	Útreiðslur	Inntøkur
	- Tús. kr. -	

Rentur

20.50.1.	**Rentur av skuld**		
01.	Rentur at gjalda	18.000	-
20.50.2.	**Rentuinntøkur o.t.**		
01.	Rentuinntøkur av innistandandi	7.900	31.900
04.	Aðrar rentur	-	1.000
10.	Útgoldið yvirskot frá Danmarks Nationalbank	-	5.000

Skattir og avgjøld

20.52.1.	**Skattainntøkur**		
01.	Vanligur landsskattur	-	1.465.400
04.	FAS-skipanin	245.000	245.000
05.	Kirkjuskattur	-	0
07.	Felagsskattur	-	395.000
11.	Kapitalvinningsskattur	-	260.000
13.	Avgjald av kapitaleftirlønum	-	40.000
14.	Skattur av pensjónsinngjøldum	-	0
25.	Arvaavgjald	-	10.000
26.	Gjald til Vinnusjúkugrunnin	-	0
27.	Gjald til Heilsutrygd	-	148.000
28.	Gjald til barsilsskipan	132.500	132.500
30.	Gjald til Búnaðarstovuna	-	2.940
20.52.2.	**Avgjøld og tollur**		
01.	Meirvirðisgjald	175.000	1.740.000
04.	Tollavgjøld	-	51.000
07.	Punktgjøld	-	194.000
10.	Lønhæddaravgjald	-	37.000
13.	Brennioljugjald	12.000	77.000
14.	Loyvisgjald á alivinnu	-	160.000
15.	Avgjald á fiskatilfeingi	-	292.000
16.	Framleiðsluavgjøld	-	23.000
19.	Skrásetingargjald	-	164.000
22.	Vegskattur (Vektgjald)	-	119.000
25.	Ferðaavgjald	-	12.000
28.	Umhvørvisavgjald á smyrjiolju	-	3.000
30.	Tinglýsingargjald	-	43.000
20.52.3.	**Ymsar inntøkur**		
01.	Útluting frá Fíggingargrunninum frá 1992	-	15.000
04.	Útluting frá partafeløgum og grunnum	-	30.000
10.	Aðrar inntøkur	-	2.500
20.52.5.	**Flytingar**		
01.	Endurrindan av keyps-MVG	210.000	-
04.	Endurrindan fyri DIS/FAS inntøkur	116.000	-

Ríkisstuðul

20.54.1.	**Heildarveiting o.t.**		
01.	Heildarveiting o.t.	-	641.800

C. Átekningar

Nr. 17. Høvuðskonta 20.52.2.14. Loyvisgjald á alivinnu (Ógreinað játtan)
Landsstýriskvinnuni verður sambært § 2, stk. 3 í Ll. nr. 64 frá 15. mai 2014 um loyvisgjald á alivinnu heimilað at nýta staðfesta mánaðarliga miðalspotprísin í evrum fyri kruvdan laks sambært Fish Pool Index, sum altjóða marknaðarprís til útrokning av avgjaldsgrundarlagnum fyri tøkugjaldinum. Umroknað verður til danskar krónur við at nýta sentralkursin hjá Danmarks Nationalbank, sum er 746,038 danskar krónur fyri hvørjar 100 evrur.

§ 25 Gjaldføri

A. Yvirlit

Játtanar yvirlit

Tús. kr	Netto	Útreiðslur	Inntøkur
Útreiðsluætlan	258.055	0	-258.055
Broytingar í "virði" og "skuld v.m."		**-**	**-258.055**
25.60.1. Ymsar broytingar		-	-258.055
Afturgjald av skuld		**0**	**-**
25.62.1. Afturgjald		0	-
Útvegan av gjaldføri		**-**	**0**
25.64.1. Útvegan		-	0
Yvirlit yvir høvuðssløg:			
Játtan tilsamans		0	-258.055
Nettostýrt virksemi		-	-
Virksemi tilsamans		0	-258.055
Fíggjarpostar		0	0
Broytingar í "VIRÐI" og "SKULD V.M."		-	-258.055

B. Játtanir

	Útreiðslur	Inntøkur
	- Tús. kr. -	
Broytingar í "virði" og "skuld		
25.60.1. Ymsar broytingar		
01. Broytingar í "virði" og "skuld v.m."	-	-258.055
Afturgjald av skuld		
25.62.1. Afturgjald		
01. Afturgjald av landskassaskuld	0	-
Útvegan av gjaldføri		
25.64.1. Útvegan		
01. Útvegan av gjaldføri	-	0

§ 55 Serinntøkur, fiskivinnumál

A. Yvirlit

Játtanar yvirlit

Tús. kr	Netto	Útreiðslur	Inntøkur
Útreiðsluætlan	-700	-	700
Landbúnaður		**-**	**700**
55.33.2. Landbúnaðarstudningur		-	700
Yvirlit yvir høvuðssløg:			
Játtan tilsamans		-	700
Nettostýrt virksemi		-	-
Virksemi tilsamans		-	700
Skattir og flytingarinntøkur		-	700

B. Játtanir

	Útreiðslur	Inntøkur
	- Tús. kr. -	
Landbúnaður		
55.33.2. Landbúnaðarstudningur		
12. Niðurlaðing av Búnaðargrunninum (Stuðulsj.)	-	700

§ 80 Rentur

A. Yvirlit

Játtanar yvirlit

Tús. kr	Netto	Útreiðslur	Inntøkur
Útreiðsluætlan	0	0	0
Rentur		**0**	**0**
80.50.1. Rentur av skuld		0	-
80.50.2. Rentuinntøkur o.t.		-	0
Yvirlit yvir høvuðssløg:			
Játtan tilsamans		0	0
Nettostýrt virksemi		-	-
Virksemi tilsamans		0	0
Flytingar millum almennar myndugleikar		0	0

B. Játtanir

	Útreiðslur	Inntøkur
	- Tús. kr. -	
Rentur		
80.50.1. Rentur av skuld		
02. Frávik fyri rentuútreiðslur	0	-
80.50.2. Rentuinntøkur o.t.		
02. Frávik fyri rentuinntøkur	-	0

§ 89 Búskapargrunnur

A. Yvirlit

Játtanar yvirlit

Tús. kr	Netto	Útreiðslur	Inntøkur
Útreiðsluætlan	143.811	143.811	-
Flytingar millum fíggjarlóg og Búskapargrunn		**143.811**	**-**
89.61.1. Búskapargrunnur		143.811	-
Yvirlit yvir høvuðssløg:			
Játtan tilsamans		143.811	-
Nettostýrt virksemi		-	-
Virksemi tilsamans		143.811	-
Flytingar millum almennar myndugleikar		143.811	-

B. Játtanir

	Útreiðslur	Inntøkur
	- Tús. kr. -	
Flytingar millum fíggjarlóg og		
89.61.1. Búskapargrunnur		
01. Flytingar í Búskapargrunn (Stuðulsj.)	143.811	-

§ 1 Løgtingið

Løgtingið

1.10.1. Løgtingið

1.10.1.02. Eftirløn og bíðiløn til løgtingsmenn (Lógarbundin játtan)

Játtanin verður nýtt at gjalda løgtingsmonnum eftirløn og bíðiløn sambært lóg um samsýning løgtingsmanna og eftirløn til tænastumenn á skrivstovu Løgtingsins.

Løgtingsval var í september 2015, og tí er einki sett av til bíðiløn í 2018. Annars er játtanin hækkandi vegna øktar útreiðslur til eftirløn.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	8.472	6.610	7.000	7.200	10.000	8.800
01. Eftirløn						
Útreiðslur	**6.156**	**6.287**	**7.000**	**7.200**	**7.500**	**7.800**
52. Tilskot til einstaklingar	6.156	6.287	7.000	7.200	7.500	7.800
02. Bíðiløn						
Útreiðslur	**2.317**	**324**	**-**	**-**	**2.500**	**1.000**
52. Tilskot til einstaklingar	2.317	324	-	-	2.500	1.000

1.10.1.03. Løgtingsarbeiði (Rakstrarjáttan)

Játtanin verður nýtt til hesi endamál:

- Samsýning, kostnaðarendurgjald og ferða- og dagpening uttanlands sambært løgtingslóg nr. 12 frá 18. februar 1999 um samsýning og eftirløn løgtingsmanna
- Altjóðasamstarv, t.e. Útnorðurráðið og Norðurlandaráðið
- Eftirlitsarbeiði Løgtingsins og § 19 kanningar
- Umsiting Løgtingsins
- Stuðul til parlamentariska arbeiðið

20. Løgtingsmenn
Henda játtan verður nýtt at gjalda løgtingsmonnum løn og kostnaðarendurgjald, so sum ásett er í lógini um samsýning og eftirløn løgtingsmanna. Somuleiðis verða útreiðslur í sambandi við Norðurlandaráðið og Útnorðurráðið goldnar av hesi játtan. Harumframt ymsar útreiðslur við tilknýti til virksemi tingmanna, t.e. ferðing uttanlands, umboðan og formansskapinum at ráða yvir.

21. Stuðul til parlamentariska arbeiðið (floksskrivarar)
Stuðulin verður veittur sambært reglugerð um stuðul til flokkarnar á tingi og um løn til floksskrivarar, so sum samtykt á formansskapsfundi 25. januar 2000, og síðan broytt nakrar ferðir. Seinast broytt í 2015, tá sett var í verk skipan við stuðuli til hvønn einstakan tingmann, so hesir kunnu menna sínar førleikar at røkja tingsessin.

22. Eftirlitsuppgávur tingsins

Eftir § 38 í stýrisskipanarlógini hevur Landsstýrismálanevndin eftirlit við, at landsstýrið fremur arbeiði sítt á lógligan hátt. Játtanin verður nýtt til sakkøna hjálp og at gjalda møguligum kanningarstjórum við.

23. Umsiting Løgtingsins

Umsiting Løgtingsins er at vera:

- Avgreiðsluskrivstova
- Tænastuveiting til tingarbeiði
- At umsita og viðlíkahalda ognir og leigumál tingsins

Játtan

Játtanin í 2018 er hækkað við 3 mió. kr. til kanningarstjóramál, arbeiðsbólk til at eftirmeta tingmannalønir og -eftirlønir, betraði hølisviðurskifti, nýggja sjónvarpsútgerð, og økt virksemi hjá Løgtinginum.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	32.488	33.277	36.475	40.060	37.760	37.760
Útreiðslur	32.593	33.494	36.625	40.210	37.910	37.910
Inntøkur	105	217	150	150	150	150
20. Løgtingsmenn						
Nettoútreiðsla	19.488	20.436	21.675	22.760	22.360	22.360
Útreiðslur	**19.488**	**20.436**	**21.675**	**22.760**	**22.360**	**22.360**
11. Lønir v.m.	16.075	16.714	17.300	17.850	17.850	17.850
14. Keyp av vørum og tænastum	1.112	1.476	1.950	2.400	2.000	2.000
15. Keyp av útbúnaði, netto	58	-	-	-	-	-
17. Avskrivingar o.a.	-	1	-	-	-	-
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	1.902	1.897	2.000	2.000	2.000	2.000
51. Tilskot til útlandið o.a.	341	349	425	510	510	510
21. Stuðul til parlamentariska arbeiðið						
Nettoútreiðsla	1.645	2.248	3.000	3.000	3.000	3.000
Útreiðslur	**1.645**	**2.360**	**3.000**	**3.000**	**3.000**	**3.000**
11. Lønir v.m.	1.653	1.716	1.780	1.780	1.780	1.780
14. Keyp av vørum og tænastum	-42	477	1.220	1.220	1.220	1.220
15. Keyp av útbúnaði, netto	34	167	-	-	-	-
Inntøkur	**-**	**112**	**-**	**-**	**-**	**-**
63. Vanligar flytingarinntøkur	-	*112*	-	-	-	-
22. Eftirlitsuppgávur						
Nettoútreiðsla	2.968	-	150	650	150	150
Útreiðslur	**2.968**	**-**	**150**	**650**	**150**	**150**
14. Keyp av vørum og tænastum	2.968	-	150	650	150	150

23. Fyrisiting Løgtingsins

Nettoútreiðsla	8.387	10.592	11.650	13.650	12.250	12.250
Útreiðslur	**8.492**	**10.697**	**11.800**	**13.800**	**12.400**	**12.400**
11. Lønir v.m.	5.667	5.932	6.500	7.100	7.100	7.100
14. Keyp av vørum og tænastum	2.287	2.555	2.500	2.900	2.500	2.500
15. Keyp av útbúnaði, netto	281	1.135	1.600	2.100	1.600	1.600
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	240	1.063	1.200	1.700	1.200	1.200
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	17	12	-	-	-	-
Inntøkur	**105**	**105**	**150**	**150**	**150**	**150**
21. Søla av vøru og tænastum	*105*	*105*	*150*	*150*	*150*	*150*

Starvsfólkayvirlit: 21 Stuðul til parlamentariska arbeiðið

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Í lønarflokki 37 ella hægri	-	-	-	-	-	-
Onnur	5,0	5,0	5,0	5,0	5,0	5,0
Fulltíðarstørv	5,0	5,0	5,0	5,0	5,0	5,0
Lønarpartur (mió. kr.)	1,7	1,7	1,8	1,8	1,8	1,8

Starvsfólkayvirlit: 23 Fyrisiting Løgtingsins

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Í lønarflokki 37 ella hægri	1,0	1,0	1,0	1,0	1,0	1,0
Onnur	12,0	12,0	12,0	13,0	13,0	13,0
Fulltíðarstørv	13,0	13,0	13,0	14,0	14,0	14,0
Lønarpartur (mió. kr.)	5,7	5,9	6,5	7,1	7,1	7,1

1.10.2. Stovnar knýttir at Løgtinginum

1.10.2.01. Landsgrannskoðanin (Rakstrarjáttan)

Reglur fyri grannskoðan av landsroknskapinum v.m. eru ásettar í løgtingslóg nr. 25 frá 21. apríl 1999, við seinni broytingum.

Landsgrannskoðanin hevur til endamáls at grannskoða landsroknskapin, sum fevnir um inntøkur og útreiðslur á fíggjarlógini umframt ogn og skuld landskassans. Sambært § 8, stk. 2, skal Landsgrannskoðanin kanna, um tey í § 4, stk. 2 og 3, nevndu krøv til roknskapin eru hildin, og harumframt skal grannskoðanin regluliga kanna, um roknskapar- og eftirlitsskipanir eru tryggar.

Umframt grannskoðan av, um roknskapurin er uppsettur í samsvari við galdandi bókhalds- og roknskaparreglur, og um stovnurin hevur hildið galdandi játtanarreglur, og aðrar lógir og reglur á økinum, skal grannskoðanin eisini fevna um "vanliga fyrisitingargrannskoðan".

Landsgrannskoðanin er í ávísan mun við í arbeiði, ella ummælir reglur og ásetingar, viðvíkjandi eftirlits-, grannskoðanar-, játtanar- og roknskaparviðurskiftum. Harumframt fyrireikar og avgreiðir Landsgrannskoðanin mál vegna løgtingsgrannskoðararnar.

Løgtingsgrannskoðararnir eru 4 løgtingsmenn, valdir av Løgtinginum sambært § 1 í lógini. Sambært § 4 er álagt løgtingsgrannskoðarunum at fara ígjøgnum landsroknskapin og aðrar

roknskapir hjá landsstovnum o.l., og sambært § 19 skulu løgtingsgrannskoðararnir leggja uppskot til samtyktar fyri Løgtingið um góðkenning av roknskapunum saman við viðmerkingum sínum. Í § 3 eru ásetingar um samsýning/fundarpening.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	5.910	6.315	7.120	7.120	7.120	7.120
Útreiðslur	5.947	6.315	7.120	7.120	7.120	7.120
Inntøkur	37	-	-	-	-	-
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	5.826	6.088	6.970	6.970	6.970	6.970
Útreiðslur	**5.863**	**6.088**	**6.970**	**6.970**	**6.970**	**6.970**
11. Lønir v.m.	4.686	4.940	5.640	5.700	5.700	5.700
14. Keyp av vørum og tænastum	725	703	850	800	800	800
15. Keyp av útbúnaði, netto	92	94	100	100	100	100
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	359	351	380	370	370	370
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	-	0	-	-	-	-
Inntøkur	**37**	**-**	**-**	**-**	**-**	**-**
21. Søla av vøru og tænastum	*37*	-	-	-	-	-
21. Løgtingsgrannskoðararnir						
Nettoútreiðsla	84	227	150	150	150	150
Útreiðslur	**84**	**227**	**150**	**150**	**150**	**150**
11. Lønir v.m.	66	176	150	150	150	150
14. Keyp av vørum og tænastum	18	51	-	-	-	-

Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Í lønarflokki 37 ella hægri	1,0	1,0	1,0	1,0	1,0	1,0
Onnur	8,4	9,2	10,5	10,5	10,5	10,5
Fulltíðarstørv	9,4	10,2	11,5	11,5	11,5	11,5
Lønarpartur (mió. kr.)	4,7	4,9	5,6	5,7	5,7	5,7

1.10.2.07. Løgtingsins umboðsmaður (Rakstrarjáttan)

Løgtingsins umboðsmaður virkar sambært løgtingslóg nr. 60 frá 10. mai 2000 um Løgtingsins umboðsmann. Sambært § 5 í lógini skal umboðsmaðurin hava eftirlit við, at almenna fyrisitingin ikki ger mistøk ella vanrøkir skyldur sínar, og at hendan ikki fremur órætt móti einstaka borgaranum. Hetta eftirlit verður serliga framt í sambandi við viðgerð av klagum frá borgarum, men umboðsmaðurin kann eisini taka upp mál av sínum eintingum.

Eftirlitsuppgávan hjá umboðsmanninum var víðkað í 2014 til eisini at fevna um privatar stovnar v.m., hvørs uppgávur beinleiðis viðvíkja børnum.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	3.673	3.779	4.300	4.200	4.200	4.200
Útreiðslur	3.673	3.779	4.300	4.200	4.200	4.200
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	3.673	3.779	4.300	4.200	4.200	4.200
Útreiðslur	**3.673**	**3.779**	**4.300**	**4.200**	**4.200**	**4.200**
11. Lønir v.m.	2.775	2.948	3.300	3.300	3.300	3.300
14. Keyp av vørum og tænastum	703	524	760	700	700	700
15. Keyp av útbúnaði, netto	71	185	100	70	70	70
57. Rentuútreiðslur o.a.	0	0	-	-	-	-
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	124	122	140	130	130	130

Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Í lønarflokki 37 ella hægri	1,0	1,0	1,0	1,0	1,0	1,0
Onnur	4,0	4,0	4,0	4,0	4,0	4,0
Fulltíðarstørv	5,0	5,0	5,0	5,0	5,0	5,0
Lønarpartur (mió. kr.)	2,8	2,9	3,3	3,3	3,3	3,3

§ 2 Løgmansfyrisitingin

Felagsútreiðslur

2.11.1. Fyrisiting

2.11.1.02. Løgmansskrivstovan (Rakstrarjáttan)

Løgmansskrivstovan er fyrisiting løgmans, ið varðar av stjórnarmálum og lógarmálum. Høvuðsendamálið hjá Løgmansskrivstovuni er at veita løgmanni ráð, tryggja haldgott grundarlag og gera hugskot til veruleika á nevndu málsøkjum.

Stjórnarmál fevna um tær uppgávur, sum løgmanni eru tillutaðar samsvarandi stýrisskipanini. Tey kunnu greinast soleiðis:

- stýrisskipanarviðurskifti, ríkislógir og slíkt, sum ikki hoyrir til annað stjórnarráð.
- samskipa virksemið hjá landsstýrinum og millum stjórnarráðini.
- uppfylging av samgonguskjalinum og málum, sum landsstýrið hevur sett sær fyri at fremja.
- eftirlit við landsstýrismonnum.
- menningartiltøk, sum t.d. nýskipan í almenna bygnaðinum, fjølmiðla- og kunningarpolitikkur og norðurlendsk tænastumannaumbýti.
- standa fyri og samskipa arbeiði og verkætlanir, ið fevna um ábyrgdarøki hjá fleiri landsstýrismonnum og sum hava stóran politiskan, fyrisitingarligan og/ella samfelagsligan týdning.
- yvirtøkumál.
- ovasta umboð Føroya heima og í útlondum, og
- ognir landsins í Tinganesi og á Reyni.

Løgmál fevna um lóggávu, sum er undir føroyskum málsræði, og ríkislóggávu.

Føroysk lóggáva
fevnir um lóg um alment innlit, fyrisitingarlóg, persónsupplýsingarlóg, innsavnan og burturlutan, lóg um Ítróttarvedding, finningargóðs, vápnalóg, eitur, lóg um endurgjald, ekspropriatión til serlig endamál, serstakar ásetanir um serliga tíðarrokning, brúkaravernd í sambandi við at keypa og selja fastogn, fjølmiðlaábyrgd, sjónvarpseygleiðing, lóggáva kring uppboðssøluhaldarar, vaktarvirksemi, ikki vinnurekandi grunnar, revsilóggávan, og fíggjarrættur (keyp, avtalur, fyrning, skuldarbrøv, kekkar, brúkaraavtalur, og produktábyrgd).

Ríkislóggáva
fevnir um brotsmálaumsorgan, heimarættur danska ríkisins, Hægstirættur danska ríkisins, løgregla og ákærumyndugleiki, pass, rættargangur, og sakførarastarvssemi.

Lógardygd
fevnir um at ráðgeva øðrum stjórnarráðum í lógartøkniligum spurningum, herundir eftirkanning av lógaruppskotum og kunngerðum. Til hetta arbeiðið eru rundskriv og leiðbeiningar, sum verða brúktar sum grundarlag fyri eftirkanningini.

Portalurin *www.logir.fo* er ein tænasta til borgaran, vinnulív, stovnar og aðrar myndugleikar, har tað ber til umvegis alnótina skjótt at kunna seg um galdandi lóggávu í Føroyum.

Kunngerðablaðið
Í Kunngerðablaðnum skulu allar rættarreglur lýsast, sum skulu galda í Føroyum. Føroysk lóggáva verður lýst í Kunngerðablaði A, meðan ríkislóggáva verður lýst í B-blaðnum. Síðani 1. januar 2013 er Kunngerðablaðið talgilt og sæst á Kunngerðaportalinum, *www.kunngerdaportalur.fo*.

Játtanin
Endamálið við játtanini er at reka virksemi løgmans og fyrisiting hansara, sum m.a. lýst omanfyri, umframt ávíst felags virksemi hjá teimum stjórnarráðunum, sum húsast í Tinganesi. Av játtanini til keyp av vørum og tænastum eru 500 tús. kr. settar av til útlendskar vitjanir.

35. Felagsfyrisitingin í Tinganesi

Løgmansskrivstovan veitir øðrum stjórnarráðum tænastur á móttøku- og telefonmóttøkuøkinum. Afturat hesum ber Løgmansskrivstovan útreiðslur til smærri viðlíkahald og útreiðslur til vasking fyri stjórnarráðini, ið halda til í Tinganesi. Haraftrat eru allar el- og oljuútreiðslurnar umframt tryggingargjøld av bygningunum í Tinganesi og inntøkur av tveimum útleigaðum sethúsum.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	23.613	14.103	14.534	14.689	14.689	14.689
Útreiðslur	24.610	15.288	15.474	15.964	15.964	15.964
Inntøkur	997	1.185	940	1.275	1.275	1.275
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	21.665	12.498	13.009	12.784	12.784	12.784
Útreiðslur	**22.166**	**12.936**	**13.079**	**13.104**	**13.104**	**13.104**
11. Lønir v.m.	15.205	9.395	10.331	10.164	10.164	10.164
14. Keyp av vørum og tænastum	6.460	3.300	2.390	2.640	2.640	2.640
15. Keyp av útbúnaði, netto	288	159	232	220	220	220
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	62	56	56	60	60	60
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	9	3	70	20	20	20
51. Tilskot til útlandið o.a.	142	-	-	-	-	-
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	-	23	-	-	-	-
Inntøkur	**502**	**438**	**70**	**320**	**320**	**320**
21. Søla av vøru og tænastum	*114*	*116*	*70*	-	-	-
65. Flytingarinntøkur úr útlandinum	*179*	*19*	-	*20*	*20*	*20*
76. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	*209*	*302*	-	*300*	*300*	*300*

35. Felagsfyrisitingin í Tinganesi

Nettoútreiðsla	1.948	1.605	1.525	1.905	1.905	1.905
Útreiðslur	**2.444**	**2.352**	**2.395**	**2.860**	**2.860**	**2.860**
11. Lønir v.m.	1.473	1.307	1.375	1.680	1.680	1.680
14. Keyp av vørum og tænastum	939	994	900	1.125	1.125	1.125
15. Keyp av útbúnaði, netto	-	20	20	20	20	20
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	17	17	100	20	20	20
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	14	14	-	15	15	15
Inntøkur	**496**	**747**	**870**	**955**	**955**	**955**
21. Søla av vøru og tænastum	*49*	*137*	*70*	*135*	*135*	*135*
76. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	*447*	*611*	*800*	*820*	*820*	*820*

Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Í lønarflokki 37 ella hægri	7,0	4,0	4,0	4,0	4,0	4,0
Onnur	21,1	12,3	12,3	13,0	13,0	13,0
Fulltíðarstørv	28,1	16,3	16,3	17,0	17,0	17,0
Lønarpartur (mió. kr.)	15,2	9,4	10,3	10,2	10,2	10,2

Starvsfólkayvirlit: 35 Felagsfyrisitingin í Tinganesi

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Í lønarflokki 37 ella hægri	-	-	-	-	-	-
Onnur	3,8	3,8	4,1	4,1	4,1	4,1
Fulltíðarstørv	3,8	3,8	4,1	4,1	4,1	4,1
Lønarpartur (mió. kr.)	1,5	1,3	1,4	1,7	1,7	1,7

2.11.1.21. Umbygging í Tinganesi (Løgujáttan)

Játtanin fer til at umbyggja, umvæla og skipa ognir landsstýrisins í Tinganesi, sambært heildarætlanini fyri Tinganes. Endamálið við umbyggingini er m.a. at fáa Tinganes at koma til sín rætt í søgu, bygningum, uttanumøki, fornminni, sum ferðavinnumál og sum hóskandi fyristingarkarmur hjá landsins stjórn.

Játtaðar eru 2,7 mió. kr. til endamálið í 2018.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	1.989	937	1.800	2.700	3.000	3.000
10. Umbygging						
Útreiðslur	**1.989**	**937**	**1.800**	**2.700**	**3.000**	**3.000**
11. Lønir v.m.	96	-	-	-	-	-
14. Keyp av vørum og tænastum	36	-	-	-	-	-
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	-132	-203	-150	-150	-150	-150
31. Bygging og løguframleiðsla	1.989	937	1.800	2.700	3.000	3.000
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	-	203	150	150	150	150

Landsstýrið

2.12.3. Landsstýrið

2.12.3.01. Løgmaður og landsstýrið (Rakstrarjáttan)

Játtanin er til at gjalda løgmanni og landsstýrisfólkum løn, o.a. sambært løgtingslóg nr. 10 frá 8. januar 1993 um samsýning og eftirløn landsstýrismanna v.m. við seinni broytingum. Nýggj skipan er sett í verk smb. løgtingslóg nr. 71 frá 19. mai 2014 um broyting í løgtingslóg um samsýning og eftirløn landsstýrismanna v.m.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	7.768	8.376	7.730	7.730	8.580	8.180
Útreiðslur	7.768	8.376	7.730	7.730	8.580	8.180
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	7.768	8.376	7.730	7.730	8.580	8.180
Útreiðslur	**7.768**	**8.376**	**7.730**	**7.730**	**8.580**	**8.180**
11. Lønir v.m.	7.036	8.346	7.700	7.700	8.550	8.150
14. Keyp av vørum og tænastum	10	-	-	-	-	-
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	722	30	30	30	30	30

Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Í lønarflokki 37 ella hægri	7,0	8,0	8,0	8,0	8,0	8,0
Onnur	-	-	-	-	-	-
Fulltíðarstørv	7,0	8,0	8,0	8,0	8,0	8,0
Lønarpartur (mió. kr.)	7,0	8,3	7,7	7,7	8,6	8,2

Uttanríkismál

2.13.1. Sendistovur

2.13.1.04. Norðurbryggjan í Keypmannahavn (Stuðulsjáttan)

Endamálið við játtanini er at stuðla virksemi at menna og breiða út kunnleikan til mentan og virkislív í útnorðri.

Móttakari av játtanini er vinnurekandi grunnurin Norðurbryggjan í Keypmannahavn.

Stjórnirnar í Danmark, Íslandi, Grønlandi og Føroyum rinda hvør 500 tús. kr. árliga í beinleiðis stuðli. Av føroyska partinum rindar Løgmansskrivstovan rindar 300 tús. kr. og Mentamálaráðið 200 tús. kr.

Studningurin verður útgoldin, tá ið grannskoðaður roknskapur fyri undanfarna ár er til skjals, fíggjarætlan fyri inniverandi ár fyriliggur, og endamálið við stuðulsupphæddini er eftirkannað. Hetta er vanliga í fyrru hálvu av fíggjarárinum.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	300	300	300	300	300	300
01. Stuðul						
Útreiðslur	**300**	**300**	**300**	**300**	**300**	**300**
51. Tilskot til útlandið o.a.	300	300	300	300	300	300

Lógarmál

2.14.1. Ymsar útreiðslur

2.14.1.01. Ymsar útreiðslur (Rakstrarjáttan)

Undirkonta 20. Endamálið er at útgeva Kunngerðablaðið talgildað.

Undirkonta 21. Játtanin til lógarsavn er fyri rakstur, røkt og at menna elektroniska lógdátugrunnin, ið fevnir um alla lóggávu, sum er galdandi í Føroyum. Møguleikar eru eisini seinni, um ynski er frammi um tað, at víðka grunnin til at fevna um allar almennar fráboðanir.

Undirkonta 22. Fyri dóms- og løgreglumál er galdandi, at landsstýrið rindar fyri, at rættarskjøl verða týdd til danskt, tá ið mál verða skotin inn fyri hægri rætt. Hetta er sambært ásetingunum í rættargangslógini.

Undirkonta 26. Játtaðar eru 50 tús. kr. til at stuðla rakstrinum hjá Rættarhjálp Føroya.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	351	401	340	520	520	520
Útreiðslur	351	401	340	520	520	520
20. Kunngerðarsavn og -blað						
Nettoútreiðsla	253	143	100	225	225	225
Útreiðslur	**253**	**143**	**100**	**225**	**225**	**225**
14. Keyp av vørum og tænastum	253	143	100	225	225	225
21. Lógarsavn						
Nettoútreiðsla	4	83	100	125	125	125
Útreiðslur	**4**	**83**	**100**	**125**	**125**	**125**
14. Keyp av vørum og tænastum	4	83	100	125	125	125
22. Dóms- og løgreglumál						
Nettoútreiðsla	44	125	90	120	120	120
Útreiðslur	**44**	**125**	**90**	**120**	**120**	**120**
11. Lønir v.m.	-	-	50	100	100	100
14. Keyp av vørum og tænastum	44	125	40	20	20	20
26. Rættarhjálp Føroya						
Nettoútreiðsla	50	50	50	50	50	50
Útreiðslur	**50**	**50**	**50**	**50**	**50**	**50**
54. Stuðul til annað virksemi	50	50	50	50	50	50

2.14.1.02. Studningur til politiskt virksemi og upplýsing (Stuðulsjáttan)

Sambært løgtingslóg nr. 31 frá 6. mars 2003 um fíggjarligan stuðul til politiskt virksemi og politiska upplýsing er endamálið við játtanini at styrkja politiska arbeiðið og politiska upplýsing við at veita fíggjarligan stuðul, sum kann verða nýttur til at reka politiskar flokkar og til politiska virksemi teirra.

Upphæddin verður býtt millum flokkar og uttanflokkatingmenn eftir atkvøðutali seinasta løgtingsval. Peningurin kann m.a. verða nýttur til at reka politiskar flokkar, skeið- og fundarvirksemi og blaðútgávu í hesum sambandi.

Studningurin verður útgoldin mánaðarliga. Grundarlagið undir útgjaldinum er grannskoðaður roknskapur fyri undanfarna roknskaparár, fíggjarætlan fyri inniverandi ár og frágreiðing um endamálið við stuðulsupphæddini.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	4.207	4.800	4.800	4.800	4.800	4.800
01. Studningur til politiskt virksemi og upplýsing						
Útreiðslur	**4.207**	**4.800**	**4.800**	**4.800**	**4.800**	**4.800**
54. Stuðul til annað virksemi	4.207	4.800	4.800	4.800	4.800	4.800

2.14.1.04. Føroya kærustovnur (Rakstrarjáttan)

Føroya Kærustovnur fevnir sum rakstrarstað um virksemið hjá Skatta- og avgjaldskærunevndini, Kærunevndini í almanna- og heilsumálum, Kærunevndini hjá Studna, Kærunevndini í lendismálum, Vinnukærunevndini, Psykiatrisku sjúklingakærunevndini, Fjølmiðlanevndini, Skuldarumskipanarnevndini og Høvuðsbarnaverndarnevndini.

Kærustovnurin upplýsir og fyrireikar málini fyri nevndirnar og ger teimum tilmælir at taka støðu til.

Nevndirnar verða allar samsýntar av játtanini hjá Føroya Kærustovni.

Skatta- og avgjaldskærunevndin viðger kærur um:

- avgerðir hjá TAKS um skatt, toll og meirvirðisgjald, og
- avgerðir hjá Akstovuni um skrásetingargjald á motorakførum.

Kærunevndin í almanna- og heilsumálum viðger kærur um:

- avgerðir hjá Almannaverkinum,
- avgerðir hjá Sjúkrahúsverkinum, sum ikki eru um heilsufakligt virksemi,
- avgerðir hjá kommunustýrum um barna- og ungdómstannrøkt,
- avgerðir hjá Heilsutrygd og tilskotsnevndini eftir lóg um almenna heilsutrygd,
- avgerðir eftir barnaverndarlógini, sum ikki kunnu leggjast fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina, og
- avgerðir hjá kommunum eftir lóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m.

Kærunevndin hjá Studna viðger kærur um:

- avgerðir hjá Studna eftir lóg um lestrarstuðul.

Kærunevndin í lendismálum viðger kærur um:

- avgerðir hjá kommununum eftir býarskipanarlógini ella byggisamtykt,
- avgerðir hjá Umhvørvisstovuni eftir tinglýsingarlógini og lóg um matrikulering og sundurbýti,
- avgerðir hjá kommunum eftir 1881-lógini um ognartøku,
- avgerðir eftir løgtingslóg nr. 11 frá 3. apríl 1970 um eigaraíbúðir, og
- avgerðir eftir lóg um bygging.

Vinnukærunevndin viðger kærur um:

- avgerðir hjá Akstovuni eftir lóg um ferðslu,
- avgerðir hjá Arbeiðseftirlitinum eftir lóg um arbeiðsumhvørvi,
- avgerðir hjá Jarðfeingi eftir lóg um framleiðslu, flutning og veiting av ravmagni,
- avgerðir hjá Fjarskiftiseftirlitinum eftir lóg um fjarskifti,
- avgerðir hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni eftir lóg matvørur v.m., lóg um aling av fiski, lóg um djórasjúkur, lóg um djóralæknavirksemi og lóg um innflutning og hald av vandamiklum djórum o.ø.,
- avgerðir hjá Kappingarráðnum eftir lóg um kapping,
- avgerðir hjá Landsverki eftir lóg um landsvegir og lóg um ognartøku og avhendan til flogferðsluendamál,
- avgerðir hjá Posteftirlitinum eftir lóg um postvirksemi,
- avgerðir hjá Skráseting Føroya eftir partafelagslógini, smápartafelagslógini, ársroknskaparlógini, lóg um ávís vinnurekandi virkir, lóg um vinnurekandi grunnar, lóg um vinnu og lóg um góðkendar grannskoðarar og grannskoðanarvirkir,
- avgerðir hjá Sjóvinnustýrinum eftir kunngerð um loðsprógv og loðsfrítøkuskjal,
- avgerðir hjá Tryggingareftirlitinum eftir lóg um tryggingarvirksemi, og
- harumframt viðger Vinnukærunevndin kærur eftir lóg um skyldu arbeiðsgevarans at fráboða løntakaranum treytirnar fyri setanarviðurskiftunum.

Psykiatriska sjúklingakærunevndin
Nevndin viðgerð kærur eftir "Anordning nr. 185 af 13. mars 2009 om ikrafttræden for Færøerne af lov om anvendelse af tvang i psykiatrien". Umframt at Kærustovnurin er skrivstova hjá psykiatrisku sjúklingakærunevndini, setir stovnurin sjúklingaráðgevarar í starv og upplærir teir um galdandi rættarreglur og arbeiðsuppgávur innan økið.

Skuldarumskipanarnevndin
Nevndin viðgerð umsóknir um skuldarumskipan av almennari skuld.

Fjølmiðlanevndin
Nevndin viðgerð kærur um brot á góðum fjølmiðlasiði.

Høvuðsbarnaverndarnevndin
Høvuðsbarnaverndarnevndin tekur avgerð í øllum málum um umsorganaryvirtøku og samverurætt; um fyriskipanir, har samtykki ikki er fingið frá tí ella teimum, sum hava foreldramyndugleikan; familjuviðgerð og dagstovnatilboð hjá landinum og rætt til ókeypis umboðan.

Kærunevndin hjá Barsilsskipanini
Nevndin viðger kærur um avgerðir, sum TAKS tekur við heimild í lóg um barsilsskipan. Í hesum sambandi verða árliga fluttar 50 tús. kr. til Føroya Kærustovn frá TAKS.

Kærunevndin hjá Arbeiðsloysisskipanini
Nevndin viðger kærur um avgerðir, sum Arbeiðsloysisskipanin tekur við heimild í ALS-lógini. Í hesum sambandi verða árliga fluttar 150 tús. kr. til Føroya Kærustovn frá ALS.

Heimild
Heimildargrundarlagið fyri nevndirnar og Føroya Kærustovn er:

- løgtingslóg nr. 47 frá 23. mars 1993 um kærunevnd í almannamálum og heilsumálum,
- løgtingslóg nr. 169 frá 30. desember 1997 um toll- og skattafyrisiting (§§ 3 og 22),
- løgtingslóg nr. 36 frá 3. mai 2007 um lestrarstuðul,
- løgtingslóg nr. 29 frá 8. apríl 2005 um umskipan av landsskatta-, mvg- og tollskuld og annað,
- løgtingslóg nr. 110 frá 13. desember 2006 um kærunevnd í lendismálum og kunngerð nr. 3 frá 25. januar 2007 um kærunevnd í lendismálum,
- avgerð frá 1997 tikin av Fíggjarmálastýrinum og Almanna- og heilsumálastýrinum um at skipa ein almennan kærustovn og at leggja skrivstovurnar hjá kærunevndunum í almanna-, skatta-, toll- og mvg-málum til Føroya Kærustovn,
- avgerð frá 2000 tikin av landstýrismonnunum í mentamálum og lógarmálum um at leggja skrivstovuna hjá Kærunevndini hjá Stuðulsstovninum til Føroya Kærustovn,
- avgerð frá 2005 tikin av Fíggjarmálaráðnum og Innlendismálaráðnum um, at Kærustovnurin skal virka sum skrivstova fyri Skuldarumskipanarnevndina,
- løgtingslóg nr. 17 frá 8. mai 2008 um Vinnukærunevnd,
- løgtingslóg nr. 18 frá 8. mai 2008 um at broyta ymsar lógir undir Vinnumálaráðnum,
- avgerð frá 2008 tikin av Vinnumálaráðnum og Løgmálaráðnum um, at Kærustovnurin skal virka sum skrivstova hjá Vinnukærunevndini,
- avgerð frá 2008 tikin av Innlendismálaráðnum um, at Kærustovnurin skal virka sum skrivstova hjá Fjølmiðlanevndini,
- anordning nr. 185 af 13. mars 2009 om ikrafttræden for Færøerne af lov om anvendelse af tvang í psykiatrien,
- løgtingslóg nr. 18 frá 8. mars 2005 um barnavernd, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 139 frá 18. desember 2013,
- fráboðanir dagfestar 11. apríl 2016,
- løgtingslóg nr. 48 frá 3. apríl 2001 um barsilsskipan, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 137 frá 16. desember 2015,
- kunngerð nr. 39 frá 14. juni 2004 um kærunevnd hjá barsilsskipanini, og
- løgtingslóg nr. 113 frá 13. juni 1997 um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 71 frá 22. mai 2015.

Ókeypis umboðan (Lógarbundin játtan)
Um eitt barn verður sett heiman og foreldramyndugleikin ella barnið, ið hevur fylt 15 ár, ikki hevur givið samtykki, hava foreldrini og barnið rætt til at verða umboðað ókeypis av advokati. Í málum har samtykki er fingið, kann Høvuðsbarnaverndarnevndin gera av, at foreldur og børn fáa ókeypis umboðan. Útreiðslurnar til advokatin ber landið.

Í sambandi við, at Føroya Kærustovnur hevur um hendi skrivstovuvirksemi hjá Høvuðsbarnaverndarnevndini, umsitur stovnurin tann partin av játtanini á høvuðskontu 12.21.3.01. Barnavernd, sum er til ókeypis advokatumboðan. Talan er um lógarbundna játtan.

Nýtt virksemi
Familjurættarliga økið verður eftir ætlan yvirtikið á Ólavsøku í 2018. Føroya Kærustovnur skal viðgera mál innan persóns-, húsfólka- og arvarætt, ið verða løgd fyri kærunevndina í almanna- og heilsumálum. Mett verður, at tørvur verður á einum løgfrøðingi til arbeiðið. Harafturat verður nevndarsamsýningin til limirnar í kærunevndini hækkað.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	6.415	6.751	6.805	7.071	7.481	7.481
Útreiðslur	6.423	6.837	7.005	7.271	7.681	7.681
Inntøkur	8	85	200	200	200	200
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	6.415	6.751	6.805	7.071	7.481	7.481
Útreiðslur	**6.423**	**6.837**	**7.005**	**7.271**	**7.681**	**7.681**
11. Lønir v.m.	5.098	5.401	5.846	6.112	6.522	6.522
14. Keyp av vørum og tænastum	752	966	683	683	683	683
15. Keyp av útbúnaði, netto	164	100	104	104	104	104
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	409	369	372	372	372	372
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	0	-	-	-	-	-
57. Rentuútreiðslur o.a.	0	0	-	-	-	-
Inntøkur	**8**	**85**	**200**	**200**	**200**	**200**
21. Søla av vøru og tænastum	*-*	*63*	*-*	*-*	*-*	*-*
25. Eftirlits- og umsjónaravgjøld	*8*	*2*	*-*	*-*	*-*	*-*
76. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	*-*	*21*	*200*	*200*	*200*	*200*

Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Í lønarflokki 37 ella hægri	1,0	1,0	1,0	1,0	1,0	1,0
Onnur	7,0	7,0	7,0	7,4	8,0	8,0
Fulltíðarstørv	8,0	8,0	8,0	8,4	9,0	9,0
Lønarpartur (mió. kr.)	5,1	5,4	5,8	6,1	6,5	6,5

2.14.1.07. Endurgjald til brotsverksoffur (Lógarbundin játtan)

Málsøkið revsirættur varð yvirtikið 1. mars 2010. Herímillum er lógin um endurgjald til brotsverksoffur, sum merkir, at landskassin hevur tikið á seg tær útreiðslur, sum standast av hesum. Hetta í teimum førum, tá brotsverksoffur annars ikki hava møguleika fyri at fáa endurgjald.

Útreiðslurnar til endurgjald til brotsverksoffur hava seinastu árini verið millum 100 til 600 tús. kr. Játtanin á 300 tús. kr. í 2018 er ein leyslig meting. Brotsmenn verða nú kravdir eftir endurgjaldi, sum hevur við sær eina ávísa inntøku á høvuðskontuni.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	301	276	0	0	0	0
01. Endurgjald til brotsverksoffur						
Útreiðslur	**301**	**491**	**300**	**300**	**300**	**300**
52. Tilskot til einstaklingar	301	491	300	300	300	300
02. Innkrevjing av endurgjaldi frá brotsmonnum						
Útreiðslur	**-**	**-216**	**-300**	**-300**	**-300**	**-300**
52. Tilskot til einstaklingar	-	-216	-300	-300	-300	-300

2.14.2. Skráseting og eftirlit

2.14.2.02. Dátueftirlitið (Rakstrarjáttan)

Dátueftirlitið umsitur løgtingslóg nr. 73 frá 8. mai 2001 um viðgerð av persónsupplýsingum, sum broytt við løgtingslóg nr. 24 frá 17. mai 2004 (persónsupplýsingarlógin). Sambært § 37 í persónsupplýsingarlógini eru uppgávurnar hjá Dátueftirlitinum hesar:

- Av sínum eintingum ella eftir klagu frá skrásetta ansa eftir, at viðgerð av persónsupplýsingum bert fer fram í samsvari við lógina og tær reglur, sum ásettar eru sambært lógini
- Viðgera fráboðanir og umsóknir um loyvi og áleggja treytir sambært lógarheimild
- Hava ein skipaðan almennan lista yvir allar fráboðanir og loyvir sambært lógini
- Geva ummæli til ætlaða lóggávu, sum viðvíkir persónsupplýsingum
- Gera kanningar, har persónsupplýsingar verða viðgjørdar
- Vegleiða privat og tað almenna í ivamálum og virka fyri, at upplýsingar verða viðgjørdar sambært góðum dátuviðgerðarsiði
- Fylgja við í og kunna um gongdina í viðgerðini av persónsupplýsingum her á landi og uttanlands
- Fyrireika mál at leggja fyri Dáturáðið
- Gera árliga ársfrágreiðing

Dátueftirlitið hevur eftirlit við KT-trygd í Føroyum, sambært kunngerð nr. 28 frá 27. februar 2003 um trygd í sambandi við viðgerð av persónsupplýsingum. Í mai 2010 fingu Føroyar triðjalands góðkenning frá ES, viðvíkjandi viðgerð av persónsupplýsingum.

Dátueftirlitið fremur regluliga eftirlitsvitjanir á privatum virkjum og almennum stovnum. Stovnurin leggur dent á tann partin av arbeiðinum sum er fyribyrgjandi. Í hesum sambandi ger Dátueftirlitið tilfar og skipar fyri ymiskum átøkum.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	1.867	1.797	2.000	2.000	2.000	2.000
Útreiðslur	1.867	1.797	2.000	2.000	2.000	2.000
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	1.867	1.797	2.000	2.000	2.000	2.000
Útreiðslur	**1.867**	**1.797**	**2.000**	**2.000**	**2.000**	**2.000**
11. Lønir v.m.	1.554	1.446	1.640	1.640	1.640	1.640
14. Keyp av vørum og tænastum	274	318	280	280	280	280
15. Keyp av útbúnaði, netto	31	23	80	80	80	80
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	8	10	-	-	-	-

Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Í lønarflokki 37 ella hægri	1,0	1,0	1,0	1,0	1,0	1,0
Onnur	1,8	1,8	1,8	1,8	1,8	1,8
Fulltíðarstørv	2,8	2,8	2,8	2,8	2,8	2,8
Lønarpartur (mió. kr.)	1,6	1,4	1,6	1,6	1,6	1,6

§ 3 Fíggjarmál

Felagsútreiðslur

3.11.1. Fyrisiting

3.11.1.03. Fíggjarmálaráðið (Rakstrarjáttan)

Ráðið er fyrisiting hjá landsstýriskvinnuni fyri málsøkini samsvarandi galdandi málsøkjabýti løgmans. Høvuðsmálsøkini hjá landsstýriskvinnuni eru: búskaparmál, fíggjarmál, skatta- og avgjaldsmál, peninga- og kredittmál, lønarmál, kommunal fíggjarmál og hagfrøðismál.

Virkisøkini hjá landsstýriskvinnuni eru skipað í stovnunum:

- TAKS
- Gjaldstovan
- Hagstovan
- Landsbankin

Ráðið fyriskipar landsins fíggjar- og búskaparstýring og skapar grundarlag fyri, at landstovnar greiða sínar uppgávur væl fíggjarliga. Ráðið fylgir við gongdini í búskapinum og ger búskaparfrágreiðingar í sambandi við játtanarkarmar og fíggjarlógaruppskot. Ráðið stendur eisini fyri lønarsamráðingum hjá landinum, og umsitur reglur og vegleiðingar um hetta.

Játtanin í 2018 er hækkað við góðum 500 tús. kr. til at styrkja starvsfólkaumsiting landsins, og til at seta í verk varskógvaraskipan fyri almenn starvsfólk.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	10.772	9.523	11.505	12.032	12.032	12.032
Útreiðslur	10.866	9.652	11.505	12.132	12.132	12.132
Inntøkur	94	128	-	100	100	100
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	10.772	9.523	11.505	12.032	12.032	12.032
Útreiðslur	**10.866**	**9.652**	**11.505**	**12.132**	**12.132**	**12.132**
11. Lønir v.m.	9.272	8.060	9.460	9.907	9.907	9.907
14. Keyp av vørum og tænastum	1.387	1.300	1.740	1.740	1.740	1.740
15. Keyp av útbúnaði, netto	182	257	285	285	285	285
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	24	4	20	20	20	20
57. Rentuútreiðslur o.a.	1	1	-	-	-	-
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	-	30	-	180	180	180
Inntøkur	**94**	**128**	**-**	**100**	**100**	**100**
76. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	*94*	*128*	*-*	*100*	*100*	*100*

Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Í lønarflokki 37 ella hægri	3,0	3,0	4,0	4,0	4,0	4,0
Onnur	13,0	10,0	11,4	12,0	12,0	12,0
Fulltíðarstørv	16,0	13,0	15,4	16,0	16,0	16,0
Lønarpartur (mió. kr.)	9,3	8,1	9,5	9,9	9,9	9,9

3.11.1.36. Sáttmálaviðurskifti (Rakstrarjáttan)

Játtanin verður vanliga í høvuðsheitum nýtt til útreiðslur í sambandi við lønarsáttmálar, sum fakfeløg hava við tað almenna. Hetta eru útreiðslur, ið ikki beinleiðis viðvíkja rakstrinum hjá Fíggjarmálaráðnum, men allari landsumsitingini.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	374	320	400	400	400	400
Útreiðslur	374	320	400	400	400	400
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	374	320	400	400	400	400
Útreiðslur	**374**	**320**	**400**	**400**	**400**	**400**
11. Lønir v.m.	-	39	100	100	100	100
14. Keyp av vørum og tænastum	374	281	250	250	250	250
52. Tilskot til einstaklingar	-	-	50	50	50	50

3.11.1.61. Talgildu Føroyar (Rakstrarjáttan)

Játtanin til Talgildu Føroyar hevur til endamáls at menna eitt talgilt undirstøðukervið, sum skapar fyritreytir fyri at nútímansgera vælferðina og tænasturnar hjá føroyingum, at skapa kappingarføri, vøkstur og framleidni, umframt at tryggja sparingar og effektiviseringar í almenna geiranum.

Talgildingin hevur við sær, at borgarar og virki fara at samskifta talgilt við almenna geiran, at fyrisitingarligar tænastur hjá tí almenna verða tøkar á netinum, og at veitingar og mannagongdir í almennu fyrisitingini verða talgildar.

Høvuðsátøkini í Talgildu Føroyum eru 4:

1. at menna ein talgildan samleika, so allir borgarar kunnu eyðmerkja seg trygt, tá ið teir brúka talgildar tænastur,
2. at seta á stovn ein standardiseraðan og tryggan pall, sum dátur verða samskiftar um,
3. at styrkja um grundardáturnar (fólk, virki, ognir og kort) og gera tær opnar og ókeypis, og
4. at menna felags portalar og tænastur.

Samlaða verkætlanin er mett at kosta 150 mió. kr. í tíðarskeiðinum 2016-2020.

Verklagslóg, sum er grundarlagið fyri samlaðu verkætlanini, varð samtykt av Løgtinginum í 2017. Arbeitt hevur verið við einum fíggingarmyndli, har landið rindar 90 mió. kr., meðan

kommunur og týðandi áhugapartar rinda tær írestandi 60 mió. kr., harav tær 15 mió. kr. sum peningastovnarnir hava játtað at rinda, eru ein partur.

Í 2016 vóru nýttar 5,9 mió. kr. Nýtslan í 2017 verður mett til 18,5 mió. kr. Roknað verður við, at virksemið komandi árini verður áleið 35 mió. kr. um árið. Nettojáttanin í 2018 er 19 mió. kr.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	-	-	20.000	19.000	21.000	20.000
Útreiðslur	-	-	35.000	34.000	36.000	35.000
Inntøkur	-	-	15.000	15.000	15.000	15.000
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	-	-	20.000	19.000	21.000	20.000
Útreiðslur	**-**	**-**	**35.000**	**34.000**	**36.000**	**35.000**
11. Lønir v.m.	-	-	5.000	5.000	5.000	5.000
14. Keyp av vørum og tænastum	-	-	30.000	29.000	31.000	30.000
Inntøkur	**-**	**-**	**15.000**	**15.000**	**15.000**	**15.000**
63. Vanligar flytingarinntøkur	-	-	*15.000*	*15.000*	*15.000*	*15.000*

Uttanríkismál

3.13.2. Millumtjóða samstarv

3.13.2.03. Endurgjald av skatti og avgjøldum (Stuðulsjáttan)

Norrøna Atlantssamstarvið (NORA) er samstarv ímillum Ísland, Grønland, Føroyar og Vestur- og Norðurnoreg undir Ráðharraráðnum í Norðurlandaráðnum. Høvuðsskrivstovan er í Føroyum, men skrivstovur eru eisini í hinum samstarvslondunum.
Norðurlandaráðharraráðið veitir játtanina, ið NORA hevur at arbeiða við.

Játtanin er til partvíst endurgjald fyri skatt og avgjøld, ið NORA og starvsfólk tess rinda í Føroyum. Endurgjaldið fyri fíggjarárið verður rindað einaferð árliga, tá ið uppgerð yvir skatt og avgjøld fyriliggur, sum ið minsta lagi er á stødd við játtanarupphæddina.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	300	300	300	300	300	300
01. Norrøna Atlantssamstarvið (NORA)						
Útreiðslur	**300**	**300**	**300**	**300**	**300**	**300**
51. Tilskot til útlandið o.a.	300	300	300	300	300	300

Fíggjarmál o.a.

3.15.1. Fíggjarfyrisiting v.m.

3.15.1.04. TAKS (Rakstrarjáttan)

TAKS tryggjar tí almenna skatta- og avgjaldsinntøkur, umsitur gjøld og veitingar, og fyribyrgir ólógligum inn- og útflutningi sambært galdandi lógum.

Aðrar uppgávur hjá TAKS eru, at:

- umsita frítíðarløn og trygdargrunn løntakaranna
- krevja inn gjald til Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin og gjalda út úr grunninum
- krevja inn gjald til Vinnusjúkugrunnin og gjalda út úr grunninum
- krevja inn gjald til Arbeiðsloysisskipanina
- krevja inn gjald til Heilsutrygd
- krevja inn gjald til Kringvarpið
- umsita Barsilsskipanina
- umsita FAS-skipanina
- krevja inn almenna skuld
- umsita stuðulslóggávu
- gera lóggávuarbeiði fyri Fíggjarmálaráðið, og ráðgeva um galdandi lóggávu og um onnur viðurskifti á skatta- og avgjaldsøkinum.

TAKS umsitur heilt ella partvíst fylgjandi lógir:

- Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn, Ll. um
- Lov om arveafgift
- Avskrivingarlógin
- Ásetingarlógin
- Barsilsskipan, Ll. um
- Brenniolju, Ll. um serligt avgjald á
- Burturluting v.m., Ll. um gjald av vinningi við
- Dupult húsarhald, Ll. um stuðul til
- Eftirlønarlógin
- Eydnuspæl v.m., Ll. um
- Ferðagjald, Ll. um
- Ferðaútreiðslur, Ll. um stuðul til
- Framleiðslu og innflutningi, Ll um avgjald á
- Frítíð við løn, Ll. um
- Innkrevjing av faldnari skuld, Ll. um gjøld o.l. fyri
- Inddrivelse af personlig skat til amtskommunen, midlertidig bestemmelse
- Íløgugrunnar, Ll. um
- Kapitalvinningi, Ll. um skatting av
- Kolvetnisskattalógin
- Kolvetnisskattafyrisitingarlógin
- Kringvarpslógin
- Lønarhæddaravgjaldslógin
- Meirvirðisgjaldslógin
- Motorakførum v.m., Ll. um avgjøld við skráseting av

- Panting fyri skatt, Ll. um
- Panting, Ll. um avgjøld í samband við
- Stuðul til rentuútreiðslur av lánum, Ll. um
- Rentutryggingarlógin/ Ll. um uppsparing og skatting av eftirlønum
- Skattafría samanlegging, Ll. um
- Skattalógin
- Skuldarumskipan, Ll. um
- Smyrjiolju, Ll. um umhvørvisgjald á
- Tinglýsingaravgjald, Ll. um
- Tinglýsingargjøld v.m., Ll. um
- Toll- og Skattafyrisiting, Ll. um
- Toll-lógin
- Tonsaskatt, Ll. um
- Trygd og at bjóða á tvingsilssølu í sambandi við innkrevjingarmál, Ll. um at veita
- Trygdargrunn fyri avreiðingar og lønir v.m., Ll. um
- Umskipanarlógin
- Útflutningi av vørum, Ll. um skráseting av

Harafturat eru hesar lógir lutvíst at røkja:
Lóg um innflutning og sølu av rúsdrekka, Lóg um sjúkur, sum fiskur, skeljadýr og krabbadýr hava, Lóg um íløt til øl, mineralvatn og lidnar leskidrykkir, Lóg um frítíð við løn, Kunngerð um frítíðarløn, Bókhaldsskyldulógin, Lóg um arbeiðsloysisskipan, Sjúkufyribyrging av dýrum, og Bekæmpelse af smitsomme plantesygdomme og skadedyr (kunngerð).

Millumlandasáttmálar
Tvískattasáttmáli er við Norðurlond, Grønland, Schweiz, India, Stóra Bretland, Isle of Man, Jersey, Guernsey, Bermuda, Bretsku Jomfrúoyggjarnar, Cayman Islands, Niðurlondsku Antillurnar og Aruba. Norðurlendsk hjálpiavtala á skattaøkinum, hjálpiavtala hjá OECD og Europaráðnum í skattamálum, hjálpiavtala við Isle of Man, Guernsey, Jersey, Aruba, Niðurlondsku Antillurnar, Cayman Islands, Bermuda, Bretsku Jomfrúoyggjarnar, Gibraltar, St. Kitts & Nevis, St. Vincent & Grenadines, Anguilla, Antigua & Barbuda, Turks & Caicos Islands, St. Lucia, Bahamas, Dominica, Grenada, Cook Islands, Samoa, San Marino, Andorra, Monaco, Belize, Marshall Islands, Costa Rica, Liberia, Liechtenstein, Montserrat, Bahrain, Barbados, Brunei, Macao, Mauritius, Seychelles, Botswana, Uruguay, Guatemala, Panama, Jamaica, Vanuatu, Qatar og Niue.

Fríhandilsavtalur
Føroyar-ES, Føroyar-Turkaland, Føroyar-Noreg, Føroyar-Ísland og Føroyar-Sveis (íroknað Liktinstein). GATT-sáttmálin (WTO).

TAKS arbeiðir alsamt við at økja sítt virkni og at betra sína tænastu, góðsku og trivnað. Hetta verður m.a. gjørt við at menna KT-kervið og KT-skipanir, og fleiri KT-sjálvavgreiðslur verða gjørdar. Starvsfólkini verða førleikament og trivnaðurin raðfestur. Arbeiðsgongdir verða betraðar, og samskifti innan- og uttanhýsis verður eisini ment.

TAKS leggur stóra áherðslu á at tryggja álitið á TAKS, og ávirka atburðin hjá borgarum og fyritøkum til at gera tað rætta. Álit er grundleggjandi fyritreyt fyri, at stovnurin megnar at loysa sína uppgávu at tryggja landskassans inntøkur. Arbeitt verður við at tryggja, at borgarin og samfelagið hevur álit á lóggávu og fyrisiting soleiðis, at fólk skilja týdningin av at gera rætt, men eisini avleiðingarnar av at gera skeivt. Við góðari vegleiðing og skilagóðum

samskifti, rættari málsviðgerð og eftirliti, roynir TAKS at ávirka atburðin hjá fólki til at fylgja toll-, avgjalds- og skattalóggávuni. Arbeitt verður við at styrkja vinnuliga eftirlitið.

Játtanin í 2018 er við kravi um tillagaðan rakstur lækkað við góðum 1.150 tús. kr. og herumframt lækkað við 300 tús. kr., sum eru fluttar til serstaka høvuðskontu 3.15.1.06. Sakarmálskostnaður hjá TAKS.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	59.683	65.258	64.858	63.393	63.393	63.393
Útreiðslur	81.726	84.212	80.358	79.193	77.893	77.893
Inntøkur	22.043	18.954	15.500	15.800	14.500	14.500
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	47.770	52.560	53.658	52.193	52.193	52.193
Útreiðslur	**66.171**	**68.104**	**66.358**	**65.193**	**65.193**	**65.193**
11. Lønir v.m.	50.407	52.094	54.370	54.070	54.070	54.070
14. Keyp av vørum og tænastum	11.465	11.302	9.318	8.453	8.453	8.453
15. Keyp av útbúnaði, netto	2.305	1.930	600	600	600	600
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	1.956	2.732	2.000	2.000	2.000	2.000
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	29	43	70	70	70	70
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	9	4	-	-	-	-
Inntøkur	**18.401**	**15.544**	**12.700**	**13.000**	**13.000**	**13.000**
21. Søla av vøru og tænastum	*797*	*1.569*	*1.100*	*1.100*	*1.100*	*1.100*
25. Eftirlits- og umsjónaravgjøld	*175*	*140*	-	-	-	-
62. Kravd gjøld, bøtur o.a.	*8.199*	*9.797*	*7.800*	*8.100*	*8.100*	*8.100*
64. Aðrar flytingarinntøkur	*6.048*	-	-	-	-	-
76. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	*3.183*	*4.037*	*3.800*	*3.800*	*3.800*	*3.800*
24. EDV-skipanir hjá TAKS						
Nettoútreiðsla	11.913	12.698	11.200	11.200	11.200	11.200
Útreiðslur	**15.555**	**16.107**	**14.000**	**14.000**	**12.700**	**12.700**
14. Keyp av vørum og tænastum	10.075	11.955	6.400	6.400	5.100	5.100
15. Keyp av útbúnaði, netto	5.479	4.152	7.600	7.600	7.600	7.600
Inntøkur	**3.641**	**3.410**	**2.800**	**2.800**	**1.500**	**1.500**
21. Søla av vøru og tænastum	*2.322*	*1.756*	*1.500*	*1.500*	*1.500*	*1.500*
76. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	*1.319*	*1.654*	*1.300*	*1.300*	-	-

Undirkonta 24. EDV-skipanir hjá TAKS

Síðani 1980-áríni eru KT-kjarnuskipanirnar hjá TAKS støðugt útbygdar, riknar og viðlíkahildnar av hesi játtan. Skipaninar fevna í dag um fakskipanir til skatt, toll og avgjøld v.m., undir hesum eisini býtið millum land og kommunur. Hetta merkir, at skipanirnar hjá TAKS hava sera avgerandi týdning fyri landið, tí tær tryggja innkrevjing og eftirlit við meginpartinum av inntøkum landskassans.

Ætlanin var, at í 2016 skuldu KT-skipanirnar verða liðugt uppstigaðar til nútímans pall, soleiðis at raksturin gerst bíligari. Uppstigingin er seinkað, men verður væntandi liðug í 2018. Hóast uppstigingina eru KT-skipanirnar tó framvegis gamlar og krevja at verða nútímansgjørdar, og tí er neyðugt, at sparingin í KT-rakstrinum, fyri ein part verður tøk hjá TAKS at brúka til at nútímansgera skipanirnar.

Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Í lønarflokki 37 ella hægri	1,0	1,0	1,0	1,0	1,0	1,0
Onnur	110,0	110,0	110,0	110,0	110,0	110,0
Fulltíðarstørv	111,0	111,0	111,0	111,0	111,0	111,0
Lønarpartur (mió. kr.)	50,4	52,1	54,4	54,1	54,1	54,1

3.15.1.06. Sakarmálskostnaður hjá TAKS (Rakstrarjáttan)

Av tí, at sveiggini eru stór og upphæddirnar kunnu verða høgar verður mett skilabetri at hava serstaka høvuðskontu til sakarmálskostnað hjá TAKS.

Játtanin er 300 tús. kr. í 2018.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	-	-	-	300	300	300
Útreiðslur	-	-	-	300	300	300
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	-	-	-	300	300	300
Útreiðslur	**-**	**-**	**-**	**300**	**300**	**300**
14. Keyp av vørum og tænastum	-	-	-	300	300	300

3.15.1.07. Føroya gjaldstova (Rakstrarjáttan)

Játtanin verður nýtt at reka landsstovnin Gjaldstovuna, sum er skipaður undir Fíggjarmálaráðnum. Gjaldstovan førir roknskap yvir játtanirnar á fíggjarlógini og førir m.a. eisini roknskap yvir ogn og skuld landskassans. Gjaldstovan stendur fyri inn- og útgjaldingum landskassans og umsitur lønarskipanina, sum er karmur um avgreiðslu av almennum lønum.

Í 2009 varð Landsnet flutt til Gjaldstovuna at umsita. Játtanin til Landsnet liggur tó á egnari høvuðskontu 3.38.3.19. KT Landsins. Í 2013 var ognar- og skuldafyrisitinginin hjá Landsbankanum flutt til Gjaldstovuna í deildina Fígging landsins. Í 2015, tá ið eldrarøktin varð flutt til kommunurnar, varð øll lønarfyrisitingin hjá Almannaverkinum flutt til Gjaldstovuna. Lønarfyrisitingin veitir tænastu til Almannaverkið og stovnar tess, og til eldrasamstørvini. Í 2016 var stóra verkætlanin Talgildu Føroyar flutt til Gjaldstovuna at umsita. Játtanin til verkætlanina liggur á egnari høvuðskontu 3.11.1.61. Talgildu Føroyar. Fígging landsins var 1. januar 2017 flutt til endurstovnaða Landsbankan.

Ábyrgdarøkið kann verða liðað sundur í hesar høvuðsuppgávur:

- Landsins roknskaparhald og gera landsroknskap
- Menning, viðlíkahald og at reka Búskaparskipan landsins
- Gjaldstovan førir bókhald og avgreiðir lønir fyri fleiri stovnar, grunnar og samstørv
- Lønarfyrisiting og lønarbókhald
- Undirvísing í t.d. skipanum og roknskaparverki

- Gjaldstovan hevur um hendi allar inn- og útgjaldingar landskassans vegna og skal ætla um gjaldførið í fíggjarárinum
- Taka móti og validera kommunuroknskapardátur og dátur fyri grunnar
- Menning, viðlíkahald og rakstur av Landsneti
- KT-trygdarfyriskipanir undir Fíggjarmálaráðnum
- Felagsfyrisiting í Fíggjarmálaráðnum
- Umsita verkætlanina Talgildu Føroyar

Stovnurin er ikki skipaður við lóg, men partar av virkseminum eru ásettir við lóg.

Í kunngerð nr. 22 frá 14. mars 2007 eru ásett øll tey týdningarmestu viðurskiftini í sambandi við roknskaparverk landsins, t.d. hvønn roknskaparhaldið fatar um, hvørjar uppgávur roknskaparhald landsins skal loysa, hvussu tað verður fyriskipað, og hvørji krøv verða sett til roknskaparførslu.

Umsitingin av Landsneti er føstløgd í serligari avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Gjaldstovuna.

Játtanin í 2018 er hækkað við 800 tús. kr. til umsiting, menning og marknaðarføring av Keypsportalinum, og við kravi um tillagaðan rakstur er játtanin lækkað við góðum 650 tús. kr.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	29.933	29.954	28.154	28.299	28.299	28.299
Útreiðslur	33.736	36.068	31.149	31.574	31.574	31.574
Inntøkur	3.803	6.115	2.995	3.275	3.275	3.275
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	16.141	15.759	16.499	16.824	16.824	16.824
Útreiðslur	**18.434**	**19.622**	**18.394**	**18.819**	**18.819**	**18.819**
11. Lønir v.m.	13.981	14.957	16.634	17.104	17.104	17.104
14. Keyp av vørum og tænastum	2.649	3.238	1.405	1.360	1.360	1.360
15. Keyp av útbúnaði, netto	1.038	1.098	240	240	240	240
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	738	306	115	115	115	115
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	0	0	-	-	-	-
57. Rentuútreiðslur o.a.	0	0	-	-	-	-
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	27	23	-	-	-	-
Inntøkur	**2.293**	**3.863**	**1.895**	**1.995**	**1.995**	**1.995**
21. Søla av vøru og tænastum	*25*	*25*	*45*	*45*	*45*	*45*
76. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	*1.316*	*2.658*	*750*	*850*	*850*	*850*
77. Flyting frá kommunum	*951*	*1.180*	*1.100*	*1.100*	*1.100*	*1.100*
24. Búskaparskipan landsins						
Nettoútreiðsla	7.994	7.528	7.735	7.735	7.735	7.735
Útreiðslur	**7.994**	**7.768**	**7.735**	**7.735**	**7.735**	**7.735**
14. Keyp av vørum og tænastum	6.465	5.796	5.735	5.735	5.735	5.735
15. Keyp av útbúnaði, netto	1.529	1.972	2.000	2.000	2.000	2.000
Inntøkur	**-**	**240**	**-**	**-**	**-**	**-**
76. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	*-*	*240*	*-*	*-*	*-*	*-*

25. Vaktætlanarskipanin						
Nettoútreiðsla	-	43	825	825	825	825
Útreiðslur	**-**	**412**	**1.475**	**1.475**	**1.475**	**1.475**
11. Lønir v.m.	-	84	350	400	400	400
14. Keyp av vørum og tænastum	-	328	925	925	925	925
15. Keyp av útbúnaði, netto	-	-	200	150	150	150
Inntøkur	**-**	**369**	**650**	**650**	**650**	**650**
76. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	*-*	*303*	*400*	*400*	*400*	*400*
77. Flyting frá kommunum	*-*	*66*	*250*	*250*	*250*	*250*
28. Felagsfyrisiting hjá Fíggjarmálaráðnum						
Nettoútreiðsla	2.913	3.123	3.095	2.915	2.915	2.915
Útreiðslur	**3.178**	**3.354**	**3.345**	**3.345**	**3.345**	**3.345**
11. Lønir v.m.	1.574	1.593	2.145	2.145	2.145	2.145
14. Keyp av vørum og tænastum	1.296	1.304	820	820	820	820
15. Keyp av útbúnaði, netto	110	86	30	30	30	30
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	197	342	350	350	350	350
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	0	0	-	-	-	-
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	1	29	-	-	-	-
Inntøkur	**265**	**232**	**250**	**430**	**430**	**430**
21. Søla av vøru og tænastum	*265*	*232*	*250*	*250*	*250*	*250*
76. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	*-*	*-*	*-*	*180*	*180*	*180*
30. Umsiting av ogn og skuld landsins						
Nettoútreiðsla	2.915	3.575	-	-	-	-
Útreiðslur	**4.020**	**4.748**	**-**	**-**	**-**	**-**
11. Lønir v.m.	3.163	3.253	-	-	-	-
14. Keyp av vørum og tænastum	857	1.366	-	-	-	-
15. Keyp av útbúnaði, netto	-	129	-	-	-	-
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	-	0	-	-	-	-
Inntøkur	**1.105**	**1.174**	**-**	**-**	**-**	**-**
21. Søla av vøru og tænastum	*1.105*	*1.174*	*-*	*-*	*-*	*-*
40. Inntøkufíggjað virksemi						
Nettoútreiðsla	-29	-75	0	0	0	0
Útreiðslur	**111**	**163**	**200**	**200**	**200**	**200**
11. Lønir v.m.	63	39	100	100	100	100
14. Keyp av vørum og tænastum	7	125	100	100	100	100
15. Keyp av útbúnaði, netto	41	-	-	-	-	-
Inntøkur	**140**	**238**	**200**	**200**	**200**	**200**
21. Søla av vøru og tænastum	*140*	*238*	*200*	*200*	*200*	*200*

Undirkonta 20. Vanligt virksemi

Lønarfyrisitingin hjá Almannaverkinum varð í 2015 flutt til Gjaldstovuna í sambandi við, at eldraøkið varð flutt til kommunurnar. Eldrasamstørvini rinda áleið 1,1 mió. kr. árliga fyri tær tænastur, sum Gjaldstovan veitir teimum.

Undirkonta 24. Búskaparskipan landsins

Búskaparskipan landsins er m.a.:

- Høvuðsbók
- Debitorskipan
- Kreditorskipan og rokningarverkgongd (ljóslesing, arbeiðsgongdir o.t.)
- Útgjaldingarskipan

- Inngjaldingarskipan
- Støðisogn
- Lønarskipan o.a.
- Leiðslukunningarskipan
- Búskettskipan
- Skipan fyri søguligar dátur
- Vegskattaskipan
- Lánsskipan
- Navna- og virkiskrá

Talið av brúkarum í Búskaparskipan landsins liggur um túsund. Krøvini til rakstrarumhvørvið - bæði við atliti til skipanir, talið av brúkarum og KT-trygd - hava merkt, at hetta er munandi útbygt síðstu árini.

So at siga allar KT-uppgávurnar undir Búskaparskipan landsins eru útveittar gjøgnum árini.

Undirkonta 25. Vaktætlanarskipanin
Í oktober 2016 yvirtók Gjaldstovan ábyrgdina av at reka Vaktætlanarskipanina. Í hesum sambandi vórðu í 2017 fluttar 825 tús. kr. frá KT-øki heilsuverksins undir Landssjúkrahúsinum. Eisini eru flytingar frá stovnum, sum nýta Vaktætlanarskipanina.

Undirkonta 28. Felagsfyrisitingin hjá Fíggjarmálaráðnum
Felagsfyrisitingin fatar um húsavørð, bygningstrygging, vasking og starvsfólkamatstovu.

Undirkonta 30. Umsiting av gjaldføri og skuld landsins
Frá 1. apríl 2013 yvirtók Gjaldstovan umsitingina av gjaldføri og skuld landsins frá Landsbankanum. Fígging landsins var 1. januar 2017 flutt til endurstovnaða Landsbankan.

Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Í lønarflokki 37 ella hægri	2,0	2,0	2,0	1,7	2,0	2,0
Onnur	28,5	32,5	32,5	33,5	33,5	33,5
Fulltíðarstørv	30,5	34,5	34,5	35,2	35,5	35,5
Lønarpartur (mió. kr.)	14,0	15,0	16,6	17,1	17,1	17,1

Starvsfólkayvirlit: 28 Felagsfyrisiting hjá Fíggjarmálaráðnum

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Í lønarflokki 37 ella hægri	-	-	-	-	-	-
Onnur	5,0	5,0	5,8	6,0	6,0	6,0
Fulltíðarstørv	5,0	5,0	5,8	6,0	6,0	6,0
Lønarpartur (mió. kr.)	1,6	1,6	2,1	2,1	2,1	2,1

Starvsfólkayvirlit: 30 Umsiting av ogn og skuld landsins

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Í lønarflokki 37 ella hægri	2,0	2,0	-	-	-	-
Onnur	3,0	3,0	-	-	-	-
Fulltíðarstørv	5,0	5,0	-	-	-	-
Lønarpartur (mió. kr.)	3,2	3,3	-	-	-	-

3.15.1.13. Búskaparráðið (Rakstrarjáttan)

Búskaparráðið er skipað sambært løgtingslóg nr. 50 frá 11. mai 2009 um búskaparráð við seinni broytingum. Ætlanin við Búskaparráðnum er, at tað skal gera regluligar frágreiðingar frá føroyskum búskaparfrøðingum um gongdina í føroyska búskapinum, um tey búskaparligu útlitini, og um hvørji tiltøk eiga at verða sett í verk.

Búskaparráðið er óheft av landsstýrinum. Tríggir limir eru í ráðnum, og verða hesir settir eftir tilmæli frá Fróðskaparsetur Føroya. Allir limirnir í ráðnum skulu vera búskaparfrøðingar við útbúgving frá hægri lærustovni.

Játtanin verður eisini nýtt til gransking og undirvísing í búskaparfrøði.

Dagliga umsitingin og skrivarauppgávan hjá Búskaparráðnum verður røkt av Fróðskaparsetur Føroya.

Átekning

Landsstyriskvinnuni verður heimilað at gera innanhýsis flytingar millum hesa høvuðskontuna og høvuðskontu 7.23.6.16. Fróðskaparsetur Føroya.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	2.403	2.400	2.450	2.450	2.450	2.450
Útreiðslur	2.403	2.400	2.450	2.450	2.450	2.450
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	2.403	2.400	2.450	2.450	2.450	2.450
Útreiðslur	**2.403**	**2.400**	**2.450**	**2.450**	**2.450**	**2.450**
11. Lønir v.m.	203	200	250	250	250	250
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	2.200	2.200	2.200	2.200	2.200	2.200

3.15.1.20. Landsbanki Føroya (Rakstrarjáttan)

Nýggi Landsbanki Føroya varð stovnaður 1. januar 2017.

Landsbankin er skipaður sum óheftur tjóðarbúskaparligur stovnur, ið skal virka fyri fíggjarligum støðufesti, umsita gjaldføri, fíggjarogn og skuld landsins, gera búskaparfrágreiðingar og veita ráðgeving. Landsbankin verður skrivstova fyri Føroya váðaráð, ið skal hava yvirskipað eftirlit við fíggjarligu váðunum í føroyska búskapinum.

Í 2018 verður virksemið mett at kosta 8,9 mió. kr.

Landsbanki Føroya verður inntøkufíggjaður við gjaldi svarandi til upp til 4 promillu av minstagjaldføri landsins, umframt gjaldi fyri tænastur, ið Landsbankin røkir fyri aðrar partar, so sum AMEG.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	-	-	0	0	0	0
Útreiðslur	-	-	8.900	8.900	8.900	8.900
Inntøkur	-	-	8.900	8.900	8.900	8.900
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	-	-	0	0	0	0
Útreiðslur	**-**	**-**	**8.900**	**8.900**	**8.900**	**8.900**
11. Lønir v.m.	-	-	6.800	6.800	6.800	6.800
14. Keyp av vørum og tænastum	-	-	1.900	1.720	1.720	1.720
15. Keyp av útbúnaði, netto	-	-	200	200	200	200
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	-	-	-	180	180	180
Inntøkur	**-**	**-**	**8.900**	**8.900**	**8.900**	**8.900**
21. Søla av vøru og tænastum	*-*	*-*	*1.000*	*1.000*	*1.000*	*1.000*
64. Aðrar flytingarinntøkur	*-*	*-*	*7.900*	*7.900*	*7.900*	*7.900*

Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Í lønarflokki 37 ella hægri	-	-	1,0	1,0	1,0	1,0
Onnur	-	-	9,0	9,0	9,0	9,0
Fulltíðarstørv	-	-	10,0	10,0	10,0	10,0
Lønarpartur (mió. kr.)	-	-	6,8	6,8	6,8	6,8

3.15.2. Hagfrøði

3.15.2.01. Hagstova Føroya (Rakstrarjáttan)

Lógargrundarlag stovnsins er løgtingslóg nr. 33 frá 7. mai 1991 um Hagstovu Føroya. Sambært hesi lóg er Hagstovan sjálvstøðugur stovnur, sum er høvuðsmyndugleiki fyri hagfrøðiligum virksemi í Føroyum.

Í 2013 yvirtók Hagstovan hagtalsvirksemi hjá Landsbankanum, og varð játtanin hækkað samsvarandi. Í sambandi við endurstovnanina av Landsbanka Føroya í 2017 varð partur av sama hagtalsvirksemi flutt aftur, og játtanin lækkað. Landsbanki Føroya og Hagstova Føroya samstarva um ávís búskaparhagtøl.

Játtanin í 2018 er hækkað við 1,0 mió. kr. til verkætlan at fáa til vega útgreinaði lønarhagtøl fyri privata og almenna arbeiðsmarknaðin, og við kravi um tillagaðan rakstur er játtanin lækkað við sløkum 200 tús. kr.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	10.903	11.718	10.325	11.127	11.127	11.127
Útreiðslur	11.727	12.478	10.415	11.327	11.327	11.327
Inntøkur	824	760	90	200	200	200
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	10.903	11.718	10.325	11.127	11.127	11.127
Útreiðslur	**11.727**	**12.478**	**10.415**	**11.327**	**11.327**	**11.327**
11. Lønir v.m.	10.246	10.327	9.355	9.907	9.907	9.907
14. Keyp av vørum og tænastum	1.133	1.261	910	1.270	1.270	1.270
15. Keyp av útbúnaði, netto	245	110	150	150	150	150
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	-	776	-	-	-	-
17. Avskrivingar o.a.	0	-	-	-	-	-
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	103	4	-	-	-	-
Inntøkur	**824**	**760**	**90**	**200**	**200**	**200**
21. Søla av vøru og tænastum	*824*	*760*	*90*	*200*	*200*	*200*

Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Í lønarflokki 37 ella hægri	1,0	1,0	1,0	1,0	1,0	1,0
Onnur	17,7	17,3	16,0	17,0	17,0	17,0
Fulltíðarstørv	18,7	18,3	17,0	18,0	18,0	18,0
Lønarpartur (mió. kr.)	10,2	10,3	9,4	9,9	9,9	9,9

Almenn starvsfólk v.m.

3.18.1. Tænastumannaeftirlønir

3.18.1.01. Tænastumannaeftirlønir (Lógarbundin játtan)

Lógargrundarlagið undir játtanini er løgtingslóg nr. 32 frá 5. juli 1971 um tænastumannaeftirlønir við seinni broytingum. Fólk, sum fáa eftirløn eftir hesi løgtingslóg, eru: tænastumenn, sum eru farnir frá fyri aldur, sjúku ella av øðrum óvæntaðum ávum, sum teir hava ikki vald á, og sum kunnu ikki verða kannaðar teimum. Eftirsitandi hjúnafelagi eftir tænastumann ella eftirløntan tænastumann. Eftirsitandi børn hjá tænastumanni fáa barnaeftirløn til tey eru 21 ár. Eftirløntir tænastumenn fáa barnaískoyti, eiga teir børn undir 21 ár.

Eftirløn verður roknað eftir avtalu, sum er gjørd millum Fíggjarmálaráðið og Tænastumannafelagið eftir lógini, sum er nevnd omanfyri.

Talið av eftirlønarmóttakarum er vaksið nógv seinastu árini. Tænastumannaeftirlønirnar vóru 28,4 mió. kr. í 2016. Metta nýtslan í 2017 er slakar 30,3 mió. kr.

Játtanin er í 2018 flutt til høvuðskontu 3.18.1.02. Ymsar tænastumannaeftirlønir.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	26.286	28.382	29.300	-	-	-
01. Tænastumenn						
Útreiðslur	**26.286**	**28.382**	**29.300**	**-**	**-**	**-**
52. Tilskot til einstaklingar	26.286	28.382	29.300	-	-	-

3.18.1.02. Ymsar tænastumannaeftirlønir (Lógarbundin játtan)

01. Tænastumenn

Lógargrundarlagið undir játtanini er løgtingslóg nr. 32 frá 5. juli 1971 um tænastumannaeftirlønir við seinni broytingum. Fólk, sum fáa eftirløn eftir hesi løgtingslóg, eru: tænastumenn, sum eru farnir frá fyri aldur, sjúku ella av øðrum óvæntaðum ávum, sum teir hava ikki vald á, og sum kunnu ikki verða kannaðar teimum. Eftirsitandi hjúnafelagi eftir tænastumann ella eftirløntan tænastumann. Eftirsitandi børn hjá tænastumanni fáa barnaeftirløn til tey eru 21 ár. Eftirløntir tænastumenn fáa barnaískoyti, eiga teir børn undir 21 ár.

Eftirløn verður roknað eftir avtalu, sum er gjørd millum Fíggjarmálaráðið og Tænastumannafelagið eftir lógini, sum er nevnd omanfyri.

Talið av eftirlønarmóttakarum er vaksið nógv seinastu árini. Tænastumannaeftirlønirnar vóru 28,4 mió. kr. í 2016. Metta nýtslan í 2017 er slakar 30,3 mió. kr. Roknað verður við 30,8 mió. kr. í 2018.

02. Læraraeftirlønir

Tey, sum fáa eftirløn av hesi játtan, eru tænastumenn, sum settir hava verið í føroyska

fólkaskúlanum og tey, sum sett hava verið við eftirlønarrætti sum tænastumenn í folkaskúlanum.

Játtanin er til tænastumenn í fólkaskúlanum, sum eru farnir frá fyri aldur, sjúku ella av øðrum óvæntaðum ávum, sum teir hava ikki vald á, og sum kunnu ikki verða kannaðar teimum, og til eftirsitandi hjúnafelagi eftir tænastumann ella eftirløntan tænastumann. Eftirsitandi børn hjá tænastumonnum fáa barnaeftirløn til tey eru 21 ár. Eftirløntir tænastumenn fáa barnaískoyti, eiga teir børn undir 21 ár.

Fyri teir tænastumenn, sum eru eftirløntir eftir 30. juni í 1997, er lógargrundarlagið undir játtanini løgtingslóg nr. 32 frá 5. juli 1971 um tænastumannaeftirlønir við seinni broytingum. Teir, sum eru eftirløntir fyri 30. juni í 1997, eru eftirløntir eftir danskari lóg.

Útreiðslurnar til læraraeftirlønir eru vorðnar alsamt størri seinastu árini. Læraraeftirlønirnar vóru 78,1 mió. kr. í 2016. Nýtslan verður mett til áleið 83,0 mió. kr. í 2017. Roknað verður við 86,8 mió. kr. í 2018.

03. Endurgjald fyri læraraeftirlønir
Endurgjald verður rindað úr ríkiskassanum fyri eftirlønir til tænastumenn, sum settir hava verið í føroyska fólkaskúlanum.

Til 30. juni í 1997 hevur ríkiskassin endurrindað 80% av øllum útreiðslunum til læraraeftirlønir, men frá 1. juli í 1997 hevur verið endurrindað eftir L. nr. 474 frá 10. juni í 1997 "Lov om ophævelse af lov om tjenestemænd m.fl. i folkeskolen på Færøerne". Eftir lógini verður skilnaður gjørdur millum eftirlønaraldur, sum vunnin er fyri og eftir 31. desember í 1987. Ásett er, at ríkiskassin endurrindar 80% av teimum eftirlønarútreiðslum, sum eru fyri eftirlønarrætt, sum vunnin er fyri 31. desember í 1987. Útreiðslurnar til læraraeftirlønir verða alsamt størri og tað, ríkiskassin endurrindar, verður ár fyri ár minni. Endurrindanin frá ríkinum verður bókað á undirkontu 02. Endurgjøld.

Endurgjaldið var 26,9 mió. kr. í 2016. Mett verður, at endurgjaldið verður áleið 27,9 mió. kr. í 2017. Roknað verður við 28,3 mió. kr. í 2018.

04. Eftirlønir innan heilsuverkið
Játtanin verður nýtt til eftirlønir til tænastumenn, ið hava starvast í heilsuverkinum.

Útreiðslurnar til eftirlønir innan heilsuverkið vóru 13,6 mió. kr. í 2016. Nýtslan verður mett til áleið 14,3 mió. kr. í 2017. Roknað verður við 14,6 mió. kr. í 2018.

05. Postverk Føroya, eftirlønir
Tá Postverk Føroya varð yvirtikið í 1976, yvirtók postverkið 76 tænastumenn, sum gjørdust starvsmenn við sama eftirlønarrætti sum tænastumenn.

Eftirlønarskyldan er ein lógarbundin skylda ásett í § 1 í løgtingslóg nr. 45 frá 9. mai 1976 um viðurskiftini hjá starvsfólki á postverkinum í sambandi við yvirtøku. Ásett er, at eftirlønarbyrðan verður býtt millum statin og Føroya Landsstýri í mun til eftirlønaraldur hjá starvsfólki í postverkinum áðrenn yvirtøkuna, og eftirlønaraldur hjá Postverki Føroya eftir yvirtøkuna. Postverk Føroya (nú partafelagið) fær endurgoldið donsku eftirlønarútreiðslurnar frá danska statinum, men fíggjaði sjálvt útreiðslurnar fyri starvstíðina eftir yvirtøkuna av rakstri fyritøkunar fram til ultimo 2004.

Tað var mett at vera óheppið, at Postverk Føroya, tvs. brúkarin av posttænastunum, skuldi fíggja eftirlønarskylduna. Peningur verður tí settur av á fíggjarlógini til endamálið. Tó soleiðis, at P/F Postverkið sjálvt rindar yvir raksturin, tað sum annars svarar til eftirlønina fyri sáttmálasettar starvsmenn (starvsfólk, sum eru sett í starv eftir yvirtøkuna).

Útreiðslurnar til eftirlønirnar hjá Postverkinum vóru 8,3 mió. kr. í 2016. Nýtslan verður mett til slakar 8,4 mió. kr. í 2017. Roknað verður við sløkum 8,7 mió. kr. í 2018.

06. Eftirløn landsstýrismanna

Eftirløn verður goldin landsstýrismonnum, ið hava rætt til eftirløn sambært løgtingslóg nr. 10 frá 8. januar 1993 um samsýning og eftirløn landsstýrismanna v.m., við seinni broytingum.

Útreiðslurnar til eftirløni landsstýrismanna vóru slakar 2,9 mió. kr. í 2016. Nýtslan verður mett til áleið 3,0 mió. kr. í 2017. Roknað verður við sløkum 3,5 mió. kr. í 2018.

07. Danskar eftirlønir

Endurgjald til ríkiskassan sambært avtalu dagf. 6. februar 1981 við ískoyti dagf. 10. mai 1990 um eftirlønarbýti hjá ávikavist landsstýrinum og ríkiskassanum. Eftir hesi avtalu rindar ríkiskassin eftirløn til tænastumenn og onnur, ið hava tænastumannalíknandi eftirlønarskipan, sum heimastýrið hevur yvirtikið eftir hesi skipan. Landsstýrið skal síðani rinda ríkiskassanum aftur tað, sum er vunnið í eftirlønarrætti eftir yvirtøkuna.

Útreiðslurnar til donsku eftirlønirnar vóru 1,6 mió. kr. í 2016. Nýtslan verður mett til slakar 1,6 mió. kr. í 2017. Roknað verður við 1,8 mió. kr. í 2018.

08. Eftirlønir

Eftirlønir, sum sambært samtykt Landsstýrisins og fíggjarnevnd Løgtingsins verða veittar teimum, sum vóru í starvi hjá tí almenna 1. apríl 1949, og sum eftir 30 ára aldur hava starvast í minsta lagi 15 ár hjá tí almenna og fara úr starvi fyri aldur ella sjúku, ella eftirsitandi hjúnafelaga teirra.

Útreiðslurnar til eftirlønir vóru 494 tús. kr. í 2016. Nýtslan verður mett til áleið 500 tús. kr. í 2017. Roknað verður við 550 tús. kr. í 2018.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	-	-	-146.650	153.250	159.850	
Inntøkujáttan	-	-	- 28.300	29.100	29.900	
01. Tænastumenn						
Útreiðslur	**-**	**-**	**- 30.800**	**32.300**	**33.800**	
52. Tilskot til einstaklingar	-	-	- 30.800	32.300	33.800	
02. Læraraeftirlønir						
Útreiðslur	**-**	**-**	**- 86.800**	**91.100**	**95.400**	
52. Tilskot til einstaklingar	-	-	- 86.800	91.100	95.400	

03. Endurgjald fyri læraraeftirlønir						
Inntøkur	**-**	**-**	**-**	**28.300**	**29.100**	**29.900**
65. Flytingarinntøkur úr útlandinum	*-*	*-*	*-*	*28.300*	*29.100*	*29.900*
04. Eftirlønir innan heilsuverkið						
Útreiðslur	**-**	**-**	**-**	**14.600**	**15.100**	**15.600**
52. Tilskot til einstaklingar	-	-	-	14.600	15.100	15.600
05. Postverk Føroya, eftirlønir						
Útreiðslur	**-**	**-**	**-**	**8.650**	**8.650**	**8.650**
51. Tilskot til útlandið o.a.	-	-	-	150	150	150
52. Tilskot til einstaklingar	-	-	-	8.500	8.500	8.500
06. Eftirløn landsstýrismanna						
Útreiðslur	**-**	**-**	**-**	**3.450**	**3.750**	**4.050**
52. Tilskot til einstaklingar	-	-	-	3.450	3.750	4.050
07. Danskar eftirlønir						
Útreiðslur	**-**	**-**	**-**	**1.800**	**1.800**	**1.800**
51. Tilskot til útlandið o.a.	-	-	-	1.800	1.800	1.800
08. Eftirlønir						
Útreiðslur	**-**	**-**	**-**	**550**	**550**	**550**
52. Tilskot til einstaklingar	-	-	-	550	550	550

3.18.1.04. Læraraeftirlønir (Lógarbundin játtan)

01. Læraraeftirlønir

Tey, sum fáa eftirløn av hesi játtan, eru tænastumenn, sum settir hava verið í føroyska fólkaskúlanum og tey, sum sett hava verið við eftirlønarrætti sum tænastumenn í folkaskúlanum.

Játtanin er til tænastumenn í fólkaskúlanum, sum eru farnir frá fyri aldur, sjúku ella av øðrum óvæntaðum ávum, sum teir hava ikki vald á, og sum kunnu ikki verða kannaðar teimum, og til eftirsitandi hjúnafelagi eftir tænastumann ella eftirløntan tænastumann. Eftirsitandi børn hjá tænastumonnum fáa barnaeftirløn til tey eru 21 ár. Eftirløntir tænastumenn fáa barnaískoyti, eiga teir børn undir 21 ár.

Fyri teir tænastumenn, sum eru eftirløntir eftir 30. juni í 1997, er lógargrundarlagið undir játtanini løgtingslóg nr. 32 frá 5. juli 1971 um tænastumannaeftirlønir við seinni broytingum. Teir, sum eru eftirløntir fyri 30. juni í 1997, eru eftirløntir eftir danskari lóg.

Útreiðslurnar til læraraeftirlønir eru vorðnar alsamt størri seinastu árini. Læraraeftirlønirnar vóru 78,1 mió. kr. í 2016. Nýtslan verður mett til áleið 83,0 mió. kr. í 2017.

02. Endurgjøld

Endurgjald verður rindað úr ríkiskassanum fyri eftirlønir til tænastumenn, sum settir hava verið í føroyska fólkaskúlanum.

Til 30. juni í 1997 hevur ríkiskassin endurrindað 80% av øllum útreiðslunum til læraraeftirlønir, men frá 1. juli í 1997 hevur verið endurrindað eftir L. nr. 474 frá 10. juni í 1997 "Lov om ophævelse af lov om tjenestemænd m.fl. i folkeskolen på Færøerne". Eftir lógini verður skilnaður gjørdur millum eftirlønaraldur, sum vunnin er fyri og eftir 31. desember í 1987. Ásett er, at ríkiskassin endurrindar 80% av teimum eftirlønarútreiðslum, sum eru fyri eftirlønarrætt, sum vunnin er fyri 31. desember í 1987. Útreiðslurnar til

læraraeftirlønir verða alsamt størri og tað, ríkiskassin endurrindar, verður ár fyri ár minni. Endurrindanin frá ríkinum verður bókað á undirkontu 02. Endurgjøld.

Endurgjaldið var 26,9 mió. kr. í 2016. Mett verður, at endurgjaldið verður áleið 27,9 mió. kr. í 2017.

Játtan

Játtanin er í 2018 flutt til høvuðskontu 3.18.1.02. Ymsar tænastumannaeftirlønir.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	72.586	78.142	82.500	-	-	-
Inntøkujáttan	25.837	26.907	27.500	-	-	-
01. Læraraeftirlønir						
Útreiðslur	**72.586**	**78.142**	**82.500**	**-**	**-**	**-**
52. Tilskot til einstaklingar	72.586	78.142	82.500	-	-	-
02. Endurgjald fyri læraraeftirlønir						
Inntøkur	**25.837**	**26.907**	**27.500**	**-**	**-**	**-**
65. Flytingarinntøkur úr útlandinum	*25.837*	*26.907*	*27.500*	-	-	-

3.18.1.07. Eftirlønir innan heilsuverkið (Lógarbundin játtan)

Játtanin verður nýtt til eftirlønir til tænastumenn, ið hava starvast í heilsuverkinum.

Útreiðslurnar til eftirlønir innan heilsuverkið vóru 13,6 mió. kr. í 2016. Nýtslan verður mett til áleið 14,3 mió. kr. í 2017.

Játtanin er í 2018 flutt til høvuðskontu 3.18.1.02. Ymsar tænastumannaeftirlønir.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	12.608	13.580	14.100	-	-	-
01. Eftirlønir innan heilsuverkið						
Útreiðslur	**12.608**	**13.580**	**14.100**	**-**	**-**	**-**
52. Tilskot til einstaklingar	12.608	13.580	14.100	-	-	-

3.18.1.10. Postverk Føroya, eftirlønir (Lógarbundin játtan)

Tá Postverk Føroya varð yvirtikið í 1976, yvirtók postverkið 76 tænastumenn, sum gjørdust starvsmenn við sama eftirlønarrætti sum tænastumenn.

Eftirlønarskyldan er ein lógarbundin skylda ásett í § 1 í løgtingslóg nr. 45 frá 9. mai 1976 um viðurskiftini hjá starvsfólki á postverkinum í sambandi við yvirtøku. Ásett er, at eftirlønarbyrðan verður býtt millum statin og Føroya Landsstýri í mun til eftirlønaraldur hjá starvsfólki í postverkinum áðrenn yvirtøkuna, og eftirlønaraldur hjá Postverki Føroya eftir yvirtøkuna. Postverk Føroya (nú partafelagið) fær endurgoldið donsku eftirlønarútreiðslurnar frá danska statinum, men fíggjaði sjálvt útreiðslurnar fyri starvstíðina eftir yvirtøkuna av rakstri fyritøkunar fram til ultimo 2004.

Tað var mett at vera óheppið, at Postverk Føroya, tvs. brúkarin av posttænastunum, skuldi fíggja eftirlønarskylduna. Peningur verður tí settur av á fíggjarlógini til endamálið. Tó soleiðis, at P/F Postverkið sjálvt rindar yvir raksturin, tað sum annars svarar til eftirlønina fyri sáttmálasettar starvsmenn (starvsfólk, sum eru sett í starv eftir yvirtøkuna).

Útreiðslurnar til eftirlønirnar hjá Postverkinum vóru 8,3 mió. kr. í 2016. Nýtslan verður mett til slakar 8,4 mió. kr. í 2017.

Játtanin er í 2018 flutt til høvuðskontu 3.18.1.02. Ymsar tænastumannaeftirlønir.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	8.437	8.326	8.650	-	-	-
01. Postverk Føroya, eftirlønir						
Útreiðslur	**8.437**	**8.326**	**8.650**	**-**	**-**	**-**
51. Tilskot til útlandið o.a.	119	120	150	-	-	-
52. Tilskot til einstaklingar	8.318	8.206	8.500	-	-	-

3.18.2. Aðrar eftirlønir

3.18.2.01. Eftirlønir (Lógarbundin játtan)

Eftirlønir, sum sambært samtykt Landsstýrisins og fíggjarnevnd Løgtingsins verða veittar teimum, sum vóru í starvi hjá tí almenna 1. apríl 1949, og sum eftir 30 ára aldur hava starvast í minsta lagi 15 ár hjá tí almenna og fara úr starvi fyri aldur ella sjúku, ella eftirsitandi hjúnafelaga teirra.

Útreiðslurnar til eftirlønir vóru 494 tús. kr. í 2016. Nýtslan verður mett til áleið 500 tús. kr. í 2017.

Játtanin er í 2018 flutt til høvuðskontu 3.18.1.02. Ymsar tænastumannaeftirlønir.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	481	494	500	-	-	-
01. Eftirlønir						
Útreiðslur	**481**	**494**	**500**	**-**	**-**	**-**
52. Tilskot til einstaklingar	481	494	500	-	-	-

3.18.2.04. Danskar eftirlønir (Lógarbundin játtan)

Endurgjald til ríkiskassan sambært avtalu dagf. 6. februar 1981 við ískoyti dagf. 10. mai 1990 um eftirlønarbýti hjá ávikavist landsstýrinum og ríkiskassanum. Eftir hesi avtalu rindar ríkiskassin eftirløn til tænastumenn og onnur, ið hava tænastumannalíknandi eftirlønarskipan, sum heimastýrið hevur yvirtikið eftir hesi skipan. Landsstýrið skal síðani rinda ríkiskassanum aftur tað, sum er vunnið í eftirlønarrætti eftir yvirtøkuna.

Útreiðslurnar til donsku eftirlønirnar vóru 1,6 mió. kr. í 2016. Nýtslan verður mett til slakar 1,6 mió. kr. í 2017.

Játtanin er í 2018 flutt til høvuðskontu 3.18.1.02. Ymsar tænastumannaeftirlønir.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	1.351	1.588	1.850	-	-	-
01. Danskar eftirlønir						
Útreiðslur	**1.351**	**1.588**	**1.850**	**-**	**-**	**-**
51. Tilskot til útlandið o.a.	1.351	1.588	1.850	-	-	-

3.18.2.07. Eftirløn landsstýrismanna (Lógarbundin játtan)

Eftirløn verður goldin landsstýrismonnum, ið hava rætt til eftirløn sambært løgtingslóg nr. 10 frá 8. januar 1993 um samsýning og eftirløn landsstýrismanna v.m., við seinni broytingum.

Útreiðslurnar til eftirlønir landsstýrismanna vóru slakar 2,9 mió. kr. í 2016. Nýtslan verður mett til áleið 3,0 mió. kr. í 2017.

Játtanin er í 2018 flutt til høvuðskontu 3.18.1.02. Ymsar tænastumannaeftirlønir.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	2.520	2.867	3.150	-	-	-
01. Landsstýrismenn						
Útreiðslur	**2.520**	**2.867**	**3.150**	**-**	**-**	**-**
52. Tilskot til einstaklingar	2.520	2.867	3.150	-	-	-

3.18.3. Aðrar starvsfólkaútreiðslur

3.18.3.04. Lønarforskot (Stuðulsjáttan)

Talan er um lønarforskot, sum tænastumenn kunnu fáa í heilt serligum førum, tá ið á stendur, sbrt. § 41 í tænastumannalógini, og sum verður veitt sum lán.

Síðstu nógvu árini er einki lønarforskot veitt.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	-	-	50	50	50	50
Inntøkujáttan	-	-	50	50	50	50
01. Forskot						
Útreiðslur	**-**	**-**	**50**	**50**	**50**	**50**
82. Útlán v.m.	-	-	50	50	50	50
Inntøkur	**-**	**-**	**50**	**50**	**50**	**50**
86. Afturgjaldan av útlánum v.m.	*-*	*-*	*50*	*50*	*50*	*50*

Almannamál

3.21.2. Útgjaldsskipanir

3.21.2.01. Stuðul til flutning og dupult húsarhald (Lógarbundin játtan)

Sambært løgtingslóg nr. 93 um stuðul til ferðaútreiðslur og løgtingslóg nr. 95 um stuðul til dupult húsarhald, báðar frá 6. juni 1997 við seinni broytingum, verður stuðul veittur fólki, sum í sambandi við arbeiði hava útreiðslur til ferðing ella uppihald. Stuðulin hevur verið ásettur sambært kunngerð nr. 132 frá 27. desember 2006 um stuðul til ferðaútreiðslur og útreiðslur til dupult húsarhald.

Ferðastuðulin varð hækkaður við 10 % í 2016.

Útreiðslurnar til stuðul til ferðing og dupult húsarhald vóru 19,6 mió. kr. í 2016. Nýtslan verður mett til áleið 22,0 mió. kr. í 2017. Roknað verður við 22,1 mió. kr. í 2018.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	16.596	19.583	19.600	22.100	22.100	22.100
01. Stuðul						
Útreiðslur	**16.596**	**19.583**	**19.600**	**22.100**	**22.100**	**22.100**
52. Tilskot til einstaklingar	16.596	19.583	19.600	22.100	22.100	22.100

3.21.7. Sosialar skipanir

3.21.7.10. Útgjald úr Trygdargrunninum (Lógarbundin játtan)

Trygdargrunnurin virkar sambært løgtingslóg nr. 68 frá 9. juni 1988 um trygdargrunn fyri avreiðingar og lønir v.m. við seinni broytingum. Grunnurin hevur til endamáls at tryggja løntakarunum lønarkrøv í sambandi við, at arbeiðsgevari kemur í fíggjartrot, arbeiðsgevari doyr, ella fyritøka hansara heldur uppat vegna vantandi fíggjarligan førleika.

Í 2016 var útgjaldið til lønarkrøv -300 tús. kr., sum landskassin fekk endurrindað úr Trygdargrunninum. Mett verður, at útgjaldið til lønarkrøv verður slakar 50 tús. kr. í 2017. Roknað verður við 500 tús. kr. í 2018.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	2.526	-300	500	500	500	500
Inntøkujáttan	2.526	-300	500	500	500	500
01. Útgjald úr Trygdargrunninum						
Útreiðslur	**2.526**	**-300**	**500**	**500**	**500**	**500**
11. Lønir v.m.	-	0	-	-	-	-
52. Tilskot til einstaklingar	2.526	-300	500	500	500	500
Inntøkur	**2.526**	**-300**	**500**	**500**	**500**	**500**
76. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	*2.526*	*-300*	*500*	*500*	*500*	*500*

Íbúðarmál

3.22.4. Útgjaldsskipanir

3.22.4.01. Stuðul til rentuútreiðslur (Lógarbundin játtan)

Sambært løgtingslóg nr. 148 frá 30. desember 1996 um stuðul til rentuútreiðslur av lánum, við seinni broytingum, verður stuðul latin til rentuútreiðslum av lánum til egnan bústað, til bústaðaeindir í lutaíbúðafeløgum, til útbúgving, og til at gjalda aftur virkin (effektiv) veðhald frá áðrenn 3. desember 1994.

Fíggjarmálaráðið og TAKS hava gjørt avtalu við Danmarks Rederiforening um, at Udligningsfonden endurrindar part av rentustuðlinum fyri teir føroyingar, sum sigla undir DIS-skipanini.

Síðani 2014 hevur rentustuðulin verið 35 prosentstig, harav landið rindar 19,5 prosentstig og kommunurnar 15,5 prosentstig. Rentustuðul verður bert veittur til ein matrikul við einum hámarkið, sum í 2014 var 120 tús. kr.

Í løgtingslóg nr. 155 frá 20. desember 2013 er ásett, at hámarksupphæddin lækkar 5 tús. kr. árliga frá og við 2015, til tað í 2018 og frameftir verður givin rentustuðul fyri rentuútreiðslur upp til 100 tús. kr.

Nettoútreiðslurnar til rentustuðul vóru 44,1 mió. kr. í 2016. Nettonýtslan verður mett til áleið 43,7 mió. kr. í 2017. Roknað verður við nettonýtslu á 44,0 mió. kr. í 2018.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	82.121	80.025	79.000	79.000	79.000	79.000
Inntøkujáttan	36.796	35.908	35.000	35.000	35.000	35.000
01. Rentustuðul						
Útreiðslur	**82.121**	**80.025**	**79.000**	**79.000**	**79.000**	**79.000**
52. Tilskot til einstaklingar	82.121	80.025	79.000	79.000	79.000	79.000
Inntøkur	**36.796**	**35.908**	**35.000**	**35.000**	**35.000**	**35.000**
77. Flyting frá kommunum	*36.796*	*35.908*	*35.000*	*35.000*	*35.000*	*35.000*

Mentan

3.24.3. Mentanararvur

3.24.3.27. Saltsilo, rakstrarstuðul (Stuðulsjáttan)

Landið hevur átikið sær at lata stuðul til raksturin av mentanarbygninginum Saltsiloini. Talan er um tilsøgn um rakstrarstuðul á 2,5 mió. kr. um árið. Í 2017 vórðu latnar 2,1 mió. kr. í rakstrarstuðuli.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	-	-	2.500	2.500	2.500	2.500
01. Saltsilo, rakstrarstuðul						
Útreiðslur	**-**	**-**	**2.500**	**2.500**	**2.500**	**2.500**
54. Stuðul til annað virksemi	-	-	2.500	2.500	2.500	2.500

Samferðsla og samskifti

3.38.3. Samskifti

3.38.3.19. KT Landsins (Rakstrarjáttan)

KT Landsins, sum er skipað sum deild undir Gjaldstovuni, hevur til endamáls at virka fyri einari skynsamari og tryggari KT-nýtslu í almennu fyrisitingini. Hetta verður gjørt við at miðsavna og samskipa KT-virksemið í almennu fyrisitingini.

Uppgávurnar hjá KT Landsins eru:

- At reka og menna Landsnet. Landsnet er KT-undirstøðukervið, sum verður bjóðað almennum stovnum at gera nýtslu av. Endamálið við Landsnet er, við miðsavnan og stórrakstri, at fáa rationaliseringar, savna vitan á einum stað og økja um KT-trygdina í KT-virkseminum hjá almennum stovnum.
- At menna og bjóða út felags tænastur á Landsneti.
- Virka fyri at styrkja neyðugar førleikar í menning av KT.
- Samskipa almennar fakskipanir á yvirskipaðum stigi. Hetta fyri at tryggja endurnýtslu av KT-skipanum, og at virka fyri vitanardeiling.
- Miðsavnað innkeyp av KT, bæði rit- og útbúnaði. Hetta krevur at miðsavna førleikar innan m.a. umsiting av lisensum og KT-sáttmálum í KT Landsins.
- Støðugt at hækka KT-trygdarstigið hjá stovnunum, sum luttaka í Landsnetssamstarvinum.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	3.984	4.520	4.300	4.200	4.200	4.200
Útreiðslur	21.472	22.865	21.300	21.200	21.200	21.200
Inntøkur	17.488	18.345	17.000	17.000	17.000	17.000
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	3.984	4.520	4.300	4.200	4.200	4.200
Útreiðslur	**21.472**	**22.865**	**21.300**	**21.200**	**21.200**	**21.200**
11. Lønir v.m.	3.520	3.455	4.300	4.200	4.200	4.200
14. Keyp av vørum og tænastum	16.402	17.334	17.000	17.000	17.000	17.000
15. Keyp av útbúnaði, netto	1.040	666	-	-	-	-
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	10	-	-	-	-	-
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	0	-	-	-	-	-
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	500	1.410	-	-	-	-
Inntøkur	**17.488**	**18.345**	**17.000**	**17.000**	**17.000**	**17.000**
21. Søla av vøru og tænastum	*17.488*	*18.122*	*17.000*	*17.000*	*17.000*	*17.000*
76. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	-	*223*	-	-	-	-

Innlimingarætlan Landsnet

Ár	2012	2013	2014	2015	2016	2017	2018
Tal av nýggjum brúkarum í Landsneti í árinum	900	100	100	-200	100	100	100
Tal av brúkarum tilsamans við ársenda (brúkarar)	2.000	2.100	2.200	2.000	2.100	2.200	2.300

Eldrarøktin varð flutt til kommunurnar í 2015, og tí fall talið av brúkarum. Fleiri av samstørvunum hava egnar loysnir, meðan onnur hildu fram í Landsneti.

Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018** **F**	2019 Æ	2020 Æ
Í lønarflokki 37 ella hægri	1,0	1,0	1,0	1,0	1,0	1,0
Onnur	7,1	7,1	8,0	8,0	8,0	8,0
Fulltíðarstørv	8,1	8,1	9,0	9,0	9,0	9,0
Lønarpartur (mió. kr.)	3,5	3,5	4,3	4,2	4,2	4,2

§ 5 Fiskivinnumál

Felagsútreiðslur

5.11.1. Fyrisiting

5.11.1.05. Fiskimálaráðið (Rakstrarjáttan)

Fiskimálaráðið hevur til uppgávu, at:

- Vera fyrisiting hjá landsstýrismanninum í fiskivinnumálum
- Virka sum umboð fyri landsstýrismannin og taka avgerðir hansara vegna
- Vera yvirskipað leiðsla og myndugleiki hjá deildum og stovnum
- Standa fyri avgreiðslum vendar ímóti borgaranum

Tilbúgvingarsamskipanin liggur í Fiskimálaráðnum og virkar sambært løgtingslóg nr. 61 frá 15. mai 2012 (Tilbúgvingarlógin). Tilbúgvingarlógin skal tryggja fyribyrging, og avmarka og bøta um skaða á fólk, djór, umhvørvi, virði og ognir í sambandi við skaðahendingar ella vanlukkur, ella tá hóttandi vandi er fyri hesum, og at tryggja, at virkisførið í samfelagnum minst møguligt verður skert ella fer til grundar, orsakað av skaðahendingum ella vanlukkum.

Uppgávan er at samskipa tilrættisleggingina av tilbúgvingini og tryggja eina samvirkandi tilbúgving fyri alt landið og veita myndugleikum, kommunum og fyritøkum ráðgeving. Harundir:

- Samskipa tilrættisleggingina av samstarvinum millum ábyrgdarpartarnar í landstilbúgvingini og bjargingarfeløg og onnur sjálvboðin.
- Hava eftirlit við, at kommunur halda reglurnar í lógini og reglur, ásettar við heimild í lógini.
- Krevja upplýsingar frá øllum um, hvørji tilbúgvingarlig tiltøk eru sett í verk, ella ætlanir eru um at seta í verk, umframt upplýsingar, sum vera mettar neyðugar til at fremja uppgávurnar í tilbúgvingini.

Harumframt fatar høvuðskontan um edv-verkætlanir, sum eisini kunnu vera verkætlanir sum eru felags fyri fleiri stovnar og/ella aðalráð, og um stuðulsfíggjað virksemi, ið eru verkætlanir Fiskimálaráðið eitt nú umsitur vegna norðurlendska ráðharraráðið.

Virkisøkini undir Fiskimálaráðnum eru í síni heild fyriskipað soleiðis:

- Vørn, ið umsitur fiskiveiðieftirlit, MRCC / Tórshavn Radio og veðurtænastu
- Havstovan
- Búnaðarstovan
- Búnaðargrunnurin

Játtanin í 2018 er hækkað við slakari 1,0 mió. kr. Fiskivinnunýskipanin fer at krevja nógva orku í 2018. Ætlanin er, at fiskivinnufyrisitingin í síni heild skal endurskoðast, KT-skipanir skulu gerast og alt regluverkið skal tillagast nýggju lógina.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	15.590	13.376	14.118	15.108	14.558	14.558
Útreiðslur	17.367	13.816	15.618	16.608	16.058	16.058
Inntøkur	1.777	440	1.500	1.500	1.500	1.500
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	15.590	13.376	14.018	15.008	14.458	14.458
Útreiðslur	**17.367**	**13.816**	**14.018**	**15.008**	**14.458**	**14.458**
11. Lønir v.m.	9.908	8.868	9.631	10.121	10.071	10.071
14. Keyp av vørum og tænastum	6.725	3.979	3.046	3.546	3.046	3.046
15. Keyp av útbúnaði, netto	-	60	460	460	460	460
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	617	773	881	881	881	881
17. Avskrivingar o.a.	0	-	-	-	-	-
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	116	136	-	-	-	-
Inntøkur	**1.777**	**440**	**-**	**-**	**-**	**-**
21. Søla av vøru og tænastum	*142*	*23*	-	-	-	-
65. Flytingarinntøkur úr útlandinum	*1.485*	*416*	-	-	-	-
76. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	*150*	-	-	-	-	-
23. EDV-verkætlan						
Nettoútreiðsla	-	-	100	100	100	100
Útreiðslur	**-**	**-**	**100**	**100**	**100**	**100**
14. Keyp av vørum og tænastum	-	-	100	100	100	100
45. Stuðulsfíggjað virksemi						
Nettoútreiðsla	-	-	0	0	0	0
Útreiðslur	**-**	**-**	**1.500**	**1.500**	**1.500**	**1.500**
11. Lønir v.m.	-	-	200	200	200	200
14. Keyp av vørum og tænastum	-	-	1.200	1.200	1.200	1.200
15. Keyp av útbúnaði, netto	-	-	100	100	100	100
Inntøkur	**-**	**-**	**1.500**	**1.500**	**1.500**	**1.500**
64. Aðrar flytingarinntøkur	-	-	*1.500*	*1.500*	*1.500*	*1.500*

Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Í lønarflokki 37 ella hægri	4,0	4,0	3,3	3,0	3,0	3,0
Onnur	13,5	11,2	12,7	14,0	14,0	14,0
Fulltíðarstørv	17,5	15,2	16,0	17,0	17,0	17,0
Lønarpartur (mió. kr.)	9,9	8,9	9,6	10,1	10,1	10,1

Tilbúgving

5.31.1. Tilbúgving

5.31.1.04. Tilbúgvingarætlan (Løgujáttan)

Í 2017 vórðu játtaðar 1,0 mió. kr. til at gera sendinetið hjá MRCC/Tórshavn Radio liðugt, og 500 tús. kr. til at dagføra veðurstøðirnar kring landið.

Eingin játtan er til endamálið í 2018.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	879	8.661	1.500	-	-	-
10. Tilbúgvingarætlan						
Útreiðslur	**879**	**8.661**	**1.500**	**-**	**-**	**-**
11. Lønir v.m.	-	17	-	-	-	-
14. Keyp av vørum og tænastum	28	1.186	200	-	-	-
15. Keyp av útbúnaði, netto	851	7.455	1.300	-	-	-
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	0	3	-	-	-	-
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	-	-8.661	-	-	-	-
31. Bygging og løguframleiðsla	-	8.661	-	-	-	-

5.31.1.05. Stuðul til bjargingarfeløg (Stuðulsjáttan)

Studningur til bjargingarfeløgini í Føroyum hevur verið býttur millum og útgoldin framman undan til feløgini við teirri treyt, at tey føra roknskap/uppgerð yvir virksemið. Sambært reglugerð verður stuðulin serliga latin til at keypa bjargingarútgerð. Ásannandi at tað er kostnaðarmikið at reka bjargingarbátar og aðra útgerð, kann partur at stuðulinum brúkast til rakstur og viðlíkahald av bjargingarbátum og útgerð.

Løgtingið samtykti í 2006 at játta 1,5 mió. kr. árliga árini 2007 - 2015 sum stuðul til íløgu ði før, sum bjargingarfeløgini skulu brúka í føroysku tilbúgvingini. Avtala varð gjørd við bjargingarfelag, at tað fær árliga stuðulin yvir ásett áramál, soleiðis at far kann útvegast. Henda skipanin var víðkað til eisini at fevna um 2016.

Bjargingarfeløg, sum hava fingið far útvegað fyri henda stuðul og onnur bjargingarfeløg við førum, sum verða brúkt í føroysku tilbúgvingini, skulu saman við Vørn gera eina innanhýsis góðskuskipan við greiðum mannagongdum fyri virksemi hjá førunum, soleiðis at virksemi er trygt og nøktandi. Neyðugu myndugleikarnir skulu kunnast um hesa innanhýsis góðskuskipan.

Higartil er fimm bátar útvegaðir fyri henda stuðul til bjargingarfeløgini í Havn, Kollafirði, Nólsoy, Vágunum, Eiði, Sandoy og Suðuroy.

Um pláss er fyri tí í játtanini kunnu bjargingarbátar framhaldandi útvegast við stuðuli av hesi játtan.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	2.498	2.500	2.000	2.000	2.000	2.000
01. Stuðul til bjargingarfeløg						
Útreiðslur	**2.498**	**2.500**	**2.000**	**2.000**	**2.000**	**2.000**
54. Stuðul til annað virksemi	2.498	2.500	2.000	2.000	2.000	2.000

5.31.1.06. Tilbúgving á sjógvi (Rakstrarjáttan)

Føroya Landsstýri yvirtók 2. apríl 2002 frá Danmark, leiting og bjarging á sjónum innanfyri føroyska 200 fjórðinga sjómarkið. Uppgávan varð løgd til Fiskimálaráðið, samstundis var MRCC stovnað og síðani lagt saman við Tórshavn Radio.

20. Neyð- og trygdartænasta (Tórshavn Radio)

Tórshavn Radio hevur lurtiskyldu á VHF og MF og vaktarhald á DSC sambært altjóða viðtøkum frá ITU og IMO. Tórshavn Radio sendir m.a. siglinga- og veðurávaringar til skipaferðslu í økinum, umframt at avgreiða radiosamtalur millum skip og land. Eisini verður samskift um læknahjálp, og samskift í sambandi við leiting og bjarging. Tórshavn Radio er ein radiostøð sum hevur lurtivakt á øllum neyðrásum 24 tímar um døgnið, m.a. VHF rás 16. Samstundis tekur Tórshavn Radio ímóti EPIRB fráboðanum og sendur út ávaringar og NAVTEX fráboðanir. Tórshavn Radio hevur eisini 24 tímar vakt til avgreiðslu av vanligum fjarskiftissamrøðum.

21. MRCC Tórshavn (Sjóbjargingarstøðin)

MRCC hevur ábyrgdina av at samskipa alla leiting og bjarging á føroyskum sjóøki. Hetta verður gjørt sambært altjóða viðtøkum, og eru avtalur gjørdar við grannalondini um hetta arbeiði. Eisini eru avtalur gjørdar við teir partar, sum vanliga taka lut í leiting og bjarging, eitt nú Atlantic Helicopters, FRK og Fiskiveiðieftirlitið. MRCC tekur ímóti fráboðanum um dálking á sjónum. Somuleiðis hevur MRCC skyldu at taka ímóti og bera víðari boð um yvirgang umborð á skipum sambært ISPS kotuni. MRCC samskipar sjúkraflutning við tyrlu bæði á sjógvi og landi. MRCC Tórshavn hevur vakt 24 tímar um døgnið, fyri at taka ímóti neyðboðum, dálkingarfráboðanum og øðrum trygdarfráboðanum.

MRCC og Tórshavn Radio eru ISO 9001 góðkend. Talan er um eina skipaða góðskustýring av mannagongdum og virkisgongdum.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	11.921	11.868	11.900	11.900	11.900	11.900
Útreiðslur	12.040	11.985	12.000	12.000	12.000	12.000
Inntøkur	119	117	100	100	100	100
20. Neyð- og Trygdartænasta (Tórshavn Radio)						
Nettoútreiðsla	6.159	5.979	5.912	5.912	5.912	5.912
Útreiðslur	**6.277**	**6.096**	**6.012**	**6.012**	**6.012**	**6.012**
11. Lønir v.m.	4.337	4.177	4.050	4.050	4.050	4.050
14. Keyp av vørum og tænastum	1.638	1.760	1.712	1.712	1.712	1.712
15. Keyp av útbúnaði, netto	117	-	250	250	250	250
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	184	159	-	-	-	-
Inntøkur	**119**	**117**	**100**	**100**	**100**	**100**
21. Søla av vøru og tænastum	*-*	*-*	*100*	*100*	*100*	*100*
76. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	*119*	*117*	-	-	-	-
21. Sjóbjargingarstøðin (MRCC)						
Nettoútreiðsla	5.763	5.889	5.988	5.988	5.988	5.988
Útreiðslur	**5.763**	**5.889**	**5.988**	**5.988**	**5.988**	**5.988**
11. Lønir v.m.	4.455	4.565	4.587	4.587	4.587	4.587
14. Keyp av vørum og tænastum	1.256	1.321	1.293	1.293	1.293	1.293
15. Keyp av útbúnaði, netto	52	-	108	108	108	108
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	-	3	-	-	-	-

Starvsfólkayvirlit: 20 Neyð- og Trygdartænasta (Tórshavn Radio)

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Í lønarflokki 37 ella hægri	-	-	-	-	-	-
Onnur	9,0	9,0	9,0	9,0	9,0	9,0
Fulltíðarstørv	9,0	9,0	9,0	9,0	9,0	9,0
Lønarpartur (mió. kr.)	4,3	4,2	4,1	4,1	4,1	4,1

Starvsfólkayvirlit: 21 Sjóbjargingarstøðin (MRCC)

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Í lønarflokki 37 ella hægri	-	-	-	-	-	-
Onnur	10,0	10,0	10,0	10,0	10,0	10,0
Fulltíðarstørv	10,0	10,0	10,0	10,0	10,0	10,0
Lønarpartur (mió. kr.)	4,5	4,6	4,6	4,6	4,6	4,6

5.31.1.07. Veðurtænastan (Rakstrarjáttan)

Málsøkið Veðurtænasta varð yvirtikið 1. apríl 2009. Veðurtænastan umsitur fylgjandi:

- Radiosonderingar tvær ferðir um samdøgrið
- Innlesir veðurforsagnir á telefonsvarara fýra ferðir um samdøgrið
- Umsitur veðurstøðirnar: Akraberg, Mykines, Fugloy og Tórshavn
- Stendur fyri avfallsmátingum kring landið

Játtanin er hækkað við 400 tús. kr. í 2018 til at menna eina føroyska veðurtænastu. Landsstýrið hevur raðfest stigvísa menning av føroyskari veðurtænastu. Landsstýrismaðurin hevur fingið ávegis tilfar um, hvussu ein veðurtænasta kann mennast.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	4.391	4.045	4.400	4.800	4.800	4.800
Útreiðslur	4.391	4.083	4.400	4.800	4.800	4.800
Inntøkur	-	38	-	-	-	-
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	4.391	4.045	4.400	4.800	4.800	4.800
Útreiðslur	**4.391**	**4.083**	**4.400**	**4.800**	**4.800**	**4.800**
11. Lønir v.m.	535	536	936	1.136	1.136	1.136
14. Keyp av vørum og tænastum	3.425	3.110	3.464	3.664	3.664	3.664
15. Keyp av útbúnaði, netto	298	307	-	-	-	-
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	14	13	-	-	-	-
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	119	117	-	-	-	-
Inntøkur	**-**	**38**	**-**	**-**	**-**	**-**
21. Søla av vøru og tænastum	-	*38*	-	-	-	-

Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Í lønarflokki 37 ella hægri	-	-	-	-	-	-
Onnur	2,0	2,0	2,0	2,0	2,0	2,0
Fulltíðarstørv	2,0	2,0	2,0	2,0	2,0	2,0
Lønarpartur (mió. kr.)	0,5	0,5	0,9	1,1	1,1	1,1

5.31.1.08. Tyrlutænasta (Rakstrarjáttan)

Sambært løgtingslóg nr. 85 frá 22. mai 2015 um samráðingarheimild at gera nýggjan sáttmála um tyrlutænastu, er 10 ára sáttmáli gjørdur við Atlantsflog um tyrlutænastu, galdandi fram til 31. desember 2025.

Endamálið við sáttmálanum er at fáa til vega eina góða og framtíðartryggjaða loysn á tørvi landsins á innanoyggja tyrluflúgving við fólki, farmi og posti og tyrlutilbúgving í samband við leiting og bjarging.

Atlantsflog átekur sær, við tveimum tyrlum við støð í Føroyum, at lúka øll krøv og hava neyðugu góðkeningar í øllum sáttmálaskeiðnum í samband við veitan av einari almennari tyrlutænastu innanfyri føroyska sjómarkið, umfatandi innanoyggja fólkaflutning, farmaflutning og postflutning, leiting og bjarging, sjúkraflutning og aðrar uppgávur, sum sáttmálin eyðmerkir.

MRCC umsitur sáttmálan vegna Fiskimálaráðið, og Strandfaraskip Landsins umsitur sáttmálan vegna Samferðslumálaráðið.

Atlantsflog rekur sítt virksemi sambært loyvi frá Trafikstyrelsen/EASA, sum eisini hevur støðugt eftirlit við hesum virksemi. Atlantsflog átekur sær ábygrdina fyri at tyrlurnar lúka øll

krøv til tyrluflúgving eftir hesum sáttmála, í øllum sáttmálaskeiðnum fyri at tryggja bestu tyrlutænastu.

Atlantsflog skal hava tyrlutilbúgving alt samdøgrið. MRCC samskipar virksemið, men onnur ráð og stovnar nýta eisini tyrlurnar eftir nærri avtalu, t.d. til sjúkraflutning.

Samlaði kostnaðurin er 44,4 mió. kr. árliga. Parturin hjá Fiskimálaráðnum er 30,1 mió. kr.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	26.000	30.100	30.100	30.100	30.100	30.100
Útreiðslur	26.000	30.100	30.100	30.100	30.100	30.100
20. Tyrlutænasta						
Nettoútreiðsla	26.000	30.100	30.100	30.100	30.100	30.100
Útreiðslur	**26.000**	**30.100**	**30.100**	**30.100**	**30.100**	**30.100**
14. Keyp av vørum og tænastum	26.000	30.100	30.100	30.100	30.100	30.100

Landbúnaður

5.33.2. Landbúnaðarstudningur

5.33.2.01. Landbúnaðarroyndir og -ráðgeving (Rakstrarjáttan)

Endamálið við virkseminum er at kanna og royna nýggjar vinnumøguleikar í landbúnaðinum og at menna verandi vinnur. Høvuðsøkini eru hesi:

- Varðveitsla av føroysku húsdjórasløgunum, herundir samskipan av kynbótararbeiði.
- Gransking innan seyðahald og seyðakjøt. Gransking innan gras og aðrar fóðurvøkstir.
- Fyribyrgjandi kunning og ráðgeving í samband við dálking frá landbúnaðinum.
- Eftirlit við kommunum í Rottutýning jbr. kunngerð nr. 20 frá 16. mai 1962 um oyðing av rottu.
- Skeiðvirksemi og ráðgeving innan landbúnaðin.
- Gransking innan føroyska matframleiðslu, t.d. epli, røtur og grønmeti.
- Ísáðing.
- Veita landsstýrismanninum ráðgeving í landbúnaðarspurningum.

Arbeiðið heldur fram at orða ein nýggjan landbúnaðarpolitikk, sum m.a. skal leggja eina ætlan fyri, hvussu Føroyar kunnu gerast meira sjálvbjargnar við landbúnaðarvørum - t.d. grønmeti, seyðakjøti og neytakjøti - og fáa meira burturúr tí tilfeingi, sum í dag fer burtur.

40. Inntøkufíggjað virksemi. Játtanin er til inntøkufíggjað virksemi hjá Búnaðarstovuni. Fyri at virka fyri, at føroyska ullin verður gagnnýtt, er ullamóttøka skipað á Búnaðarstovuni í Kollafirði. Móttøkan keypir ullina frá bøndum, skilir hana og selur hana víðari. Útreiðslurnar til móttøkuna eru størri enn inntøkan frá sølu av ull. Tískil hækkar játtanin við 192 tús. kr.

45. Stuðulsfíggjað virksemi. Játtanin er ætlað til verkætlanir innan gransking, menning og nýskapan, ið Búnaðarstovan tekur lut í og sum fáa uttanhýsis fígging.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	2.435	3.789	2.900	3.092	3.092	3.092
Útreiðslur	3.588	4.635	6.160	6.352	6.352	6.352
Inntøkur	1.153	846	3.260	3.260	3.260	3.260
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	2.435	3.055	2.900	2.900	2.900	2.900
Útreiðslur	**3.588**	**3.720**	**4.060**	**4.060**	**4.060**	**4.060**
11. Lønir v.m.	1.728	1.962	2.860	2.860	2.860	2.860
14. Keyp av vørum og tænastum	1.372	1.024	710	710	710	710
15. Keyp av útbúnaði, netto	331	406	370	370	370	370
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	151	300	100	100	100	100
17. Avskrivingar o.a.	-	-	20	20	20	20
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	-	20	-	-	-	-
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	7	7	-	-	-	-
Inntøkur	**1.153**	**665**	**1.160**	**1.160**	**1.160**	**1.160**
21. Søla av vøru og tænastum	*494*	*197*	*940*	*940*	*940*	*940*
63. Vanligar flytingarinntøkur	*78*	*-*	*-*	*-*	*-*	*-*
64. Aðrar flytingarinntøkur	*-*	*163*	*-*	*-*	*-*	*-*
65. Flytingarinntøkur úr útlandinum	*52*	*41*	*-*	*-*	*-*	*-*
76. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	*296*	*-*	*-*	*-*	*-*	*-*
77. Flyting frá kommunum	*233*	*263*	*220*	*220*	*220*	*220*
40. Inntøkufíggjað virksemi						
Nettoútreiðsla	-	734	0	192	192	192
Útreiðslur	**-**	**915**	**1.000**	**1.192**	**1.192**	**1.192**
11. Lønir v.m.	-	369	250	250	250	250
14. Keyp av vørum og tænastum	-	261	700	892	892	892
15. Keyp av útbúnaði, netto	-	23	50	50	50	50
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	-	14	-	-	-	-
53. Stuðul til vinnu	-	247	-	-	-	-
Inntøkur	**-**	**181**	**1.000**	**1.000**	**1.000**	**1.000**
21. Søla av vøru og tænastum	*-*	*136*	*1.000*	*1.000*	*1.000*	*1.000*
65. Flytingarinntøkur úr útlandinum	*-*	*45*	*-*	*-*	*-*	*-*
45. Stuðulsfíggjað virksemi						
Nettoútreiðsla	-	-	0	0	0	0
Útreiðslur	**-**	**-**	**1.100**	**1.100**	**1.100**	**1.100**
11. Lønir v.m.	-	-	200	200	200	200
14. Keyp av vørum og tænastum	-	-	800	800	800	800
15. Keyp av útbúnaði, netto	-	-	100	100	100	100
Inntøkur	**-**	**-**	**1.100**	**1.100**	**1.100**	**1.100**
63. Vanligar flytingarinntøkur	*-*	*-*	*1.100*	*1.100*	*1.100*	*1.100*

5.33.2.03. Búnaðarstovan (Rakstrarjáttan)

Búnaðarstovan er skipað, sum ásett í løgtingslóg nr. 45 frá 15. mai 2007 um landsjørð, og fyrisitur hon alla almennu jørð Føroya, ið ikki er fyrisitin av, ella skrásett sum ogn hjá, øðrum almennum stovni.

Búnaðarstovan fyrisitur eisini árligu studningsjáttanina til landbúnaðarvinnuna, sum verður veitt við heimild í løgtingslóg nr. 32 frá 6. mars 2003 um landbúnaðarstuðul og sambært

kunngerð nr. 99 frá 4. november 2010 um stuðul til landbúnaðin. Búnaðarstovan umsitur sostatt jørð landsins og landbúnaðarstuðulin.

Búnaðargrunnurin fíggjar raksturin av jarðarumsitingini, sum verður mett at kosta 2.940 tús. kr., og er peningurin settur av á § 20 Inntøkur til endamálið, meðan landskassin fíggjar umsitingina av landbúnaðarstuðlinum og eru 60 tús. kr. settar av til tað endamálið.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	2.954	3.604	3.000	3.000	3.000	3.000
Útreiðslur	2.954	3.604	3.000	3.000	3.000	3.000
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	2.954	3.604	3.000	3.000	3.000	3.000
Útreiðslur	**2.954**	**3.604**	**3.000**	**3.000**	**3.000**	**3.000**
11. Lønir v.m.	2.066	2.350	2.412	2.412	2.412	2.412
14. Keyp av vørum og tænastum	638	939	408	408	408	408
15. Keyp av útbúnaði, netto	36	298	100	100	100	100
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	8	18	50	50	50	50
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	-	-	30	30	30	30
57. Rentuútreiðslur o.a.	0	0	-	-	-	-
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	206	-	-	-	-	-

Virksemisyvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
A: Høvuðsendamál (1.000 kr.)	**2.954**	**3.604**	**3.000**	**3.000**	**3.000**	**3.000**
1. Leiðsla og hjálparvirksemi	800	800	800	800	800	800
2. Búnaðarmál	2.046	2.744	2.140	2.140	2.140	2.140
3. Landbúnaðarstuðul	108	60	60	60	60	60

Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Í lønarflokki 37 ella hægri	1,0	1,0	1,0	1,0	1,0	1,0
Onnur	4,0	4,0	4,0	4,0	4,0	4,0
Fulltíðarstørv	5,0	5,0	5,0	5,0	5,0	5,0
Lønarpartur (mió. kr.)	2,1	2,3	2,4	2,4	2,4	2,4

5.33.2.08. Búnaðarstovan (Løgujáttan)

Játtaðar eru 1,5 mió. kr. til neyðugar ábøtur og umbyggingar í bygningunum hjá Búnaðarstovuni í Kollafirði. Í fyrstu atløgu skal niðurslitna hitaveitingarskipanin á Búnaðarstovuni skiftast frá verandi oljufýring til eina grøna orkuvinaliga loysn við hitapumpum. Orkudeildin á Umhvørvisstovuni hevur latið borað eitt jarðhitahol á staðnum til granskingarendamál, og fær nýggja hitaskipanin ókeypis gagn av hesum. Arbeiðið fatar um at skifta út hitaskipanina í báðum bygningunum (fyrisitingarbygninginum og verkstaðarbygninginum), umframt neyðugu fyrireikingarnar til at loysa uppgávuna.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	-	-	-	1.500	-	-
10. Búnaðarstovan						
Útreiðslur	**-**	**-**	**-**	**1.500**	**-**	**-**
31. Bygging og løguframleiðsla	-	-	-	1.500	-	-

5.33.2.10. Landbúnaðarstuðul (Stuðulsjáttan)

Landbúnaðarstuðul verður veittur við heimild í løgtingslóg nr. 32 frá 6. mars 2003 um landbúnaðarstuðul og sambært kunngerð nr. 99 frá 4. november 2010 um stuðul til landbúnaðin. Búnaðarstovan umsitur stuðulin.

Stuðul verður veittur til mjólk, neytakjøt, seyðakjøt, stráfóður, djórahald, avloysaraskipan og til føroysk húsdjór. Stuðulin er treytaður av, at umsøkjari er bókhaldsskyldugur (tó undantikið undirkontur 10-12, sum virka eftir serstøkum reglum) og MVG skrásettur.

Sambært § 6 a í løgtingslóg nr. 34 frá 7. mai 2013 um Búnaðargrunn, hevur Búnaðargrunnurin í 6 ár fram til 2017 flutt 4,1 mió. kr. árliga til Búnaðarstovuna at nýta til studning til egið framleitt stráfóður. Í 2013 vóru 8,2 mió. kr. fluttar fyri 2012 og 2013.

Stráfóðurstuðul heldur fram í 2018 við somu játtan sum í 2017, hóast eingin fígging longur er úr Búnaðargrunninum.

Stuðulin til neytakjøt hækkar við 600 tús. kr. soleiðis at framleiðsla av kálvakjøti kann stuðlast. Stuðulin til grønmetisframleiðslu hækkar við 400 tús. kr. Stuðulin til føroysk húsdjór hækkar við 50 tús. kr., sum eru til Felagið Føroysk Ross at nýta til aling og skráseting av føroyskum rossum.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	15.228	15.147	16.300	17.350	17.350	17.350
01. Mjólk						
Útreiðslur	**7.249**	**7.220**	**7.220**	**7.220**	**7.220**	**7.220**
53. Stuðul til vinnu	7.249	7.220	7.220	7.220	7.220	7.220
02. Neytakjøt						
Útreiðslur	**551**	**499**	**500**	**1.100**	**1.100**	**1.100**
53. Stuðul til vinnu	551	499	500	1.100	1.100	1.100
03. Seyðakjøt						
Útreiðslur	**1.700**	**1.700**	**1.700**	**1.700**	**1.700**	**1.700**
53. Stuðul til vinnu	1.700	1.700	1.700	1.700	1.700	1.700
04. Stráfóður						
Útreiðslur	**5.080**	**5.080**	**5.080**	**5.080**	**5.080**	**5.080**
53. Stuðul til vinnu	5.080	5.080	5.080	5.080	5.080	5.080

07. Húsdýralógin						
Útreiðslur	**18**	**18**	**70**	**70**	**70**	**70**
53. Stuðul til vinnu	18	18	70	70	70	70
08. Avloysaraskipan						
Útreiðslur	**480**	**480**	**480**	**480**	**480**	**480**
53. Stuðul til vinnu	480	480	480	480	480	480
10. Føroysk húsdjór						
Útreiðslur	**150**	**150**	**250**	**300**	**300**	**300**
53. Stuðul til vinnu	150	150	250	300	300	300
11. Grønmetisframleiðsla						
Útreiðslur	**-**	**-**	**400**	**800**	**800**	**800**
53. Stuðul til vinnu	-	-	400	800	800	800
12. Seyðakanningar						
Útreiðslur	**-**	**-**	**600**	**600**	**600**	**600**
53. Stuðul til vinnu	-	-	600	600	600	600

5.33.2.11. Almenn jørð, søla (Løgujáttan)

Samb. § 9 í løgtingslóg nr. 45 frá 15. mai 2007 um landsjørð, er Búnaðarstovuni heimilað at selja burtur av landsjørð til almenn endamál, grundstykkir til húsabygging, handils- og ídnaðar-, havbúnaðar-, ítróttar- og frítíðarendamál. Harumframt er Búnaðarstovuni heimilað at selja festara innistøðu, sethús, fjós og aðrar bygningar við hóskandi undirlendi, sum hoyra til festið.

Nú galdandi jarðarprísir síggast í fylgiskjali til kunngerð nr. 95 frá 23. oktober 2007, og á heimasíðuni hjá Búnaðarstovuni, www.bst.fo, har meginreglurnar fyri prísásetingini eisini síggjast.

Tá ið festarar keypa bygningar á festum, kann hetta sambært § 11, stk. 2, gerast við, at festarin rindar fyri eitt hóskandi grundstykki. Tá ið festi verða lýst leys, verða møguligir bygningar á festum seldir fyri marknaðarvirði.

Landsjørðin verður seld fyri fastan prís uttan alment útboð frammanundan, og verður í høvuðsheitum seld kommunum til byggilendi. Tað er sera ymiskt, hvussu nógv almenn jørð verður seld einstaka árið, og er tað trupult nágreiniligt at meta um eina upphædd. Eisini er tað ringt at meta um, hvussu stórar upphæddir talan verður um í sambandi við, at festarar yvirtaka bygningar á festum. Ásetta upphæddin upp á 10 mió. kr. er soleiðis ein leyslig meting.

Eftir § 5 í løgtingslóg nr. 21 frá 17. mai 2004 um Búnaðargrunn skal ágóðin av søluni flytast Búnaðargrunninum, og verða bókaður á kontu hjá avvarðandi festi. Talan hevur verið um eina fyri landskassan útreiðsluneutrala játtan.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	5.498	16.264	10.000	10.000	10.000	10.000
Inntøkujáttan	5.543	22.596	10.000	10.000	10.000	10.000
10. Almenn jørð, søla						
Útreiðslur	**5.498**	**16.264**	**10.000**	**10.000**	**10.000**	**10.000**
14. Keyp av vørum og tænastum	-5	-42	-	-	-	-
54. Stuðul til annað virksemi	5.504	16.306	10.000	10.000	10.000	10.000
Inntøkur	**5.543**	**22.596**	**10.000**	**10.000**	**10.000**	**10.000**
29. Ymsar rakstrarinntøkur	*1.586*	*1.402*	-	-	-	-
42. Søla av løgu o.ø.	*3.957*	*21.194*	*10.000*	*10.000*	*10.000*	*10.000*

Fiskivinna

5.34.1. Ymsar útreiðslur

5.34.1.01. Fiskivinnuráð og nevndir (Rakstrarjáttan)

Játtanin verður nýtt til fastar nevndir og nevndir settar til ávís onnur endamál. Harumframt verður játtanin nýtt til sakkøna hjálp til ráð og nevndir.

Fiskidaganevndin og fiskivinnuráðið halda ikki fram í nýggju lógini um fyrisiting av sjófeingi. Tískil verður eingin játtan í 2018 og frameftir.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	362	2.080	440	-	-	-
Útreiðslur	362	2.080	440	-	-	-
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	362	2.080	440	-	-	-
Útreiðslur	**362**	**2.080**	**440**	**-**	**-**	**-**
11. Lønir v.m.	320	1.406	440	-	-	-
14. Keyp av vørum og tænastum	42	674	-	-	-	-

5.34.1.04. Upplýsing um grind (Rakstrarjáttan)

Játtanin verður nýtt til at gera upplýsandi tilfar um grind, at gjalda fyri at møta á fundum í NAMMCO og á øðrum hvalafundum og luttøku annars í arbeiðinum hjá NAMMCO. Játtanin verður eisini brúkt til frameftir at gera betri grindarakstur og kanna hagreiðing av grind.

Játtanin fyri 2018 lækkar við 50 tús. kr.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	157	135	220	170	170	170
Útreiðslur	157	135	220	170	170	170
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	157	135	220	170	170	170
Útreiðslur	**157**	**135**	**220**	**170**	**170**	**170**
11. Lønir v.m.	69	36	-	-	-	-
14. Keyp av vørum og tænastum	78	74	220	170	170	170
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	10	25	-	-	-	-

5.34.1.05. Hvalagransking og hvalateljing v.m. (Rakstrarjáttan)

Endamálið við játtanini er at gjalda fyri hvalagransking og hvalateljingar.

Altjóða hvalateljingar, ið fara fram umleið 6. hvørt ár, vórðu gjørdar í 2015.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	3.580	1.001	1.080	1.080	1.080	1.080
Útreiðslur	3.590	1.026	1.080	1.080	1.080	1.080
Inntøkur	10	25	-	-	-	-
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	3.580	1.001	1.080	1.080	1.080	1.080
Útreiðslur	**3.590**	**1.026**	**1.080**	**1.080**	**1.080**	**1.080**
11. Lønir v.m.	1.302	937	981	981	981	981
14. Keyp av vørum og tænastum	412	118	79	79	79	79
15. Keyp av útbúnaði, netto	680	8	20	20	20	20
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	1.203	-37	-	-	-	-
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	-8	-	-	-	-	-
Inntøkur	**10**	**25**	**-**	**-**	**-**	**-**
76. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	*10*	*25*	-	-	-	-

Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Í lønarflokki 37 ella hægri	-	-	-	-	-	-
Onnur	2,0	1,5	1,5	1,5	1,5	1,5
Fulltíðarstørv	2,0	1,5	1,5	1,5	1,5	1,5
Lønarpartur (mió. kr.)	1,3	0,9	1,0	1,0	1,0	1,0

5.34.2. Tænasta og eftirlit

5.34.2.01. Fiskiveiðieftirlitið (Rakstrarjáttan)

Fiskiveiðieftirlitið virkar sambært løgtingslóg nr. 28 frá 10. mars 1994 um vinnuligan fiskiskap og fremur eftirlit, sum fyrisett í hesi lóg. Ásett er, at Fiskiveiðieftirlitið hevur dagliga eftirlitið við føroyskum fiskiførum, sum royna undir Føroyum ella aðrastaðni, og við útlendskum fiskiførum, ið royna undir Føroyum.

Fiskiveiðieftirlitið hevur dagliga eftirlitið við:

- veittum fiskiloyvum
- fiskidagaskipanini á heimaleiðum
- latnum og leigaðum fiskidøgum og kvotum
- kvotum hjá føroyskum skipum á fjarleiðum
- kvotum hjá føroyskum og útlendskum skipum undir Føroyum
- veiðidagbókaskipanini
- innvigingarskipanini
- upp- og umskipan av frystum fiskavørum
- avgreiðsla av veiðuváttanum til ES
- at avreiðingarnar á virkjum í Føroyum og uttanlands samsvara við veiðidagbøkurnar
- burturbeining av burturkasti, kloakkspillivatni og olju frá skipum

Fiskiveiðieftirlitið undir Føroyum verður útint saman við donsku sjóverjuni eftir samstarvsavtalu, sum landsstýrið og ríkismyndugleikin hava góðkent.

Fiskiveiðieftirlitið hevur víðar heimildir eftir lógini um vinnuligan fiskiskap, umframt heimild at krevja avgreiðslugjøld, sum landsstýrið hevur ásett. Fiskiveiðieftirlitið hevur tvey vaktarskip, ið hava eftirlit undir Føroyum, í NAFO og NEAFC økjunum. Brimil verður brúktur til sigling við næmingum partar av árinum. Harumframt verður eftirlitið útint við eygleiðarum og við fylgisveinaeftirliti av føroyskum og útlendskum skipum.

Játtanin hækkar við 2,6 mió. kr. í 2018. Nýskipanin av fiskivinnuni verður sett í verk í 2018 við grundfesti í løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi. Í tí sambandi skal fiskiveiðieftirlitið styrkjast bæði á sjógvi og landi, og umsitingin av fiskivinnuni skal mennast og skipast eftir nýmótans leisti. Hetta skal gerast í sambandi við týðandi átøk innan fyrisitingina so sum:

- Betri gjøgnumskygni viðvíkjandi ognarviðurskiftum.
- Betri gjøgnumskygni um hvør hevur rættindi at veiða og hvussu hesi rættindi flytast eitt nú í sambandi við miðsavnan.
- At skipa almennan rættindamarknað.
- At menna skipanir við dagførdum almennum hagtølum og upplýsingum um allar tættir í fiskivinnuni.

Fiskiveiðieftirlitið í síni heild skal mennast og styrkjast.

Undirkonta 25. Rakstur av vaktarskipunum

Játtanin er til olju og viðlíkahald av vaktarskipunum. Játtanin fyri 2016 varð hækkað við 3,4 mió. kr. til keyp av nýggjum MOB bátum.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	40.060	42.852	40.900	43.500	43.300	43.300
Útreiðslur	44.950	45.646	43.900	46.500	46.300	46.300
Inntøkur	4.889	2.794	3.000	3.000	3.000	3.000
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	29.350	30.852	31.280	33.880	33.680	33.680
Útreiðslur	**31.053**	**31.721**	**34.280**	**36.880**	**36.680**	**36.680**
11. Lønir v.m.	23.303	24.493	29.839	30.739	30.539	30.539
14. Keyp av vørum og tænastum	4.850	5.150	3.369	5.069	5.069	5.069
15. Keyp av útbúnaði, netto	1.878	832	532	532	532	532
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	1.023	1.246	540	540	540	540
Inntøkur	**1.703**	**869**	**3.000**	**3.000**	**3.000**	**3.000**
21. Søla av vøru og tænastum	*1.694*	*826*	*3.000*	*3.000*	*3.000*	*3.000*
62. Kravd gjøld, bøtur o.a.	*9*	*3*	-	-	-	-
76. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	-	*40*	-	-	-	-
25. Rakstur av vaktarskipunum						
Nettoútreiðsla	10.711	11.999	9.620	9.620	9.620	9.620
Útreiðslur	**13.896**	**13.924**	**9.620**	**9.620**	**9.620**	**9.620**
14. Keyp av vørum og tænastum	13.031	10.547	9.220	9.220	9.220	9.220
15. Keyp av útbúnaði, netto	256	3.358	400	400	400	400
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	609	1	-	-	-	-
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	-	18	-	-	-	-
Inntøkur	**3.186**	**1.925**	**-**	**-**	**-**	**-**
21. Søla av vøru og tænastum	*3.186*	*1.925*	-	-	-	-

Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Í lønarflokki 37 ella hægri	1,0	1,0	1,0	2,0	2,0	2,0
Onnur	55,0	55,0	56,0	58,0	58,0	58,0
Fulltíðarstørv	56,0	56,0	57,0	60,0	60,0	60,0
Lønarpartur (mió. kr.)	23,3	24,5	29,8	30,7	30,5	30,5

5.34.3. Gransking og menning

5.34.3.01. Havstovan (Rakstrarjáttan)

Havstovan er vísindaligur stovnur undir Fiskimálaráðnum. Stovnurin skal kanna og fylgja gongdini í fiskastovnum og øðrum livandi tilfeingi í føroyskum havøki, umframt har Føroyar hava áhugamál. Stovnurin skal kanna náttúruviðurskifti, fiskiskap og annað, sum kann ávirka tilfeingið. Grundað á kanningarúrslit og eygleiðing av gongdini skal stovnurin lata landsstýrinum upplýsingar viðvíkjandi støðuni í fiskastovnunum og vísindaliga grundaðar tilráðingar og metingar samsvarandi endamálinum í lógini um vinnuligan fiskiskap (løgtingslóg nr. 28 frá 10. mars 1994 við seinni broytingum). Stovnurin skal ráðgeva landsstýri, vinnulívi, áhugafeløgum og føroyingum yvirhøvur í spurningum um burðardygga gagnnýtslu av livandi tilfeinginum í sjónum og um árinið á stovnarnar frá tí fysiska og lívfrøðiliga umhvørvinum.

Á hvørjum ári skal Havstovan innan 15. juni lata landsstýrismanninum frágreiðing um støðuna í teimum fiskastovnum, sum verða gagnnýttir á føroysku landleiðunum, millum annað serliga teimum, sum eru undir fiskidagaskipanini.

Játtanin til Havstovuna hækkar við 850 tús. kr. í 2018. Í sambandi við nýskipanina av fiskivinnuni skal virksemið innan vísindaliga ráðgeving mennast, eitt nú í sambandi við menning av umsitingarætlanum. Fullfíggjaðar stovnsmetingar skula gerast av øllum týðandi fiskastovnum.

20. Vanligt virksemi. Broytingar í havumhvørvinum við Føroyar ávirka nógv vistfrøðina og livilíkindini hjá fiskastovnunum undir Føroyum. Havstovan hevur síðstu árini lagt og fer frameftir, um fíggjarligu karmarnir loyva hesum, at leggja størri orku í at talfesta hesar broytingar og hesa ávirkan, sum verður tikin við í metingarnar av fiskastovnunum. Ásannað er, at neyðugt er við kunning um havtilfeingi og -umhvørvi okkara. Havstovan miðar alsamt eftir við tiltøkum og í vanliga virksemi sínum í størri mun at fáa tað nógva tilfar, sum á hvørjum ári verður savnað inn, út til fiskimenn og almenning sum heild.

22. Ferðing og atburður hjá toski er ein verkætlan, har hugt verður at, hví toskastovnurin á landgrunninum er so nógv broyttur. Í verkætlanini verður kannað, um toskastovnurin á landgrunninum er ein stovnur fyri seg, ella um toskur undir serligum umstøðum kemur í føroyskan sjógv og eisini fer úr føroyskum sjógvi, og um atburður hjá toski av fiskireiðskapi verður ávirkaður av broytingum í føðitilgongdini. Ein stórur partur av játtanini fer til at merkja tosk á landgrunninum.

23. Fuglakanningarstøð er til eftirlitskanningar viðvíkjandi sjófuglameinginum í Føroyum, serliga lomviga og lunda, og at kanna sambandið millum sjófugl og fisk. Fuglakanningarstøðin er mannað við einum fuglafrøðingi í føstum starvi.

45. Verkætlanir fevnir um verkætlanir, sum verða fíggjaðar av Fiskivinnuroyndum og øðrum granskingargrunnum, og annað. Havstovan fremur fleiri týðandi royndir í samstarvi við vinnu, einstaklingar og onnur í Føroyum og útlandinum. Royndirnar hava stóran týdning fyri millum annað fiskivinnuna, men høvdu ikki verið framdar av einstøkum reiðaríum hvør sær. Havstovan samskipar hesar royndir og tryggjar eitt vísindaligt støði, samstarv við viðkomandi partar, umframt at úrslitini av royndunum koma allari vinnuni til góðar.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	13.106	14.014	14.350	15.200	15.200	15.200
Útreiðslur	20.215	19.060	19.350	20.200	20.200	20.200
Inntøkur	7.109	5.045	5.000	5.000	5.000	5.000
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	11.868	12.787	13.156	14.006	14.006	14.006
Útreiðslur	**12.901**	**13.420**	**14.156**	**15.006**	**15.006**	**15.006**
11. Lønir v.m.	10.936	11.647	12.500	13.400	13.400	13.400
14. Keyp av vørum og tænastum	1.655	1.695	1.406	1.356	1.356	1.356
15. Keyp av útbúnaði, netto	235	29	200	200	200	200
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	45	17	50	50	50	50
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	15	17	-	-	-	-
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	15	15	-	-	-	-
Inntøkur	**1.033**	**633**	**1.000**	**1.000**	**1.000**	**1.000**
21. Søla av vøru og tænastum	*1.033*	*633*	*1.000*	*1.000*	*1.000*	*1.000*
22. Ferðing og atburður hjá toski						
Nettoútreiðsla	574	565	514	514	514	514
Útreiðslur	**574**	**565**	**514**	**514**	**514**	**514**
11. Lønir v.m.	487	494	479	479	479	479
14. Keyp av vørum og tænastum	4	9	35	35	35	35
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	83	63	-	-	-	-
23. Fuglakanningarstøð						
Nettoútreiðsla	682	626	680	680	680	680
Útreiðslur	**752**	**696**	**680**	**680**	**680**	**680**
11. Lønir v.m.	678	692	650	650	650	650
14. Keyp av vørum og tænastum	25	5	30	30	30	30
15. Keyp av útbúnaði, netto	39	-	-	-	-	-
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	9	-	-	-	-	-
Inntøkur	**70**	**70**	**-**	**-**	**-**	**-**
76. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	*70*	*70*	-	-	-	-
45. Verkætlanir						
Nettoútreiðsla	-18	35	0	0	0	0
Útreiðslur	**5.989**	**4.378**	**4.000**	**4.000**	**4.000**	**4.000**
11. Lønir v.m.	3.124	2.691	3.000	3.000	3.000	3.000
14. Keyp av vørum og tænastum	2.334	1.572	900	900	900	900
15. Keyp av útbúnaði, netto	498	115	100	100	100	100
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	37	-	-	-	-	-
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	-5	-	-	-	-	-
Inntøkur	**6.006**	**4.342**	**4.000**	**4.000**	**4.000**	**4.000**
21. Søla av vøru og tænastum	*-*	*-15*	-	-	-	-
63. Vanligar flytingarinntøkur	*5.142*	*3.275*	*3.000*	*3.000*	*3.000*	*3.000*
76. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	*864*	*1.083*	*1.000*	*1.000*	*1.000*	*1.000*

Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Í lønarflokki 37 ella hægri	1,0	1,0	1,0	1,0	1,0	1,0
Onnur	24,0	24,0	26,0	28,0	28,0	28,0
Fulltíðarstørv	25,0	25,0	27,0	29,0	29,0	29,0
Lønarpartur (mió. kr.)	10,9	11,6	12,5	13,4	13,4	13,4

5.34.3.03. Útgerð til Magnus Heinason (Rakstrarjáttan)

Magnus Heinason er sum tíðin er liðin vorðið eitt gamalt skip og hevur átrokandi tørv á viðlíkahaldi. Fleiri lutir á skipinum eru nógv slitnir og kunnu væntast at ganga fyri nær tað skal vera. Síðstu árini hevur skipið eisini alsamt oftari havt brek í motori, útgerð og annað. Tískil er tørvur á ávísari útskifting av lutum og útgerð umborð.

Tað eru játtaðar 400 tús. kr. til endamálið í 2018.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	329	1.000	600	400	400	400
Útreiðslur	329	1.000	600	400	400	400
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	329	1.000	600	400	400	400
Útreiðslur	**329**	**1.000**	**600**	**400**	**400**	**400**
14. Keyp av vørum og tænastum	305	-	-	-	-	-
15. Keyp av útbúnaði, netto	24	-	600	400	400	400
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	-	1.000	-	-	-	-

5.34.3.04. Magnus Heinason (Rakstrarjáttan)

Játtanin er til at reka fiskirannsóknarskipið Magnus Heinason. Havstovan nýtir skipið til vísindaligar havrannsóknir og fiskirannsóknir undir Føroyum og á leiðum, ið eru týdningarmiklar fyri føroyskan fiskiskap og føroyskan sjógv.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	10.757	10.687	10.800	10.800	10.800	10.800
Útreiðslur	13.740	11.841	12.300	12.300	12.300	12.300
Inntøkur	2.982	1.154	1.500	1.500	1.500	1.500
20. Magnus Heinason						
Nettoútreiðsla	10.757	10.687	10.800	10.800	10.800	10.800
Útreiðslur	**13.740**	**11.841**	**12.300**	**12.300**	**12.300**	**12.300**
11. Lønir v.m.	7.559	6.999	7.368	7.368	7.368	7.368
14. Keyp av vørum og tænastum	4.335	3.765	3.815	3.815	3.815	3.815
15. Keyp av útbúnaði, netto	58	61	737	737	737	737
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	1.788	1.016	380	380	380	380
Inntøkur	**2.982**	**1.154**	**1.500**	**1.500**	**1.500**	**1.500**
21. Søla av vøru og tænastum	*2.982*	*1.154*	*1.500*	*1.500*	*1.500*	*1.500*

Starvsfólkayvirlit: 20 Magnus Heinason

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Í lønarflokki 37 ella hægri	-	-	-	-	-	-
Onnur	12,0	12,0	12,0	12,0	12,0	12,0
Fulltíðarstørv	12,0	12,0	12,0	12,0	12,0	12,0
Lønarpartur (mió. kr.)	7,6	7,0	7,4	7,4	7,4	7,4

5.34.3.06. Nýtt havrannsóknarskip (Løgujáttan)

Landsstýrið hevur sett sær fyri at fáa til vega nýtt havrannsóknarskip, ið verður fíggjað við løgujáttan í fíggjarlógini.

Við Ll. nr. 76 frá 7. juni 2011 um bygging av nýggjum havrannsóknarskipi, broytt við Ll. nr. 136 frá 16. desember 2015, er heimilað landsstýrismanninum at gera avtalur um bygging av nýggjum havrannsóknarskipi fyri í mesta lagi 215 mió. kr. Henda lógin er broytt soleiðis, at landssyrismaðurin hevur heimild til at brúka upp til 286 mió. kr. til nýtt havrannsóknarskip.

Í tíðarskeiðnum 2011-2015 eru nýttar 4,5 mió. kr. til detailprojektering o.a. Í 2016 vórðu 10 mió. kr. játtaðar. Nýtt útbjóðingartilfar varð gjørt og útbjóðingin av at byggja nýtt havrannsóknarskip var síðst í 2016. Játtaðar vórðu 9,5 mió. kr. til endamálið í 2017. Sostatt bar til at undirskrivað sáttmála við Mest í 2017 um at byggja nýggja havrannsóknarskipið.

Játtaðar eru 85 mió. kr. til endamálið í 2018.

Átekning

Landsstýrismanninum verður heimilað at flyta óbrúkta játtan til seinni fíggjarár.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	-	470	9.500	85.000	107.500	74.000
10. Nýtt havrannsóknarskip						
Útreiðslur	**-**	**470**	**9.500**	**85.000**	**107.500**	**74.000**
14. Keyp av vørum og tænastum	-	465	-	-	-	-
15. Keyp av útbúnaði, netto	-	5	-	-	-	-
31. Bygging og løguframleiðsla	-	-	9.500	85.000	107.500	74.000

5.34.3.07. Fiskivinnuroyndir (Rakstrarjáttan)

Fiskimálaráðið umsitur fiskivinnuroyndir, sum hava til endamáls (stevnu) at fremja royndir og kanningar, bæði praktiskar, vinnuligar og vísindaligar, ið menna og økja um framleidni í føroyskari fiskivinnu við atliti at lívfrøðiligari, búskaparligari og samfelagsligari burðardyggari gagnnýtslu av havtilfeinginum.

Umsóknir til fiskivinnuroyndir verða viðgjørdar av einum stýrisbólki, sum hevur greiðar mannagongdir at virka eftir. Eftir tilmæli frá stýrisbólkinum veitir Fiskimálaráðið endaliga tilsøgn um stuðul.

Játtanin til fiskivinnuroyndir lækkar við 1,4 mió. kr. í 2018. Samstundis er peningur tøkur í Fiskivinnugrunninum til at menna eina nýggja skipan til nýskapan, menning og gransking í øllum liðum og virðisketunum í fiskivinnuni við fyrimynd í íslendska Matís stovninum. Ætlanin er at skipa hetta virksemi í deplum kring landið.

Raðfest øki 2017-2019

Royndarveiða og virðisøking av fiski og fiskavørum
Hetta kunnu vera praktiskar royndir ella vísindarligar kanningar, t.d.:

1. royndarveiða eftir fiskasløgum, sum ikki verða gagnnýtt
2. at fáa størri part av tilfeinginum til matna og finna marknaðir
3. at alt tilfeingið verður fingið til lands, verður gagnnýtt og virðisøkt
4. at menna tøkni og mannagongdir, ið betra um góðskuna á fiski og fiskavørum
5. at menna ymiskar góðskubólkar fyri ráfisk og góðskuváttanir
6. at lýsa og loysa praktiskar trupulleikar at fáa alla veiði til høldar
7. fáa fram og nýta eginleikar, sum havtilfeingið hevur á fólkaheilsuna

Burðardyggur fiskiskapur
Hetta kunnu vera praktiskar royndir ella vísindarligar kanningar, t.d.:

1. at menna tøkni, ið fer varliga við umhvørvinum og minkar um orkunýtsluna
2. at menna vitanina um fiskalívfrøði og vistfrøði
3. at menna burðardyggan fiskiskap (umsitingarætlanir v.m.)

Búskaparlig og samfelagslig menning av fiskivinnuni og førleikamenning í øllum liðum
Hetta kunnu vera fyrisitingarligar, fíggjarligar, hagfrøðiligar, samfelagsligar ella búskaparligar kanningar ella greiningar, sum leggja afturat vitan um fiskivinnuna, og harvið menna grundarlagið undir vinnuligum og politiskum avgerðum, t.d.:

1. tilfeingisbúskapur og fyrisiting
2. skipan av framtíðar fiskiskapi og flota undir Føroyum (íroknað ávirkan á onnur lið)
3. marknaðarføringsátøk, ið kunnu stimbra áhugan fyri føroyskum fiski, herundir á nýggjum marknaðum
4. at marknaðaratgongd og marknaðarføring kunnu betrast
5. at størri virðisøking verður skapt í Føroyum í øllum liðum í vinnuni
6. at føroyskir førleikar verða mentir í tøkni, veiði, framleiðslu, veitingum, tænastum og sølu

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	2.483	3.598	8.600	7.200	8.200	8.200
Útreiðslur	2.483	3.597	8.600	7.200	8.200	8.200
Inntøkur	-	-2	-	-	-	-
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	2.483	3.598	8.600	7.200	8.200	8.200
Útreiðslur	**2.483**	**3.597**	**8.600**	**7.200**	**8.200**	**8.200**
11. Lønir v.m.	3	10	355	355	355	355
14. Keyp av vørum og tænastum	95	74	158	158	158	158
53. Stuðul til vinnu	1.222	1.958	6.587	5.187	6.187	6.187
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	1.164	1.554	1.500	1.500	1.500	1.500
Inntøkur	**-**	**-2**	**-**	**-**	**-**	**-**
21. Søla av vøru og tænastum	-	*-2*	-	-	-	-

5.34.4. Studningur til vinnur

5.34.4.22. Flutningsstuðul (Lógarbundin játtan)

Flutningstuðul verður goldin eftir heimild í løgtingslóg nr. 14 frá 3. mars 1999 um stuðul til flutning av fiski. Stuðulsupphæddirnar eru ásettar í kunngerð.

Játtanin er hækkað við 600 tús. kr. í 2018 vegna metta hægri nýtslu. Tó skulu ávísar tillagingar gerast í gjaldinum. Ætlanin er at lækka flutningsstuðulin á meginøkinum.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	1.084	2.274	2.200	2.800	2.800	2.800
01. Stuðul						
Útreiðslur	**1.084**	**2.274**	**2.200**	**2.800**	**2.800**	**2.800**
53. Stuðul til vinnu	1.084	2.274	2.200	2.800	2.800	2.800

5.34.5. Lán, effektiv veðhald o.t.

5.34.5.01. Útlán (Stuðulsjáttan)

Á hesi høvuðskontu eru afturgjøld og lánseftirgevingar, ið veitt eru fiskivinnuni sambært løgtingslógum, sum ikki eru í gildi longur.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	-	-	100	100	100	100
Inntøkujáttan	4	8	100	100	100	100
60. Ymsi lán						
Útreiðslur	**-**	**-**	**100**	**100**	**100**	**100**
53. Stuðul til vinnu	-	-	100	100	100	100
Inntøkur	**4**	**8**	**100**	**100**	**100**	**100**
86. Afturgjaldan av útlánum v.m.	*4*	*8*	*100*	*100*	*100*	*100*

5.34.5.07. Effektivar veðhaldsútreiðslur (Stuðulsjáttan)

Útreiðslujáttanin fatar um tær veðhaldsskyldur, sum landskassin hevur í fiskiskipum. Inntøkujáttanin er afturgjald til landskassan fyri goldnar borganir. Landskassin hevur bert smávegis veðhaldsskyldur eftir í skipaflotanum.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Inntøkujáttan	40	299	100	100	100	100
01. Veðhald						
Inntøkur	**40**	**299**	**100**	**100**	**100**	**100**
86. Afturgjaldan av útlánum v.m.	*40*	*299*	*100*	*100*	*100*	*100*

§ 7 Mentamál

Felagsútreiðslur

7.11.1. Fyrisiting

7.11.1.09. Mentamálaráðið (Rakstrarjáttan)

Mentamálaráðið fyrisitur málsøkini útbúgving, gransking og mentan, og her undir eisini dagstovnaøkið, kirkjumál, fjølmiðlar og ítrótt. Mentamálaráðið hevur sum mál og mið at:

- Fyrisita, umsita og menna galdandi lóggávu í útbúgvingar-, granskingar-, og mentanarmálum
- Seta í verk politikkin, sum er orðaður í samgonguskjalinum
- Hækka vitanarstøðið og mentanarmedvitið hjá borgarunum
- Tryggja mennandi karmar fyri virksemi innan útbúgving, gransking og mentan.

Mentamálaráðið hevur hesar høvuðsuppgávur:

- Hevur undir landsstýriskvinnuni yvirskipaða, fyrisitingarliga og fíggjarliga eftirlitið við teimum stovnum, sum eru undir ráðnum og yvirskipaðu ráðleggingina viðvíkjandi øllum málsøkjum, nevnd eru omanfyri.

- Fyrireikar lógaruppskot, millum annað fíggjarlógaruppskot, ger kunngerðir á fyrisitingarøkinum, ráðleggur og fyrireikar mál til landsstýriskvinnuna at taka støðu til, umframt at fáast við vanliga málsviðgerð.

- Fyrisitur fyri útbúgvingarstovnar og stovnar á § 7 í løgtingsfíggjarlógini, verk- og útbyggingarætlanir á økinum. Ger uppskot til almenn stevnumið fyri dagstovna-, skúla- og undirvísingarætlanir og til tíma- og námsætlanir. Tryggjar, at undirvísingartilfar verður fyrireikað og givið út.

- Hevur eftirlit við, at galdandi reglur fyri skúlaskapin verða hildnar, og at áløgd tiltøk verða framd, umframt at tað skipar fyri, at tær prótøkur og royndir, sum ásettar eru í lóggávuni, verða hildnar.

- Samstarvar við onnur ráð, samskiftir og samstarvar við stovnsleiðarar, viðskiftafólk og við myndugleikar og stovnar í Norðurlondum, er umboðað í undirvísingar- og mentamálanevndum undir norðurlendska ráðharraráðnum, er virkið í útnorðursamstarvi, og fyrireikar og tekur lut í ES útbúgvingar- og granskingarsamstarvinum, eins og í UNESCO-samstarvinum.

Undirkonta 21. Yrkisútbúgvingarskrivstovan. Yrkisdepilin samskipar yvirskipaða virksemið av yrkisútbúgvingunum og er fyrisiting/skrivari hjá Yrkisútbúgvingarráðnum og yrkisnevndini sambært ásetingunum í Ll. nr. 94 frá 29. desember 1998 um yrkisútbúgvingar við seinni broytingum, og í viðtøkum, sum landsstýriskvinnan hevur góðtikið. Landskassin rindar fyrisitingarútreiðslurnar, sum standast av skipanini eftir kap. 5 í yrkisútbúgvingarlógini. Yrkisdepilin umsitur eisini yrkisskeið sambært løgtingslóg nr. 22 frá

17. mai 2004 um yrkisskeið og førleikameting sambært løgtingslóg nr. 67 frá 15. mai 2014 um førleikameting.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	18.003	18.794	20.167	19.907	19.907	19.907
Útreiðslur	18.019	18.844	20.167	19.907	19.907	19.907
Inntøkur	16	49	-	-	-	-
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	15.823	16.402	16.832	16.572	16.572	16.572
Útreiðslur	**15.840**	**16.452**	**16.832**	**16.572**	**16.572**	**16.572**
11. Lønir v.m.	12.164	12.775	13.499	13.299	13.299	13.299
14. Keyp av vørum og tænastum	3.291	3.217	3.025	2.965	2.965	2.965
15. Keyp av útbúnaði, netto	167	126	48	48	48	48
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	5	-	-	-	-	-
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	213	334	260	260	260	260
Inntøkur	**16**	**49**	**-**	**-**	**-**	**-**
76. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	*16*	*49*	-	-	-	-
21. Yrkisútbúgvingarskrivstovan						
Nettoútreiðsla	2.179	2.392	3.335	3.335	3.335	3.335
Útreiðslur	**2.179**	**2.392**	**3.335**	**3.335**	**3.335**	**3.335**
11. Lønir v.m.	1.860	2.090	3.055	3.055	3.055	3.055
14. Keyp av vørum og tænastum	276	267	245	245	245	245
15. Keyp av útbúnaði, netto	4	13	35	35	35	35
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	40	23	-	-	-	-

Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Í lønarflokki 37 ella hægri	4,0	5,0	5,0	5,0	5,0	5,0
Onnur	19,0	20,0	20,0	20,0	20,0	20,0
Fulltíðarstørv	23,0	25,0	25,0	25,0	25,0	25,0
Lønarpartur (mió. kr.)	12,2	12,8	13,5	13,3	13,3	13,3

Útbúgving og gransking

7.23.1. Ymsar útreiðslur

7.23.1.04. Studni (Rakstrarjáttan)

Studni varð settur á stovn, tá ið føroyingar yvirtóku fyrisitingina av "Statens Uddannelsesstøtte" í 1988, og játtanin á donsku fíggjarlógini varð flutt í heildarveitingina. Egnar reglur vórðu tá gjørdar fyri, hvussu stuðulin skuldi verða veittur.

Galdandi lóg um lestrarstuðul er Ll. nr. 36 um lestrarstuðul frá 3. mai 2007, seinast broytt við Ll. nr. 53 frá 6. mai 2016. Galdandi kunngerð er kunngerð nr. 107 frá 25. august 2011 um lestrarstuðul, sum seinast er broytt við kunngerð nr. 83 frá 16. august 2016.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	3.242	3.069	3.332	3.332	3.332	3.332
Útreiðslur	3.242	3.069	3.332	3.332	3.332	3.332
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	3.242	3.069	3.332	3.332	3.332	3.332
Útreiðslur	**3.242**	**3.069**	**3.332**	**3.332**	**3.332**	**3.332**
11. Lønir v.m.	2.193	2.238	2.350	2.350	2.350	2.350
14. Keyp av vørum og tænastum	753	755	900	900	900	900
15. Keyp av útbúnaði, netto	296	75	82	82	82	82

Virksemisyvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
A: Høvuðsendamál, netto (1.000 kr.)	**3.242**	**3.069**	**3.332**	**3.332**	**3.332**	**3.332**
1. Leiðsla og hjálparvirksemi	1.665	1.474	1.601	1.539	1.539	1.539
2. ÚS-stuðulsveiting	505	510	554	574	574	574
3. Ferðastuðul	410	415	450	466	466	466
4. ÚSUN-stuðulsveiting	189	191	208	215	215	215
5. Verkætlanarstuðul	32	32	35	36	36	36
6. Lánsumsiting	441	447	484	502	502	502
B: Virksemi (persónsmál) (tal)						
2. ÚS-stuðulsveiting	4.177	4.200	4.200	4.200	4.200	4.200
3. Ferðastuðul	1.664	1.800	1.800	1.600	1.600	1.600
4. ÚSUN-stuðulsveiting	153	160	160	150	150	150
5. Verkætlanarstuðul	169	180	180	188	188	188
6. Lánsumsiting	2.143	2.200	2.200	2.000	2.000	2.000
C: Eindarkostnaður (miðalkostn.) (kr.)						
2. ÚS-stuðulsveiting	121	122	122	137	137	137
3. Ferðastuðul	246	230	230	292	292	292
4. ÚSUN-stuðulsveiting	1.237	1.196	1.196	1.435	1.435	1.435
5. Verkætlanarstuðul	187	177	177	191	191	191
6. Lánsumsiting	206	203	203	251	251	251

Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Í lønarflokki 37 ella hægri	-	-	-	-	-	-
Onnur	4,7	5,0	5,0	5,0	5,0	5,0
Fulltíðarstørv	4,7	5,0	5,0	5,0	5,0	5,0
Lønarpartur (mió. kr.)	2,2	2,2	2,4	2,4	2,4	2,4

7.23.1.13. Skúlabókagerð (Rakstrarjáttan)

Sambært § 3, stk. 3 í Ll. nr. 53 frá 15. mai 2014 um at útvega undirvísingarmiðlar o.a. kann landsstýriskvinnan veita forløgum og einstaklingum stuðul til at gera og geva út undirvísingarmiðlar. Stuðulin verður veittur sum tímaniðurskurður, farloyvi við løn í styttri tíðarskeið ella sum beinleiðis stuðul, ið verður goldin, tá ið handritið ella partar av handritinum er liðugt.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	521	488	512	512	512	512
Útreiðslur	521	488	512	512	512	512
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	521	488	512	512	512	512
Útreiðslur	**521**	**488**	**512**	**512**	**512**	**512**
11. Lønir v.m.	431	278	362	362	362	362
14. Keyp av vørum og tænastum	-	40	-	-	-	-
54. Stuðul til annað virksemi	90	170	150	150	150	150

7.23.1.18. Nám (Rakstrarjáttan)

Nám veitir tænastur og undirvísingarmiðlar til skúlaverkið. Høvuðsvirkisøkini eru:

- At útvega fjølbroyttar undirvísingarmiðlar - prentað og talgilt tilfar
- Undirvísingarportalurin Snar
- Føroysk Teldutala
- Faklig og undirvísingarlig ráðgeving
- Skeiðsvirksemi
- Miðlasavn og útlán
- Samskiftisskipanin First Class
- Skeið

Nám hevur heimild í §3, stk. 1 í løgtingslóg nr. 53 frá 15. mai 2014 um at útvega undirvísingarmiðlar o.a., og er virksemið á stovninum ásett sambært hesi lóggávu. Nám og fyrisitingin av prógvtøkum, sum liggur í Mentamálaráðnum, eru samskipað bygnaðarliga frá 1. august 2015. Føroysk Teldutalu fær stuðul á 200 tús. kr.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	15.019	12.972	14.246	14.146	14.146	14.146
Útreiðslur	22.758	22.292	21.746	21.646	21.646	21.646
Inntøkur	7.739	9.320	7.500	7.500	7.500	7.500
24. Nám						
Nettoútreiðsla	15.019	12.972	14.246	14.146	14.146	14.146
Útreiðslur	**22.758**	**22.292**	**21.746**	**21.646**	**21.646**	**21.646**
11. Lønir v.m.	10.964	11.099	12.721	12.671	12.671	12.671
14. Keyp av vørum og tænastum	14.556	13.695	12.260	12.210	12.210	12.210
15. Keyp av útbúnaði, netto	221	205	175	175	175	175
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	274	342	290	290	290	290
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	-3.256	-3.052	-3.900	-3.900	-3.900	-3.900
54. Stuðul til annað virksemi	-	-	200	200	200	200
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	-	3	-	-	-	-
Inntøkur	**7.739**	**9.320**	**7.500**	**7.500**	**7.500**	**7.500**
21. Søla av vøru og tænastum	*5.877*	*6.429*	*6.000*	*6.000*	*6.000*	*6.000*
29. Ymsar rakstrarinntøkur	*1*	-	-	-	-	-
63. Vanligar flytingarinntøkur	*100*	-	-	-	-	-
65. Flytingarinntøkur úr útlandinum	-	*150*	-	-	-	-
76. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	*1.762*	*2.741*	*1.500*	*1.500*	*1.500*	*1.500*

Starvsfólkayvirlit: 24 Nám

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Í lønarflokki 37 ella hægri	1,0	1,0	1,0	1,0	1,0	1,0
Onnur	18,5	18,1	21,3	21,3	21,3	21,3
Fulltíðarstørv	19,5	19,1	22,3	22,3	22,3	22,3
Lønarpartur (mió. kr.)	11,0	11,1	12,7	12,7	12,7	12,7

Umframt føstu starvsfólkini í Námi, ið fyrisita, ritstjórna og samskipa útgávur, skeið og lán, verða lønir goldnar til tænastur keyptar frá rithøvundum, týðarum, myndprýðarum, skeiðshaldarum, forritarum o.ø. Lønarsamsýningar til framleiðslu av útgávum og til skeiðshald eru ikki at rokna sum føst størv í Námi. Tilsamans eru settar 1 mió. kr. av til lønarsamsýningar til útgávur og skeið afturat 11,7 mió. kr. í føstum lønarsamsýningum, tilsamans 12,7 mió. kr.

7.23.1.22. Barnabløð (Stuðulsjáttan)

Endamálið við játtanini er at veita árligan stuðul til at geva út barnablað, sum Bókadeild Føroya Lærarafelags hevur staðið fyri síðani 1959.

Árligi stuðulin verður veittur sum ein samlað játtan til virksemið og verður goldin hvønn ársfjórðing. Roknskapur verður latin Mentamálaráðnum eftir lokið fíggjarár. Frá skúlaársbyrjan 2017 koma tvey bløð út: PÍKA7 til 0-2. flokk, fýra bløð um árið, og STROK til 3. flokk og eldri, sjey bløð um árið.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	163	253	253	353	353	353
01. Stuðul						
Útreiðslur	**163**	**253**	**253**	**353**	**353**	**353**
54. Stuðul til annað virksemi	163	253	253	353	353	353

7.23.1.25. Barnabókaútgáva (Stuðulsjáttan)

Endamálið við játtanini er at veita ein árligan stuðul til Bókadeild Føroya Lærarafelags, ið gevur út bøkur á føroyskum til børn og ung. Bókadeildin gav 86 bøkur út í 2017. Limaskarin í Barnabókaklubbanum er um 1.800.

Árligi stuðulin verður veittur sum ein samlað játtan til virksemið og verður goldin felagnum hvønn ársfjórðing. Roknskapur verður latin Mentamálaráðnum eftir lokið fíggjarár.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	1.531	1.831	2.031	2.031	2.031	2.031
01. Stuðul						
Útreiðslur	**1.531**	**1.831**	**2.031**	**2.031**	**2.031**	**2.031**
54. Stuðul til annað virksemi	1.531	1.831	2.031	2.031	2.031	2.031

7.23.1.28. Fjølrit (Rakstrarjáttan)

Játtanin er strikað. Nýggj lóg um upphavsrætt er sett í gildi.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	200	-	-	-	-	-
Útreiðslur	200	-	-	-	-	-
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	200	-	-	-	-	-
Útreiðslur	**200**	**-**	**-**	**-**	**-**	**-**
14. Keyp av vørum og tænastum	200	-	-	-	-	-

7.23.1.31. Prótøkur (Rakstrarjáttan)

Játtanin verður brúkt til løn og amboð til at skipa fyri prótøkum, uppgávugerð og prógdøming herímillum ferðaútreiðslur í sambandi við prótøkur. Eisini verða allar útreiðslurnar til OECD-kanningar (Pisa og TALIS) og til landsroyndir í skúlaverkinum rindaðar av hesi játtan.

Seinnu árini eru útreiðslurnar til prótøkur hækkaðar, m.a. tí alsamt fleiri prótøkuuppgávur til miðnámsútbúgvingarnar verða gjørdar í Føroyum, gjald til prótøkunevndir er hækkað

sambært nýggjum sáttamála og tænastugjøld í sambandi við samstarv við danskar myndugleikar eru eisini hækkað. Á prógvstovuni starvast 7 fólk, og harumframt eru millum 600 og 800 persónar knýttir at arbeiðnum at gera uppgávur og at vera prógvdómarar. Fyrisitingin av prógvtøkum er bygnaðarliga skipað saman við Námi frá 1. august 2015. Í sambandi við flyting av tænastumannasettum starvsfólki eru 500 tús. kr. fluttar frá høvuðskontu 7.23.2.01. Fólkaskúlin.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	9.802	10.529	10.854	11.254	11.254	11.254
Útreiðslur	9.949	10.548	10.854	11.254	11.254	11.254
Inntøkur	147	19	-	-	-	-
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	9.802	10.529	10.854	11.254	11.254	11.254
Útreiðslur	**9.949**	**10.548**	**10.854**	**11.254**	**11.254**	**11.254**
11. Lønir v.m.	7.500	6.962	8.327	8.727	8.727	8.727
14. Keyp av vørum og tænastum	2.258	2.267	2.400	2.400	2.400	2.400
15. Keyp av útbúnaði, netto	120	231	127	127	127	127
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	1	93	-	-	-	-
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	1	0	-	-	-	-
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	70	994	-	-	-	-
Inntøkur	**147**	**19**	**-**	**-**	**-**	**-**
21. Søla av vøru og tænastum	*25*	*6*	-	-	-	-
76. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	*122*	*13*	-	-	-	-

Virksemisyvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
A: Høvuðsendamál (1.000 kr.)	**9.949**	**10.548**	**10.854**	**11.254**	**11.254**	**11.254**
1. Umsiting og felagsútreiðslur	2.764	2.900	3.864	4.264	4.264	4.264
2. Fólkaskúlin	1.500	1.723	1.900	1.900	1.900	1.900
3. Gymnasialt miðnám	-	3.400	3.200	3.200	3.200	3.200
4. Studentaskúlar og HF-skeið	2.200	-	-	-	-	-
5. Tekniski skúlin	420	460	100	100	100	100
6. Fiskivinnuskúlin	150	-	-	-	-	-
7. Handilsskúlin	1.000	-	-	-	-	-
8. Heilsuskulin	95	95	90	90	90	90
9. Maritimar útbúgvingar	1.250	1.400	1.200	1.200	1.200	1.200
10. OECD-kanningar, PISA og TALIS	570	570	500	500	500	500

Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Í lønarflokki 37 ella hægri	-	-	-	-	-	-
Onnur	6,0	6,0	6,0	7,0	7,0	7,0
Fulltíðarstørv	6,0	6,0	6,0	7,0	7,0	7,0
Lønarpartur (mió. kr.)	7,5	7,0	8,3	8,7	8,7	8,7

7.23.1.37. Meginfelag føroyskra studenta, MFS (Stuðulsjáttan)

Meginfelag Føroyskra Studenta er felag teirra lesandi. MFS umboðar lesandi føroyingar uttanlands, lesandi á Fróðskaparsetrinum í Føroyum og tey, sum eru í læru uttanlands, og øll hesi kunnu gerast limir í felagnum. Í altjóða høpi er MFS viðurkent sum sjálvstøðugt føroyskt studentafelag á jøvnum føti við eitt nú onnur norðurlendsk studentafeløg og altjóða studentafelagsskapir. Játtanin á føroysku fíggjarlógini ger virksemi felagsins møguligt. Endamálið við felagnum er at arbeiða fyri at betra viðurskifti teirra lesandi. Talan er um rættiliga víttfevnandi arbeiði, har kjakfundir, blaðútgáva, samskifti við myndugleikar, hugnakvøld, lestrarstevna osfr. hoyra til arbeiðsøkið.

Árligi stuðulin er 251 tús. kr. Stuðulin verður veittur sum ein samlað játtan til virksemið, útgoldin frammanundan mánaðarliga. Roknskapur verður latin Mentamálaráðnum eftir lokið fíggjarár. Limaskarin er umleið 210.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	181	181	181	251	251	251
01. Stuðul						
Útreiðslur	**181**	**181**	**181**	**251**	**251**	**251**
54. Stuðul til annað virksemi	181	181	181	251	251	251

7.23.1.40. Næmingaheim (Stuðulsjáttan)

Eftir § 6 í Ll. nr. 63 frá 23. juni 1983 um bústaðarhús til fólk í útbúgving, seinast broytt við Ll. nr. 127 frá 25. oktober 1988, kann Føroya Landsstýri veita rakstrarstuðul upp í 50 % av útreiðslunum til rentur og avdráttir av upprunaligu prioritetslánunum. Eftir § 7 í somu lóg skal stovnurin vera sjálveigandi stovnur og skal hava viðtøkur, sum Mentamálaráðið hevur góðkent. Mentamálaráðið rindar stuðulin sambært roknskapi fyri farna fíggjarár.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	54	55	60	50	50	50
03. Studentaskúlaheimið						
Útreiðslur	**54**	**55**	**60**	**50**	**50**	**50**
Mentamálaráðið játtar kommunum stuðul við grundarlagi í innsendum umsóknum. Kommunurnar rinda lønina hjá lærarum og leiðarum og góðkenna einstøku skeiðini. Endurgjaldið er 50 % fyri almenna frítíðarundirvísing og 100 % fyri serstaka frítíðarundirvísing, sum í høvuðsheitum fatar um serundirvísing, prógtøkur fólkaskúlans, dugnaskapsroyndir, HF-stakgreinalestur og yrkiskeið innan landbúnað. Kommunurnar lata Mentamálaráðnum uppgerð hvørt hálvár, og verður stuðulin útgoldin við grundarlagi í hesum uppgerðum.

Mentamálaráðið skipar fyri skeiði fyri leiðarum og lærarum í frítíðarundirvísingini, veitir leiðarum og lærarum lutvísan stuðul til eftirútbúgvingarskeið og skipar fyri landsumfatandi frítíðarundirvísing eftir tørvi.

Átekning

Landsstýriskvinnuni verður heimilað at gera innanhýsis flytingar millum hesa høvuðskontuna og undirkontu 20. Sernám á høvuðskontu 7.23.2.02. Sernám.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	6.064	6.062	6.082	6.082	6.082	6.082
Útreiðslur	6.064	6.062	6.082	6.082	6.082	6.082
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	6.064	6.062	6.082	6.082	6.082	6.082
Útreiðslur	**6.064**	**6.062**	**6.082**	**6.082**	**6.082**	**6.082**
11. Lønir v.m.	49	86	722	722	722	722
14. Keyp av vørum og tænastum	226	5	38	38	38	38
15. Keyp av útbúnaði, netto	-	-	30	30	30	30
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	-	-	6	6	6	6
52. Tilskot til einstaklingar	-	-	10	10	10	10
54. Stuðul til annað virksemi	102	39	-	-	-	-
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	-	32	-	-	-	-
72. Flytingar frá landi til kommunur	5.687	5.901	5.276	5.276	5.276	5.276

7.23.5.10. Musikkskúlar (Rakstrarjáttan)

Skipaða musikkskúlaundirvísingin í Føroyum virkar eftir Ll. nr. 83 frá 29. mai 2017 um musikkskúlaskipan. Lærararnir eru settir hjá landinum, og musikkskúlarnir eru kommunalir/interkommunalir. Musikkskúlastjórin hevur námsfrøðiligu ábyrgdina og samskipar undirvísingina.

Landið rindar løn til musikkskúlastjóran og meginfyrisiting, ferðing hjá musikkskúlalærarum og 50% av musikkskúlalæraralønum. Landið umsitur og avgreiðir lønir til musikkskúlalærarar, og kommunan endurrindar landinum 50% av musikkskúlalæraralønum.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	12.493	12.670	13.409	13.409	13.409	13.409
Útreiðslur	23.183	23.480	25.060	25.060	25.060	25.060
Inntøkur	10.690	10.810	11.651	11.651	11.651	11.651
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	12.493	12.670	13.409	13.409	13.409	13.409
Útreiðslur	**23.183**	**23.480**	**25.060**	**25.060**	**25.060**	**25.060**
11. Lønir v.m.	22.263	22.337	24.067	24.067	24.067	24.067
14. Keyp av vørum og tænastum	913	1.131	970	970	970	970
15. Keyp av útbúnaði, netto	-	12	5	5	5	5
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	24	-	-	-	-	-
54. Stuðul til annað virksemi	-17	-	-	-	-	-
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	-	1	18	18	18	18
Inntøkur	**10.690**	**10.810**	**11.651**	**11.651**	**11.651**	**11.651**
63. Vanligar flytingarinntøkur	*206*	-	-	-	-	-
77. Flyting frá kommunum	*10.483*	*10.810*	*11.651*	*11.651*	*11.651*	*11.651*

Virksemisyvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
A: Høvuðsendamál (1.000 kr.)	**23.183**	**23.480**	**25.060**	**25.060**	**25.060**	**25.060**
1. Leiðsla, skrivstova, ferðing lærarar o.a.	1.791	1.700	1.758	1.758	1.758	1.758
2. Musikkundirvísing	21.392	21.780	23.302	23.302	23.302	23.302
B: Virksemi (tal)						
2. Musikkundirvísing (næmingar)	1.900	1.945	2.050	2.050	2.050	2.050
C: Eindarkostnaður (kr.)						
2. Musikkundirvís. (kostn. fyri hvønn næming)	11.259	11.390	11.367	11.367	11.367	11.367

Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Í lønarflokki 37 ella hægri	-	-	-	-	-	-
Onnur	50,3	50,4	51,8	51,8	51,8	51,8
Fulltíðarstørv	50,3	50,4	51,8	51,8	51,8	51,8
Lønarpartur (mió. kr.)	22,3	22,3	24,1	24,1	24,1	24,1

7.23.5.13. Felagið fyri lesi- og skriviveik (Stuðulsjáttan)

Endamálið við játtanini er at veita ein árligan stuðul til Felagið fyri lesi- og skriviveik, ið hevur sum endamál at hjálpa og stuðla teimum, ið hava lesi- og skrivitrupulleikar.

Árligi stuðulin verður veittur sum ein samlað játtan til virksemið og verður goldin felagnum hvønn ársfjórðing. Roknskapur verður latin Mentamálaráðnum eftir lokið fíggjarár.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	1.500	1.600	1.700	1.700	1.700	1.700
01. Felagið fyri lesi- og skriviveik						
Útreiðslur	**1.500**	**1.600**	**1.700**	**1.700**	**1.700**	**1.700**
54. Stuðul til annað virksemi	1.500	1.600	1.700	1.700	1.700	1.700

7.23.6. Hægri útbúgvingar og gransking

7.23.6.05. Maritimir skúlar (Rakstrarjáttan)

20. Vinnuháskúlin er skipaður sambært Ll. nr. 55 frá 24. apríl 2001 um útbúgving av manning á skipum o.ø. Undirvísingarvirksemið er skiparaútbúgving, skipsføraraútbúgving, maskinistútbúgving og maskinmeistaraútbúgving. Harumframt verða skipsførara- og maskinmeistaraútbúgvingarnar eisini bjóðaðar út í nýggjari aspirantskipan. Eftir ætlan verða útbúgvingarnar eisini á bachelor støði í 2018.

Eisini skipar skúlin fyri skeiðsvirksemi í sjóvinnu, eftirútbúgvingarskeiðum fyri maskinistar og maskinmeistarar og dugnaskaparskeiðum í sigling og motor. Flestu skeiðini eru kravd av IMO.

22. Sjónám (Klaksvíkar sjómansskúli) er skipaður sambært Ll. nr. 55 frá 24. apríl 2001 um útbúgving av manning á skipum o.ø. Undirvísingarvirksemi skúlans er skiparaútbúgving (1½ ár) og útbúgving til skipsatstøðara, byrjunnar- og endaskeið (6 mánaða skeið). Eisini skipar skúlin fyri skeiðsvirksemi í sjóvinnu. Flestu skeiðini eru kravd av IMO.

23. Sjónám (Trygdarmiðstøðin og skeiðsvirksemi) varð stovnað í 1999 sum sjálvstøðugur stovnur til at geva sjómonnum skeið og undirvísing í trygd á sjónum sambært Ll. nr. 63 frá 3. juli 1998 um manning av skipum.

30. Føroya Brandskúli skipar fyri skeiðum í trygd á sjónum, sløkkiliðsútbúgvingum og skeiðum innan eldsløkking og roykkaving. Flestu skeiðini eru kravd av IMO.

40. Inntøkufíggjað virksemi hjá Vinnuháskúlanum verður roknað at geva eitt avlop á 350 tús. kr. í 2018.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	27.634	26.728	27.865	27.016	27.016	27.016
Útreiðslur	43.179	41.335	38.974	37.161	37.161	37.161
Inntøkur	15.546	14.607	11.109	10.145	10.145	10.145
20. Vinnuháskúlin						
Nettoútreiðsla	23.682	23.578	21.450	21.126	21.126	21.126
Útreiðslur	**26.467**	**24.643**	**22.860**	**22.536**	**22.536**	**22.536**
11. Lønir v.m.	15.664	16.300	18.253	18.253	18.253	18.253
14. Keyp av vørum og tænastum	4.258	3.908	3.787	3.463	3.463	3.463
15. Keyp av útbúnaði, netto	6.058	4.230	750	750	750	750
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	486	205	70	70	70	70
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	0	0	-	-	-	-
Inntøkur	**2.785**	**1.065**	**1.410**	**1.410**	**1.410**	**1.410**
21. Søla av vøru og tænastum	*1.435*	*1.265*	*1.410*	*1.410*	*1.410*	*1.410*
65. Flytingarinntøkur úr útlandinum	*1.350*	*-200*	-	-	-	-
22. Sjónám (Klaksvíkar sjómansskúli)						
Nettoútreiðsla	3.547	3.263	4.165	3.290	3.290	3.290
Útreiðslur	**3.640**	**3.495**	**4.295**	**3.450**	**3.450**	**3.450**
11. Lønir v.m.	2.468	2.519	2.600	2.600	2.600	2.600
14. Keyp av vørum og tænastum	1.058	747	909	770	770	770
15. Keyp av útbúnaði, netto	67	159	20	20	20	20
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	46	70	766	60	60	60
Inntøkur	**93**	**232**	**130**	**160**	**160**	**160**
21. Søla av vøru og tænastum	*93*	*232*	*130*	*160*	*160*	*160*
23. Sjónám (Trygdarmiðstøðin og skeiðsvirksemi)						
Nettoútreiðsla	1.658	1.468	1.500	1.500	1.500	1.500
Útreiðslur	**3.746**	**3.829**	**3.800**	**3.700**	**3.700**	**3.700**
11. Lønir v.m.	2.626	2.682	2.560	2.520	2.520	2.520
14. Keyp av vørum og tænastum	936	885	1.030	910	910	910
15. Keyp av útbúnaði, netto	31	35	40	90	90	90
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	146	216	170	180	180	180
17. Avskrivingar o.a.	8	11	-	-	-	-
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	0	-	-	-	-	-
Inntøkur	**2.088**	**2.361**	**2.300**	**2.200**	**2.200**	**2.200**
21. Søla av vøru og tænastum	*2.088*	*2.361*	*2.300*	*2.200*	*2.200*	*2.200*
30. Føroya Brandskúli						
Nettoútreiðsla	1.373	1.084	1.450	1.450	1.450	1.450
Útreiðslur	**4.919**	**5.015**	**4.895**	**5.150**	**5.150**	**5.150**
11. Lønir v.m.	3.234	3.447	3.668	3.670	3.670	3.670
14. Keyp av vørum og tænastum	664	944	775	950	950	950
15. Keyp av útbúnaði, netto	767	455	255	330	330	330
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	254	168	197	200	200	200
Inntøkur	**3.546**	**3.931**	**3.445**	**3.700**	**3.700**	**3.700**
21. Søla av vøru og tænastum	*3.546*	*3.931*	*3.445*	*3.700*	*3.700*	*3.700*

40. Inntøkufíggjað virksemi

Nettoútreiðsla	-2.627	-2.666	-700	-350	-350	-350
Útreiðslur	**4.407**	**4.353**	**3.124**	**2.325**	**2.325**	**2.325**
11. Lønir v.m.	2.813	2.896	2.224	1.525	1.525	1.525
14. Keyp av vørum og tænastum	1.223	977	500	400	400	400
15. Keyp av útbúnaði, netto	371	480	400	400	400	400
Inntøkur	**7.034**	**7.019**	**3.824**	**2.675**	**2.675**	**2.675**
21. Søla av vøru og tænastum	*7.122*	*7.019*	*3.824*	*2.675*	*2.675*	*2.675*
25. Eftirlits- og umsjónaravgjøld	*-88*	-	-	-	-	-

Virksemisyvirlit: 20 Vinnuháskúlin

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
A: Høvuðsendamál (1.000 kr.)	**26.467**	**24.643**	**22.860**	**22.536**	**22.536**	**22.536**
1. Leiðsla, hjálparvirks., ikki flokksbýtt virks.	14.486	12.497	10.520	9.045	9.045	9.045
2. Maskinistútbúgving	505	520	595	645	645	645
3. Maskinmeistaraútbúgving	5.584	5.947	5.942	6.528	6.528	6.528
4. Skiparar	3.093	3.021	2.956	3.139	3.139	3.139
5. Skipsførarar	2.799	2.658	2.847	3.179	3.179	3.179
B: Virksemi (tal)	**257**	**269**	**267**	**273**	**273**	**273**
2. Maskinistútbúgving (næmingar)	12	16	15	18	18	18
3. Maskinmeistaraútbúgving (næmingar)	125	137	127	131	131	131
4. Skiparar (næmingar)	54	66	66	53	53	53
5. Skipsførarar (næmingar)	66	50	59	71	71	71
C: Eindarkostnaður (kr.)						
2. Maskinistútbúgving (fyri hvønn næming)	42.083	32.500	39.667	35.833	35.833	35.833
3. Maskinmeistaraútbúgving (fyri hv. næming)	44.672	43.409	46.787	49.832	49.832	49.832
4. Skiparar (fyri hvønn næming)	57.278	45.773	44.788	59.226	59.226	59.226
5. Skipsførarar (fyri hvønn næming)	42.409	53.160	48.254	44.774	44.774	44.774

Starvsfólkayvirlit: 20 Vinnuháskúlin

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Í lønarflokki 37 ella hægri	1,0	1,0	1,0	1,0	1,0	1,0
Onnur	37,1	37,8	38,2	37,7	37,7	37,7
Fulltíðarstørv	38,1	38,8	39,2	38,7	38,7	38,7
Lønarpartur (mió. kr.)	15,7	16,3	18,3	18,3	18,3	18,3

Virksemisyvirlit: 22 Sjónám (Klaksvíkar sjómansskúli)

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
A: Høvuðsendamál (1.000 kr.)	**3.640**	**3.495**	**4.295**	**3.450**	**3.450**	**3.450**
1. Leiðsla, hjálparvirks., ikki flokksbýtt virks.	1.590	1.424	2.229	1.131	1.131	1.131
2. Skiparar	1.052	1.063	1.047	1.175	1.175	1.175
3. Skipskokkar	-	-	-	-	-	-
4. Skipsatstøðarar	998	1.008	1.019	1.144	1.144	1.144
B: Virksemi (tal)	**30**	**30**	**24**	**23**	**23**	**23**
2. Skiparar (næmingar)	16	16	12	15	15	15
3. Skipskokkar (næmingar)	-	-	-	-	-	-
4. Skipsatstøðarar (næmingar)	14	14	12	8	8	8
C: Eindarkostnaður (kr.)						
2. Skiparar (kostnaður fyri hvønn næming)	65.750	66.438	87.250	78.333	78.333	78.333
3. Skipskokkar (kostn. fyri hvønn næming)	-	-	-	-	-	-
4. Skipsatstøðarar (kostn. fyri hvønn næming)	71.286	72.000	84.917	143.000	143.000	143.000

Starvsfólkayvirlit: 22 Sjónám (Klaksvíkar sjómansskúli)

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Í lønarflokki 37 ella hægri	-	-	-	-	-	-
Onnur	5,0	4,5	4,5	4,5	4,5	4,5
Fulltíðarstørv	5,0	4,5	4,5	4,5	4,5	4,5
Lønarpartur (mió. kr.)	2,5	2,5	2,6	2,6	2,6	2,6

Starvsfólkayvirlit: 23 Sjónám (Trygdarmiðstøðin og skeiðsvirksemi)

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Í lønarflokki 37 ella hægri	-	-	-	-	-	-
Onnur	5,0	4,5	4,5	4,5	4,5	4,5
Fulltíðarstørv	5,0	4,5	4,5	4,5	4,5	4,5
Lønarpartur (mió. kr.)	2,6	2,7	2,6	2,5	2,5	2,5

Starvsfólkayvirlit: 30 Føroya Brandskúli

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Í lønarflokki 37 ella hægri	-	-	-	-	-	-
Onnur	6,8	6,8	7,2	7,2	7,2	7,2
Fulltíðarstørv	6,8	6,8	7,2	7,2	7,2	7,2
Lønarpartur (mió. kr.)	3,2	3,4	3,7	3,7	3,7	3,7

7.23.6.15. Fróðskaparsetur Føroya (Løgujáttan)

Játtanin er ætlað til útreiðslur í sambandi við universitetskampus til Fróðskaparsetur Føroya.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	-	599	8.000	5.000	-	-
10. Fróðskaparsetur Føroya						
Útreiðslur	**-**	**599**	**8.000**	**5.000**	**-**	**-**
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	-	-448	-600	-600	-	-
31. Bygging og løguframleiðsla	-	599	8.000	5.000	-	-
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	-	448	600	600	-	-

7.23.6.16. Fróðskaparsetur Føroya (Rakstrarjáttan)

Fróðskaparsetur Føroya (University of the Faroe Islands) er ein almennur stovnur.

20. Fróðskaparsetur Føroya virkar sambært ásetingum í Ll. nr. 58 frá 9. juni 2008 um Fróðskaparsetur Føroya, sum broytt við Ll. nr. 51 frá 8. mai 2012. Fróðskaparsetur Føroya er sjálvstøðugur almennur stovnur, sum virkar óheftur av politisku skipanini, har hetta er ásett í lógini. Endamálið er í einum at menna granskingina og dygdina í undirvísingini umframt at skapa karmar um nýskapandi undirvísing og útbúgving á Fróðskaparsetrinum.

Fróðskaparsetur Føroya verður stjórnað av einum stýri, sum er ovasti myndugleiki í stovninum og hevur evstu ábyrgdina av virkseminum á stovninum. Rektari leiðir Fróðskaparsetur Føroya innan karmar, sum stýrið ásetir. Í stýrinum fyri Fróðskaparsetur Føroya eru sjey limir. Landsstýriskvinnan tilnevnir sjey stýrislimir og sjey varalimir fyri 4 ár í senn, tó so at studentaumboð verður tilnevnt fyri eitt ár í senn. Stýrislimir og varalimir verða tilnevndir soleiðis: Fýra limir og fýra varalimir verða tilnevndir uttaneftir eftir landsstýriskvinnunar avgerð. Tveir stýrislimir og tveir varalimir verða tilnevndir eftir tilmæli frá starvsfólkunum í føstum starvi á Fróðskaparsetri Føroya. Ein stýrislimur og ein varalimur verða tilnevndir eftir tilmæli frá teimum lesandi.

Í 2014 varð óheft uttanhýsis eftirmeting gjørd av Fróðskaparsetri Føroya, peningur varð avsettur til hetta endamál á játtanini hjá Mentamálaráðnum. Eftirmeting skal fara fram regluliga, m.a. fyri at Fróðskaparsetur Føroya skal viðurkennast sum altjóða góðkendur lærustovnur eftir Bologna-avtaluni, sum arbeitt verður við at gerast partur av.

Játtanin til Fróðskaparsetur Føroya hækkar við 8,8 mió. kr. í mun til játtanina í 2017. Leiguútreiðslurnar hækka 5,8 mió. kr. í sambandi við at flutt verður í Sjóvinnuhúsið, og virksemið er framskrivað við 3 mió. kr.

30. Eftirútbúgving. Játtanin verður nýtt til tann partin av Námi, ið higartil hevur tikið sær av eftirútbúgving av fólkaskúlalærarum, til pedagogikum hjá miðnámsskúlalærarum, og til Vegleiðaraútbúgvingina á Setrinum. Ræðisrætturin til játtanina er í Mentamálaráðnum.

40. Stuðulsfíggjað virksemi. Játtanin er ætlað til stuðulsfíggjað virksemi hjá Fróðskaparsetri Føroya.

45. Inntøkufíggjað virksemi. Játtanin er ætlað til inntøkufíggjað virksemi hjá Fróðskaparsetri Føroya.

Búskaparráðið
Sambært Ll. nr. 50 frá 11. mai 2009 um Búskaparráðið, sum broytt við Ll. nr. 139 frá 20. desember 2012, sum kom í gildi 1. apríl 2013, er uppgávan hjá Fróðskaparsetrinum at røkja skrivarauppgávuna og dagligu umsitingina hjá Buskaparráðnum.

Fróðskaparsetrið tilmælir nevndarlimir til Búskaparráðið til landsstýriskvinnuna í fíggjarmálum at velja ímillum.

Innanhýsis flytingar eru frá høvuðskontu 3.15.1.13. Búskaparráðið til undirkontu 20. Fróðskaparsetur Føroya.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	78.577	85.103	87.186	95.987	95.987	95.987
Útreiðslur	89.732	99.832	96.886	105.687	105.687	105.687
Inntøkur	11.154	14.730	9.700	9.700	9.700	9.700
20. Fróðskaparsetur Føroya						
Nettoútreiðsla	75.781	82.771	84.466	93.267	93.267	93.267
Útreiðslur	**80.608**	**89.634**	**89.166**	**97.967**	**97.967**	**97.967**
11. Lønir v.m.	65.641	73.757	74.866	77.067	77.067	77.067
14. Keyp av vørum og tænastum	11.193	12.018	10.500	11.300	11.300	11.300
15. Keyp av útbúnaði, netto	664	966	1.100	1.100	1.100	1.100
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	2.902	2.708	2.600	8.400	8.400	8.400
17. Avskrivingar o.a.	18	-	-	-	-	-
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	-	0	-	-	-	-
52. Tilskot til einstaklingar	80	80	100	100	100	100
54. Stuðul til annað virksemi	50	50	-	-	-	-
57. Rentuútreiðslur o.a.	-	0	-	-	-	-
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	60	53	-	-	-	-
Inntøkur	**4.827**	**6.863**	**4.700**	**4.700**	**4.700**	**4.700**
21. Søla av vøru og tænastum	*553*	*1.037*	*1.000*	*1.000*	*1.000*	*1.000*
63. Vanligar flytingarinntøkur	*-*	*1.483*	*-*	*-*	*-*	*-*
65. Flytingarinntøkur úr útlandinum	*68*	*17*	*-*	*-*	*-*	*-*
67. Rentuinntøkur og vinningsbýti	*-*	*0*	*-*	*-*	*-*	*-*
76. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	*2.494*	*2.403*	*2.200*	*2.200*	*2.200*	*2.200*
77. Flyting frá kommunum	*1.712*	*1.922*	*1.500*	*1.500*	*1.500*	*1.500*
30. Eftirútbúgving						
Nettoútreiðsla	2.796	2.332	2.720	2.720	2.720	2.720
Útreiðslur	**2.796**	**2.332**	**2.720**	**2.720**	**2.720**	**2.720**
11. Lønir v.m.	130	-	-	-	-	-
14. Keyp av vørum og tænastum	755	502	-	-	-	-
17. Avskrivingar o.a.	-3	-	-	-	-	-
54. Stuðul til annað virksemi	19	-	-	-	-	-
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	1.894	1.830	2.720	2.720	2.720	2.720
40. Stuðulsfíggjað virksemi						
Nettoútreiðsla	0	0	0	0	0	0
Útreiðslur	**5.932**	**6.779**	**4.000**	**4.000**	**4.000**	**4.000**
11. Lønir v.m.	3.112	3.276	3.200	3.200	3.200	3.200
14. Keyp av vørum og tænastum	2.446	2.984	800	800	800	800
15. Keyp av útbúnaði, netto	22	5	-	-	-	-
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	89	61	-	-	-	-
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	-	0	-	-	-	-
51. Tilskot til útlandið o.a.	241	308	-	-	-	-
52. Tilskot til einstaklingar	23	145	-	-	-	-
Inntøkur	**5.932**	**6.779**	**4.000**	**4.000**	**4.000**	**4.000**
21. Søla av vøru og tænastum	*314*	*176*	*600*	*600*	*600*	*600*
29. Ymsar rakstrarinntøkur	*28*	*-10*	*-*	*-*	*-*	*-*
63. Vanligar flytingarinntøkur	*1.574*	*2.859*	*3.400*	*3.400*	*3.400*	*3.400*
65. Flytingarinntøkur úr útlandinum	*3.496*	*3.626*	*-*	*-*	*-*	*-*
76. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	*520*	*128*	*-*	*-*	*-*	*-*

45. Inntøkufíggjað virksemi

Nettoútreiðsla	0	0	0	0	0	0
Útreiðslur	**395**	**1.088**	**1.000**	**1.000**	**1.000**	**1.000**
11. Lønir v.m.	160	804	700	700	700	700
14. Keyp av vørum og tænastum	219	266	300	300	300	300
15. Keyp av útbúnaði, netto	15	-	-	-	-	-
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	2	17	-	-	-	-
Inntøkur	**395**	**1.088**	**1.000**	**1.000**	**1.000**	**1.000**
21. Søla av vøru og tænastum	*395*	*1.287*	*1.000*	*1.000*	*1.000*	*1.000*
63. Vanligar flytingarinntøkur	*-*	*-249*	*-*	*-*	*-*	*-*
76. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	*-*	*49*	*-*	*-*	*-*	*-*

Virksemisyvirlit: 20 Fróðskaparsetur Føroya

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
A:: Høvuðsendamál (netto) (1.000 kr.)	**80.608**	**89.634**	**89.166**	**97.967**	**97.967**	**97.967**
1. Leiðsla, hjálparvirks., ikki flokksbýtt virks.	17.831	17.926	17.833	23.633	23.633	23.633
2. Gransking (íroknað savnsuppg.) og frálæra	62.777	71.708	71.333	74.334	74.334	74.334
B:: Virksemi (tal)						
2. Gransking og frálæra (tal av lesandi)	850	950	1.050	1.120	1.120	1.120

Starvsfólkayvirlit: 20 Fróðskaparsetur Føroya

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Í lønarflokki 37 ella hægri	3,0	3,0	3,0	1,0	1,0	1,0
Onnur	125,9	126,5	134,0	139,0	139,0	139,0
Fulltíðarstørv	128,9	129,5	137,0	140,0	140,0	140,0
Lønarpartur (mió. kr.)	65,6	73,8	74,9	77,1	77,1	77,1

7.23.6.20. Granskingarráð Føroya (Rakstrarjáttan)

Granskingargrunnurin virkar sambært løgtingslóg nr. 85 frá 15. mai 2001 um gransking við seinri broytingum. Játtanin er til at umsita grunnin við.

Granskingarráðið kunnar um stuðulsmøguleikar úr Granskingargrunninum, vegleiðir umsøkjarum og umsitur játtaðar verkætlanir. Undir leiðslu av nevnd og stjóra ráðgevur Granskingarráðið eisini landsstýri og samfelagnum yvirhøvur í granskingarpolitiskum spurningum. Granskingarráðið er skrivstova hjá Granskingarnevndini og Vísindaráðnum.

Føroyska NCP-tænastan, sum er kravd í sambandi við granskingarsamstarvið við ES, er staðsett í Granskingarráðnum. EURAXESS tænastan, sum er kunningartænastu til granskarar, sum ynskja at koma til Føroya ella at fara út í heim at granska, er eisini staðsett í Granskingarráðnum.

Granskingarráðið kunnar breitt um gransking og granskingarúrslit, um stuðulsmøguleikar úr Granskingargrunninum og ES-granskingarsamstarvinum umvegis heimasíðu, tíðindabræv og ymisk tiltøk, m.a. árligu Vísindavøkuna, sum í stóran mun er uttanhýsis fíggjað.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	2.371	2.345	2.377	2.377	2.377	2.377
Útreiðslur	2.719	2.526	2.529	2.503	2.503	2.503
Inntøkur	348	181	152	126	126	126
20. Granskingarráð Føroya						
Nettoútreiðsla	2.371	2.345	2.377	2.377	2.377	2.377
Útreiðslur	**2.719**	**2.526**	**2.529**	**2.503**	**2.503**	**2.503**
11. Lønir v.m.	2.013	1.791	2.029	2.000	2.000	2.000
14. Keyp av vørum og tænastum	615	625	419	487	487	487
15. Keyp av útbúnaði, netto	1	20	-	15	15	15
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	1	1	1	1	1	1
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	0	0	-	-	-	-
57. Rentuútreiðslur o.a.	0	-	-	-	-	-
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	89	90	80	-	-	-
Inntøkur	**348**	**181**	**152**	**126**	**126**	**126**
21. Søla av vøru og tænastum	*7*	*7*	*82*	*42*	*42*	*42*
63. Vanligar flytingarinntøkur	*137*	*51*	*70*	*84*	*84*	*84*
65. Flytingarinntøkur úr útlandinum	*141*	*60*	-	-	-	-
76. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	*63*	*63*	-	-	-	-

Starvsfólkayvirlit: 20 Granskingarráð Føroya

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Í lønarflokki 37 ella hægri	1,0	1,0	1,0	1,0	1,0	1,0
Onnur	2,6	2,0	1,7	1,7	1,7	1,7
Fulltíðarstørv	3,6	3,0	2,7	2,7	2,7	2,7
Lønarpartur (mió. kr.)	2,0	1,8	2,0	2,0	2,0	2,0

7.23.6.21. Granskingargrunnurin (Stuðulsjáttan)

Sambært Ll. nr. 85 frá 15. mai 2001 um gransking, við seinri broytingum, er stovnaður sjálvstøðugur granskingargrunnur, ið hevur til endamáls at stuðla verkætlanum innan gransking, menning og nýskapan. 1 mió. kr. av játtanini er ætlað til Námsfrøðiliga gransking. Stuðulin verður bert latin eftir umsókn.

Tað verður kravt, at í minsta lagi 1/3 verður fíggjaður úr øðrum enn Granskingargrunninum. Minstamark fyri stuðli til verkætlanir er 80 tús. kr.

Stuðulin verður útgoldin ávegis árliga. Av játtaða stuðlinum verða umleið 15 % afturhildin, til endalig uppgerð og frágreiðing er latin Granskingarráðnum í seinasta lagi 3 mánaðir eftir, at verkætlanin er liðug. Harumframt skulu roknskapur og ávegis frágreiðing latast eftir hvørt lokið fíggjarár.

Játtanin er hækkað við 800 tús. kr. í 2018 til kanningarætlanir, sum kunnu menna heilsuøkið í Føroyum. Tí verður ein upphædd sett av til Sjúkrakassagrunnin, høvuðsøki 1, sum gevur møguleika at seta í verk upplýsandi og mennandi tiltøk innan heilsuøkið. Feløg, sum umboða fólk, ið bera brek, sjúklingafeløg, feløg innan eldraøkið og fakfeløg kunnu søkja.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	6.500	7.500	7.500	8.300	8.300	8.300
01. Stuðul						
Útreiðslur	**6.500**	**7.500**	**7.500**	**8.300**	**8.300**	**8.300**
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	6.500	7.500	7.500	8.300	8.300	8.300

7.23.6.24. ES-granskingarskrá (Stuðulsjáttan)

Játtanin er ætlað til at rinda fyri luttøkugjaldið í sambandi við granskingarsáttmála við ES. Føroyar hava síðan 2010 verið partur av ES-granskingarsamstarvinum. ES granskingarskráin Framework Programme 7 fyri gransking og tøkniliga menning, ið var galdandi fyri tíðarskeiðið 2007-2013, hevði eina samlaða játtan á 53,2 mia. evrur.

ES granskingarskráin Horizon 2020, ið er galdandi fyri tíðarskeiðið 2014-2020, hevur eina samlaða játtan á 70,2 mia. evrur og fevnir um stuðul til gransking, nýskapan og menning av nýggjari tøkni. Luttøkugjaldið verður roknað eftir hesum frymli: BTÚfo/(BTÚeu+BTÚfo). Føroyska luttøkugjaldið hevur verið stigvíst vaksandi; úr 7 mió. kr. í 2010 til 10,3 mió. kr. í 2016.

Í 2017 var luttøkugjaldið 11,6 mió. kr., og mett verður, at tað í 2018 verður 12,5 mió. kr.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	10.426	10.266	10.500	12.500	13.000	13.500
01. ES-granskingarskrá						
Útreiðslur	**10.426**	**10.266**	**10.500**	**12.500**	**13.000**	**13.500**
51. Tilskot til útlandið o.a.	10.426	10.266	10.500	12.500	13.000	13.500

7.23.6.25. Fiskivinnusavnið Beta (Stuðulsjáttan)

Endamálið við játtanini er at stuðla gransking í tilfarið frá partafelagnum Beta um felagsins virksemi, sum er savnað og skrásett í meira enn 20 ár.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	-	-	-	1.000	1.000	1.000
01. Fiskivinnusavnið Beta						
Útreiðslur	**-**	**-**	**-**	**1.000**	**1.000**	**1.000**
52. Tilskot til einstaklingar	-	-	-	1.000	1.000	1.000

7.23.7. Lestrarstuðul

7.23.7.04. Lestrarstuðul (Lógarbundin játtan)

01. Stuðulsveitingar. Studni varð settur á stovn, tá ið føroyingar yvirtóku fyrisitingina av Statens Uddannelsesstøtte í 1988, og játtanin á donsku fíggjarlógini varð flutt í "blokkin". Føroyingar gjørdu tá egnar reglur fyri, hvussu lestrarstuðulin skuldi veitast.

Galdandi lóg er løgtingslóg nr. 36 frá 3. mai 2007 um lestrarstuðul, sum seinast var broytt við løgtingslóg nr. 165 frá 20. desember 2017. Galdandi kunngerð er kunngerð nr. 107 frá 25. august 2011 um lestrarstuðul, sum seinast var broytt við kunngerð nr. 121 frá 18. august 2017.

Stuðul til lesandi í Føroyum
Stuðul verður veittur lesandi, ið ganga á miðnámsútbúgvingum, á stuttum vinnuførleikagevandi útbúgvingum, á hægri útbúgvingum og á framhaldsdeildarstigi fyri lesandi eldri enn 18 ár. Øll, ið eru 18 ár ella eldri, fáa vanliga lestrarstuðulin, um tey lúka treytirnar. Tey, ið verða 18 ár í stuðulsárinum, fáa stuðulin mánaðin eftir, at tey eru fylt 18 ár. Talið á lesandi, sum hava fingið lestrarstuðulsútgjald frá Studna til lestur í Føroyum í skúlaárinum 2016/2017, er umleið 3.120.

	um árið (kr.)	um mánaðin (kr.)
Lægri studningurin miðnám (11 mðr.)	20.218	1.838
Hægri studningurin miðnám (11 mðr.)	41.965	3.815
Studningur hægri útbúgvingar (12 mðr.)	51.780	4.315
Lán 11 mðr.	26.609	2.419
Lán 12 mðr.	29.028	2.419

Lesandi á hægri útbúgvingum og vinnuførleikagevandi útbúgvingum fáa lestrarstuðul í 12 mánaðir. Lesandi við børnum fáa harafturat 1.000 kr. um mánaðin fyri hvørt barnið. Eisini ber til at fáa barnsburðarfarloyvisstuðul í upp til eitt stuðulsár. Upphæddin er tann sama sum tann hægri studningurin.

Lesandi undir 18 ár fáa bókastudning, ið er 3.642 kr. Harumframt hava hesi lesandi møguleika at søkja um vistarhaldsstudning. Vistarhaldsstudningurin er 2.544 kr. um mánaðin.

Einsamallir uppihaldarar, ið fáa barnaískoyti frá Almannaverkinum, fáa harumframt 1.532 kr. um mánaðin.

Øll lesandi kunnu eisini søkja um ferðastudning innanoyggja. Meginreglan í skipanini er, at øll lesandi, ið hava fyri neyðini at nýta Strandfaraskip Landsins, ferðast ókeypis aftur og fram í skúla eina ferð um dagin, uttan mun til fjarstøðu frá skúlanum. Treytin fyri at fáa ferðastudningin er hin sama, ið er galdandi fyri at fáa lestrarstuðulin.

Stuðul til lesandi uttanlands - ÚSUN-skipanin
ÚSUN-skipanin er ein stuðulsskipan fyri føroyingar, ið taka eina hægri útbúgving uttan fyri Norðurlond. Stuðul verður veittur bæði til livikostnað og skúlagjald. 1. mars 2017 lósu umleið 140 føroyingar uttan fyri Norðurlond. Hesi lesandi fáa annaðhvørt stuðul frá Studna

ella frá SU (Statens Uddannelsesstøtte), men tað kemur ofta fyri, at annar stuðulin verður veittur frá Studna og hin frá SU.

Føroyingar, ið lesa uttan fyri Norðurlond, fáa stuðul til livikostnað frá SU í 4 ár. Stuðul til livikostnað kann harafturat fáast frá Studna í 2 ár. Lesandi undir ÚSUN-skipanini hava eisini møguleika at søkja um ferðastudning.

Harafturat finst ein stuðulsskipan, ið veitir stuðul til málslig fyrireikingarskeið til hægri útbúgvingar í ikki enskt talandi londum.

Stuðul til lesandi í Norðurlondum
Í serstøkum førum veitir Studni stuðul til lesandi í Norðurlondum.

Ferðastudningur
Endamálið við ferðastudninginum er at stuðla føroyingum, ið leita sær til onnur lond í útbúgvingarørindum, at koma heim til Føroya eftir lokna útbúgvingartíð. Hetta verður gjørt við at stuðla fíggjarliga soleiðis, at tey lesandi og børn teirra hava møguleika at koma heim til Føroya eina ferð um árið. Umleið 1.500 lesandi fingu studning eftir hesi skipan í skúlaárinum 2016/2017.

Verkætlanarstudningur
Endamálið við ferðastudninginum til verkætlanir er at stuðla føroyingum, ið lesa á hægri lærustovnum í Føroyum og uttanlands, í sambandi við størri verkætlanir, ið skulu gerast í øðrum landi enn í lestrarlandinum. Hetta verður gjørt við at veita studning til ferðina millum lestrarlandið og landið, har verkætlanin skal gerast. Umleið 220 lesandi fingu studning eftir hesi skipan í skúlaárinum 2016/2017.

03. Studningur til lærupláss. Landskassin endurrindar læruplássum ein part av lærlingaløninni, meðan lærlingur er í skúla.

04. Gjald fyri lærusáttmálar. Í sambandi við lærusáttmálar rinda læruplássini sambært lógini um yrkisútbúgvingar eitt umsitingargjald fyri hvønn góðkendan lærusáttmála, og sambært lógini um yrkisskeið rindar tann, ið søkir um góðkenning av yrkisskeiði, eitt umsitingargjald fyri hvørja góðkenning.

05. Ferðaendurgjald til lærupláss. Talan er um eitt fast gjald fyri ferðaútreiðslur til tey lærupláss, sum mugu senda lærlingar til Danmarkar, tí at skúlaundirvísingin, ið hoyrir til læruna, ikki kann fáast í Føroyum. Ætlanin er at broyta ferðaendurgjaldið, eins og gjørt er í sambandi við ferðastudingin til lesandi uttanlands.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	125.035	124.499	128.411	128.935	128.935	128.935
Inntøkujáttan	870	990	900	900	900	900
01. Stuðulsveitingar						
Útreiðslur	**112.675**	**111.684**	**113.781**	**115.000**	**115.000**	**115.000**
52. Tilskot til einstaklingar	112.675	111.684	113.781	115.000	115.000	115.000

03. Studningur til læruplass						
Útreiðslur	**11.362**	**11.877**	**13.586**	**13.161**	**13.161**	**13.161**
53. Stuðul til vinnu	11.362	11.877	13.586	13.161	13.161	13.161
04. Gjald fyri lærusáttmálar						
Inntøkur	**870**	**990**	**900**	**900**	**900**	**900**
62. Kravd gjøld, bøtur o.a.	*870*	*990*	*900*	*900*	*900*	*900*
05. Ferðaendurgjald til læruplass						
Útreiðslur	**998**	**938**	**1.044**	**774**	**774**	**774**
53. Stuðul til vinnu	998	938	1.044	774	774	774

7.23.7.05. Lestrarlán (Stuðulsjáttan)

Lesandi, sum eru 18 ár og eldri, kunnu taka lán frá Studna. Lestrarlán frá Studna renta við 2 % p.a. í útbúgvingartíðini og við 3 % p.a. yvir diskontuni eftir lokna útbúgving.

Tann lesandi byrjar vanliga at gjalda aftur lestrarlán og rentur eitt ár aftaná, at tað stuðulsárið er endað, har ið útbúgvingin er lokin ella steðgað. Studni ásetur afturgjaldsupphæddina í mun til samlaðu skuldina. Afturgjaldstíðin er í mesta lagi 15 ár. Hvørt gjaldið skal í minsta lagi vera 300 kr. um mánaðin.

Roknað verður við, at minni lántøka og meiri afturgjald av lánum gevur landskassanum 3 mió. kr. netto í inntøkum í 2018.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	11.748	10.487	8.900	8.900	8.900	8.900
Inntøkujáttan	12.052	13.796	11.900	11.900	11.900	11.900
01. Lestrarlán						
Útreiðslur	**11.748**	**10.487**	**8.900**	**8.900**	**8.900**	**8.900**
17. Avskrivingar o.a.	-	-	230	230	230	230
52. Tilskot til einstaklingar	163	63	-	-	-	-
57. Rentuútreiðslur o.a.	-	0	-	-	-	-
82. Útlán v.m.	11.585	10.424	8.670	8.670	8.670	8.670
Inntøkur	**12.052**	**13.796**	**11.900**	**11.900**	**11.900**	**11.900**
67. Rentuinntøkur og vinningsbýti	*2.043*	*1.937*	*1.600*	*1.600*	*1.600*	*1.600*
86. Afturgjaldan av útlánum v.m.	*10.009*	*11.859*	*10.300*	*10.300*	*10.300*	*10.300*

Mentan

7.24.1. Ymsar útreiðslur

7.24.1.04. Føroyahús í Danmark (Stuðulsjáttan)

01. Føroyahúsið í Keypmannahavn. Játtanin er til stuðul til rakstur av Føroyahúsinum í Keypmannahavn. Føroyahúsið í Keypmannahavn er eitt savningarstað fyri allar føroyingar í Danmark, eins og húsið er opið fyri øll onnur. Húsið er við til at varðveita sambandið millum føroyingar í Danmark, sum antin eru í lestrarørindum ella eru fluttir hagar at búgva. Hetta verður mett at vera týdningarmikið fyri føroyska málið og mentanina og fyri valið at flyta aftur til Føroyar. Játtanin fer til lønir, leigu og annan rakstur í sambandi við virksemið í húsinum.

Stuðulin til lønir, leigu og annan rakstur er 1.641 tús. kr. og verður veittur sum ein samlað játtan til virksemið, útgoldin hálvárliga. Roknskapur fyri virksemið hjá sjálvsognarstovninum verður latin Mentamálaráðnum eftir lokið fíggjarár.

02. Føroyahúsið í Århus. Játtanin er til stuðul til Føroyingafelagið í Århus. Stórt tal á øðrum føroyingafeløgum er eisini í Danmark og aðrastaðni, og stuðul verður vanliga ikki latin hesum feløgum. Sum eitt undantak verður stuðul latin Føroyingafelagnum í Århus, ið er annar stórur lestrarbýur fyri føroysk lesandi. Játtanin fer til lønir, leigu og annan rakstur í sambandi við virksemið í húsinum.

Stuðulin á 100 tús. kr. verður veittur sum ein samlað játtan til virksemið, útgoldin við ársbyrjan, tá ið roknskapur fyri virksemið hjá felagnum árið fyri verður latin Mentamálaráðnum eftir lokið fíggjarár.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	1.741	1.741	2.741	1.741	1.741	1.741
01. Føroyahúsið í Keypmannahavn						
Útreiðslur	**1.641**	**1.641**	**2.641**	**1.641**	**1.641**	**1.641**
51. Tilskot til útlandið o.a.	1.641	1.641	2.641	1.641	1.641	1.641
02. Føroyahúsið í Århus						
Útreiðslur	**100**	**100**	**100**	**100**	**100**	**100**
51. Tilskot til útlandið o.a.	100	100	100	100	100	100

7.24.1.05. Tiltøk fyri børn og ung (Stuðulsjáttan)

Mentamálaráðið fær umvegis Sp/f Ítróttarvedding 15 % av tillutaða føroyska partinum av veddingarpeninginum. Játtanin verður nýtt til verkætlanir og tiltøk til gagns fyri børn og ung til og við 25 ár. Talan kann vera um stuðul til virksemi, ið stimbrar og mennir listarlig, skapandi, mennandi og útinnandi evni hjá børnum og ungum, til upplýsandi og fyribyrgjandi tiltøk, søgulig og siðsøgulig tiltøk, íverksetarastuðul o.a. Leiðreglar um stuðulin eru at finna aftast í umsóknarblaðnum til barna- og ungdómsarbeiði, sum finst á www.mmr.fo.

Játtanin verður umsitin við heimild í Ll. nr. 60 frá 17. mai 2005 um stuðul til mentan og list v.m., sum broytt við Ll. nr. 45 frá 15. mai 2014. Stuðul verður játtaður eftir umsókn og

útgoldin frammanundan. Roknskapur verður latin Mentamálaráðnum, tá verkætlan ella tiltak er endað ella í seinasta lagi 1. mars eftir lokið fíggjarár.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	-57	1	0	0	0	0
01. Flyting frá P/F Ítróttarvedding						
Útreiðslur	**-2.037**	**-2.023**	**-1.580**	**-1.580**	**-1.580**	**-1.580**
54. Stuðul til annað virksemi	-2.037	-2.023	-1.580	-1.580	-1.580	-1.580
02. Tiltøk fyri børn og ung						
Útreiðslur	**1.980**	**2.024**	**1.580**	**1.580**	**1.580**	**1.580**
14. Keyp av vørum og tænastum	-	3	-	-	-	-
52. Tilskot til einstaklingar	-	18	-	-	-	-
54. Stuðul til annað virksemi	1.845	1.925	1.580	1.580	1.580	1.580
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	135	78	-	-	-	-

7.24.1.07. Málráðið (Rakstrarjáttan)

20. Málráðið. Játtanin er ætlað til rakstur av Málráðnum, ið er skipað við Ll. nr. 59 frá 15. mai 2012 um málráð, sum broytt við Ll. nr. 104 frá 13. juli 2017. Málráðið, sum avloysir Málnevndina, er málrøktar- og málmenningarstovnur, skipaður undir landsstýrinum og í virksemi sínum óheftur av politisku skipanini. Málráðið hevur til endamáls at røkja, menna og verja føroyska málið, at vegleiða, ráðgeva og gera niðurstøður í málspurningum og at áseta føroyska stavseting.

21. Staðarnavnanevndin. Játtanin er ætlað til rakstur av Staðarnavnanevndini, ið er sett sambært reglugerð fyri Staðarnavnanevndina frá 6. juli 2010. Staðarnavnanevndin ásetur form og stavseting av staðarnøvnum í almennari nýtslu, eitt nú á kortum, skeltum og í skúlabókum. Nevndin gevur harumframt myndugleikum ráð viðvíkjandi nøvnum á almennum støðum í Føroyum, so sum búsetingum, fyrisitingarligum eindum, samferðsluleiðum o.ø.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	1.074	1.086	1.115	1.115	1.115	1.115
Útreiðslur	1.087	1.170	1.115	1.115	1.115	1.115
Inntøkur	14	84	-	-	-	-
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	1.067	1.075	1.085	1.085	1.085	1.085
Útreiðslur	**1.081**	**1.159**	**1.085**	**1.085**	**1.085**	**1.085**
11. Lønir v.m.	967	1.058	1.011	1.011	1.011	1.011
14. Keyp av vørum og tænastum	96	40	25	25	25	25
15. Keyp av útbúnaði, netto	17	0	-	-	-	-
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	1	50	49	49	49	49
52. Tilskot til einstaklingar	-	12	-	-	-	-
Inntøkur	**14**	**84**	**-**	**-**	**-**	**-**
76. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	*14*	*84*	-	-	-	-

21. Staðarnavnanevndin						
Nettoútreiðsla	7	10	30	30	30	30
Útreiðslur	**7**	**10**	**30**	**30**	**30**	**30**
11. Lønir v.m.	7	10	30	30	30	30

Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Í lønarflokki 37 ella hægri	-	-	-	-	-	-
Onnur	2,0	2,0	2,0	2,0	2,0	2,0
Fulltíðarstørv	2,0	2,0	2,0	2,0	2,0	2,0
Lønarpartur (mió. kr.)	1,0	1,1	1,0	1,0	1,0	1,0

7.24.1.10. Orðabókagerð (Stuðulsjáttan)

Játtanin fer til at stuðla orðabókagerð úr og í fremmant mál og at gera orðabøkur tøkar á alnetinum. Játtanin verður umsitin við heimild í Ll. nr. 60 frá 17. mai 2005 um stuðul til mentan og list v.m., sum broytt við Ll. nr. 45 frá 15. mai 2014.

Stuðulin verður latin eftir umsókn og verður útgoldin frammanundan. Roknskapur verður latin Mentamálaráðnum, tá verkætlan er endað ella í seinasta lagi 1. mars eftir lokið fíggjarár.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	900	900	900	900	900	900
01. Orðabókaútgáva						
Útreiðslur	**900**	**900**	**900**	**900**	**900**	**900**
54. Stuðul til annað virksemi	700	880	900	900	900	900
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	200	20	-	-	-	-

7.24.1.13. Ymiskir studningar (Stuðulsjáttan)

Endamálið er at veita stuðul til norrønt samstarv, ungmannafeløg og mentan. Játtanirnar verða umsitnar við heimild í Ll. nr. 60 frá 17. mai 2005 um stuðul til mentan og list v.m., sum broytt við Ll. nr. 45 frá 15. mai 2014.

01. Útnorðursamstarv. Játtanin er til mentanarsamstarv millum Hetland, Ísland, Grønland og Føroyar umframt føroysk tiltøk á Norðurbryggjuni. Stuðul verður veittur til ávís átaksøki, sum eru tilskilað í samstarvsavtalum. Um játtan annars er tøk, er eisini møguligt at stuðla uttan um avtalur innan fyri endamálið við játtanini.

02. Norrøna felagið. Játtanin verður veitt Norrøna Felagnum í Føroyum, sum er landsfelag og hevur til endamáls at styðja og økja um norðurlendskt samstarv í felag við norrønu feløgini í hinum Norðurlondunum. Norrøna Felagið hevur 238 limir (pr. 31. desember 2015). Árligi stuðulin á 150 tús. kr. verður veittur sum ein samlað játtan til virksemið, og verður útgoldin frammanundan mánaðarliga. Roknskapur verður latin Mentamálaráðnum í seinasta lagi 1. mars eftir lokið fíggjarár.

03. Ungmannafeløg. Játtanin er til at stuðla ungdómsarbeiði til tess at menna ungdómin í øllum lutum. Stuðul verður m.a. veittur til upplýsing um útbúgvingarmøguleikar, sum FUR stendur fyri. Roknskapur verður latin Mentamálaráðnum í seinasta lagi 1. mars eftir lokið fíggjarár.

04. Stuðul til onnur endamál. Játtanin er ætlað til menning av mentan og list, til virknan stuðul til mentanarlív á bygd og í bý, so sum mentanarverkætlanir ella tiltøk. Talan kann vera um konsertir, framsýningar og framflyting av list innan- og uttanlands v.m. Stuðulin verður latin eftir umsókn. Lýst verður alment eftir umsóknum. Stuðulin verður sum høvuðsregla útgoldin, tá ið tiltakið verður sett í verk, og undantaksvís, tá ið roknskapur fyriliggur í seinasta lagi 1. mars eftir lokið fíggjarár.

05. Listafólkasamband Føroya. Játtanin verður veitt til Listafólkasamband Føroya, ið er meginfelag fyri 11 limafeløg. Játtanin verður nýtt til skrivstovuhald, ráðgeving og aðrar tænastur til føroysk listafólk. Árligi stuðulin á 380 tús. kr. verður veittur sum ein samlað játtan til virksemið, og verður útgoldin frammanundan mánaðarliga. Roknskapur verður latin Mentamálaráðnum í seinasta lagi 1. mars eftir lokið fíggjarár.

06. Stuðul til listafólk. Játtanin er ætlað listafólkum at nema sær útbúgvingar, til ferðastuðul v.m. Stuðulin á 100 tús. kr. verður latin eftir umsókn. Lýst verður alment eftir umsóknum. Stuðulin verður sum høvuðsregla útgoldin, tá ið tiltakið verður sett í verk og undantaksvís, tá ið roknskapur fyriliggur í seinasta lagi 1. mars eftir lokið fíggjarár.

07. Skótarørsla. Játtanin fer til Føroya Skótaráð, ið er samstarvsráð fyri skótasamskipanirnar í Føroyum. Árligi stuðulin á 500 tús. kr. verður veittur sum ein samlað játtan til virksemið, útgoldin frammanundan hvønn ársfjórðing. Roknskapur verður latin Mentamálaráðnum í seinasta lagi 1. mars eftir lokið fíggjarár.

08. Farlit. Játtanin fer til at menna føroyskar bókmentir við m.a. at skipa fyri átøkum fyri týðarar og forløg og við luttøku á altjóða bókamessum o.ø. útflutningsfremjandi tiltøkum. Árligi stuðulin á 500 tús. kr. verður veittur sum ein samlað játtan til virksemið, útgoldin hálvárliga til Bókamiðsøluna, har Farlit er staðsett. Roknskapur verður latin Mentamálaráðnum í seinasta lagi 1. mars eftir lokið fíggjarár.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	2.441	2.271	2.900	3.000	3.000	3.000
01. Útnorðursamstarv						
Útreiðslur	**200**	**200**	**300**	**300**	**300**	**300**
51. Tilskot til útlandið o.a.	200	200	300	300	300	300
02. Norrøna felagið						
Útreiðslur	**150**	**150**	**150**	**150**	**150**	**150**
54. Stuðul til annað virksemi	150	150	150	150	150	150
03. Ungmannafeløg						
Útreiðslur	**350**	**350**	**350**	**350**	**350**	**350**
54. Stuðul til annað virksemi	350	350	350	350	350	350

04. Stuðul til onnur endamál						
Útreiðslur	**874**	**715**	**720**	**720**	**720**	**720**
52. Tilskot til einstaklingar	35	8	-	-	-	-
54. Stuðul til annað virksemi	819	693	720	720	720	720
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	21	14	-	-	-	-
05. Listafólkasamband Føroya (LISA)						
Útreiðslur	**380**	**380**	**380**	**380**	**380**	**380**
54. Stuðul til annað virksemi	380	380	380	380	380	380
06. Stuðul til listafólk						
Útreiðslur	**87**	**76**	**100**	**100**	**100**	**100**
52. Tilskot til einstaklingar	72	50	100	100	100	100
54. Stuðul til annað virksemi	16	26	-	-	-	-
07. Skótarørsla						
Útreiðslur	**400**	**400**	**400**	**500**	**500**	**500**
54. Stuðul til annað virksemi	400	400	400	500	500	500
08. Farlit						
Útreiðslur	**-**	**-**	**500**	**500**	**500**	**500**
54. Stuðul til annað virksemi	-	-	500	500	500	500

7.24.1.26. LOA-grunnurin (Stuðulsjáttan)

Í apríl 2010 var samstarvsavtala gjørd við Lokale- og Anlægsfonden, LOA-grunnin, soleiðis at føroyingar kunnu søkja um stuðul til íløgur innan ítrótt og mentan. Við avtaluni við LOA ber til at søkja um stuðul ella lán til størri íløgur í ítróttaverkløg, mentanarhús, sjónleikarhús, konserthús, verkløg til skótar, biografar, tónleika- og dansiverkløg o.t. at nýta til almannagagnlig endamál. Tey, sum kunnu søkja, eru feløg, stovnar, grunnar og kommunur, sum ynskja at byggja og reka verkløg uttan fíggjarlig egináhugamál.

LOA-grunnurin er danskur grunnur, ið verður fíggjaður við 8 % av donsku veddingarpengunum, harumframt hevur grunnurin eitt stovnsfæ, sum donsk ítróttarfeløg settu í grunnin, tá ið hann var stovnaður í 1993. Frá 2017 er árliga limagjaldið til LOA-grunnin ásett til 520 túsund kr.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	536	511	550	520	520	520
01. Limagjald						
Útreiðslur	**536**	**511**	**550**	**520**	**520**	**520**
51. Tilskot til útlandið o.a.	536	511	550	520	520	520

7.24.2. Skapandi og útinnandi virksemi

7.24.2.01. Tónleikur, sangur og føroyskur dansur (Stuðulsjáttan)

Játtanin verður umsitin við heimild í Ll. nr. 60 frá 17. mai 2005 um stuðul til mentan og list v.m., sum broytt við Ll. nr. 45 frá 15. mai 2014.

01. Tónleikur og sangur. Játtanin á 365 tús. kr. er ætlað til at stuðla og menna tónleik og sang í Føroyum. Stuðul verður latin meginfeløgum, ið virka á tónleikaøkinum. Kórsamband Føroya, Konsertfelagið, Meginfelag fyri Føroysk Hornorkestur, Aldubáran og Felagið Føroysk Tónaskøld hava fingið stuðul av hesi undirkontu. Roknskapur verður latin Mentamálaráðnum í seinasta lagi 1. mars eftir lokið fíggjarár.

Játtanin er hækkað við 50 tús. kr. í 2018. Hækkingin er ætlað at stuðla Tórshavnar Bigband.

02. Føroya Symfoniorkestur. Játtanin á 1.700 tús. kr. er ætlað til at stuðla Symfoniorkestrinum. Stuðulin verður veittur sum ein samlað játtan til virksemið, útgoldin frammanundan mánaðarliga. Partur av játtanini er ætlaður til at styrkja barna- og ungdómsarbeiðið, m.a. barnakonsertir, og annars eisini konsertir kring landið. Roknskapur verður latin Mentamálaráðnum í seinasta lagi 1. mars eftir lokið fíggjarár.

03. Føroyskur dansur. Játtanin á 500 tús. kr. er ætlað til at varðveita og menna føroyska dansin kring landið og verður flutt Landsfelagnum fyri føroyskan dans, Sláið Ring. Stuðulin er eisini í stóran mun ætlaður barnadansitiltøkum. Stuðulin verða útgoldin frammanundan mánaðarliga. Roknskapur verður latin Mentamálaráðnum í seinasta lagi 1. mars eftir lokið fíggjarár.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	2.115	2.515	2.515	2.565	2.565	2.565
01. Tónleikur og sangur						
Útreiðslur	**215**	**315**	**315**	**365**	**365**	**365**
54. Stuðul til annað virksemi	215	315	315	365	365	365
02. Føroya Symfoniorkestur						
Útreiðslur	**1.500**	**1.700**	**1.700**	**1.700**	**1.700**	**1.700**
54. Stuðul til annað virksemi	1.500	1.700	1.700	1.700	1.700	1.700
03. Føroyskur dansur						
Útreiðslur	**400**	**500**	**500**	**500**	**500**	**500**
54. Stuðul til annað virksemi	400	500	500	500	500	500

7.24.2.03. Filmur (Stuðulsjáttan)

Játtanin er ætlað til at stuðla einari ungari filmsvinnu í framgongd.

Játtanin verður umsitin við heimild í Ll. nr. 60 frá 17. mai 2005 um stuðul til mentan og list v.m., sum broytt við Ll. nr. 45 frá 15. mai 2014. Stuðul verður játtaður eftir umsókn og sum høvuðsregla útgoldin, tá ið verkætlanin verður sett í verk. Lýst verður alment eftir umsóknum. Roknskapur verður latin Mentamálaráðnum, tá verkætlanin er endað ella í seinasta lagi 1. mars eftir lokið fíggjarár.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	700	1.500	2.000	2.300	2.300	2.300
01. Filmur						
Útreiðslur	**700**	**1.500**	**2.000**	**2.300**	**2.300**	**2.300**
52. Tilskot til einstaklingar	-	492	-	-	-	-
54. Stuðul til annað virksemi	700	1.008	2.000	2.300	2.300	2.300

7.24.2.04. Mentanargrunnurin (Stuðulsjáttan)

Mentanargrunnur Landsins virkar við heimild í Ll. nr. 84 frá 17. mai 2000 um Mentanargrunn Landsins. Endamálið við virksemi grunsins er at styðja starv fyri føroyskum mentanarlívi; føroyskum máli, bókmentum, list, vísindum og øðrum mentanarmálum bæði hjá leikum og lærdum.

Grunnurin skal serliga stuðla tiltøkum og verkætlanum, sum kveikja og menna føroyska myndlist, tónleik og tónlist, bókmentir, sjónleik og aðra list, sum kann javnmetast við hesar listagreinir.

Í 2018 er játtanin hækkað við 1,1 mió. kr. til nýggju skipanina við listafólkalønum. Kunngerð nr. 109 frá 21. september 2000 um Mentanargrunn Landsins er dagførd til at fevna um nýggju skipanina. Lýst verður eftir listafólkum.

Stuðul úr Mentanargrunninum verður latin eftir umsókn og verður útgoldin, tá vissa er fingin fyri, at verkætlanin/tiltakið verður framt. Starvslønir og listafólkalønir verða útgoldnar mánaðarliga.

Stuðulsmóttakari skal lata nevndini fyri Mentanargrunnin roknskap og frágreiðing, eftir at tiltakið er av, tó í seinasta lagi 1. apríl árið eftir játtanarárið. Henda áseting er eisini treyt fyri nýggjari tilsøgn. Gongur verkætlan yvir fleiri ár, verður frágreiðing at meta sum ávegisfrágreiðing, sum verður latin Mentanargrunninum hvørt ár. Tey, sum fáa starvsløn ella listafólkaløn, skulu bert lata inn frágreiðing ella ávegisfrágfreiðing.

Verður ikki øll játtanin nýtt á undirkontu 02. Listafólkalønir og undirkontu 03. Týðaragrunnur Landsins, kann avlopið verða nýtt sum stuðul sambært undirkontu 01. Mentanargrunnurin.

01. Mentanargrunnurin. Henda játtan er ætlað til starvslønir, íverksetarastuðul og annars til stuðul til mentanarlig tiltøk og verkætlanir innan fyri endamál grunsins.

02. Listafólkalønir. Henda játtan er ætlað til at seta listafólk í áramálssett starv. Kunngerð nr. 109 frá 21. september 2000 um Mentanargrunn Landsins er í hesum sambandi dagførd til at fevna um nýggju skipanina.

03. Týðaragrunnur Landsins. Henda játtan er ætlað til týðing úr føroyskum til fremmand mál, eins og til týðing av fremmandum málum til føroyskt.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	6.194	6.691	7.800	8.900	8.900	8.900
01. Mentanargrunnurin						
Útreiðslur	**5.746**	**6.200**	**6.200**	**6.200**	**6.200**	**6.200**
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	5.746	6.200	6.200	6.200	6.200	6.200
02. Listafólkalønir						
Útreiðslur	**-**	**-**	**1.100**	**2.200**	**2.200**	**2.200**
52. Tilskot til einstaklingar	-	-	1.100	2.200	2.200	2.200
03. Týðaragrunnur Landsins						
Útreiðslur	**448**	**491**	**500**	**500**	**500**	**500**
14. Keyp av vørum og tænastum	0	-	-	-	-	-
52. Tilskot til einstaklingar	191	250	500	500	500	500
53. Stuðul til vinnu	-	90	-	-	-	-
54. Stuðul til annað virksemi	247	150	-	-	-	-
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	10	-	-	-	-	-

7.24.2.05. Umsiting av Mentanargrunninum (Rakstrarjáttan)

Mentanargrunnur Landsins hevur egna umsiting og umsitur sjálvstøðugt játtanina til grunnin. Rakstrarjáttanin er til hetta endamálið.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	452	509	479	479	479	479
Útreiðslur	452	509	479	479	479	479
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	452	509	479	479	479	479
Útreiðslur	**452**	**509**	**479**	**479**	**479**	**479**
11. Lønir v.m.	321	353	363	363	363	363
14. Keyp av vørum og tænastum	128	137	65	65	65	65
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	2	18	51	51	51	51
52. Tilskot til einstaklingar	0	0	-	-	-	-

7.24.2.06. Leiklist (Rakstrarjáttan)

20. Vanligt virksemi. Játtanin er til at reka Tjóðpall Føroya. Tjóðpallur Føroya er sjálvstøðugur almennur stovnur, ið virkar sambært Ll. nr. 68 frá 2. mai 2003 um Tjóðpall Føroya og stuðul til leiklist v.m.

Tjóðpallur Føroya skal í virksemi sínum leggja dent á føroysk verk á dygdargóðum listaligum støði, og stovnurin skal framføra klassisk so væl sum nútímans altjóða verk. Harafturat skal stovnurin geva borgarunum í øllum landinum eitt breitt og dygdargott tilboð av leiklist og sjónleiki so væl sum aðrari palllist, tryggja sjónleikarum, dansarum og øðrum leikhústarvsfólki hóskandi arbeiðsmøguleikar til tess at menna yrkisførleikar teirra, skipa fyri leiklistaligum útbúgvingum og eftirútbúgvingum, og fremja og menna yrkis- og áhugaleiklistina í Føroyum.

21. Meginfelag áhugaleikara Føroya. Játtanin er stuðul til áhugaleiklist. Stuðulin verður latin Meginfelag Áhugaleikara Føroya, sum umsitur játtanina. Stuðulin verður útgoldin frammanundan hvønn ársfjórðing. Roknskapur verður latin Mentamálaráðnum í seinasta lagi 1. mars eftir lokið fíggjarár.

22. Stuðul til yrkisleiklist. Játtanin er stuðul til aðra yrkisleiklist. Játtanin kann eisini nýtast til førleikamenning. Stuðulin verður latin eftir umsókn. Lýst verður alment eftir umsóknum. Leiklistaráðið viðger umsóknirnar og ger tilmæli til landsstýriskvinnuna um býtið av játtanini. Stuðulin verður sum høvuðsregla útgoldin, tá ið tiltakið verður sett í verk og undantaksvís, tá ið roknskapur fyriliggur. Roknskapur verður latin Mentamálaráðnum í seinasta lagi 1. mars eftir lokið fíggjarár.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	5.796	5.908	6.061	6.161	6.161	6.161
Útreiðslur	6.434	6.833	6.909	7.009	7.009	7.009
Inntøkur	638	925	848	848	848	848
20. Tjóðpallur Føroya						
Nettoútreiðsla	4.596	4.708	4.661	4.761	4.761	4.761
Útreiðslur	**5.234**	**5.633**	**5.509**	**5.609**	**5.609**	**5.609**
11. Lønir v.m.	3.215	3.678	4.323	4.423	4.423	4.423
14. Keyp av vørum og tænastum	1.577	1.759	886	886	886	886
15. Keyp av útbúnaði, netto	58	8	50	50	50	50
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	384	243	250	250	250	250
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	0	0	-	-	-	-
53. Stuðul til vinnu	-	-56	-	-	-	-
57. Rentuútreiðslur o.a.	-	0	-	-	-	-
Inntøkur	**638**	**925**	**848**	**848**	**848**	**848**
21. Søla av vøru og tænastum	*638*	*925*	*848*	*848*	*848*	*848*
21. Meginfelag áhugaleikara Føroya						
Nettoútreiðsla	750	750	750	750	750	750
Útreiðslur	**750**	**750**	**750**	**750**	**750**	**750**
54. Stuðul til annað virksemi	750	750	750	750	750	750
22. Stuðul til yrkisleiklist						
Nettoútreiðsla	450	450	650	650	650	650
Útreiðslur	**450**	**450**	**650**	**650**	**650**	**650**
54. Stuðul til annað virksemi	450	450	650	650	650	650

Starvsfólkayvirlit: 20 Tjóðpallur Føroya

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Í lønarflokki 37 ella hægri	-	-	-	-	-	-
Onnur	6,3	7,5	7,5	7,5	7,5	7,5
Fulltíðarstørv	6,3	7,5	7,5	7,5	7,5	7,5
Lønarpartur (mió. kr.)	3,2	3,7	4,3	4,4	4,4	4,4

7.24.2.09. Tjóðleikhús (Løgujáttan)

Sum ein liður í at lyfta føroyska leiklist frameftir er avgjørt at byggja eitt nýtt Tjóðleikhús, sum skal tryggja yrkisleiklistini tíðarhóskandi hølisumstøður.

Á løgtingsfíggjarlógini fyri 2011 vóru játtaðar 5 mió. kr., sum vóru ætlaðar til at fyrireika og fara undir at byggja tjóðleikhús. Bygginevnd var sett í september 2013. Nevndin hevur síðani arbeitt við at fyrireika eina byggiskrá. Í februar 2015 boðaði Tórshavnar kommuna frá, at staðsetingin verður á Skálatrøð, og síðani hevur verið arbeitt við at gera byggiskránna lidna í 2017.

Í 2018 verður farið undir at fyrireika sjálva byggingina, og tí verða játtaðar 3 mió. kr. í 2018, 5 mió. kr. í 2019, 16 mió. kr. í 2020 og 35 mió. kr. í 2021.

Átekning

Landsstýriskvinnuni verður heimilað at flyta óbrúkta játtan til seinni fíggjarár.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	32	185	-	3.000	5.000	16.000
10. Tjóðleikhús						
Útreiðslur	**32**	**185**	**-**	**3.000**	**5.000**	**16.000**
11. Lønir v.m.	10	-	-	-	-	-
14. Keyp av vørum og tænastum	4	27	-	-	-	-
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	-14	-110	-	3.000	5.000	16.000
31. Bygging og løguframleiðsla	32	185	-	-	-	-
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	-	83	-	-	-	-

7.24.2.10. Norðurlandahúsið (Stuðulsjáttan)

Norðurlandahúsið í Føroyum er mentanarstovnur, sum virkar fyri norðurlendskari mentan í Føroyum, fremur føroysk mentanartiltøk í Norðurlondum og stuðlar og fremur føroysk tiltøk í Føroyum.

Árligi stuðulin verður veittur sum ein samlað játtan til virksemið, útgoldin frammanundan hvønn ársfjórðing. Roknskapur verður latin Mentamálaráðnum eftir lokið fíggjarár.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	2.300	1.700	1.700	1.700	1.700	1.700
01. Norðurlandahúsið						
Útreiðslur	**2.300**	**1.700**	**1.700**	**1.700**	**1.700**	**1.700**
54. Stuðul til annað virksemi	2.300	1.700	1.700	1.700	1.700	1.700

7.24.2.13. Heiðursgávur til mentafólk (Stuðulsjáttan)

Endamálið við játtanini er at heiðra listafólk. Játtanin verður umsitin við heimild í Ll. nr. 60 frá 17. mai 2005 um stuðul til mentan og list v.m., sum broytt við Ll. nr. 45 frá 15. mai 2014.

Landsstýriskvinnan hevur sett virðislønarnevnd at gera tilmæli um, hvør skal fáa virðisløn og sømdargávu. Latin verður Mentanarvirðisløn Landsins, sum er á 150 tús. kr., og Heiðursgáva Landsins, sum er á 75 tús. kr. Til tess at kunna fáa Mentanarvirðisløn Landsins, skal virðislønarevnið hava skapað listaverk á høgum støði. Til tess at fáa Heiðursgávu Landsins, skal virðislønarevnið hava virkað til frama fyri mentanarlig virði, sum hava týdning fyri føroysku mentanina, list og mentanararv. Landsstýriskvinnan ger av, nær á árinum og á hvønn hátt virðislønirnar verða handaðar.

Eisini verða latnar árligar sømdargávur til listafólk, so leingi tey eru á lívi. Til tess at fáa sømdargávu skal listafólkið hava útint listarligt avrik, ið verður mett at hava týdning fyri samtíð og framtíð. Upphæddin er vanliga 20 tús. kr. um árið. Harafturat kunnu aðrar heiðursgávur latast listafólki, mentafólki ella felagsskapi eftir landsstýriskvinnunnar egnu avgerð.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	495	495	500	500	500	500
01. Sømdarpeningur						
Útreiðslur	**495**	**495**	**500**	**500**	**500**	**500**
52. Tilskot til einstaklingar	495	495	500	500	500	500

7.24.3. Mentanararvur

7.24.3.03. Søvn landsins (Rakstrarjáttan)

Í tíðarskeiðnum 2011 til 2017 vóru søvnini skipað í Søvn Landsins við einum felags stjóra. Á vári 2017 var avgerð tikin um at skilja søvnini sundur í tríggjar sjálvsstøðugar stovnar: Tjóðsavnið (Fornminnissavnið og Náttúrugripasavnið), Landsskjalasavnið og Landsbókasavnið.

Í 2018 er samlaða játtanin til søvnini hækkað við 600 tús. kr.

21. Koltursætlanin. Málsøkið Koltur var í 2013 flutt til § 7 Mentamál. Játtanin er løgd undir Tjóðsavnið, sum umsitur Koltur. Í 2018 eru 750 tús. kr. av játtanini ætlaðar til rakstur innan karmarnar av eini antikvariskari serskipan, ið verður gjørd fyri Koltur.

Hin parturin av játtanini er serstudningur játtaður úr Búnaðargrunninum. Við heimild í Ll. nr. 34 frá 7. mai 2013 um Búnaðargrunn, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 80 frá 22. mai 2015, verða sum serstudningur úr Búnaðargrunninum til at fyriskipa og menna eina antikvariska serskipan í Koltri avsettar 5 mió. kr. at nýta lutvíst tey næstu árini. Upphæddin skal brúkast til at fyriskipa og menna antikvarisku serskipanina og til íløgur í endurreising og viðlíkahald av bygningum í Koltri, umframt íløgur í neyðug rakstrargøgn í sambandi við stovnsetan av antikvarisku skipanini. Eftir ætlan skal arbeiðið við at fyriskipa og menna ta antikvarisku serskipanina halda á fram til 2020. Upphæddin úr Búnaðargrunninum verður flutt landskassanum á høvuðskontu 55.33.2.12. Niðurlaðing av Búnaðargrunninum sambært uppgerð hjá Tjóðsavninum fyri staðfesta árliga nýtslu fram til 2020. Í 2018 verður mett, at 700 tús. kr. verða nýttar til endamálið.

22. Tjóðsavnið. Tjóðsavnið virkar sambært Ll. nr. 32 frá 2. mai 1952 um fornminnissavn, við seinni broytingum og sambært Ll. nr. 26 frá 17. august 1955 um Føroya Náttúrugripasavn, við seinni broytingum. Høvuðsuppgávurnar hjá Tjóðsavninum eru at reka musealt virksemi gjøgnum innsavning, varðveiting, gransking, miðlan og framsýning av náttúruarvi og mentanararvi Føroya. Tjóðsavnið er umboðað í Yvirfriðingarnevndini. Harumframt umfata uppgávurnar umsiting av fornminna- og bygningafriðingarlógini, lógini um fornminni í sjónum, fakligt eftirlit við mentanarsøguligum bygdasøvnum, átekning av mentanarsøguligum skipum, antikvariska ráðgeving í sambandi við bygningar fólkakirkjunnar og loyvisumsiting í sambandi við fuglaveiðu.

Ein partur av játtanini er til at reka friðaðar landsognir, sum álagdar eru stovninum at umsita, umframt at samsýna fornminnisnevnd og lata stuðul til friðað hús og fornminni, sum ikki eru landsogn.

23. Landsskjalasavnið. Landsskjalasavnið virkar sambær Ll. nr. 49 frá 28. apríl 1992. Landsskjalasavnið hevur tvær høvuðsuppgávur, sum eru at innsavna, skipa, varðveita, lýsa og taka sær av tí tilfari, sum almennir stovnar sambært lóggávu skulu avhenda til savnið, og at hava eftirlit við journalum og arkivum hjá almennum stovnum og ráðgeva teimum. Landsskjalasavnið innsavnar harumframt privat skjøl, sum hava granskingarligan ella mentanarligan týdning. Samstundis er tað uppgáva Landsskjalasavnsins at hava savnindi tøk til almenna fyrisiting og gransking og at hava egna gransking. Landsskjalasavnið samstarvar við útlendsk skjalasøvn, serliga Statens Arkiver í Danmark, sum eisini hava týðandi savnindi úr Føroyum.

24. Landsbókasavnið. Landsbókasavnið er tjóðbókasavn og virkar sambært Ll. nr. 79 frá 8. mai 2001 um bókasøvn, við seinni broytingum. Landsbókasavnið hevur sum høvuðsbókasavn til uppgávu at fremja útbreiðslu av kunnleika, vitan og upplýsing í landinum. Landsbókasavnið skal savna allar føroyskar bókmentir og í tann mun tað er gjørligt allar bókmentir, sum viðvíkja Føroyum. Tað hevur eina handritadeild við handritum, ið lýsa føroyska bókmentasøgu, mentan og siðsøgu. Landsbókasavnið umsitur skylduavhendingina, sum er áløgd teimum, ið framleiða eintøk til útgávu, ger føroysku tjóðbókaskránna og er føroysk ISBN-skrivstova. Landsbókasavnið hevur eftirlit við fólkabókasøvnunum og tekur sær m.a. av bókakeypi, klárgering og skráseting til bókasøvn, sum ikki sjálv hava útbúgvið fólk til hetta. Landsbókasavnið veitir vísindabókasavnstænastu í samstarvi við vísindaligar stovnar og útbúgvingarstovnar. Ljóðbókatænastan liggur hjá Landsbókasavninum, ið hevur ábyrgd av at reka og menna eina føroyska ljóðbókatænastu. Hildið verður fram við virkseminum, har higartil umleið 25 nýggir ljóðbókatitlar hava verið framleiddir árliga. Talan er bæði um fagurbókmentir og yrkisbøkur, skúlabøkur og barna- og ungdómsbøkur. Miðað verður eftir, at ljóðbøkurnar verða atkomuligar á netinum.

40. Tjóðsavnið, inntøkufíggjað virksemi. Tjóðsavnið hevur ymiskt inntøkufíggjað virksemi.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	26.043	26.736	29.803	30.403	30.403	30.403
Útreiðslur	29.641	28.217	30.668	31.235	31.235	31.235
Inntøkur	3.598	1.482	865	832	832	832
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	25.052	26.015	28.353	-	-	-
Útreiðslur	**25.663**	**26.777**	**28.901**	**-**	**-**	**-**
11. Lønir v.m.	19.081	19.617	22.198	-	-	-
14. Keyp av vørum og tænastum	4.215	4.725	5.080	-	-	-
15. Keyp av útbúnaði, netto	883	1.531	699	-	-	-
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	626	459	531	-	-	-
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	-14	0	-	-	-	-
31. Bygging og løguframleiðsla	27	-	276	-	-	-
54. Stuðul til annað virksemi	782	350	75	-	-	-
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	63	95	42	-	-	-
Inntøkur	**611**	**762**	**548**	**-**	**-**	**-**
21. Søla av vøru og tænastum	*507*	*516*	*494*	-	-	-
29. Ymsar rakstrarinntøkur	*33*	*39*	*39*	-	-	-
63. Vanligar flytingarinntøkur	*11*	*33*	-	-	-	-
76. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	*60*	*174*	*15*	-	-	-
21. Koltursætlanin						
Nettoútreiðsla	982	791	1.450	1.450	1.450	1.450
Útreiðslur	**1.098**	**953**	**1.567**	**1.567**	**1.567**	**1.567**
11. Lønir v.m.	639	555	616	616	616	616
14. Keyp av vørum og tænastum	286	265	216	216	216	216
15. Keyp av útbúnaði, netto	168	112	15	15	15	15
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	6	11	720	720	720	720
31. Bygging og løguframleiðsla	-	9	-	-	-	-
Inntøkur	**117**	**162**	**117**	**117**	**117**	**117**
21. Søla av vøru og tænastum	*117*	*162*	*117*	*117*	*117*	*117*
22. Tjóðsavnið						
Nettoútreiðsla	-	-	-	15.590	15.590	15.590
Útreiðslur	**-**	**-**	**-**	**15.916**	**15.916**	**15.916**
11. Lønir v.m.	-	-	-	12.224	12.224	12.224
14. Keyp av vørum og tænastum	-	-	-	3.008	3.008	3.008
15. Keyp av útbúnaði, netto	-	-	-	191	191	191
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	-	-	-	437	437	437
54. Stuðul til annað virksemi	-	-	-	42	42	42
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	-	-	-	14	14	14
Inntøkur	**-**	**-**	**-**	**326**	**326**	**326**
21. Søla av vøru og tænastum	-	-	-	*296*	*296*	*296*
76. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	-	-	-	*30*	*30*	*30*

23. Landsskjalasavnið

Nettoútreiðsla	-	-	-	4.010	4.010	4.010
Útreiðslur	**-**	**-**	**-**	**4.016**	**4.016**	**4.016**
11. Lønir v.m.	-	-	-	3.098	3.098	3.098
14. Keyp av vørum og tænastum	-	-	-	504	504	504
15. Keyp av útbúnaði, netto	-	-	-	140	140	140
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	-	-	-	274	274	274
Inntøkur	**-**	**-**	**-**	**6**	**6**	**6**
21. Søla av vøru og tænastum	-	-	-	*6*	*6*	*6*

24. Landsbókasavnið

Nettoútreiðsla	-	-	-	9.353	9.353	9.353
Útreiðslur	**-**	**-**	**-**	**9.536**	**9.536**	**9.536**
11. Lønir v.m.	-	-	-	7.522	7.522	7.522
14. Keyp av vørum og tænastum	-	-	-	1.296	1.296	1.296
15. Keyp av útbúnaði, netto	-	-	-	395	395	395
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	-	-	-	323	323	323
Inntøkur	**-**	**-**	**-**	**183**	**183**	**183**
21. Søla av vøru og tænastum	-	-	-	*145*	*145*	*145*
29. Ymsar rakstrarinntøkur	-	-	-	*38*	*38*	*38*

40. Inntøkufíggjað virksemi

Nettoútreiðsla	9	-70	0	0	0	0
Útreiðslur	**2.879**	**487**	**200**	**200**	**200**	**200**
11. Lønir v.m.	2.481	346	166	166	166	166
14. Keyp av vørum og tænastum	282	32	34	34	34	34
15. Keyp av útbúnaði, netto	32	7	-	-	-	-
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	20	-	-	-	-	-
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	63	71	-	-	-	-
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	-	31	-	-	-	-
Inntøkur	**2.870**	**557**	**200**	**200**	**200**	**200**
21. Søla av vøru og tænastum	*2.525*	*83*	-	-	-	-
63. Vanligar flytingarinntøkur	*-4*	*-33*	-	-	-	-
76. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	*349*	*507*	*200*	*200*	*200*	*200*

Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Í lønarflokki 37 ella hægri	1,0	1,0	1,0	-	-	-
Onnur	40,6	40,6	42,6	-	-	-
Fulltíðarstørv	41,6	41,6	43,6	-	-	-
Lønarpartur (mió. kr.)	19,1	19,6	22,2	-	-	-

Starvsfólkayvirlit: 21 Koltursætlanin

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Í lønarflokki 37 ella hægri	-	-	-	-	-	-
Onnur	1,3	1,3	1,3	1,3	1,3	1,3
Fulltíðarstørv	1,3	1,3	1,3	1,3	1,3	1,3
Lønarpartur (mió. kr.)	0,6	0,6	0,6	0,6	0,6	0,6

Starvsfólkayvirlit: 22 Tjóðsavnið

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Í lønarflokki 37 ella hægri	-	-	-	1,0	1,0	1,0
Onnur	-	-	-	19,4	19,4	19,4
Fulltíðarstørv	-	-	-	20,4	20,4	20,4
Lønarpartur (mió. kr.)	-	-	-	12,2	12,2	12,2

Starvsfólkayvirlit: 23 Landsskjalasavnið

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Í lønarflokki 37 ella hægri	-	-	-	1,0	1,0	1,0
Onnur	-	-	-	5,4	5,4	5,4
Fulltíðarstørv	-	-	-	6,4	6,4	6,4
Lønarpartur (mió. kr.)	-	-	-	3,1	3,1	3,1

Starvsfólkayvirlit: 24 Landsbókasavnið

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Í lønarflokki 37 ella hægri	-	-	-	1,0	1,0	1,0
Onnur	-	-	-	15,8	15,8	15,8
Fulltíðarstørv	-	-	-	16,8	16,8	16,8
Lønarpartur (mió. kr.)	-	-	-	7,5	7,5	7,5

7.24.3.06. Søvn landsins (Stuðulsjáttan)

Tjóðsavnið umsitur stuðulin til bygdasøvn, onnur listasøvn, sjósavnið og stuðulsjáttanina Mentanarsøgulig skip, sum er ein verndar- og stuðulsskipan til mentanarsøgulig skip, við tí endamáli at hava tey siglandi í Føroyum. Landsbókasavnið umsitur stuðulin til fólka- og skúlabókasøvn. Landsskjalasavnið umsitur játtanina til skjalasøvn.

Arbeitt verður við at dagføra lóggávuna fyri stuðli á savnsøkinum.

01. Bygdasøvn. Lógargrundarlagið er Ll. nr. 17 frá 9. mai 1972, seinast broytt við Ll. nr. 88 frá 17. juli 1986, um bygdasøvn við mentanarsøguligum virksemi. Í bygdasøvnunum verður varðveitt ymiskt søguligt tilfar, sum hevur týdning fyri bygdirnar. Játtanin er eisini til serlig tiltøk hjá landsantikvarinum í sambandi við bygdasavnsvirksemið og ásetingarnar í bygdasavnslógini.

Góðkendu bygdarsøvnini eru:

- Vágs Sóknar Bygdasavn
- Porkeris Bygdarsavn
- Tvøroyrar Bygda- og Sjóvinnusavn
- Fornminnisavnið á Mýri, Hovi
- Sunnbiar Sóknar Bygdasavn
- Sands Bygdasavn
- Skopunar Bygdasavn

- Skúvoyar Bygdasavn
- Sandavágs Bygdasavn
- Miðvágs Bygdasavn
- Sørvágs Bygdasavn
- Nólsoyar Bygdarsavn
- Vestmanna Bygdarsavn
- Kollafjarðar Bygdarsavn
- Tórshavnar Býarsavn
- Sjóvar Fornminnissavn
- Eiðis Bygdasavn
- Bygdarsavnið "Gamli Skúli", Leirvík
- Gøtu Fornminnissavn
- Bygdasavnið "Forni", Glyvrar
- Bygdasavnið í Nes kommunu
- Norðoya Fornminnissavn

Landið letur góðkendum bygdasøvnum stuðul, sum er 60 % av góðkendum rakstrarútreiðslum. Stuðulin verður latin eftir umsókn og útgoldin árliga sambært roknskapinum árið fyri.

02. Fólka- og skúlabókasøvn. Stuðul verður latin fólka- og skúlabókasøvnum sambært Ll. nr. 79 frá 8. mai 2001 um bókasøvn. Eisini verður útgoldið bókasavnsgjald til rithøvundar sbrt. somu lóg av hesi játtan.

Stuðulin verður latin av góðkendari fíggjarætlan fyri næsta rakstrarár. Stuðulin verður útgoldin í fíggjarárinum sum eitt forskotsgjald og avroknaður endaliga við fíggjarárslok eftir innsendum roknskapi.

Fólka- og skúlabókasøvn, ið fáa stuðul sambært bókasavnslógini eru:

- Bókasavnið í Nes kommunu
- Bókasavnið við Løkin í Runavík
- Býarbókasavnið í Tórshavn
- Felagsskúlin á Oyrabakka
- Fuglafjarðar bókasavn
- Gøtu- og Leirvíkar bókasavn
- Hvalvíkar bókasavn
- Klaksvíkar bókasavn
- Kvívíkar skúlabókasavn
- Sandoyar Meginskúli
- Sands bókasavn
- Stranda bókasavn
- Sunda bókasavn, Oyrabakki
- Sørvágs bókasavn
- Tvøroyrar bókasavn
- Vága bókasavn
- Vágs bókasavn
- Vestmanna bókasavn

04. Listasøvn. Játtanin er ætlað at stuðla listasøvnum kring landið. Stuðulin verður latin sum stuðul til rakstur og stuðul til ymsar verkætlanir, so sum keyp og umvæling av listaverkum, skráseting, keyp av útbúnaði til framsýningarhøli v.m. Norðoya Listafelag, Skálin við Skálá og Listasavnið á Sandi hava fingið stuðul av hesi játtan.

Stuðulin verður latin eftir umsókn og verður goldin út síðst í árinum, treytað av at roknskapur er latin inn fyri árið fyri.

05. Sjósavn. Játtanin er ætlað at stuðla sjálvsognarstovninum Grunnurin Føroya Sjósavn.

06. Mentanarsøgulig skip. Endamálið við játtanini er at skipa eina antikvariska verndar- og stuðulsskipan til mentanarsøgulig skip og hava tey siglandi í Føroyum. Stuðulin er ætlaður skipum millum 5 BT og 300 BT, ið hava fingið átekning sum varðveitingarverd skip. Ánarar av varðveitingarverdum skipum kunnu søkja um, at skipið fær átekning sum varðveitingarvert skip.

Stuðulin verður latin sum verkætlanarstuðul og rakstrarstuðul eftir umsókn. Tjóðsavnið umsitur verndar- og stuðulsskipanina og veitur ráðgeving í sambandi við átekning og stuðulsveiting. Heimildin fyri verndar- og stuðulsskipanini er Ll. nr. 14 frá 28. februar 2013 um mentanarsøgulig skip.

07. Skjalasøvn. Víst verður til § 17 í lógini um Føroya Landsskjalasavn nr. 49, frá 28. apríl 1992. Játtanin er ætlað, sum ein royndarverkætlan í trý ár, at skipa eitt skjalasavn á Tvøroyri, fíggjað í felag av landinum, Tvøroyrar Býráð og privatum. Verkætlanin fer fram í neyvum samstarvi við Landsskjalasavnið.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	7.633	7.138	7.603	8.638	8.638	8.638
01. Bygdasøvn						
Útreiðslur	**2.502**	**2.086**	**2.462**	**2.462**	**2.462**	**2.462**
14. Keyp av vørum og tænastum	-	26	-	-	-	-
54. Stuðul til annað virksemi	2.221	1.838	2.462	2.462	2.462	2.462
72. Flytingar frá landi til kommunur	281	222	-	-	-	-
02. Fólkabókasøvn						
Útreiðslur	**3.877**	**3.866**	**3.887**	**3.887**	**3.887**	**3.887**
14. Keyp av vørum og tænastum	-	0	-	-	-	-
52. Tilskot til einstaklingar	1.040	1.038	1.043	1.043	1.043	1.043
54. Stuðul til annað virksemi	59	9	-	-	-	-
72. Flytingar frá landi til kommunur	2.779	2.817	2.844	2.844	2.844	2.844
04. Listasøvn						
Útreiðslur	**120**	**120**	**120**	**120**	**120**	**120**
54. Stuðul til annað virksemi	120	120	120	120	120	120
05. Sjósavn						
Útreiðslur	**284**	**284**	**284**	**434**	**434**	**434**
54. Stuðul til annað virksemi	284	284	284	434	434	434
06. Mentanarsøgulig skip						
Útreiðslur	**850**	**782**	**850**	**850**	**850**	**850**
54. Stuðul til annað virksemi	850	782	850	850	850	850

07. Skjalasøvn						
Útreiðslur	**-**	**-**	**-**	**885**	**885**	**885**
54. Stuðul til annað virksemi	-	-	-	885	885	885

7.24.3.15. Hvalastøðin við Áir (Løgujáttan)

Arbeiðið at varðveita Hvalastøðina við Áir verður gjørt við støði í ávegis áliti um varðveiting av hvalastøðini sum sjóvinnusavn frá 2007 og áliti um økisskipan við Áir frá 2013. Í álitunum verður staðfest, at hvalastøðin er varðveitingarverd sum dømi um ídnaðarsamfelagið, ið tók seg upp í Føroyum í 19. øld. Arbeiðið at varðveita hvalastøðina verður gjørt so hvørt játtan er til endamálið.

Í 2018 verða játtaðar 1 mió. kr. til endamálið.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	2.596	1.638	1.000	1.000	-	-
10. Hvalastøðin við Áir						
Útreiðslur	**2.596**	**1.638**	**1.000**	**1.000**	**-**	**-**
11. Lønir v.m.	151	83	-	-	-	-
14. Keyp av vørum og tænastum	15	19	-	-	-	-
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	-166	-103	-	-	-	-
31. Bygging og løguframleiðsla	2.596	1.638	1.000	1.000	-	-

7.24.3.18. Krígssavn (Stuðulsjáttan)

Játtanin verður umsitin við heimild í Ll. nr. 60 frá 17. mai 2005 um stuðul til mentan og list v.m., sum broytt við Ll. nr. 45 frá 15. mai 2014.

Stuðulin á 200 tús. kr. til virksemið hjá Krígssavninum verður útgoldin frammanundan árliga. Roknskapur verður latin Mentamálaráðnum í seinasta lagi 1. mars eftir lokið fíggjarár.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	200	200	200	200	200	200
01. Krígssavn						
Útreiðslur	**200**	**200**	**200**	**200**	**200**	**200**
54. Stuðul til annað virksemi	200	200	200	200	200	200

7.24.3.21. Varðveiting av mentanararvinum (Løgujáttan)

Játtanin í 2018 skal nýtast til at gera bakkaverju í Kirkjubø, og møguliga aðrastaðni, fyri at tryggja fornminni.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	-	-	-	1.000	-	-
10. Varðveiting av mentanararvinum						
Útreiðslur	**-**	**-**	**-**	**1.000**	**-**	**-**
31. Bygging og løguframleiðsla	-	-	-	1.000	-	-

7.24.3.22. Listasøvn (Rakstrarjáttan)

Listasavn Føroya fevnir um framsýningarhúsið Listaskálan, aðrar ognir og almenna savnið av føroyskari list. Listasavn Føroya røkir myndlistaliga mentanararv Føroya við innsavning, varðveiting, skráseting, gransking og miðlan. Listasavn Føroya ger savnsins listaverk atkomulig fyri almenningin og letur tey vera tøk til gransking. Listasavn Føroya savnar og keypir føroyska myndlist, og kann savna inn aðra list, tá listafólk og listaverk fakliga kunnu setast í samband við Føroyar.

Arbeitt verður við at dagføra lóggávuna fyri savnsvirksemi, ið eisini fer at fevna um listasøvn.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	2.255	2.321	2.234	2.234	2.234	2.234
Útreiðslur	3.540	3.587	3.534	3.534	3.534	3.534
Inntøkur	1.285	1.266	1.300	1.300	1.300	1.300
20. Listasavn Føroya						
Nettoútreiðsla	2.255	2.321	2.234	2.234	2.234	2.234
Útreiðslur	**3.540**	**3.587**	**3.534**	**3.534**	**3.534**	**3.534**
11. Lønir v.m.	1.600	1.723	1.833	1.833	1.833	1.833
14. Keyp av vørum og tænastum	1.932	1.794	1.350	1.350	1.350	1.350
15. Keyp av útbúnaði, netto	10	8	351	351	351	351
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	-	68	-	-	-	-
17. Avskrivingar o.a.	1	-	-	-	-	-
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	-2	-7	-	-	-	-
Inntøkur	**1.285**	**1.266**	**1.300**	**1.300**	**1.300**	**1.300**
21. Søla av vøru og tænastum	*987*	*1.093*	*900*	*900*	*900*	*900*
29. Ymsar rakstrarinntøkur	-	*3*	-	-	-	-
63. Vanligar flytingarinntøkur	*249*	*170*	*400*	*400*	*400*	*400*
65. Flytingarinntøkur úr útlandinum	*40*	-	-	-	-	-
76. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	*10*	-	-	-	-	-

Starvsfólkayvirlit: 20 Listasavn Føroya

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Í lønarflokki 37 ella hægri	-	-	-	-	-	-
Onnur	3,0	3,5	3,5	3,5	3,5	3,5
Fulltíðarstørv	3,0	3,5	3,5	3,5	3,5	3,5
Lønarpartur (mió. kr.)	1,6	1,7	1,8	1,8	1,8	1,8

7.24.3.23. Kirkjubømúrurin (Løgujáttan)

Játtanin er til varðveitingararbeiði í sambandi við Kirkjubømúrin og onnur jarðføst fornminni á miðaldar biskupssetrinum í Kirkjubø. Landsstýrismaðurin í mentamálum fekk í november 2008 handað eitt álit frá Múrnevndini og Føroya Fornminnissavni um varðveiting av Kirkjubømúrinum. Í álitinum varð mælt til, at verndararbeiðið fer fram eftir altjóða etiskum leiðreglum. Verkætlanin fevnir um skráseting, umvæling og varðveiting av Kirkjubømúrurin og øðrum leivdum av biskupssetrinum, umframt økisskipanarlig tiltøk, ið eisini taka atlit at ferðavinnuni í økinum.

Tjóðsavnið umsitur játtanina. Arbeiðið er farið fram sum ein verkætlan samsvarandi tilmælinum, og sum játtan hevur verið til. Í 2018 verða játtaðar 1,3 mió. kr. til endamálið.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	1.008	1.237	1.300	1.300	1.000	500
10. Kirkjubømúrurin						
Útreiðslur	**1.008**	**1.237**	**1.300**	**1.300**	**1.000**	**500**
11. Lønir v.m.	156	160	-	-	-	-
14. Keyp av vørum og tænastum	18	28	-	-	-	-
15. Keyp av útbúnaði, netto	4	-	-	-	-	-
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	-178	-188	-	-	-	-
31. Bygging og løguframleiðsla	1.008	1.221	1.300	1.300	1.000	500
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	-	16	-	-	-	-

7.24.3.28. Bókasøvn, løgustuðul (Stuðulsjáttan)

Játtanin er ætlað sum íløgustuðul til býarbókasavnið í Havn samb. Ll. nr. 79 frá 8. mai 2001 um bókasøvn, sum broytt við Ll. nr. 148 frá 20. desember 2005.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	-	-	-	1.500	3.500	3.500
01. Bókasøvn, løgustuðul						
Útreiðslur	**-**	**-**	**-**	**1.500**	**3.500**	**3.500**
55. Íløgustuðul o.a.	-	-	-	1.500	3.500	3.500

7.24.3.29. Rocksavn (Stuðulsjáttan)

Føroya Rocksavn er nýtt átak í Klaksvík. Endamálið við játtanini er at stuðla arbeiðinum við at skipa føroysku rocksøguna í eitt savn, sum er áhugavert og nýskapandi. Ætlanin er at savna, varveitað og lýsa føroysku rocksøguna.

Játtanin verður umsitin við heimild í Ll. nr. 60 frá 17. mai 2005 um stuðul til mentan og list v.m., sum broytt við Ll. nr. 45 frá 15. mai 2014. Roknskapur verður latin Mentamálaráðnum í seinasta lagi 1. mars eftir lokið fíggjarár.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	-	-	-	100	100	100
01. Rocksavn						
Útreiðslur	**-**	**-**	**-**	**100**	**100**	**100**
54. Stuðul til annað virksemi	-	-	-	100	100	100

7.24.3.30. Undirsjóvarsavn (Stuðulsjáttan)

Játtanin er ætlað sum stuðul til at seta gongd á projektering av einum undirsjóvarakvarium í Klaksvík.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	-	-	-	200	200	200
01. Undirsjóvarsavn						
Útreiðslur	**-**	**-**	**-**	**200**	**200**	**200**
54. Stuðul til annað virksemi	-	-	-	200	200	200

7.24.4. Fjølmiðlar

7.24.4.03. Kringvarp Føroya (Løgujáttan)

Bygningarnir, ið Kringvarpið húsaðist í í M. A. Winthersgøtu, vóru seldir á vári í 2013. Søluupphæddin er nýtt til um- og útbyggjan av bygningum Kringvarpsins í Sortudíki. Bygginevndin gjørdi eina byggiskrá, og verklagslóg varð samtykt í mai 2013.

Arbeitt varð víðari í samsvari við verklagslógina. Arbeiðið varð boðið út, og tilboðini komu inn í juli 2014 at byggja 1. og 2. byggistig. Í 2014 og 2015 varð arbeitt við at byggja 1. byggistig. Farið var undir 2. byggistig í 2016, og var hetta liðugt um árskifti 2016/2017.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	8.342	10.486	-	-	-	-
10. Kringvarp Føroya						
Útreiðslur	**8.342**	**10.486**	**-**	**-**	**-**	**-**
11. Lønir v.m.	198	-	-	-	-	-
14. Keyp av vørum og tænastum	74	-	-	-	-	-
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	-272	-364	-	-	-	-
31. Bygging og løguframleiðsla	8.342	10.486	-	-	-	-
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	-	364	-	-	-	-

7.24.4.06. Kringvarp Føroya (Rakstrarjáttan)

Lógargrundarlagið undir Kringvarpi Føroya er Ll. nr. 61 frá 16. mai 2006, sum seinast broytt við Ll. nr. 163 frá 24. desember 2015. Í lógini um kringvarp er ásett, at Kringvarp Føroya er

sjálvstøðugur almennur stovnur, sum virkar óheftur av politisku skipanini. Stovnurin verður stjórnaður av stýri við sjey limum, sum landsstýriskvinnan tilnevnir fyri fýra ár í senn. Virksemið hjá Kringvarpinum verður fíggjað við kringvarpsgjaldi, kunngerðarinntøkum, inntøkugevandi eydnuspølum og sponsorering sambært nærri ásettum treytum

Frá 1. januar 2016 varð farið frá at krevja kringvarpsgjald frá húskjum til at krevja eitt mánaðargjald frá einstaklingum, ið hava fulla skattskyldu í Føroyum. Virki, stovnar o.o. rinda kringvarpsgjald eftir samlaðu árligu lønarútgjaldingunum. TAKS krevur kringvarpsgaldið inn fyri Kringvarp Føroya.

Sendingar Kringvarpsins fevna um tíðindaflutning, upplýsing, undirhald og mentan. Í programmvirkseminum skal dentur leggjast á upplýsingar- og talufrælsi, sakliga og óhefta upplýsing og eitt fjøltáttað tilboð. Í public service-sáttmálanum millum Kringvarp Føroya og Mentamálaráðið, galdandi tíðarskeiðið 2017-2020, eru almennu skyldur Kringvarpsins nærri greinaðar.

Sambært § 8, stk. 4 í Ll. nr. 61 frá 16. mai 2006 um Kringvarp, sum seinast broytt við Ll. nr. 163 frá 24. desember 2015, kann virksemið hjá Kringvarpi Føroya eisini verða fíggjað við játtan á løgtingsfíggjarlógini. Hetta er tó ikki vanligt og verður bert gjørt undir serstøkum umstøðum.

30. Talgilding av bandasavninum

Játtanin er ætlað til verkætlanina at talgilda bandasavn Kringvarpsins. Verkætlanin fer fram í neyvum samstarvi við savnsøkið.

31. Lýsingarinntøkur

Roknað verður við 2,5 mió. kr. í lýsingarinntøkum í 2018.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	900	-1.206	-1.600	-1.600	-1.600	-1.600
Útreiðslur	61.609	66.114	67.339	69.818	69.818	69.818
Inntøkur	60.709	67.320	68.939	71.418	71.418	71.418
20. Landsfyritøka						
Nettoútreiðsla	0	0	0	0	0	0
Útreiðslur	**60.709**	**65.112**	**66.439**	**68.918**	**68.918**	**68.918**
11. Lønir v.m.	39.783	42.035	44.350	47.960	47.960	47.960
14. Keyp av vørum og tænastum	16.491	15.607	16.159	14.578	14.578	14.578
15. Keyp av útbúnaði, netto	2.073	4.904	3.600	3.500	3.500	3.500
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	1.313	1.352	1.380	1.380	1.380	1.380
17. Avskrivingar o.a.	1.047	-471	950	300	300	300
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	0	0	-	-	-	-
57. Rentuútreiðslur o.a.	1	1	-	-	-	-
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	-	1.684	-	1.200	1.200	1.200
Inntøkur	**60.709**	**65.112**	**66.439**	**68.918**	**68.918**	**68.918**
21. Søla av vøru og tænastum	*55.590*	*3.098*	*2.000*	*2.200*	*2.200*	*2.200*
61. Skattir og avgjøld	*-*	*60.011*	*58.819*	*61.028*	*61.028*	*61.028*
62. Kravd gjøld, bøtur o.a.	*313*	*-8*	*-*	*-*	*-*	*-*
64. Aðrar flytingarinntøkur	*4.518*	*1.450*	*5.620*	*5.690*	*5.690*	*5.690*
67. Rentuinntøkur og vinningsbýti	*6*	*-*	*-*	*-*	*-*	*-*
76. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	*281*	*560*	*-*	*-*	*-*	*-*

30. Talgilding av bandasavninum						
Nettoútreiðsla	900	899	900	900	900	900
Útreiðslur	**900**	**899**	**900**	**900**	**900**	**900**
11. Lønir v.m.	845	822	850	850	850	850
14. Keyp av vørum og tænastum	47	60	50	50	50	50
15. Keyp av útbúnaði, netto	3	7	-	-	-	-
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	5	11	-	-	-	-
31. Lýsingarinntøkur						
Nettoútreiðsla	-	-2.105	-2.500	-2.500	-2.500	-2.500
Útreiðslur	**-**	**102**	**-**	**-**	**-**	**-**
14. Keyp av vørum og tænastum	-	102	-	-	-	-
Inntøkur	**-**	**2.208**	**2.500**	**2.500**	**2.500**	**2.500**
21. Søla av vøru og tænastum	*-*	*2.208*	*2.500*	*2.500*	*2.500*	*2.500*

Starvsfólkayvirlit: 20 Landsfyritøka

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Í lønarflokki 37 ella hægri	1,0	1,0	1,0	1,0	1,0	1,0
Onnur	77,0	77,0	94,0	97,0	97,0	97,0
Fulltíðarstørv	78,0	78,0	95,0	98,0	98,0	98,0
Lønarpartur (mió. kr.)	39,8	42,0	44,4	48,0	48,0	48,0

Í lønarpartinum er íroknað gjald fyri rættindi og keyp av sendingum frá eksternum studio og fólki, sum ikki eru í starvi á stovninum.

7.24.4.10. Stuðul til framleiðslu av føroyskum loftmiðlatilfari (Stuðulsjáttan)

Játtanin er ætlað sum ein public service-tænasta til teknmálstulking av tíðindasendingum og øðrum føroyskum sendingum á sjónvarpsmiðlinum hjá Kringvarpi Føroya.

Játtanin verður umsitin við heimild í Ll. nr. 60 frá 17. mai 2005 um stuðul til mentan og list v.m., sum broytt við Ll. nr. 45 frá 15. mai 2014. Stuðul verður útgoldin veitarum eftir uppgerð nakrar ferðir árliga.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	435	560	585	585	585	585
01. Stuðul						
Útreiðslur	**435**	**560**	**585**	**585**	**585**	**585**
54. Stuðul til annað virksemi	154	-	585	585	585	585
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	281	560	-	-	-	-

7.24.4.13. Miðlastuðul (Stuðulsjáttan)

Játtan er sett av til tess at hækka dygdina í journalistiska arbeiðinum og at tryggja eitt fjøltáttað útboð av tíðindamiðlum. Endamálið við játtanini er tvíbýtt: 1) at veita útberingarstuðul til privat tíðindabløð, og 2) at veita stuðul til førleikamenning hjá tíðindamiðlunum sum heild.

Játtanin verður umsitin við heimild í Ll. nr. 35 frá 31. mars 2017 um miðlastuðul.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	-	-	2.000	2.000	2.000	2.000
01. Miðlastuðul						
Útreiðslur	**-**	**-**	**2.000**	**2.000**	**2.000**	**2.000**
53. Stuðul til vinnu	-	-	2.000	2.000	2.000	2.000

7.24.5. Kirkjan

7.24.5.01. Studningur til Kirkjugrunnin (Stuðulsjáttan)

Á Ólavsøku 2007 vórðu málsøkini fólkakirkjan og onnur trúarsamfeløg yvirtikin. Við yvirtøkuni tók landið á seg skylduna at stuðla fólkakirkjuni, eisini peningaliga, á ein hátt, ið er sambæriligur við tann stuðul, ið danska ríkisvaldið higartil hevur veitt fólkakirkjuni. Hesin peningaligi stuðulin kemur afturat tí stuðli, ið landið higartil hevur veitt nú avtikna Kirkjugrunninum.

Stuðulin verður veittur sambært § 28 og § 29, stk. 1, í løgtingslóg um fíggjarviðurskifti fólkakirkjunnar. Talan er um stuðul til rakstur, og stuðul, ið samsvarar við minst 40 % av lønunum til sóknarprestarnar, ið eru í starvi sum tænastumenn í fólkakirkjuni, og 100 % av lønini til biskupin. Stuðulin fer í nýggja Kirkjugrunnin, ið stiftsstjórnin situr fyri.

Stuðulin, ið landið higartil hevur veitt, fór í gamla kirkjugrunnin, og soleiðis til viðlíkahald og rakstur av kirkjum, umbygging og niðurtøku av kirkjum, og til helmingin av ferðaútreiðslunum hjá prestum. Stuðulin, sum verður veittur eftir omanfyri nevndu lógargreinum, er harafturímóti ikki markaður til ávís endamál.

Eftir § 29, stk. 2, í Ll. um fíggjarviðurskifti fólkakirkjunnar rindar landskassin tænastumonnum fólkakirkjunnar eftirløn, men henda fer ikki at verða uppgjørd fyri seg.

Árligi stuðulin verður veittur sum ein samlað játtan til virksemið, útgoldin frammanundan árliga. Roknskapur verður latin Mentamálaráðnum eftir lokið fíggjarár.

Eftir § 30 í løgtingslóg um fíggjarviðurskifti fólkakirkjunnar kann landskassin veita 1/3 av góðkenda byggikostnaðinum í stuðli, tá ið kirkja verður bygd ella umbygd. Hesin stuðul verður veittur einstøku kirkjuni beinleiðis, og verður settur á fíggjarlógina fyri seg tey ár, ið kirkja er, sum lýkur treytirnar fyri stuðli.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	9.030	9.000	9.000	9.000	9.000	9.000
01. Stuðul						
Útreiðslur	**9.030**	**9.000**	**9.000**	**9.000**	**9.000**	**9.000**
54. Stuðul til annað virksemi	9.030	9.000	9.000	9.000	9.000	9.000

7.24.5.04. Føroyskt kirkjumál (Stuðulsjáttan)

Endamálið við játtanini er at veita Føroyskum Kirkjumáli ein árligan stuðul til rakstur. Endamálið hjá Føroyskum Kirkjumáli er at geva út bøkur og annað, ið er neyðugt at brúka til gudstænastu, og annað, sum er gagnligt til kirkjuligt arbeiði á føroyskum.

Stuðulin á 250 tús. kr. til virksemið hjá Føroyskum Kirkjumáli verður útgoldin frammanundan árliga. Roknskapur verður latin Mentamálaráðnum í seinasta lagi 1. mars eftir lokið fíggjarár.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	250	250	250	250	250	250
01. Føroyskt kirkjumál						
Útreiðslur	**250**	**250**	**250**	**250**	**250**	**250**
54. Stuðul til annað virksemi	250	250	250	250	250	250

7.24.6. Ítróttur

7.24.6.06. Ítróttasamband Føroya (Stuðulsjáttan)

Ítróttasamband Føroya er savnandi felagsskapur fyri alla ítrótt í Føroyum og umboðar tilsamans um 15.000 virkin ítróttafólk í 120 feløgum og 24 ítróttagreinir kring oyggjarnar. Tey eru savnað í 15 sersambond.

Játtanin verður umsitin við heimild í Ll. nr. 60 frá 17. mai 2005 um stuðul til mentan og list v.m., sum broytt við Ll. nr. 45 frá 15. mai 2014. Roknskapur verður latin Mentamálaráðnum í seinasta lagi 1. mars eftir lokið fíggjarár.

01. ÍSF. Játtanin til ÍSF er 8.150 tús. kr. Ferðastuðulin er íroknaður hesa játtan. Stuðulin verður útgoldin frammanundan hálvárliga.

04. ÍSB. Játtanin til ÍSB er 300 tús. kr. Stuðulin verður útgoldin frammanundan árliga.

05. Altjóða ítróttaluttøka. Játtanin til altjóða ítróttaluttøku er 500 tús. kr. ÍSF umsitur og ger av, hvør skal hava henda stuðulin. Stuðulin verður útgoldin frammanundan árliga.

06. Úrvalsítróttur. Játtanin til úrvalsítrótt er 800 tús. kr. ÍSF umsitur og ger av, hvør skal hava henda stuðulin. Stuðulin verður útgoldin frammanundan árliga.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	8.250	8.650	9.650	9.750	9.750	9.750
01. ÍSF						
Útreiðslur	**7.150**	**7.550**	**8.050**	**8.150**	**8.150**	**8.150**
54. Stuðul til annað virksemi	7.150	7.550	8.050	8.150	8.150	8.150

04. ÍSB						
Útreiðslur	**300**	**300**	**300**	**300**	**300**	**300**
54. Stuðul til annað virksemi	300	300	300	300	300	300
05. Altjóða ítróttaluttøka						
Útreiðslur	**-**	**-**	**500**	**500**	**500**	**500**
54. Stuðul til annað virksemi	-	-	500	500	500	500
06. Úrvalsítróttur						
Útreiðslur	**800**	**800**	**800**	**800**	**800**	**800**
54. Stuðul til annað virksemi	800	800	800	800	800	800

7.24.6.08. Hugasamband Føroya (Stuðulsjáttan)

Hugasamband Føroya er sersamband, sum Talvsamband Føroya og Bridgesamband Føroya hava stovnsett. Játtanin er til at stuðla virksemið hjá hesum báðum sambondum, til verksetan av kappingum í Føroyum og til luttøku í kappingum í altjóða høpi. Játtanin verður umsitin við heimild í Ll. nr. 60 frá 17. mai 2005 um stuðul til mentan og list v.m., sum broytt við Ll. nr. 45 frá 15. mai 2014.

Í 2017 hækkaði játtanin við 300 tús. kr. og í 2018 við 100 tús. kr. Hesar 400 tús. kr. eru ætlaðar Talvsambandi Føroya, nú Føroyar hava fingið sín fyrsta stórmeistara í talvi.

Árligi stuðulin verður útgoldin frammanundan hvønn ársfjórðing. Roknskapur verður latin Mentamálaráðnum í seinasta lagi 1. mars eftir lokið fíggjarár.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	750	750	1.050	1.150	1.150	1.150
01. Stuðul						
Útreiðslur	**750**	**750**	**1.050**	**1.150**	**1.150**	**1.150**
54. Stuðul til annað virksemi	750	750	1.050	1.150	1.150	1.150

7.24.6.13. Ítróttarhøll á Sandoynni (Løgujáttan)

Eingin játtan er til Ítróttarhøllina á Sandoynni í 2018.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	484	-	485	-	-	-
01. Ítróttarhøll á Sandoynni						
Útreiðslur	**484**	**-**	**485**	**-**	**-**	**-**
11. Lønir v.m.	22	-	-	-	-	-
14. Keyp av vørum og tænastum	8	-	-	-	-	-
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	-30	-	-	-	-	-
31. Bygging og løguframleiðsla	484	-	485	-	-	-

7.24.6.18. Stuðul til at smíða kappróðrarbátar (Stuðulsjáttan)

Endamálið við játtanini er at stuðla smíð av føroyskum kappróðrarbátum og harvið menna okkara tjóðarítrótt. Hetta er liður í at upprøðfesta føroyska sermentan, har føroyski kappróðrarbáturin er nakað heilt serligt.

Játtanin verður umsitin við heimild í Ll. nr. 60 frá 17. mai 2005 um stuðul til mentan og list v.m., sum broytt við Ll. nr. 45 frá 15. mai 2014. Roknskapur verður latin Mentamálaráðnum í seinasta lagi 1. mars eftir lokið fíggjarár.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	-	-	-	100	100	100
01. Stuðul til at smíða kappróðrarbátar						
Útreiðslur	**-**	**-**	**-**	**100**	**100**	**100**
54. Stuðul til annað virksemi	-	-	-	100	100	100

Samferðsla og samskifti

7.38.3. Samskifti

7.38.3.07. Kringvarpssendistøðir (Rakstrarjáttan)

Játtanin er ætlað til at rinda P/F Føroya Tele fyri at halda og reka kringvarpssendistøðir, ið varpa út sendingarnar hjá Kringvarpi Føroya.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	4.169	4.169	4.100	4.100	4.100	4.100
Útreiðslur	4.169	4.169	4.100	4.100	4.100	4.100
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	4.169	4.169	4.100	4.100	4.100	4.100
Útreiðslur	**4.169**	**4.169**	**4.100**	**4.100**	**4.100**	**4.100**
14. Keyp av vørum og tænastum	4.169	4.169	4.100	4.100	4.100	4.100

§ 11 Heilsu- og innlendismál

Felagsútreiðslur

11.11.1. Fyrisiting

11.11.1.24. Heilsu- og innlendismálaráðið (Rakstrarjáttan)

Heilsu- og innlendismálaráðið hevur undir landsstýriskvinnuni yvirskipaða, fyrisitingarliga og fíggjarliga eftirlitið við teimum stovnum, sum eru undir ráðnum, og yvirskipaðu ráðleggingina av øllum málsøkjum undir ráðnum.

Uppgávan hjá Heilsu- og innlendismálaráðnum er:

- at ráðgeva landsstýriskvinnuni í heilsu- og innlendismálum
- at tilevna lógaruppskot, kunngerðir og aðrar reglur
- at veita stovnum og øðrum undir ráðnum ráð og vegleiðing

Málsræðið fevnir um kommunu-, umhvørvis- og orkumál, afturat heilsumálum og familjurætti.

Tænastudeildin í Heilsu- og innlendismálaráðnum er partvís felags við Almannamálaráðið. Innanhýsis flyting er fyri at javna útreiðslurnar.

Familjurættarliga økið verður yvirtikið á Ólavsøku í 2018. Játtanin til endamálið er framskrivað til heilt ár í 2019.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	12.917	15.646	15.280	15.109	16.459	16.459
Útreiðslur	13.299	16.259	15.280	15.749	17.099	17.099
Inntøkur	382	613	-	640	640	640
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	11.459	14.243	13.708	13.537	14.887	14.887
Útreiðslur	**11.841**	**14.856**	**13.708**	**14.177**	**15.527**	**15.527**
11. Lønir v.m.	7.969	11.573	11.600	11.900	13.250	13.250
14. Keyp av vørum og tænastum	2.578	3.040	1.898	2.167	2.167	2.167
15. Keyp av útbúnaði, netto	620	195	200	100	100	100
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	55	29	10	10	10	10
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	13	15	-	-	-	-
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	605	3	-	-	-	-
Inntøkur	**382**	**613**	**-**	**640**	**640**	**640**
21. Søla av vøru og tænastum	*40*	*4*	-	-	-	-
76. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	*342*	*609*	-	*640*	*640*	*640*
21. Ráð og nevndir						
Nettoútreiðsla	124	119	180	180	180	180
Útreiðslur	**124**	**119**	**180**	**180**	**180**	**180**
11. Lønir v.m.	96	62	180	180	180	180
14. Keyp av vørum og tænastum	6	-	-	-	-	-
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	22	57	-	-	-	-

26. Tilbúgving						
Nettoútreiðsla	790	878	842	842	842	842
Útreiðslur	**790**	**878**	**842**	**842**	**842**	**842**
14. Keyp av vørum og tænastum	790	878	842	842	842	842
27. Verkætlanir						
Nettoútreiðsla	451	317	450	450	450	450
Útreiðslur	**451**	**317**	**450**	**450**	**450**	**450**
11. Lønir v.m.	-	73	400	400	400	400
14. Keyp av vørum og tænastum	451	243	50	50	50	50
28. Navnanevndin						
Nettoútreiðsla	92	89	100	100	100	100
Útreiðslur	**92**	**89**	**100**	**100**	**100**	**100**
11. Lønir v.m.	86	84	100	100	100	100
14. Keyp av vørum og tænastum	6	5	-	-	-	-

21. Ráð og nevndir

Sjúklingaráð

Landsstýriskvinnan velur eitt sjúklingaráð við níggju limum út frá landafrøðiligum atliti, sum skal viðgera heildarmál um viðurskifti, ið hava týdning fyri veitingar til sjúklingar, og ráðgeva landsstýriskvinnuni hesum viðvíkjandi. Limirnir verða valdir eftir uppskoti frá feløgum og áhugabólkum. Sjúklingaráðið verður valt fjórða hvørt ár ella, tá ið løgtingsval hevur verið.

Annað virksemi

Heilsu- og innlendismálaráðið hevur síðani á heysti 2013 umsitið familjurætt. Herundir at veita samsýning til sterilisatiónsnevnd og at gjalda fyri umsiting av ogn hjá verjuleysum.

26. Tilbúgving

Heilsuverkið hevur ein avgerandi leiklut í samlaðu tilbúgvingarverkætlanini, ið varð sett í verk í 1998.

Samlaða heilsutilbúgvingin kann býtast upp í tríggjar høvuðspartar:

tilbúgvingin í teimum trimum sjúkrahúsunum

- tilbúgvingin á landi, sum ikki er í sjúkrahúsunum
- tilbúgvingin á sjógvi

Neyðugt verður at viðlíkahalda hesa tilbúgving, ið eisini fevnir um sálarliga kreppuhjálp. Millum annað skulu tey heilsustarvsfólk, sum røkja tilbúgvingina á landi, á skeið á hvørjum ári, umframt at haldast skulu regluligar venjingar.

27. Verkætlanir

Játtanin skal nýtast til verkætlanir innan heilsuøkið. Harav ein partur verður brúktur til verkætlanina trygd og dygd.

28. Navnanevndin

Navnanevndin skal sambært løgtingslóg nr. 41. frá 26. mars 2002 um fólkanøvn, sum broytt við løgtingslóg nr. 33 frá 30. apríl 2007, gera leiðbeinandi lista við fornøvnum og endurskoða

hann javnan, geva ráð um fólkanøvn, stavseting, bending o.a., og taka avgerðir í málum, ið løgd verða fyri hana, sambært § 2 í somu lóg. Landskassin ber kostnaðin av arbeiðinum hjá Navnanevndini.

Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Í lønarflokki 37 ella hægri	3,0	5,0	4,0	4,0	4,0	4,0
Onnur	12,7	16,8	17,2	17,6	20,2	20,2
Fulltíðarstørv	15,7	21,8	21,2	21,6	24,2	24,2
Lønarpartur (mió. kr.)	8,0	11,6	11,6	11,9	13,3	13,3

11.11.1.33. Siðseminevndir (Rakstrarjáttan)

20. Vísindasiðseminevndin

Lógargrundarlagið undir Vísindasiðseminevndini er "Lov om videnskabsetisk behandling af sundhedsvidenskabelige forskningsprojekter" sum varð sett í gildi við kongligari fyriskipan nr. 961 frá 15. juli 2013.

Vísindasiðseminevndin er mannað við 7 limum. Landsstýriskvinnan í heilsumálum setir nevndina. Læknafelag Føroya innstillar 3-4 limir. Uppgávan hjá nevndini er at meta um og geva loyvi til granskingarverkætlanir í Føroyum og at hava eftirlit við ymisku verkætlanunum.

Játtanin til Vísindasiðseminevndina verður givin til fundarpening til limirnar, skrivarasamsýning, tilfar til arbeiði nevndarinnar og fyri at møta á fundum við høvuðssiðseminevndina í Danmark umframt annað nevndarvirksemi. Eisini hevur nevndin eina formliga umsiting við málsviðgerð og ráðgeving.

21. Etiska ráðið

Lógargrundarlagið undir Etiska ráðnum er løgtingslóg um etiskt ráð, frá 29. mai 2017 við gildiskomu 1. januar 2018.

Landsstýriskvinnan í heilsu- og innlendismálum setur ráðið, sum hevur 9 limir, ið verða settir fyri 4 ár í senn. Etiska ráðið hevur m.a. til endamáls at fremja og styrkja kjak og vitan um etiskar spurningar, ið knýta seg til heilsufakligt virksemi á heilsuøkinum, almannaøkinum og kommunala økinum.

Útreiðslurnar til Etiska ráðið verða mettar til 560 tús. kr. um árið.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	167	155	200	760	760	760
Útreiðslur	167	155	200	760	760	760
20. Vísindasiðseminevndin						
Nettoútreiðsla	167	155	200	200	200	200
Útreiðslur	**167**	**155**	**200**	**200**	**200**	**200**
11. Lønir v.m.	127	97	150	150	150	150
14. Keyp av vørum og tænastum	40	58	50	50	50	50

21. Etiska ráðið

Nettoútreiðsla	-	-	-	560	560	560
Útreiðslur	**-**	**-**	**-**	**560**	**560**	**560**
11. Lønir v.m.	-	-	-	460	460	460
14. Keyp av vørum og tænastum	-	-	-	100	100	100

Lógarmál

11.14.1. Ymsar útreiðslur

11.14.1.03. Útreiðslur av vali (Rakstrarjáttan)

Sambært løgtingslóg nr. 49 frá 20. juli 1978 um val til Føroya Løgting, sum seinast broytt við kunngerð nr. 114 frá 5. september 2011 er ásett, at valnevndarlimum, valstýrislimum og hjálparfólki verður veitt samsýning úr landskassanum.

Ætlanin er, at ein nýggj stjórnarskipan skal staðfesta, at Føroya fólk hevur valdið í Føroyum. Lógin skal áseta og útgreina sjálvsavgerðarrættin og fólkaræðisliga stýrislagið hjá Føroya fólki.

Ætlanin er, at fólkaatkvøða verður um stjórnarskipanina í 2018. Avsettar eru 1 mió. kr. til endamálið.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	1.711	5	1.050	1.050	1.750	50
Útreiðslur	1.711	5	1.050	1.050	1.750	50
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	1.711	5	1.050	1.050	1.750	50
Útreiðslur	**1.711**	**5**	**1.050**	**1.050**	**1.750**	**50**
11. Lønir v.m.	1.305	-	1.050	1.050	1.750	50
14. Keyp av vørum og tænastum	382	5	-	-	-	-
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	24	-	-	-	-	-
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	0	-	-	-	-	-

11.14.1.13. Familjufyrisitingin (Rakstrarjáttan)

Málsøkið persóns-, húsfólka- og arvarættur er yvirtikið við gildiskomu á Ólavsøku í 2018.

Familjurættarliga økið fevnir um lóg um foreldramyndugleika og samveru, hjúnarbandslógina, arvalógina, ættleiðing, verjumálslógina og fleiri afturat hesum.

Familjufyrisitingin verður skipað undir Heilsu- og innlendismálaráðnum til at umsita økið. Føroya Kærustovnur skal fyrisita kærurnar á økinum.

Yvirtøkan væntast at kosta um 10,3 mió. kr. tilsamans um árið, og eru 5,5 mió. kr. raðfestar til endamálið í 2018. Av hesum eru 300 tús. kr. játtaðar til Heilsu- og innlendismálaráðið, 300 tús. kr. til Føroya Kærustovn og 85 tús. kr. til Gigni.

Á hesi høvuðskontuni eru játtaðar 4.815 tús. kr. til endamálið í 2018.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	-	-	-	4.815	7.770	7.770
Útreiðslur	-	-	-	4.815	7.770	7.770
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	-	-	-	4.815	7.770	7.770
Útreiðslur	**-**	**-**	**-**	**4.815**	**7.770**	**7.770**
11. Lønir v.m.	-	-	-	3.815	5.800	5.800
14. Keyp av vørum og tænastum	-	-	-	1.000	1.970	1.970

Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Í lønarflokki 37 ella hægri	-	-	-	0,7	1,0	1,0
Onnur	-	-	-	5,5	9,0	9,0
Fulltíðarstørv	-	-	-	6,2	10,0	10,0
Lønarpartur (mió. kr.)	-	-	-	3,8	5,8	5,8

Heilsumál

11.20.1. Fyribyrging

11.20.1.04. Upplýsing og ráðgeving (Rakstrarjáttan)

25. Fólkaheilsuráðið

Játtanin er til at fíggja virksemið hjá Fólkaheilsuráðnum. Ráðið er sett við løgtingslóg nr. 56 frá 10. mai 2000 við seinni broytingum.

Fólkaheilsuráðið er skipað sum eitt fakráð, hvørs uppgáva m.a. er at ráðgeva lands- og kommunalum myndugleikum um heilsufremjandi, sjúku- og vanlukkufyribyrgjandi tiltøk.

Í Fólkaheilsuráðnum sita 7 limir. Landsstýriskvinnan velur limirnar fyri 4 ár í senn. Ein limur umboðar undirvísingarverkið, ein limur umboðar almannaverkið, tríggir limir eru heilsustarvsfólk og ein limur umboðar løgregluna. Landsstýriskvinnan velur sjeynda limin, sum eisini skal hava serligt innlit í almanna- og heilsuviðurskifti. Landsstýriskvinnan velur formann og næstformann millum limirnar í ráðnum.

Játtanin verður harumframt brúkt til at fíggja ítøkilig fólkaheilsuátøk á teimum økjum, sum eru raðfest í fólkaheilsuætlanini hjá landsstýrinum. Tað vil siga átøk, sum snúgva seg um kost, rørslu, royking, rúsdrekka- og rúsevnismisnýtslu og fyribyrgjandi heilsukanningar. Harumframt er virkisøkið víðkað til eisini at fevna um sálarliga heilsu.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	2.578	2.632	2.660	2.660	2.660	2.660
Útreiðslur	2.578	2.653	2.660	2.660	2.660	2.660
Inntøkur	-	21	-	-	-	-
25. Fólkaheilsuráðið						
Nettoútreiðsla	2.578	2.632	2.660	2.660	2.660	2.660
Útreiðslur	**2.578**	**2.653**	**2.660**	**2.660**	**2.660**	**2.660**
11. Lønir v.m.	1.239	1.290	1.757	1.757	1.757	1.757
14. Keyp av vørum og tænastum	1.234	1.276	767	767	767	767
15. Keyp av útbúnaði, netto	60	53	30	30	30	30
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	45	23	106	106	106	106
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	-	2	-	-	-	-
52. Tilskot til einstaklingar	-	10	-	-	-	-
57. Rentuútreiðslur o.a.	-	0	-	-	-	-
Inntøkur	**-**	**21**	**-**	**-**	**-**	**-**
65. Flytingarinntøkur úr útlandinum	-	*21*	-	-	-	-

Starvsfólkayvirlit: 25 Fólkaheilsuráðið

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Í lønarflokki 37 ella hægri	-	-	-	-	-	-
Onnur	2,3	2,6	3,0	3,0	3,0	3,0
Fulltíðarstørv	2,3	2,6	3,0	3,0	3,0	3,0
Lønarpartur (mió. kr.)	1,2	1,3	1,8	1,8	1,8	1,8

11.20.1.07. Tiltøk móti rúsdrekkamisnýtslu (Stuðulsjáttan)

02. Blái krossur

Stuðulin er til upplýsandi og fyribyrgjandi virksemi móti rúsdrekkamisnýtslu. Stuðulin er tilsamans 325 tús. kr., og verður útgoldin frammanundan í einum.

Fyri at fáa stuðulin skal Blái Krossur Føroya lata Heilsu- og innlendismálaráðnum grannskoðaðan roknskap fyri undanfarna roknskaparár og fíggjarætlan fyri inniverandi ár, fyri 1. apríl.

Játtaðar eru 300 tús. kr. í 2018 til stuðul til ambulant viðgerðartilboð til ung. Virksemi fer fram á undirkontu 21. Ambulant viðgerðartilboð til ung, undir høvuðskontu 11.20.4.03. Viðgerðarstovnurin Blákrossheimið.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	325	325	1.125	625	625	625
02. Blái krossur						
Útreiðslur	**325**	**325**	**325**	**625**	**625**	**625**
54. Stuðul til annað virksemi	325	325	325	325	325	325
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	-	-	-	300	300	300
04. Ambulant viðgerðartilboð til ung						
Útreiðslur	**-**	**-**	**800**	**-**	**-**	**-**
54. Stuðul til annað virksemi	-	-	800	-	-	-

11.20.1.08. Stuðul til feløg (Stuðulsjáttan)

Stuðulin verður latin til Føroya Pro Vita, sum er felagsskapur, sum virkar fyri at verja barnið í móðurlívi. Pro Vita vegleiðir og stuðlar teimum kvinnum, sum eru komnar í trongstøðu, tí tær eru vorðnar við barn. Stuðulin verður játtaður til virksemið hjá felagsskapinum. Stuðulin verður útgoldin einaferð um árið. Ársroknskapurin fyri árið frammanundan skal vera latin Heilsu- og innlendismálaráðnum fyri 1. apríl.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	150	150	200	200	200	200
02. Pro Vita						
Útreiðslur	**150**	**150**	**200**	**200**	**200**	**200**
54. Stuðul til annað virksemi	150	150	200	200	200	200

11.20.1.10. Koppsetingar (Lógarbundin játtan)

Lógargrundarlagið undir koppsetingum er løgtingslóg nr. 118 frá 12. desember 2007 um ókeypis koppseting móti ávísum smittandi sjúkum, og kunngerð nr. 126 frá 2. desember 2015 um ókeypis koppseting móti ávísum smittandi sjúkum.

Sambært ásetingunum í galdandi reglum fáa persónar við føstum bústaði í Føroyum tilboð um ókeypis koppseting fyri ávísum sjúkum.

Børn kunnu verða koppsett ókeypis fyri hesar sjúkur: Kikhosta, difteri, stívkrampa, polio, meslingar, reydlingar og fárasjúku. Børn undir 6 ár kunnu harafturat verða koppsett ókeypis fyri Hæmophilus influensu, typu b. Børn undir 2 ár kunnu verða koppsett fyri pneumokokkar.

Kvinnur, sum eru 18 ár og eldri kunnu verða koppsettar ókeypis fyri reydlingar.

Gentur og kvinnur í aldrinum 12-27 ár (báðir árgangir íroknaðir) kunnu verða koppsettar ókeypis fyri HPV (humant papillomavirus) fyri at fyribyrgja lívmóðirhálskrabba.

Fólk eldri enn 66 ár kunnu verða koppsett ókeypis fyri influensu.

Í mun til fíggjarlógaruppskotið er játtanin í 2018 lækkað við 300 tús. kr.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	2.885	3.039	2.900	3.100	3.400	3.400
01. Koppsetingar						
Útreiðslur	**2.885**	**3.039**	**2.900**	**3.100**	**3.400**	**3.400**
52. Tilskot til einstaklingar	2.885	3.039	2.900	3.100	3.400	3.400

Virksemisyvirlit: 01 Koppsetingar

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
A: Høvuðsendamál (1.000 kr.)	**2.885**	**3.039**	**2.900**	**3.100**	**3.400**	**3.400**
1. Koppsetingar	2.216	2.246	1.900	2.291	2.513	2.513
2. Koppsetingar fyri pensjónistar	669	793	1.000	809	887	887
B: Virksemi (tal)						
1. Koppsetingar (fólk)	7.060	6.804	6.300	6.940	7.611	7.611
2. Koppsetingar fyri pensjónistar (fólk)	3.099	3.188	4.000	3.252	3.566	3.566
C: Eindarkostnaður (kr.)						
1. Koppsetingar (miðalkostnaður)	314	330	300	330	330	330
2. Koppsetingar fyri pensjónistar (miðalkostn.)	216	249	250	249	249	249

11.20.1.13. Upplýsing um gitnaðarfyribyrging (Lógarbundin játtan)

Lógargrundarlagið undir gitnaðarfyribyrging er anordning nr. 643 af 9. desember 1982 om ikrafttræden på Færøerne af lov om svangerskabshygiejne og fødselshjælp, som senest ændret ved anordning nr. 398 af 20. apríl 2010, og kunngerð nr. 96 frá 26. november 1987 um leiðbeinandi reglur fyri upplýsing um gitnaðarverju.

Eftir hesi skipan ber landskassin útreiðslurnar av, at ókeypis vegleiðing um gitnaðarfyribyrging kann verða givin hjá kommunulæknunum. Játtanin verður nýtt til samsýningar til kommunulæknarnar fyri, at teir ókeypis skulu geva fólki upplýsingar um ymiskar hættir til gitnaðarfyribyrging.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	384	470	550	500	500	500
01. Gitnaðarfyribyrging						
Útreiðslur	**384**	**470**	**550**	**500**	**500**	**500**
52. Tilskot til einstaklingar	384	470	550	500	500	500

Virksemisyvirlit: 01 Gitnaðarfyribyrging

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
A: Høvuðsendamál (1.000 kr.)	**384**	**470**	**550**	**500**	**500**	**500**
Gitnaðarfyribyrging	384	470	550	500	500	500
B: Virksemi (tal)	**1.768**	**1.924**	**2.300**	**2.047**	**2.047**	**2.047**
1. Framhaldandi fyribyrging	845	847	1.200	902	902	902
2. Vegleiðing ísv fyribyrging fyrstu ferð	666	772	800	821	821	821
3. Vegleiðing um aðra fyribyrging	257	305	300	324	324	324
C: Eindarkostnaður (kr.)	**217**	**244**	**239**	**244**	**244**	**244**
Gitnaðarfyribyrging	217	244	239	244	244	244

11.20.1.16. Heilsukanningar av barnakonum (Lógarbundin játtan)

Lógargrundarlagið at heilsukanna barnakonur er anordning nr. 643 frá 9. desember 1982 om ikrafttræden på Færøerne af lov om svangerskabshygiejne og fødselshjælp, som senest ændret ved anordning nr. 398 frá 20 apríl 2010.

Eftir hesi skipan hava barnakonur rætt til eitt ávíst tal av ókeypis læknakanningum í viðgongutíðini. Henda játtan verður nýtt til at keypa ymsar vørur og tænastur fyri og annars til samsýningar til kommunulæknar fyri at veita barnakonum hesar kanningar ókeypis.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	797	934	950	900	950	950
01. Heilsukanning						
Útreiðslur	**797**	**934**	**950**	**900**	**950**	**950**
52. Tilskot til einstaklingar	797	934	950	900	950	950

Virksemisyvirlit: 01 Heilsukanning

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
A: Høvuðsendamál (1.000 kr.)	**797**	**934**	**950**	**900**	**950**	**950**
Heilsukanningar	797	934	950	900	950	950
B: Virksemi (tal)						
Heilsukanningar (tal)	2.113	2.222	2.350	2.141	2.262	2.262
C: Eindarkostnaður (kr.)						
Heilsukanningar (miðalkostnaður)	377	420	404	420	420	420

11.20.1.19. Læknakanningar av børnum (Lógarbundin játtan)

Lógargrundarlagið at læknakanna børn er løgtingslóg nr. 63 frá 17. mai 2005 um fyribyrgjandi heilsutænastur til børn og ung, sum broytt við løgtingslóg nr. 9 frá 12. mars 2014 og kunngerð nr. 88 frá 24. september 2007 um fyribyrgjandi heilsuskipaninr fyri børn og ung.

Eftir hesi lóg hava øll børn undir og í undirvísingarskyldugum aldri rætt til tilsamans 9 ókeypis fyribyrgjandi heilsukanningar hjá kommunulækna.

Mest sum øll játtanin verður nýtt at samsýna kommunulæknum fyri at veita børnum hesa tænastu.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	683	792	750	850	850	850
01. Læknakanning av børnum						
Útreiðslur	**683**	**792**	**750**	**850**	**850**	**850**
52. Tilskot til einstaklingar	683	792	750	850	850	850

Virksemisyvirlit: 01 Læknakanning av børnum

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
A: Høvuðsendamál (1.000 kr.)	**683**	**792**	**750**	**850**	**850**	**850**
Læknakanningar	683	792	750	850	850	850
B: Virksemi (tal)						
Læknakanningar (tal)	3.765	4.142	3.800	4.445	4.445	4.445
C: Eindarkostnaður (kr.)						
Læknakanningar (miðalkostnaður)	181	191	200	191	191	191

11.20.2. Heilsutænastur

11.20.2.02. Heilsutrygd (Rakstrarjáttan)

Lógargrundarlagið undir Heilsutrygd er løgtingslóg nr. 178 frá 22. desember 2009 um almenna heilsutrygd, við seinni broytingum.

Uppgávan hjá Heilsutrygd er at umsita skipanina við heilsutrygdarveitingum og heilsukanningarskipanina (profylaksir), umframt Kommunulæknaskipanina, økisheilsuskipanina og Gigni - heilsufrøði fyri børn & ung. Heilsutrygd umsitur og avroknar stuðul til meginpartin av primeru heilsutænastunum í Føroyum, herundir kommunulæknaviðtalur, læknahjálp til serlækna, stuðul til hjálparráð, ískoyti til viðgerð hjá tannlækna, fysioterapeuti, sálarfrøðingi, kiropraktor o.a. Somuleiðis umsitur Heilsutrygd í samstarvi við Apoteksverkið skipanina við heilivágstilskoti.

Av játtanini í 2018 fara góðar 1,5 mió. kr. til TAKS fyri at umsita innkrevjingina av heilsutrygdargjaldinum.

Farið verður undir at tryggja dygdina og samskipa arbeiðið í vaktarskipanini hjá Kommunulæknum.

Í sambandi við, at Heilsutrygd nú er fyrisiting hjá Gigni er játtanin í 2018 hækkað við 810 tús. kr., sum eru fluttar frá Gigni.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	7.421	7.699	7.371	8.254	8.254	8.254
Útreiðslur	7.421	7.699	7.371	8.254	8.254	8.254
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	7.421	7.699	7.371	8.254	8.254	8.254
Útreiðslur	**7.421**	**7.699**	**7.371**	**8.254**	**8.254**	**8.254**
11. Lønir v.m.	4.542	4.962	4.718	5.601	5.601	5.601
14. Keyp av vørum og tænastum	958	951	2.200	2.200	2.200	2.200
15. Keyp av útbúnaði, netto	424	-1	249	249	249	249
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	203	170	204	204	204	204
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	1.293	1.618	-	-	-	-

Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Í lønarflokki 37 ella hægri	1,0	1,7	1,0	1,0	1,0	1,0
Onnur	9,0	8,4	9,4	10,0	10,0	10,0
Fulltíðarstørv	10,0	10,1	10,4	11,0	11,0	11,0
Lønarpartur (mió. kr.)	4,5	5,0	4,7	5,6	5,6	5,6

11.20.2.03. Heilsutrygdarveitingar (Rakstrarjáttan)

Lógargrundarlagið undir Heilsutrygdarveitingunum er Ll. nr. 178 frá 22. desember 2009 um almenna heilsutrygd, við seinni broytingum.

Sambært lógini eru fýra høvuðsøki, sum almenna heilsutrygdin fíggjar ella veitir ískoyti til:

1. Veitingar í primeru heilsutænastuni. Hetta er m.a. til viðtalur hjá kommunulækna og serlækna - eftir ávísing frá kommunulækna. Umframt ískoyti til sáttmálar, sum feløg innan nevndu heilsuøki hava gjørt við Meginfelag sjúkrakassa Føroya, sum Heilsutrygd hevur yvirtikið sambært lógini.
2. Endurgjald til einstaklingar í sambandi við ferðing til og frá lækna og jarðarmóðir, eftirbataheim og til gravarhjálp.
3. Ískoyti til brillur og hjálparráð.
4. Heilivágstilskot.

Heilsutrygdarveitingar fevna somuleiðis um stuðul til hjálparráð og heilivág. Her er talan um hjálparráð, sum verða veitt í sambandi við sjúkuviðgerð, ella sum verða latin persónum, ið ikki hava varandi tørv. Harumframt verður veittur stuðul til ergoterapi og fótarøkt.

Játtanin

Játtanin er í 2018 hækkað við 1 mió. kr. í sambandi við, at farið verður undir at javnseta

fyritíðarpensjónistar við fólkapensjónistar í tilskoti í heilivágsstiganum. Í sambandi við, at nakrar serlæknaveitingar verða tillagaðar, er játtanin lækkað við 800 tús. kr. Játtanin í 2018 er herumframt framskrivað við gott 2,2 prosentum í mun til játtanina í 2017.

Átekning

Landsstýriskvinnuni verður heimilað at gera innanhýsis flytingar millum hesa høvuðskontuna og høvuðskontu 11.20.2.04. Kommunulæknaskipanin.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	156.009	162.050	165.360	169.021	171.556	174.129
Útreiðslur	156.009	162.050	165.360	169.021	171.556	174.129
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	156.009	162.050	165.360	169.021	171.556	174.129
Útreiðslur	**156.009**	**162.050**	**165.360**	**169.021**	**171.556**	**174.129**
11. Lønir v.m.	-	239	-	-	-	-
14. Keyp av vørum og tænastum	2	2	-	-	-	-
52. Tilskot til einstaklingar	152.913	158.650	165.360	166.021	168.556	171.129
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	3.094	3.158	-	3.000	3.000	3.000

Virksemisyvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
A: Høvuðsendamál (1.000 kr.)	**156.009**	**162.050**	**165.360**	**169.021**	**171.556**	**174.129**
Heilivágur	63.815	66.376	67.683	70.149	71.202	72.268
Kommunulæknahjálp	46.598	47.738	47.664	49.733	50.479	51.236
Serlæknahjálp	2.102	2.053	1.982	1.339	1.359	1.379
Tannlæknahjálp	17.759	17.490	17.969	18.221	18.494	18.772
Brillur og bandasjur o.a.	1.157	1.222	1.301	1.273	1.292	1.312
Fysiurgisk viðgerð	6.830	7.025	6.988	7.319	7.428	7.540
Kiropraktor	145	154	103	160	163	165
Hvíldarheim	499	549	526	572	581	589
Sálarfrøðingar	989	944	1.148	983	998	1.013
Jarðarferðarhjálp	1.707	1.797	2.050	1.872	1.900	1.929
Fótarøkt	2.655	2.789	2.937	2.906	2.949	2.993
Hjálparráð	10.270	12.356	13.396	12.872	13.065	13.261
Ergoterapi	475	530	566	552	560	569
Eftirútbúgving og gransking, kommunulæknar	1.004	1.025	1.030	1.068	1.084	1.100
Ferðing, flutningur og annað ógreinað	4	2	17	2	2	3

11.20.2.04. Kommunulæknaskipanin (Rakstrarjáttan)

Lógargrundarlagið undir kommunulæknaskipanini er Ll. nr. 28 frá 23. apríl 1999 um kommunulæknaskipanina, sum seinast broytt við Ll. nr. 45 frá 6. mai 2015. Løgtingslógin er sett í gildi við heimild í § 1, stk. 2, nr. 2 í lóg nr. 316 frá 17. mai 1995 um "sundhedsvæsenet på Færøerne".

Játtanin til kommunulæknaskipanina verður mest sum øll nýtt til lønir til kommunulæknarnar, og viðtalustarvsfólk hjá avloysarum í teimum 9 læknadømunum í Føroyum. Talan er um eina fasta grundupphædd, sum verður goldin kommunulæknunum. Viðtalustarvsfólkini fáa løn sambært viðkomandi sáttmála.

Tann 1. januar 2017 vóru 18,5 sett og 11 avloysarasett kommunulæknastørv í skipanini. Tað er sera trupult at fáa sett læknar í leysu størvini. Arbeitt hevur verið fyri at fáa fleiri at serútbúgva seg til kommunulækna (almen medisin), og byrja úrslitini nú at síggjast.

Kommunulæknaskipanin er ótíðarhóskandi, og alneyðugt er við nýhugsan á økinum. Við støði í tilmælunum í Heilsunýskipanini verður arbeitt við at nútíðargera kommunulæknaskipanina. Hetta fer at hava við sær møguligar fyrisitingarligar og fíggjarligar broytingar í skipanini. Læknadømini fóru í 2014 frá 11 niður í 9 sum liður í hesi nútímansgerð.

Heilsutrygdarveitingar flyta basisgjald til Kommunulæknaskipanina, tá ið avloysarar eru í starvi. Kommunulæknaskipanin nýtir hesa upphædd til at rinda viðtalustarvsfólki hjá avloysarunum løn.

Trýstið á kommunulæknaskipanina er økt, og verður arbeitt við at fáa sett fleiri kommunulæknastørv.

Játtanin í 2018 er hækkað við 500 tús. kr. til endamálið.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	10.323	9.721	10.455	10.955	10.955	10.955
Útreiðslur	13.417	12.878	10.455	13.955	13.955	13.955
Inntøkur	3.094	3.157	-	3.000	3.000	3.000
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	10.323	9.721	10.455	10.955	10.955	10.955
Útreiðslur	**13.417**	**12.878**	**10.455**	**13.955**	**13.955**	**13.955**
11. Lønir v.m.	12.095	11.433	9.314	12.500	12.500	12.500
14. Keyp av vørum og tænastum	1.298	1.415	1.141	1.455	1.455	1.455
15. Keyp av útbúnaði, netto	25	27	-	-	-	-
17. Avskrivingar o.a.	0	-	-	-	-	-
52. Tilskot til einstaklingar	0	-	-	-	-	-
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	-	2	-	-	-	-
Inntøkur	**3.094**	**3.157**	**-**	**3.000**	**3.000**	**3.000**
76. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	*3.094*	*3.157*	*-*	*3.000*	*3.000*	*3.000*

Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Kommunulæknar í føstum starvi	22,0	21,0	18,5	19,5	19,5	19,5
Viðtalur uttan starvssettan lækna	9,0	8,5	11,0	11,0	11,0	11,0
Fulltíðarstørv	31,0	29,5	29,5	30,5	30,5	30,5
Lønarpartur (mió. kr.)	12,1	11,4	9,3	12,5	12,5	12,5

11.20.2.05. Útbúgving av yngri læknum (Rakstrarjáttan)

Játtanin er til at styrkja útbúgvingina av kommunulæknum og sjúkrahúslæknum í Føroyum. Ein partur av játtanini skal nýtast til álagt skeiðvirksemi.

Tann 1. september 2017 vóru 31 læknar í ymiskum útbúgvingarstørvum í skipanini. Av hesum eru 11 læknar í útbúgvingarstarvi í almen medisin, sum er útbúgving til kommunulækna.

Síðani 2002 hevur verið møguligt at tikið serútbúgving til kommunulækna í Føroyum. Higartil hava 23 tikið serútbúgving sína, ella partar av henni her, og starvast meginparturin av teimum nú í Føroyum.

Játtanin ber ikki útreiðslurnar av at skipa starvsvenjingina.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	6.822	7.176	7.727	7.727	7.727	7.727
Útreiðslur	6.822	7.176	7.727	7.727	7.727	7.727
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	6.822	7.176	7.727	7.727	7.727	7.727
Útreiðslur	**6.822**	**7.176**	**7.727**	**7.727**	**7.727**	**7.727**
11. Lønir v.m.	6.311	6.331	7.227	7.227	7.227	7.227
14. Keyp av vørum og tænastum	511	768	500	500	500	500
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	-	77	-	-	-	-

Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Í lønarflokki 37 ella hægri	-	-	-	-	-	-
Onnur	9,5	11,0	12,0	12,0	12,0	12,0
Fulltíðarstørv	9,5	11,0	12,0	12,0	12,0	12,0
Lønarpartur (mió. kr.)	6,3	6,3	7,2	7,2	7,2	7,2

11.20.2.06. Økisheilsuskipanin (Rakstrarjáttan)

Við støði í diabetesheildarætlanini fyri Føroyar hevur verið arbeitt við at betra um og góðskumenna heilsutænastur til borgarar við varandi sjúkum, t.d. diabetes. Málið er at skipa heilsutænasturnar á ein slíkan hátt, at viðgerðartilboðini í høvuðsheitum kunnu veitast hesum borgarum í nærumhvørvinum. Sjúkrarøktarfrøðingar, sum starvast í kommunulæknaviðtalum hava ment teirra førleikar til hetta virksemi í 2014. Harumframt eru dietistar settir í starv frá 2015 og veita teir borgarum tænastu í nærumhvørvinum.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	1.261	1.436	1.700	1.700	1.700	1.700
Útreiðslur	1.261	1.436	1.700	1.700	1.700	1.700
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	1.261	1.436	1.700	1.700	1.700	1.700
Útreiðslur	**1.261**	**1.436**	**1.700**	**1.700**	**1.700**	**1.700**
11. Lønir v.m.	1.092	1.264	1.600	1.600	1.600	1.600
14. Keyp av vørum og tænastum	153	166	100	100	100	100
15. Keyp av útbúnaði, netto	17	5	-	-	-	-
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	-	0	-	-	-	-

Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Í lønarflokki 37 ella hægri	-	-	-	-	-	-
Onnur	2,5	3,2	3,5	3,5	3,5	3,5
Fulltíðarstørv	2,5	3,2	3,5	3,5	3,5	3,5
Lønarpartur (mió. kr.)	1,1	1,3	1,6	1,6	1,6	1,6

11.20.2.08. Apoteksverkið (Rakstrarjáttan)

Lógargrundarlagið undir apoteksverkinum er Ll. nr. 104 frá 5. september 1988 um apoteksverkið og heilivág við seinni broytingum (apotekslógin), umframt kunngerðir givnar við heimild í apotekslógini.

Apoteksverkið er stovnur undir Heilsu- og innlendismálaráðnum, og undir apoteksverkinum eru: Tjaldurs Apotek, Norðoya Apotek, Suðuroyar Apotek, Eysturoyar Apotek og Landsapotekaraembætið. Apoteksgrunnurin varð eisini partur av apoteksverkinum áður, men varð avtikin í 2014 við lóg.

Apoteksverk Føroya hevur einkarætt at gera, flyta inn, flýggja út, hava á goymslu, handla við og pakka heilivág, uttan so at annað er ásett í apotekslógini ella reglum við heimild í apotekslógini.

Høvuðsuppgávan hjá landsapotekaranum er at hava eftirlit við tí heilivági o.ø., sum verður innflutt, selt ella gjørt í Føroyum.

At heilivágsframleiðsluhølini voru liðug í 2014 gevur møguleika fyri framleiðslu undir altjóða góðkendum umstøðum. Arbeitt verður við møguleikum fyri útflutningi av heilivági. Fortreyt fyri útflutningi er, at handilsforðingar ikki verða.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	301	-536	0	0	0	0
Útreiðslur	295.868	285.867	300.000	255.000	255.000	255.000
Inntøkur	295.567	286.403	300.000	255.000	255.000	255.000
20. Landsfyritøka						
Nettoútreiðsla	301	-536	0	0	0	0
Útreiðslur	**295.868**	**285.867**	**300.000**	**255.000**	**255.000**	**255.000**
11. Lønir v.m.	51.775	52.857	53.800	53.500	53.500	53.500
14. Keyp av vørum og tænastum	237.701	223.273	240.000	198.900	198.900	198.900
15. Keyp av útbúnaði, netto	3.402	5.250	4.200	1.000	1.000	1.000
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	2.756	3.704	2.000	1.600	1.600	1.600
17. Avskrivingar o.a.	19	613	-	-	-	-
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	106	38	-	-	-	-
52. Tilskot til einstaklingar	75	76	-	-	-	-
57. Rentuútreiðslur o.a.	35	49	-	-	-	-
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	-	7	-	-	-	-
Inntøkur	**295.567**	**286.403**	**300.000**	**255.000**	**255.000**	**255.000**
21. Søla av vøru og tænastum	*295.424*	*286.329*	*300.000*	*255.000*	*255.000*	*255.000*
67. Rentuinntøkur og vinningsbýti	*143*	*74*	-	-	-	-

Starvsfólkayvirlit: 20 Landsfyritøka

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Í lønarflokki 37 ella hægri	5,0	6,0	6,0	6,0	6,0	6,0
Onnur	110,0	110,0	110,0	110,0	110,0	110,0
Fulltíðarstørv	115,0	116,0	116,0	116,0	116,0	116,0
Lønarpartur (mió. kr.)	51,8	52,9	53,8	53,5	53,5	53,5

11.20.2.11. Ílegusavnið (Rakstrarjáttan)

Lógargrundarlagið undir Ílegusavninum er Ll. nr. 62 frá 17. mai 2005 um gransking í mannaílegum.

Sambært løgtingslógini skulu Vevnaðar-, Diagnosu- og Ættarbandsskráir stovnast og rekast. Ílegusavnið virkar eisini sum ráðgevandi innan granskingarverkætlanir og annað í heilsuverkinum.

Ætlanin er, at Ílegusavnið sum frálíður í størri mun skal fíggjast við inntøkum frá verkætlanum.

21. Verkætlanin FarGen

FarGen verkætlanin verður raðfest. Málið er framhaldandi at menna granskingarundirstøðukervið. Eitt føroyskt tilvísingar-genom verður gjørt. Hetta vil menna granskingarumhvørvið og førleikarnar at fyribyrgja og viðgera sjúku í Føroyum.

45. Stuðulsfíggjað virksemi

Alt stuðulsfíggjað virksemi er savnað á hesa undirkontuna síðani 2017. Fleiri føroyskar verkætlanir eru í gongd. Hetta virksemi, sum er í neyvum samstarvi við starvsfelagar í Europa, Usa og Kanada, er fíggjað við peningi úr almennum og privatum grunnum. Hetta

sæst aftur í inntøkum, sum eru gjøld frá verkætlanum, sum verða nýttar til samsýning til kliniskar ábyrgdarhavarar í heilsuverkinum, sjúkrarøktarfrøðingar, laborantar og onnur, sum arbeiða við tilfari til verkætlanirnar. Verkætlaninar verða fíggjaðar úr almennum og privatum grunnum. Upphæddirnar verða brúktar til samsýningar og tilfar til verkætlaninar.

Eitt undirstøðukervi fyri eina genomskrá í Føroyum verður ment. Til verkætlanina vóru 10 mió. kr. tilsamans játtaðar um donsku fíggjarlógina, árini 2015-2017. Upphæddin er brúkt m.a. til at innsavna, klárgera og talgilda (genomsekvensera) blóðroyndir hjá 1.500 persónum. Soleiðis er ein genomdátubanki ávegis í Føroyum, sum ger tað møguligt m.a. at genomgranska í føroyska fólkinum frameftir.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	1.626	1.908	3.535	3.535	3.535	3.535
Útreiðslur	2.274	7.200	13.335	5.735	5.735	5.735
Inntøkur	648	5.292	9.800	2.200	2.200	2.200
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	1.252	1.509	1.535	1.535	1.535	1.535
Útreiðslur	**1.535**	**3.058**	**2.935**	**1.735**	**1.735**	**1.735**
11. Lønir v.m.	705	1.300	1.612	1.100	1.100	1.100
14. Keyp av vørum og tænastum	546	1.067	770	435	435	435
15. Keyp av útbúnaði, netto	-	68	400	100	100	100
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	83	256	153	100	100	100
57. Rentuútreiðslur o.a.	0	1	-	-	-	-
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	200	367	-	-	-	-
Inntøkur	**282**	**1.550**	**1.400**	**200**	**200**	**200**
21. Søla av vøru og tænastum	*144*	*313*	*1.400*	*200*	*200*	*200*
63. Vanligar flytingarinntøkur	*32*	*629*	-	-	-	-
76. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	*107*	*608*	-	-	-	-
21. Verkætlanin FarGen						
Nettoútreiðsla	374	399	2.000	2.000	2.000	2.000
Útreiðslur	**374**	**399**	**2.000**	**2.000**	**2.000**	**2.000**
11. Lønir v.m.	129	-	2.000	2.000	2.000	2.000
14. Keyp av vørum og tænastum	98	229	-	-	-	-
15. Keyp av útbúnaði, netto	10	148	-	-	-	-
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	30	15	-	-	-	-
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	107	7	-	-	-	-
45. Stuðulsfíggjað virksemi						
Nettoútreiðsla	0	0	0	0	0	0
Útreiðslur	**366**	**3.743**	**8.400**	**2.000**	**2.000**	**2.000**
11. Lønir v.m.	144	867	1.400	1.500	1.500	1.500
14. Keyp av vørum og tænastum	192	2.213	7.000	500	500	500
15. Keyp av útbúnaði, netto	30	-	-	-	-	-
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	-	56	-	-	-	-
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	-	608	-	-	-	-
Inntøkur	**366**	**3.743**	**8.400**	**2.000**	**2.000**	**2.000**
63. Vanligar flytingarinntøkur	-	-	-	*2.000*	*2.000*	*2.000*
65. Flytingarinntøkur úr útlandinum	*366*	*3.743*	*8.400*	-	-	-

Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Í lønarflokki 37 ella hægri	-	-	-	-	-	-
Onnur	1,6	3,5	3,0	3,0	3,0	3,0
Fulltíðarstørv	1,6	3,5	3,0	3,0	3,0	3,0
Lønarpartur (mió. kr.)	0,7	1,3	1,6	1,1	1,1	1,1

Starvsfólkayvirlit: 21 Verkætlanin FarGen

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Í lønarflokki 37 ella hægri	-	-	1,0	3,5	3,5	3,5
Onnur	-	-	-	-	-	-
Fulltíðarstørv	-	-	1,0	3,5	3,5	3,5
Lønarpartur (mió. kr.)	0,1	-	2,0	2,0	2,0	2,0

Starvsfólkayvirlit: 45 Stuðulsfíggjað virksemi

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Í lønarflokki 37 ella hægri	-	-	-	-	-	-
Onnur	0,3	1,6	4,0	3,0	3,0	3,0
Fulltíðarstørv	0,3	1,6	4,0	3,0	3,0	3,0
Lønarpartur (mió. kr.)	0,1	0,9	1,4	1,5	1,5	1,5

11.20.3. Sjúkrahúsverkið v.m.

Lógargrundarlagið undir sjúkrahúsverkinum er Ll. nr. 64 frá 17. mai 2005 um sjúkrahúsverkið, við seinni broytingum. Sjúkrahúsverkið átekur sær serkanningar, viðgerðir og røkt av bæði likamliga og sálarliga sjúkum fólki.

Sjúkrahúsverkið fevnir um Landssjúkrahúsið, Klaksvíkar sjúkrahús, Suðuroyar sjúkrahús, Sjúklingahotellið Tórshavn og Deildina fyri arbeiðs- og almannaheilsu.

Rakstrarútreiðslurnar fevna eisini um útreiðslur til Serviðgerð uttanlands.

11.20.3.04. Landssjúkrahúsið (Rakstrarjáttan)

Lógargrundarlagið undir sjúkrahúsverkinum er Ll. nr. 64 frá 17. mai 2005 um sjúkrahúsverkið, við seinni broytingum.

Landssjúkrahúsið er meginsjúkrahús í Føroyum við umleið 20 serlæknaøkjum og 133 seingjarplássum. Innan fleiri onnur serlæknaøki er ráðgeving skipað, soleiðis at læknar uttanlands eru við í viðgerðini av sjúklingum á Landssjúkrahúsinum.

Uppgávan hjá sjúkrahúsinum er at kanna, viðgera, røkta og venja sjúklingar uppaftur. Sjúkrahúsið hevur eina bráðfeingis tilbúgvingarskipan alt samdøgrið innan tey stóru serlæknaøkini.

Landssjúkrahúsið hevur eina stjórn, sum tekur tær yvirskipaðu avgerðirnar. Sjúkrahústjórin hevur evstu ábyrgdina mótvegis Heilsu- og innlendismálaráðnum.

Sum aðalmál vil Landssjúkrahúsið veita eina góða heilsutænastu á høgum fakligum støði, umframt at menna og útbúgva síni starvsfólk, og stuðla undir gransking. Landssjúkrahúsið vil, at sjúklingurin er í miðdeplinum, at starvsfólkini eru errin av at arbeiða á sjúkrahúsinum, og at samfelagið fær ágóðan av virkseminum á sjúkrahúsinum.

Skurðdepilin
Á skurðdeplinum eru serlæknar millum annað innan ortopædi, urologi, plastikkkirurgi, gynækologi/obstetrik og almenna kirurgi. Harumframt eru oyrna-, nasa- og hálsdeild, eygnadeild, tannlæknadeild, føðideild og ein deild fyri skurðstovur og skopiir. Á deplinum eru tvær seingjadeildir við íalt 56 seingjum, dagskurðstovur við 6 seingjum og harafturat kirurgiskt ambulatorium.

Ambulanta virksemið á skurðdeplinum er nógv økt, síðan G-bygningurin á Landssjúkrahúsinum varð tikin í nýtslu í september 2004. Hetta hevur havt við sær, at bíðilistarnir eru styttir innan ávís øki. Miðað verður ímóti, at ein enn størri partur av virkseminum á skurðdeplinum verður ambulant og dagkirurgi, umframt at innleggingartíðin verður stytt.

Virksemi á skurðdeplinum	2012	2013	2014	2015	2016	2017
Innleggingar	3.467	3.441	3.620	3.723	3.668	3.459
Ambulantar viðgerðir	21.763	22.621	28.898	29.199	29.837	29.070
Skurðviðgerðir	2.222	2.046	2.630	2.507	2.414	2.266
Dag skurðviðgerðir	482	529	612	617	617	607

Medisinski depilin
Á medisinska deplinum verður viðgerð veitt millum annað innan barnasjúkur, hjartasjúkur, lungnasjúkur, krabbamein, evnaskiftissjúkur, nýrasjúkur íroknað dialysu, maga-tarm sjúkur, neurologiskar sjúkur, húðsjúkur umframt fysio- og ergoterapi. Á deplinum eru 4 sjúklingadeildir við íalt 53 seingjarplássum, harumframt medisinskt ambulatorium.

Stórar broytingar hava verið á medisinska deplinum hesi seinnu árini, har ein lutfalsliga størri partur av kanningum og viðgerðum er broyttur til ambulant virksemi. Innleggingartíðin er stytt, og hevur møguleiki tí verið fyri at gera fleiri ambulantar viðgerðir. Málið er í framtíðini at økja ambulanta virksemið enn meira, soleiðis at færri planlagdar innleggingar verða, og innleggingartíðin verður styttri.

Stórur vøkstur hevur verið í útreiðslunum til heilivág og aðrar viðgerðarvørur hesi seinastu árini. Heilivágurin á marknaðinum gerst støðugt betri við færri hjáárinum, men nýggi heilivágurin er oftast væl dýrari, og tað sæst aftur á útreiðslunum. Útreiðsluvøksturin hevur verið stórur seinastu árini, og hevur hetta eisini verið at sæð í heilsuverkunum í londunum rundan um okkum. Frá og við 2011 var serstakur sjúkrahúsheilivágur fluttur til serstaka høvuðskontu.

Virksemi á med. deplinum	2012	2013	2014	2015	2016	2017
Innleggingar	4.554	4.595	4.973	5.061	5.431	5.388
Ambulantar viðtalur	24.263	28.541	29.393	28.915	28.565	36.577

Psykiatriski depilin
Psykiatriski depilin veitir viðgerð fyri sálarligum sjúkum og fevnir um alt landið. Arbeitt verður við at skipa eitt breitt ambulant viðgerðartilboð, soleiðis at viðgerðin í høvuðsheitum verður ambulant, men við innleggingarmøguleika, har tað er neyðugt. Depilin er umskipaður og hevur nú eina seingjadeild við 19 seingjarplássum til intensiva, akutta og almenna psykiatri, sum er skipað í eindum.

Til at menna ambulantu viðgerðartilboðini er økispsykiatriska tænastan ment munandi, og virkar frá 2017 í øllum landinum. Barna- og ungdómspsykiatriska økið verður raðfest við einum dagtilboði. Harumframt verður arbeitt við at styrkja demensøkið við skjótari útgreinan og at viðgera og samantvinna hetta við eina viðgerðarskipan fyri eldri við sálarligum trupulleikum.

Virksemi á psyk. deplinum	2012	2013	2014	2015	2016	2017
Innleggingar	257	263	254	258	288	227
Ambulantar viðtalur	10.701	9.715	10.312	11.938	12.610	12.348

Mett er, at tað eru fleiri ambulantar viðgerðir í 2013 enn lýst her, tí skráseting í THS innan psykiatriska økið er trupul.

Bráðdepilin
Bráðdepilin umfatar bráðmóttøku/skaðastovu, intensiv við 5 seingjum, anæstesi og sjúkraflutningstænastuna og tænasturnar í forhøllini. Eisini verður kommunulæknavaktskipanin hýst í skaðastovuumhvørvinum.

Virksemi á bráðdeplinum	2012	2013	2014	2015	2016	2017
Innleggingar	289	263	258	204	201	210
Bráð móttøka	1.288	-	-	-	-	-
Skaðastovuviðgerðir	5.078	6.848	7.044	7.376	7.706	7.813
Kommunulæknavaktin	24.848	22.605	22.602	23.035	21.793	22.952
Sjúkraflutningstúrar	6.327	6.616	6.526	6.569	6.859	6.762

Diagnostiski depilin
Diagnostiski depilin umfatar røntgen, patologi og rannsóknarstovu.

Stórur vøkstur hevur verið í talinum av diagnostiskum kanningum seinnu árini. Tí eru útreiðslurnar øktar munandi til økið. Diagnostiska økið verður raðfest høgt fyri, at Landssjúkrahúsið kann vera ført fyri at hava betri og skjótari sjúklingagongdir og meira ambulant virksemi.

Virksemi á diagn. deplinum	2012	2013	2014	2015	2016	2017
Røntgenkanningar	29.165	30.389	32.470	33.212	34.372	36.361
Rannsóknarstovukanningar	554.861	626.073	652.183	657.094	663.189	706.868
Harav innløgd	191.520	204.057	207.066	229.728	235.556	269.637
Harav ambulant	363.341	422.016	445.117	427.366	427.633	437.231

Tænastudepilin
Tænastudepilin fevnir um raksturin av bygningum (u.l. 50.000 kvm.), uttanduraøki (u.l. 150.000 kvm.), tekniskar veitingar, medisinskan útbúnað, vaskarí, køk, goymslu, reingerð og húsavørð.

Goymslan økir støðugt sítt virksemi, og veitir eisini tænastur til aðrar kundar innan heilsuverkið.

Køkurin er gamal og hevur tørv á stórum ábótum. Køkurin umsitur eisini kaféina í forhøllini, sum bæði sjúklingar og starvsfólk kunnu nýta.

Uttanlandstænastan
Í 2011 var Uttanlandstænastan skipað sum ein stápseind á Landssjúkrahúsinum. Tænastan samskipar sjúklingaferðir og sjúklingagongdir uttanlands, herundir Sjúklingahotellið Tórshavn.

Fyrisiting
Fyrisitingin hevur nógvar rakstraruppgávur, m.a. lønarútgjalding, starvsfólkamál, bókhald, fíggjarstýring, KT, Trygd og dygd, skrivarauppgávur og ráðlegging. Harumframt viðgerð uttanlands og KT-økið heilsuverksins.

KT er vorðið ein týðandi táttur í virkseminum á sjúkrahúsinum. Við talgildum skipanum er virksemið á sjúkrahúsinum í alt størri mun tengt at KT. Hetta setur krøv til KT-økið á sjúkrahúsinum, bæði hvat viðvíkur rakstri og trygd.

THS-skipanin
Frá 1. januar 2016 er KT-øki heilsuverksins flutt til hesa høvuðskontuna.

Játtanin
Játtanin í 2018 er hækkað við 1,8 mió. kr. til demensøkið og til barna- og ungdómspsykiatriska økið.

Játtanirnar í 2018 á undirkontunum 22.-26. Virksemi uttanlands eru samlað sæð framskrivaðar við nærum 3,5 prosentum í mun til játtanina í 2017.

Játtanin á undirkontu 28. Avseting til serlæknar. Virksemið heldur áfram í 2018 samsvarandi ætlanini.

Játtanin á undirkontu 39. Óvanligt er 12,6 mió. kr. í 2018 vegna skyldugan starvsfólkakostnað til serlæknar.

Átekning

Landsstýriskvinnuni verður heimilað at gera innanhýsis flytingar millum hesa høvuðskontuna og høvuðskonturnar 11.20.3.10. Klaksvíkar sjúkrahús, 11.20.3.15. Suðuroyar sjúkrahús, og 11.20.3.19. Serstakur sjúkrahúsheilivágur.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	586.961	612.721	623.736	648.376	639.098	642.486
Útreiðslur	637.314	665.541	672.823	697.851	688.609	692.035
Inntøkur	50.352	52.820	49.087	49.475	49.511	49.549
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	426.264	446.368	451.024	457.524	457.524	457.524
Útreiðslur	**452.430**	**475.445**	**477.224**	**483.724**	**483.724**	**483.724**
11. Lønir v.m.	325.661	342.152	358.849	365.349	365.349	365.349
14. Keyp av vørum og tænastum	120.925	129.047	111.320	111.320	111.320	111.320
15. Keyp av útbúnaði, netto	2.809	1.714	6.705	6.705	6.705	6.705
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	2.699	2.014	100	100	100	100
17. Avskrivingar o.a.	-10	88	-	-	-	-
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	261	332	250	250	250	250
31. Bygging og løguframleiðsla	33	-	-	-	-	-
57. Rentuútreiðslur o.a.	0	-	-	-	-	-
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	51	98	-	-	-	-
Inntøkur	**26.165**	**29.077**	**26.200**	**26.200**	**26.200**	**26.200**
21. Søla av vøru og tænastum	*24.785*	*27.004*	*26.000*	*26.000*	*26.000*	*26.000*
29. Ymsar rakstrarinntøkur	*1.380*	*1.136*	*200*	*200*	*200*	*200*
63. Vanligar flytingarinntøkur	-	*937*	-	-	-	-
22. Viðgerð uttanlands - Landssjúkrahúsið						
Nettoútreiðsla	104.810	106.843	104.499	108.451	110.620	112.832
Útreiðslur	**113.711**	**115.143**	**112.799**	**117.051**	**119.220**	**121.432**
11. Lønir v.m.	208	44	-	-	-	-
14. Keyp av vørum og tænastum	111.087	114.830	112.799	117.051	119.220	121.432
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	88	269	-	-	-	-
57. Rentuútreiðslur o.a.	2.328	-	-	-	-	-
Inntøkur	**8.901**	**8.300**	**8.300**	**8.600**	**8.600**	**8.600**
65. Flytingarinntøkur úr útlandinum	*8.300*	*8.300*	*8.300*	*8.600*	*8.600*	*8.600*
76. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	*601*	-	-	-	-	-
23. Viðgerð uttanlands - Klaksvíkar sjúkrahús						
Nettoútreiðsla	5.192	5.382	9.348	9.816	10.012	10.213
Útreiðslur	**5.192**	**5.382**	**9.348**	**9.816**	**10.012**	**10.213**
14. Keyp av vørum og tænastum	5.192	5.382	9.348	9.816	10.012	10.213
24. Viðgerð uttanlands - Suðuroyar sjúkrahús						
Nettoútreiðsla	3.614	2.771	3.367	3.536	3.606	3.678
Útreiðslur	**3.614**	**2.771**	**3.367**	**3.536**	**3.606**	**3.678**
14. Keyp av vørum og tænastum	3.614	1.582	3.367	3.536	3.606	3.678
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	-	1.189	-	-	-	-
25. Flutningur og uppihald						
Nettoútreiðsla	22.472	25.710	24.330	24.330	24.817	25.313
Útreiðslur	**22.472**	**25.710**	**24.330**	**24.330**	**24.817**	**25.313**
14. Keyp av vørum og tænastum	22.472	25.710	24.330	24.330	24.817	25.313

26. Sjúklingahotellið Tórshavn

Nettoútreiðsla	17.840	18.346	19.000	19.951	20.351	20.758
Útreiðslur	**19.721**	**20.382**	**20.751**	**21.790**	**22.226**	**22.671**
11. Lønir v.m.	8.663	8.962	9.943	10.441	10.650	10.863
14. Keyp av vørum og tænastum	4.916	5.188	4.761	4.999	5.099	5.201
15. Keyp av útbúnaði, netto	75	69	52	55	56	57
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	6.067	6.164	5.995	6.295	6.421	6.550
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	0	-1	-	-	-	-
Inntøkur	**1.881**	**2.036**	**1.751**	**1.839**	**1.875**	**1.913**
21. Søla av vøru og tænastum	*1.880*	*2.036*	*1.751*	*1.839*	*1.875*	*1.913*
67. Rentuinntøkur og vinningsbýti	*2*	-	-	-	-	-

27. KT-øki heilsuverksins

Nettoútreiðsla	7.774	8.638	7.168	7.168	7.168	7.168
Útreiðslur	**8.212**	**9.109**	**7.604**	**7.604**	**7.604**	**7.604**
11. Lønir v.m.	2.339	3.398	4.055	4.055	4.055	4.055
14. Keyp av vørum og tænastum	5.145	4.562	3.239	3.239	3.239	3.239
15. Keyp av útbúnaði, netto	539	780	70	70	70	70
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	182	164	240	240	240	240
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	7	-	-	-	-	-
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	-	206	-	-	-	-
Inntøkur	**438**	**472**	**436**	**436**	**436**	**436**
21. Søla av vøru og tænastum	*438*	*472*	*436*	*436*	*436*	*436*

28. Avseting til serlæknar

Nettoútreiðsla	-	-	5.000	5.000	5.000	5.000
Útreiðslur	**-**	**-**	**5.000**	**5.000**	**5.000**	**5.000**
11. Lønir v.m.	-	-	5.000	5.000	5.000	5.000

39. Óvanligt

Nettoútreiðsla	-	-	-	12.600	-	-
Útreiðslur	**-**	**-**	**-**	**12.600**	**-**	**-**
11. Lønir v.m.	-	-	-	12.600	-	-

40. Inntøkufíggjað virksemi (Vaskarí)

Nettoútreiðsla	-1.005	-1.338	0	0	0	0
Útreiðslur	**11.961**	**11.597**	**12.400**	**12.400**	**12.400**	**12.400**
11. Lønir v.m.	5.512	5.747	5.700	5.700	5.700	5.700
14. Keyp av vørum og tænastum	3.454	2.959	3.500	3.500	3.500	3.500
15. Keyp av útbúnaði, netto	182	32	500	500	500	500
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	2.824	2.791	2.700	2.700	2.700	2.700
17. Avskrivingar o.a.	-10	-	-	-	-	-
32. Útvegan av løgu o.ø.	-	68	-	-	-	-
Inntøkur	**12.966**	**12.936**	**12.400**	**12.400**	**12.400**	**12.400**
21. Søla av vøru og tænastum	*12.966*	*12.936*	*12.400*	*12.400*	*12.400*	*12.400*

22. Viðgerðir uttanlands, Landssjúkrahúsið, 23. Klaksvíkar sjúkrahús og 24. Suðuroyar sjúkrahús.

Sambært § 5 í Ll. nr. 64 frá 17. mai 2005 um sjúkrahúsverkið hava persónar, ið búgva her í landinum, rætt til ókeypis viðgerð frá sjúkrahúsverkinum. Rætturin til ókeypis viðgerð fevnir eisini um viðgerð í Danmark ella í øðrum landi, tá ávísingin er gjørd í samsvari við tær av Visitatiónsnevndini givnu leiðreglum.

Ávísingar til kanningar og viðgerðir uttanlands kunnu bert verða til viðgerðarstøð, ið landsstýriskvinnan hevur gjørt avtalu við um at taka ímóti føroyskum sjúklingum, ella til viðgerðarstøð, ið Visitatiónsnevndin hevur givið loyvi til í serstøkum førum.

Talva 1 vísir, hvussu ofta føroyskir sjúklingar verða sendir til viðgerð uttanlands, og tal av sjúklingum.

Talva 1	**2012**	**2013**	**2014**	**2015**	**2016**	**2017**
Viðgerðaruppihald hjá føroyskum sjúklingum	2.276	2.191	2.210	2.389	2.633	2.821
Tal av sjúklingum	1.337	1.351	1.306	1.388	1.515	1.585

Talva 2 vísir, hvussu nógvir fylgjarar eru visiteraðir at fylgja sjúklingunum til viðgerð uttanlands.

Talva 2	**2012**	**2013**	**2014**	**2015**	**2016**	**2017**
Tal av visiteraðum fylgjarum	1.409	1.473	1.350	1.410	1.481	1.692

26. Sjúklingahotellið Tórshavn

Endamálið við Sjúklingahotellinum Tórshavn er at hýsa sjúklingum og møguliga teimum, ið varða av sjúklingunum, sum føroyska sjúkrahúsverkið sendir niður til viðgerðar. Húsaleigan fyri Sjúklingahotellið Tórshavn verður prístalsjavnað á hvørjum ári. Danskt meirvirðisgjald er tikið við í játtanina hjá Sjúklingahotellinum Tórshavn.

Talva 3 vísir tal av yvirnáttingum seinastu árini.

Talva 3	**2012**	**2013**	**2014**	**2015**	**2016**	**2017**
Yvirnáttingar	22.275	27.197	30.060	29.221	32.896	36.457

Flutt varð í nýtt sjúklingahotell í Venøgade á sumri í 2012. Hotellið var bygt til endamálið.

27. KT-øki heilsuverksins

Játtanin fevnir um rakstur, viðlíkahald og menning av Talgildu heilsuskipanini (THS).

Játtanin verður brúkt til rakstur, ráðgeving, verkætlanarleiðslu, trygd, support, neyðugar dagføringar og viðlíkahald. Skipanin skal eisini víðarimennast, m.a. fyri at aðrir stovnar eisini skulu fáa møguleika fyri at verða partur av skipanini.

THS er verksett á teimum trimum sjúkrahúsunum, á Deildini fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu og hjá øllum kommunulæknunum. THS er felags journal og samskiftisskipan í føroyska heilsuverkinum, og um 1.000 heilsustarvsfólk brúka THS sum sítt dagliga arbeiðsamboð.

Farið er í holt við at menna leiðslukunningina í talgildu heilsuskipanini, soleiðis at virksemið á heilsuøkinum kann verða lýst við góðskutryggjaðum hagtølum.

28. Avseting til serlæknar

Føroyska sjúkrahúsverkið vantar eina røð av fastsettum serlæknum, um málið skal røkkast, at flest allar kanningar og viðgerðir skulu veitast í Føroyum. Fyri framhaldandi at kunna bjóða føroyingum viðgerðir í Føroyum á sama stigi, sum okkara grannalond bjóða, er neyðugt at fáa fleiri serútbúgvin heilsustarvsfólk.

39. Óvanligt

Landssjúkrahúsið hevur í fleiri ár skrásett skyldugar erstatningsfrídagar, sum yvirlæknar ikki hava avspákað í notu í ársroknskapinum undir skyldugum starvsfólkakostnaði, heldur enn at skráseta hesar sum útreiðslur.

FAS/serlæknafelag Føroya og Landssjúkrahúsið hava nú gjørt semju um málið, umframt at flest allar serlæknarnarnir, hvør sær og Landssjúkrahúsið hava undirskrivað avtalu um, hvussu avroknað skal verða.

Játtaðar eru 12,6 mió. kr. í 2018 til endamálið.

40. Inntøkufíggjað virksemi (Vaskarí)

Vaskaríið verður rikið sum inntøkufíggjað virksemi, og umleið helvtin av umsetninginum kemur frá at vaska fyri almenn og privat virki. Kappingarráðið hevur í 2013 kannað viðurskiftini á vaskarínum og kom til, at mannagongdirnar eru í samsvari við galdandi reglur.

Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018** **F**	2019 Æ	2020 Æ
Í lønarflokki 37 ella hægri	43,7	44,1	44,5	46,5	46,5	46,5
Onnur	664,8	688,0	690,0	690,0	690,0	690,0
Fulltíðarstørv	708,5	732,1	734,5	736,5	736,5	736,5
Lønarpartur (mió. kr.)	325,7	342,2	358,8	365,3	365,3	365,3

Starvsfólkayvirlit: 26 Sjúklingahotellið Tórshavn

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018** **F**	2019 Æ	2020 Æ
Í lønarflokki 37 ella hægri	1,0	1,0	1,0	1,0	1,0	1,0
Onnur	16,9	16,9	16,9	16,9	16,9	16,9
Fulltíðarstørv	17,9	17,9	17,9	17,9	17,9	17,9
Lønarpartur (mió. kr.)	8,7	9,0	9,9	10,4	10,7	10,9

Starvsfólkayvirlit: 27 KT-øki heilsuverksins

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018** **F**	2019 Æ	2020 Æ
Í lønarflokki 37 ella hægri	-	-	-	-	-	-
Onnur	4,7	6,0	6,0	7,0	7,0	7,0
Fulltíðarstørv	4,7	6,0	6,0	7,0	7,0	7,0
Lønarpartur (mió. kr.)	2,3	3,4	4,1	4,1	4,1	4,1

Starvsfólkayvirlit: 40 Inntøkufíggjað virksemi (Vaskarí)

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018** **F**	2019 Æ	2020 Æ
Í lønarflokki 37 ella hægri	-	-	-	-	-	-
Onnur	20,1	20,7	21,0	21,0	21,0	21,0
Fulltíðarstørv	20,1	20,7	21,0	21,0	21,0	21,0
Lønarpartur (mió. kr.)	5,5	5,7	5,7	5,7	5,7	5,7

11.20.3.06. Medicoteknisk tól (Løgujáttan)

Neyðugt er støðugt at endurnýggja tólútbúnaðin hjá sjúkrahúsunum. Arbeitt verður við at samskipa íløgurnar hjá øllum trimum sjúkrahúsunum. Játtanin er ætlað bæði til medicoteknisk tól og sjúkrabilar.

Játtanin er hækkað við 4 mió. kr. í 2018.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	8.974	8.966	9.000	13.000	13.000	13.000
10. Medicoteknisk tól						
Útreiðslur	**8.974**	**8.966**	**9.000**	**13.000**	**13.000**	**13.000**
14. Keyp av vørum og tænastum	14	14	-	-	-	-
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	-14	-	-	-	-	-
32. Útvegan av løgu o.ø.	8.974	8.951	9.000	13.000	13.000	13.000

11.20.3.08. Landssjúkrahúsið, útbygging (Løgujáttan)

Lógargrundarlagið undir játtanarnýtsluni av høvuðskontuni er løgtingslóg nr. 129 frá 22. desember 2008 um at høvuðsumvæla, útbyggja og nútíðargera Landssjúkrahúsið, sum broytt við Ll. nr. 77. frá 7. juni 2011, Ll. nr. 46 frá 10. mai 2013 og sum seinast er broytt við Ll. nr. 34 frá 31. mars 2017.

Heitini á bygningunum hjá Landssjúkrahúsinum eystan fyri J.C. Svabosgøtu eru hesi: A-bygningurin er gamla Dronning Alexandrines Hospital, B-bygningurin er høgi bygningurin, ið varð bygdur í 60-árunum, C-bygningurin er tann, ið gongur frá B-bygninginum móti J.C. Svabosgøtu, E-bygningurin er barakkin fram til J.C. Svabosgøtu og G-bygningurin er nýggi bygningurin norðan frá B-bygninginum. H-bygningurin er tann nýggi bygningurin sum er í gerð.

Søguliga gongdin
Í 1998 varð farið undir at fyrireika 1. stig av eini komandi út- og umbygging av Landssjúkrahúsinum. Samstundis varð farið undir at gera eina byggiætlan, sum skuldi lýsa framtíðar tørv og ætlanir annars fyri nútíðargerð av Landssjúkrahúsinum. Sum ein liður av tørvsmetingini varð eisini gjørd ein kanning av verandi bygningum hjá Landssjúkrahúsinum, og úrslitið varð nágreiniliga lýst í eini støðisfrágreiðing í ár 2000.

Grundað á hesar fyrireikingar varð ein løguætlan gjørd, sum politisk undirtøka var fyri. Samlaði løgutørvurin varð mettur til 500 mió. kr. í 1999 krónum. Útgerð og innbúgv varð ikki íroknað. Byggiætlanin er síðani endurskoðað, og í samsvari við eina dagføring av løgutørvinum varð í 2006 heimilað at játta 105 mió. kr. til endamálið í fíggjarárunum 2006, 2007 og 2008.

Løguætlanin er síðani endurskoðað av nýggjum, og grundað á kostnaðarstøðið í 2008 varð mett, at neyðugt varð við eini samlaðari upphædd tey næstu 3 árini uppá 150 mió. kr. Í 2011 varð verklagslógin frá 2008 longd til 2018, og játtanarkarmurin hækkaður til 421,8 mió. kr., í 2011 krónum. Innan hesar karmar skal byggjast nýggjur psykiatriskur depil, somatiskar seingjadeildir, høvuðskøkur, dagføring av endurvenjingareindini. Eisini skal nakað av játtanini nýtast til størri viðlíkahaldsuppgávur.

Í 2005 vóru G- og B-bygningarnir samanbundnir við nýggjari forhøll. Móttøka og kafeteria varð tikið í nýtslu.

Í 2008 varð arbeiðið við at umvæla tær ovastu 5 hæddirnar innan í B-bygninginum liðugt. Nýtt kirurgiskt ambulatorium á B3 og umbyggingin av B2 til skopideild, umframt nýggjur sterilsentralur vórðu liðug.

Í 2010 varð arbeiðið at renovera og bjálva útsíðurnar á B-bygninginum liðugt.

Í 2011 varð farið undir umbyggingina av røntgendeild til millum annað nýggjar MR- og CT-skannarar. Sektiónsstovan varð flutt og dagførd. Arbeiðið varð liðugt í 2013.

Í 2012 varð gjørd byggiskrá, sum skal vera grundarlag undir at bjóða prosjekteringina út av næstu tilbygging av somatisku deildunum (seingjadeildunum), og psykiatriskum depli á Landssjúkrahúsinum (sonevndi H-bygningurin). Nakað av játtanini varð nýtt til smærri verkætlanir, til dømis neyðugar umvælingar av tænastubygningunum.

Í 2013 var høvuðsverkætlanin á Vaskarínum liðug.

Í 2014 varð farið undir at prosjektera H-bygningin og var arbeiðið bjóðað út í juni 2016. Tilboð eru innkomin. Farið varð í holt við at grava moldina omanav fyri H-bygninginum í 2015.

Í 2016 varð arbeiðið at byggja H-bygningin boðið út.

Í 2017 varð verklagslógin dagførd við prísvøkstri, 2 nýggjum há-isolatiónsstovum, víðkan av kjallara uttan innrætting og dagføring av svimjihylinum.

Fyri framman
Árini 2018-2021 verður bygdur nýggjur meginbygningur til psykiatri, medisinska seingjadeild, føðideild, barnadeild og endurvenjing. Við hesum meginbygningi (H-bygningurin) fara sjúkrahúsumstøðurnar innan nevndu økir at koma á nýmótans støði, umframt at onnur viðgerðarøki fáa munandi betri hølisumstøður enn í dag.

Metta nýtslan í 2017 er um 77,2 mió. kr., harav 21,2 mió. kr. eru fluttar frá 2016.

H-bygningurin er liðugt teknaður, prosjekteraður og sáttmálar eru gjørdir við arbeiðstakarar, og væntaða játtanarnýtslan frameftir er lýst í verklagslógini. Eftir tí leisti, kann bygningurin takast í nýtslu í 2021.

Samandráttur
Samsvarandi galdandi verklagslóg kunnu útreiðslurnar í mesta lagi verða 652,6 mió. kr.

Játtaðar eru 93 mió. kr. til endamálið í 2018.

Átekning

Landsstýriskvinnuni verður heimilað at flyta óbrúkta játtan til seinni fíggjarár.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	23.623	24.896	56.000	93.000	95.000	105.000
10. Landssjúkrahúsið						
Útreiðslur	**22.600**	**21.253**	**56.000**	**93.000**	**95.000**	**105.000**
11. Lønir v.m.	1.710	-	-	-	-	-
14. Keyp av vørum og tænastum	532	76	-	-	-	-
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	-2.242	-2.109	-2.200	-2.200	-2.200	-2.200
31. Bygging og løguframleiðsla	22.600	21.253	56.000	93.000	95.000	105.000
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	-	2.033	2.200	2.200	2.200	2.200
15. Landssjúkrahúsið, viðlíkahald						
Útreiðslur	**1.024**	**3.643**	**-**	**-**	**-**	**-**
14. Keyp av vørum og tænastum	-	1.086	-	-	-	-
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	-	2.557	-	-	-	-
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	-	-3.643	-	-	-	-
31. Bygging og løguframleiðsla	1.024	3.643	-	-	-	-

11.20.3.10. Klaksvíkar sjúkrahús (Rakstrarjáttan)

Lógargrundarlagið undir sjúkrahúsverkinum er Ll. nr. 64 frá 17. mai 2005 um sjúkrahúsverkið, við seinni broytingum.

Klaksvíkar sjúkrahús hevur eina felags seingjadeild fyri heiliráð- og skurðøkið, ið hevur 24 føst seingjarpláss. Afturat hesum eru 4 pláss til dagskurð, 3 til viðraking og 1 akuttpláss.

Á Klaksvíkar sjúkrahúsi er settur ein yvirlækni innan medisin og tveir yvirlæknar innan kirurgi. Avloysarar røkja sergreinina anæstesi, og hjálparlæknar røkja forvaktina. Ryggambulatorium og serligt viðgerðartilboð er til børn. Klaksvíkar sjúkrahús samstarvar við Landssjúkrahúsið innan læknaligu serøkini. Millum annað er samstarv við røntgenlækna. Av og á koma serlæknar í øðrum greinum á sjúkrahúsið, millum annað innan knæ- og mjadnakirurgi, hondkirurgi, akslakirurgi og urologi.

Klaksvíkar sjúkrahúsi hevur rannsóknarstovuvirksemi í Læknamiðstøðini í Gøtudali, umframt í Runavík.

Endurvenjing

Tað hevur týdning at betra líkindini fyri, at fólk, sum orsakað av sjúku ella skaða hava verið fyri førleikamissi, kunnu endurvinna mistu førleikarnar ella í øðrum lagi kunnu endurvinna funktiónsevni soleiðis, at tey í størst møguligan mun gerast sjálvhjálpin og, um talan er um fólk í arbeiðsvirknum aldri, fáa arbeiðsførleikan aftur. Endamálið er at tryggja, at borgarar fáa hóskandi og nøktandi tilboð um endurvenjing, so skjótt sum tørvurin er staðfestur.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	65.792	67.622	68.672	68.672	68.672	68.672
Útreiðslur	70.534	72.025	72.543	72.543	72.543	72.543
Inntøkur	4.742	4.403	3.871	3.871	3.871	3.871
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	65.792	67.622	68.672	68.672	68.672	68.672
Útreiðslur	**70.534**	**72.025**	**72.543**	**72.543**	**72.543**	**72.543**
11. Lønir v.m.	51.505	53.560	57.829	57.829	57.829	57.829
14. Keyp av vørum og tænastum	15.469	15.726	12.814	12.814	12.814	12.814
15. Keyp av útbúnaði, netto	1.953	975	1.000	1.000	1.000	1.000
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	1.196	1.322	500	500	500	500
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	391	424	400	400	400	400
57. Rentuútreiðslur o.a.	11	2	-	-	-	-
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	8	16	-	-	-	-
Inntøkur	**4.742**	**4.403**	**3.871**	**3.871**	**3.871**	**3.871**
21. Søla av vøru og tænastum	*4.100*	*4.066*	*3.771*	*3.771*	*3.771*	*3.771*
29. Ymsar rakstrarinntøkur	*523*	*237*	*100*	*100*	*100*	*100*
63. Vanligar flytingarinntøkur	*119*	-	-	-	-	-
76. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	-	*100*	-	-	-	-

Virksemisyvirlit

Innleggingar	**2012**	**2013**	**2014**	**2015**	**2016**	**2016**
	1.570	1.593	1.366	1.242	1.360	1.351

Virksemi á diagn. deplinum	**2012**	**2013**	**2014**	**2015**	**2016**	**2016**
A. Røntgen						
Kanningar	5.111	5.251	5.273	5.048	5.211	5.988
B. Rannsóknarstovan	**171.762**	**190.797**	**188.475**	**175.139**	**181.608**	**188.253**
Innløgd	17.806	20.914	17.301	20.940	22.687	24.846
Ambulant	153.956	169.883	171.174	154.199	158.921	163.407

Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Í lønarflokki 37 ella hægri	4,2	4,0	4,0	4,0	4,0	4,0
Onnur	113,0	116,5	111,0	111,0	111,0	111,0
Fulltíðarstørv	117,2	120,5	115,0	115,0	115,0	115,0
Lønarpartur (mió. kr.)	51,5	53,6	57,8	57,8	57,8	57,8

11.20.3.11. Klaksvíkar sjúkrahús (Løgujáttan)

Í 2016 vóru 2 mió. kr. játtaðar til bygningsdagføringar, og í 2017 vóru 1,5 mió. kr. játtaðar til at umvæla og nýgera skaðastovuna, umframt til høvuðsinngongd og tekju til økið, har sjúkrabilarnir standa.

Í 2018 og 2019 verða tilsamans 6 mió. kr. játtaðar til at dagføra læknahúsini (gula hús) til eina endurmenningarmiðstøð, har nýtt viðgerðartilboð innan endurvenjing (neurorehabilitering) fer at verða veitt.

Harumframt verða 15 mió. kr. játtaðar til hølisumvælingar, útbúnað og uttanumøkið javnt býttar millum 2018 og 2019. Arbeitt verður við at gera uppskot til verklagslóg.

Tilsamans verða játtaðar 21 mió. kr. soleiðis, at 10 mió. kr. verða játtaðar í 2018 og 11 mió. kr. í 2019 til endamálini.

Átekning

Landsstýriskvinnuni verður heimilað at flyta óbrúkta játtan til seinni fíggjarár.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	2.000	2.017	1.500	10.000	11.000	-
10. Klaksvíkar sjúkrahús						
Útreiðslur	**2.000**	**2.017**	**1.500**	**10.000**	**11.000**	**-**
11. Lønir v.m.	5	-	-	-	-	-
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	-5	-	-	-	-	-
31. Bygging og løguframleiðsla	2.000	2.017	1.500	10.000	11.000	-

Virksemisyvirlit: 10 Klaksvíkar sjúkrahús

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
A:: Klaksvíkar sjúkrahús (1.000 kr.)						
Hølisumvælingar	-	-	-	7.500	7.500	-
Læknahúsini (Gula hús)	-	-	-	2.500	3.500	-

11.20.3.15. Suðuroyar sjúkrahús (Rakstrarjáttan)

Lógargrundarlagið undir sjúkrahúsverkinum er Ll. nr. 64 frá 17. mai 2005 um sjúkrahúsverkið, við seinni broytingum.

Suðuroyar sjúkrahús hevur eina felags skurð- og heiliráðdeild. Á Suðuroyar sjúkrahúsi eru settir tveir yvirlæknar innan kirurgi og ein medisinskur yvirlækni. Suðuroyar sjúkrahús hevur 26 seingjarpláss. Sjúkrahúsið hevur eisini eitt laboratorium í Læknamiðstøðini í Vági, ið er opið tvær ferðir um vikuna, har møguleiki er hjá ambulantum sjúklingum at fáa tikið blóðroyndir o.a.

Læknaforvaktin er skipað soleiðis, at hon millum kl. 16:00 og kl. 8:00 virkar sum vakthavandi í samstarvi við kommunulæknaskipanina (1870).

Endurvenjing

Tað hevur týdning at betra líkindini fyri, at fólk, sum orsakað av sjúku ella skaða hava verið fyri førleikamissi, kunnu endurvinna mistu førleikarnar ella í øðrum lagi kunnu endurvinna funktiónsevni soleiðis, at tey í størst møguligan mun gerast sjálvhjálpin og, um talan er um fólk í arbeiðsvirknum aldri, fáa arbeiðsførleikan aftur. Endamálið er at tryggja, at borgarar fáa hóskandi og nøktandi tilboð um endurvenjing, so skjótt sum tørvurin er staðfestur.

Samsvarandi menningarætlanini er játtanin í 2018 hækkað við 1 mió. kr., tí sjúkrahúsið er farið undir landsdekkandi pínuviðgerð. Afturat serlæknanum í pínuviðgerð verða stuðulstænastur veittar innan psykologi, sjúkrarøkt og sosialráðgeving.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	56.979	58.496	61.065	62.065	62.065	62.065
Útreiðslur	61.848	64.556	64.435	65.435	65.435	65.435
Inntøkur	4.869	6.061	3.370	3.370	3.370	3.370
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	56.979	58.496	61.065	62.065	62.065	62.065
Útreiðslur	**61.848**	**64.556**	**64.435**	**65.435**	**65.435**	**65.435**
11. Lønir v.m.	47.213	50.018	51.904	52.904	52.904	52.904
14. Keyp av vørum og tænastum	11.749	11.277	10.248	10.248	10.248	10.248
15. Keyp av útbúnaði, netto	1.620	1.766	1.251	1.251	1.251	1.251
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	978	1.148	785	785	785	785
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	278	326	247	247	247	247
57. Rentuútreiðslur o.a.	-	0	-	-	-	-
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	11	22	-	-	-	-
Inntøkur	**4.869**	**6.061**	**3.370**	**3.370**	**3.370**	**3.370**
21. Søla av vøru og tænastum	*4.369*	*4.850*	*3.270*	*3.270*	*3.270*	*3.270*
29. Ymsar rakstrarinntøkur	*500*	*-*	*100*	*100*	*100*	*100*
76. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	*-*	*1.211*	*-*	*-*	*-*	*-*

Virksemisyvirlit

Innleggingar	**2012**	**2013**	**2014**	**2015**	**2016**	**2016**
	1.097	1.015	1.106	1.012	899	966

Virksemi á diagn. deplinum	**2012**	**2013**	**2014**	**2015**	**2016**	**2016**
A. Røntgen						
Kanningar	2.679	-	-	2.315	2.058	1.758
B. Rannsóknarstovan	**94.977**	**99.446**	**100.376**	**118.134**	**105.983**	**103.264**
Innløgd	23.379	21.915	26.066	36.566	32.117	38.334
Ambulant	71.598	77.531	74.310	81.568	73.866	64.930

Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Í lønarflokki 37 ella hægri	4,3	4,0	5,0	5,0	5,0	5,0
Onnur	99,5	104,6	104,5	106,5	106,5	106,5
Fulltíðarstørv	103,8	108,6	109,5	111,5	111,5	111,5
Lønarpartur (mió. kr.)	47,2	50,0	51,9	52,9	52,9	52,9

11.20.3.16. Suðuroyar sjúkrahús (Løgujáttan)

Í 2016 vóru 800 tús. kr. játtaðar til at dagføra frystigoymsluna, og í 2017 vóru 1 mió. kr. játtaðar til at keypa medicoteknisk tól fyri.

Í 2018 eru 4 mió. kr. játtaðar til at dagføra størri medicoteknisk tól og at betra hølisviðurskifti.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	-	781	1.000	4.000	-	-
10. Suðuroyar sjúkrahús						
Útreiðslur	**-**	**781**	**1.000**	**4.000**	**-**	**-**
14. Keyp av vørum og tænastum	-	79	-	-	-	-
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	-	702	-	-	-	-
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	-	-781	-	-	-	-
31. Bygging og løguframleiðsla	-	781	-	-	-	-
32. Útvegan av løgu o.ø.	-	-	1.000	4.000	-	-

11.20.3.19. Serstakur sjúkrahúsheilivágur (Rakstrarjáttan)

Lógargrundarlagið undir sjúkrahúsverkinum er Ll. nr. 64 frá 17. mai 2005 um sjúkrahúsverkið.

Játtanin til dýran sjúkrahúsheilivág í Føroyum lá fyrr hjá Heilsutrygd, sjúkrahúsunum og Serviðgerð uttanlands. Játtanin var í 2011 savnað á eini høvuðskontu fyri at fáa størri innlit og fakligan samanhang í umsitingina av dýra sjúkrahúsheilivágnum.

Út frá gongdini seinastu árini, bæði í Føroyum og í londunum rundan um okkum, kann væntast, at vøksturin í heilivágsútreiðslunum fer at halda fram, so leingi fólk framhaldandi gerast sjúk, og alsamt fleiri sjúklingar verða viðgjørdir í longri tíðarskeið. Framhaldandi gransking og menning innan heilivágsframleiðslu ger, at nýggjur og betri heilivágur altíð fer at koma á marknaðin.

Heilivágsráðið, sum er ráðgevandi hjá landsstýriskvinnuni, ásetir leiðreglur fyri nýtsluna av serstøkum sjúkrahúsheilivági í sjúkrahúsverkinum og hevur eftirlit við nýtsluni av hesum heilivági.

Læknar samstarva við heiliráðsfrøðingin (farmaseutin) fyri at hava eina skynsama nýtslu, umframt at avtala við veitara førdi við sær væl minni kostnað fyri sjúkrahúsheilivág. Tað eru alsamt broytingar, tí t.d. patent ganga út, og hevur tað við sær stórar príslækkingar, eins og tað er ein tilgongd av nýggjum heilivágstilbúningum.

Játtanin

Játtanin í 2018 er framskrivað við 5% í mun til játtanina í 2017.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	42.188	39.862	42.000	44.100	45.644	47.241
Útreiðslur	42.188	39.862	42.000	44.100	45.644	47.241
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	42.188	39.862	42.000	44.100	45.644	47.241
Útreiðslur	**42.188**	**39.862**	**42.000**	**44.100**	**45.644**	**47.241**
14. Keyp av vørum og tænastum	42.188	39.859	42.000	44.100	45.644	47.241
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	-	4	-	-	-	-

11.20.3.23. Umsiting av sjúklingatrygging (Rakstrarjáttan)

Lógargrundarlagið undir umsitingini av sjúklingatryggingini er "Lov om klage- og erstatningsadgang inden for sundhedsvæsenet", sum 19. desember 2011 var sett í gildi fyri Føroyar við ríkislógartilmæli.

Fyri at vera við í partinum um sjúklingatrygging samsvarandi: "lov om klage- og erstatningsadgang inden for sundhedsvæsenet" verða umsitingarútreiðslurnar at gjalda donsku tryggingarskipanini.

Skipanin varð sett í gildi í 2011, og tá varð roknað við, at útreiðslurnar at umsita skipanina, sum frá leið, fóru at verða um 1 mió. kr. um árið. Viðgerðartíðin av slíkum málum er drúgv, og verður roknað við, at skipanin er komin í eina fasta legu um nøkur ár.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	234	129	250	250	250	250
Útreiðslur	234	129	250	250	250	250
20. Umsiting av sjúklingatrygging						
Nettoútreiðsla	234	129	250	250	250	250
Útreiðslur	**234**	**129**	**250**	**250**	**250**	**250**
14. Keyp av vørum og tænastum	234	129	250	250	250	250

11.20.3.24. Sjúklingatrygging (Lógarbundin játtan)

Lógargrundarlagið undir sjúklingatryggingini er "Lov om klage- og erstatningsadgang inden for sundhedsvæsenet", sum er sett í gildi fyri Føroyar við ríkislógartilmæli.

Skipanin við sjúklingatrygging er frá 2011, og tað er torført at meta um fíggjarligu avleiðingarnar. Tá var við grundarlagi í donskum tølum mett at goldnar fóru at verða umleið 5 mió. kr. í endurgjaldi til sjúklingar um árið.

Skipanin er nýggj, umframt at viðgerðartíðin av slíkum málum er drúgv. Tað er sera trupult at meta um játtanarnýtsluna. Endurgjald til sjúklingar verða útreiðsluførd í fíggjarárinum avgerð um endurgjald verður tikin.

Játtaðar eru slakar 2,6 mió. kr. til sjúklingaendurgjøld í 2018. Í mun til fíggjarlógaruppskotið er játtanin lækkað við góðum 400 tús. kr.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	6.505	7.416	1.500	2.580	3.500	4.000
01. Sjúklingatrygging						
Útreiðslur	**6.505**	**7.416**	**1.500**	**2.580**	**3.500**	**4.000**
52. Tilskot til einstaklingar	6.505	7.416	1.500	2.580	3.500	4.000

11.20.3.25. Hvíldarheimið Naina (Rakstrarjáttan)

Lógargrundarlagið undir Hvíldarheiminum Nainu er Ll. nr. 18 frá 9. apríl 1964 um raksturin hjá Hvíldarheiminum Nainu, ið ásetur, at "landskassin letur árliga studning við játtan á fíggjarlógini". Írestandi útreiðslur gjalda kommunurnar og Heilsutrygd.

Á heiminum er pláss fyri 25 fólkum. Heimið er ætlað sum hvíldar- og eftirbataheim. Innleggingartíðin er í mesta lagi fýra vikur í senn.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	2.105	2.155	2.176	2.176	2.176	2.176
Útreiðslur	7.092	7.591	7.394	7.394	7.394	7.394
Inntøkur	4.987	5.436	5.218	5.218	5.218	5.218
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	2.105	2.155	2.176	2.176	2.176	2.176
Útreiðslur	**7.092**	**7.591**	**7.394**	**7.394**	**7.394**	**7.394**
11. Lønir v.m.	5.750	6.010	6.150	6.150	6.150	6.150
14. Keyp av vørum og tænastum	1.056	1.399	988	988	988	988
15. Keyp av útbúnaði, netto	8	63	117	117	117	117
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	278	119	139	139	139	139
Inntøkur	**4.987**	**5.436**	**5.218**	**5.218**	**5.218**	**5.218**
21. Søla av vøru og tænastum	*787*	*826*	*1.016*	*1.016*	*1.016*	*1.016*
63. Vanligar flytingarinntøkur	*156*	*263*	-	-	-	-
77. Flyting frá kommunum	*4.044*	*4.347*	*4.202*	*4.202*	*4.202*	*4.202*

Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Í lønarflokki 37 ella hægri	-	-	-	-	-	-
Onnur	14,6	14,6	15,0	15,0	15,0	15,0
Fulltíðarstørv	14,6	14,6	15,0	15,0	15,0	15,0
Lønarpartur (mió. kr.)	5,8	6,0	6,2	6,2	6,2	6,2

11.20.3.30. Deildin fyri arbeiðs- og almannaheilsu (Rakstrarjáttan)

Lógargrundarlagið undir sjúkrahúsverkinum er Ll. nr. 64 frá 17. mai 2005 um sjúkrahúsverkið.

20. Deildin fyri arbeiðs- og almannaheilsu
Arbeiðsuppgávurnar hjá Deildini fyri arbeiðs- og almannaheilsu eru at kanna einstaklingar fyri sjúku ella mein av arbeiðsávum, at meta um arbeiðsførleika, serliga í sambandi við fyritíðarpensjón, endurbúgving og yrkisráðgeving, at ráðgeva Arbeiðseftirlitinum og Skipaeftirlitinum í arbeiðsmedisinskum spurningum, at skipa fyri sjúkufyribyrgjandi arbeiði og at fremja granskingarvirksemi í arbeiðs- og almannaheilsu.

40. Inntøkufíggjað virksemi
Deildin hevur, síðani hon varð sett á stovn í 1988, skipað fyri ymiskum granskingarvirksemi í bæði arbeiðslæknafrøði og fólkaheilsu. Hetta virksemið, sum hevur verið í neyvum samstarvi við starvsfelagar í Evropa, USA og Asia, er fíggjað við peningi úr almennum og privatum

grunnum í USA, ES og Danmark. Ein megintáttur í granskingini er, hvussu dálkingin í heimshøvunum ávirkar heilsuna hjá børnum og vaksnum. Granskingin hevur serliga snúð seg um árin á nervalagið hjá børnum, men nú er deildin farin undir umfatandi kanningar av sukursjúku millum tilkomin og eldri fólk. Harumframt er deildin farin undir at kanna immunskipanina hjá smábørnum og tannáringum. Hesar granskingarætlanir halda eftir ætlan fram í fleiri fíggjarár.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	1.858	1.858	1.881	1.881	1.881	1.881
Útreiðslur	4.903	5.602	6.026	6.105	6.105	6.105
Inntøkur	3.046	3.744	4.145	4.224	4.224	4.224
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	1.858	1.858	1.881	1.881	1.881	1.881
Útreiðslur	**1.940**	**1.996**	**1.953**	**1.953**	**1.953**	**1.953**
11. Lønir v.m.	1.539	1.572	1.605	1.605	1.605	1.605
14. Keyp av vørum og tænastum	324	380	304	304	304	304
15. Keyp av útbúnaði, netto	73	41	40	40	40	40
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	2	2	2	2	2	2
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	2	2	2	2	2	2
Inntøkur	**82**	**138**	**72**	**72**	**72**	**72**
21. Søla av vøru og tænastum	*82*	*138*	*72*	*72*	*72*	*72*
40. Inntøkufíggjað virksemi						
Nettoútreiðsla	0	0	0	0	0	0
Útreiðslur	**2.963**	**3.605**	**4.073**	**4.152**	**4.152**	**4.152**
11. Lønir v.m.	1.706	2.647	2.108	3.091	3.091	3.091
14. Keyp av vørum og tænastum	1.243	937	1.965	1.061	1.061	1.061
15. Keyp av útbúnaði, netto	-	8	-	-	-	-
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	7	14	-	-	-	-
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	0	0	-	-	-	-
57. Rentuútreiðslur o.a.	0	-	-	-	-	-
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	7	-	-	-	-	-
Inntøkur	**2.963**	**3.605**	**4.073**	**4.152**	**4.152**	**4.152**
63. Vanligar flytingarinntøkur	*316*	*580*	*4.073*	*4.152*	*4.152*	*4.152*
65. Flytingarinntøkur úr útlandinum	*2.647*	*2.830*	-	-	-	-
76. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	-	*195*	-	-	-	-

Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Í lønarflokki 37 ella hægri	1,0	1,0	1,0	1,0	1,0	1,0
Onnur	3,0	3,0	3,0	3,0	3,0	3,0
Fulltíðarstørv	4,0	4,0	4,0	4,0	4,0	4,0
Lønarpartur (mió. kr.)	1,5	1,6	1,6	1,6	1,6	1,6

Starvsfólkayvirlit: 40 Inntøkufíggjað virksemi

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Í lønarflokki 37 ella hægri	-	-	-	-	-	-
Onnur	2,9	5,0	6,0	7,0	7,0	7,0
Fulltíðarstørv	2,9	5,0	6,0	7,0	7,0	7,0
Lønarpartur (mió. kr.)	1,7	2,6	2,1	3,1	3,1	3,1

11.20.4. Viðgerðarstovnar

11.20.4.02. Viðgerðarstovnurin Heilbrigdi (Rakstrarjáttan)

Viðgerðarheimið á Velbastað hevur til endamáls at virka sum viðgerðarstaður fyri rúsdrekkamisnýtarar o.o. Eisini hevur stovnurin familjuviðgerð. Heilbrigdi hevur 14 viðgerðarpláss.

Játtanin í 2018 er hækkað við góðum 200 tús. kr.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	5.872	5.864	5.960	6.180	6.180	6.180
Útreiðslur	5.872	5.864	5.960	6.180	6.180	6.180
Inntøkur	-	0	-	-	-	-
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	5.872	5.864	5.960	6.180	6.180	6.180
Útreiðslur	**5.872**	**5.864**	**5.960**	**6.180**	**6.180**	**6.180**
11. Lønir v.m.	4.102	4.172	4.488	4.708	4.708	4.708
14. Keyp av vørum og tænastum	1.428	1.343	1.220	1.220	1.220	1.220
15. Keyp av útbúnaði, netto	120	81	60	60	60	60
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	61	107	30	30	30	30
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	-	0	-	-	-	-
55. Íløgustuðul o.a.	162	162	162	162	162	162
Inntøkur	**-**	**0**	**-**	**-**	**-**	**-**
68. Roknað renta	-	*0*	-	-	-	-

Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Í lønarflokki 37 ella hægri	1,0	1,0	1,0	1,0	1,0	1,0
Onnur	7,3	8,0	7,5	7,5	7,5	7,5
Fulltíðarstørv	8,3	9,0	8,5	8,5	8,5	8,5
Lønarpartur (mió. kr.)	4,1	4,2	4,5	4,7	4,7	4,7

11.20.4.03. Viðgerðarstovnurin Blákrossheimið (Rakstrarjáttan)

Blákrossheimið hevur til endamáls at virka sum viðgerðar- og avrúsingarstaður, og familju- og ambulantur viðgerðarstaður. Á heiminum eru 14 pláss.

21. Ambulant viðgerðartilboð til ung

Í 2018 eru játtaðar 1,4 mió. kr. til ambulant viðgerðartilboð til ung, yngri enn 18 ár við rúsevnatrupulleikum. Herumframt verða 300 tús. kr. við innanhýsis flyting fluttar frá høvuðskontu 11.20.1.07. Tiltøk móti rúsdrekkamisnýtslu.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	6.191	6.011	5.960	7.360	7.360	7.360
Útreiðslur	6.215	6.117	5.990	7.690	7.690	7.690
Inntøkur	23	106	30	330	330	330
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	6.191	6.011	5.960	5.960	5.960	5.960
Útreiðslur	**6.215**	**6.117**	**5.990**	**5.990**	**5.990**	**5.990**
11. Lønir v.m.	4.395	4.253	4.517	4.517	4.517	4.517
14. Keyp av vørum og tænastum	1.114	1.194	975	975	975	975
15. Keyp av útbúnaði, netto	209	158	60	60	60	60
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	494	512	438	438	438	438
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	3	-	-	-	-	-
57. Rentuútreiðslur o.a.	0	-	-	-	-	-
Inntøkur	**23**	**106**	**30**	**30**	**30**	**30**
21. Søla av vøru og tænastum	*23*	*106*	*30*	*30*	*30*	*30*
21. Ambulant viðgerðartilboð til ung						
Nettoútreiðsla	-	-	-	1.400	1.400	1.400
Útreiðslur	**-**	**-**	**-**	**1.700**	**1.700**	**1.700**
11. Lønir v.m.	-	-	-	1.550	1.550	1.550
14. Keyp av vørum og tænastum	-	-	-	150	150	150
Inntøkur	**-**	**-**	**-**	**300**	**300**	**300**
76. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	-	-	-	*300*	*300*	*300*

Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Í lønarflokki 37 ella hægri	-	-	-	-	-	-
Onnur	10,4	10,1	9,5	9,5	9,5	9,5
Fulltíðarstørv	10,4	10,1	9,5	9,5	9,5	9,5
Lønarpartur (mió. kr.)	4,4	4,3	4,5	4,5	4,5	4,5

11.20.4.04. Viðgerðarstovnurin Frælsi (Rakstrarjáttan)

Játtanin er til stovnin Frælsi, sum er nýtt viðgerðarstað á Eiði fyri ung við rúsevnatrupulleikum.

Játtanin í 2018 er hækkað við 600 tús. kr.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	-	-	2.000	2.600	2.600	2.600
Útreiðslur	-	-	2.000	2.600	2.600	2.600
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	-	-	2.000	2.600	2.600	2.600
Útreiðslur	**-**	**-**	**2.000**	**2.600**	**2.600**	**2.600**
11. Lønir v.m.	-	-	1.700	2.300	2.300	2.300
14. Keyp av vørum og tænastum	-	-	300	300	300	300

Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Í lønarflokki 37 ella hægri	-	-	-	-	-	-
Onnur	-	-	3,5	4,5	4,5	4,5
Fulltíðarstørv	-	-	3,5	4,5	4,5	4,5
Lønarpartur (mió. kr.)	-	-	1,7	2,3	2,3	2,3

Almannamál

11.21.3. Barnastuðul

11.21.3.12. Gigni - heilsufrøði fyri børn & ung (Rakstrarjáttan)

Lógargrundarlagið undir arbeiðinum hjá heilsufrøðingunum er Ll. nr. 63 frá 17. mai 2005 um fyribyrgjandi heilsutænastur til børn og ung, sum broytt við løgtingslóg nr. 9 frá 12. mars 2014.

Sambært endamálsorðingini í lógini skulu tær fyribyrgjandi heilsutænasturnar til børn og ung gera sítt til at tryggja teimum best møguligar fyritreytir fyri einum heilsugóðum uppvøkstri og vaksnamannalívi. Stovnurin hevur harumframt til uppgávu at ráðgeva kvinnum, ið umhugsa fosturtøku.

Játtanin í 2018 er lækkað við nærum 1,0 mió. kr. Stovnurin Heilsutrygd er nú fyrisiting hjá Gigni, og er játtanin tískil lækkað við 810 tús. kr., sum eru fluttar til Heilsutrygd. Herumframt er játtanin við kravi um tillagaðan rakstur lækkað við sløkum 300 tús. kr.

Í sambandi við yvirtøkuna av familjurættarliga økinum kemur Gigni at ráðgeva foreldrum, ið ættleiða. Játtanin er tískil hækkað við 85 tús. kr. í 2018. Frameftir verða útreiðslurnar 200 tús. kr. um árið til endamálið.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	12.508	12.889	13.331	12.339	12.454	12.454
Útreiðslur	12.525	12.908	13.331	12.339	12.454	12.454
Inntøkur	18	19	-	-	-	-
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	12.508	12.889	13.331	12.339	12.454	12.454
Útreiðslur	**12.525**	**12.908**	**13.331**	**12.339**	**12.454**	**12.454**
11. Lønir v.m.	10.555	10.724	11.659	10.667	10.782	10.782
14. Keyp av vørum og tænastum	1.616	1.623	1.122	1.122	1.122	1.122
15. Keyp av útbúnaði, netto	61	263	200	200	200	200
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	225	230	250	250	250	250
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	67	67	100	100	100	100
53. Stuðul til vinnu	1	-	-	-	-	-
57. Rentuútreiðslur o.a.	0	1	-	-	-	-
Inntøkur	**18**	**19**	**-**	**-**	**-**	**-**
21. Søla av vøru og tænastum	*18*	*19*	-	-	-	-

Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Í lønarflokki 37 ella hægri	-	-	-	-	-	-
Onnur	23,5	24,3	25,0	23,5	23,5	23,5
Fulltíðarstørv	23,5	24,3	25,0	23,5	23,5	23,5
Lønarpartur (mió. kr.)	10,6	10,7	11,7	10,7	10,8	10,8

Umhvørvi

11.30.1. Umhvørvi

11.30.1.01. Stuðul til umhvørvisverndartiltøk (Stuðulsjáttan)

Játtanin er ætlað til at stuðla umhvørvisverndartiltøkum, sum:

- menna vitanina um umhvørvið og náttúruna
- virka dálkingarfyribyrgjandi og -avmarkandi
- verja landsløg, djóra- og plantusløg
- kunna almenningin um umhvørvis- og nátturuviðurskifti
- stuðla undir orkusparandi tiltøk

Stuðulin verður veittur sambært "Reglugerð fyri stuðul til umhvørvisverndartiltøk". Stuðulin verður játtaður eftir umsókn. Umsóknir skulu innihalda upplýsingar um endamál og lýsing av verkætlanini, kostnaðarmeting og fíggjarætlan.

Stuðulin verður útgoldin so hvørt sambært rokning, fyribils verkætlanarroknskapi, ella endaligum roknskapi. Roknskapur verður latin Heilsu- og innlendismálaráðnum, saman við frágreiðing um úrslitið av verkætlanini tá verkætlanin er liðug, ella í seinasta lagi 20. februar eftir lokið fíggjarár.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	400	304	400	400	400	400
01. Stuðul						
Útreiðslur	**400**	**304**	**400**	**400**	**400**	**400**
54. Stuðul til annað virksemi	140	24	400	400	400	400
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	260	280	-	-	-	-

11.30.1.07. Náttúrufriðingarnevndir (Rakstrarjáttan)

Náttúrufriðingarnevndirnar, herímillum eisini Yvirfriðingarnevndin, eru settar sambært løgtingslóg nr. 48 frá 9. juli 1970 um náttúrufriðing, sum broytt við løgtingslóg nr. 110 frá 29. juni 1995, og skulu eftir lógini geva loyvi at byggja uttangarðs, undir ávísum umstøðum innangarðs, at taka mold burtur og til vegagerð o.a. Játtanin er ætlað til lønir, samsýningar, ferða- og dagpening o.a. í sambandi við arbeiðið í nevndunum.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	430	389	500	500	500	500
Útreiðslur	430	389	500	500	500	500
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	430	389	500	500	500	500
Útreiðslur	**430**	**389**	**500**	**500**	**500**	**500**
11. Lønir v.m.	390	353	476	476	476	476
14. Keyp av vørum og tænastum	39	37	24	24	24	24

11.30.1.10. Spilloljureinsing (Stuðulsjáttan)

Landsstýrið hevur í 2001 eftir § 3 í løgtingslóg nr. 75 frá 13. mai 1992 við seinni broytingum endurnýggjað avtaluna við Interkommunala Renovatiónsfelagsskapin (IRF) um at savna inn og reinsa spillolju, og er játtanin ætlað til at gjalda IRF fyri hall av hesum arbeiði sambært avtaluni.

Tollmyndugleikarnir uppkrevja eftir løgtingslóg nr. 75 frá 13. mai 1992, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 154 frá 23. desember 2015, 2,50 kr. fyri hvønn litur av smyrjiolju, sum verður fluttur til Føroya (høvuðskonta 20.52.2.28. Umhvørvisavgjald á smyrjiolju). Gjaldið er ætlað til at fíggja kostnaðin av at savna inn og viðgera spilloljuna soleiðis, at hon ikki dálkar náttúruna. Gjaldið varð hækkað í 2016 fyri eisini at kunna fíggja byggingina av nýggjum spilloljuverki.

Játtanin er 4 mió. kr. til IRF til rakstur og til at fíggja spilloljuverkið.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	4.245	3.757	4.000	4.000	4.000	4.000
01. Reinsan av spillolju						
Útreiðslur	**4.245**	**3.757**	**4.000**	**4.000**	**4.000**	**4.000**
53. Stuðul til vinnu	4.245	3.757	4.000	4.000	4.000	4.000

11.30.3. Lánsafturgjald

11.30.3.01. Lánsafturgjald (Stuðulsjáttan)

Lánsskuld hjá IRF til Føroya Landsstýrið var umlagt til eitt 20 ára annuitetslán í 1998. Høvuðsstólurin var 67 mió. kr.

Seinasti avdrátturin frá IRF verður áleið 4,8 mió. kr. í 2018, og verður lánið tá fult afturgoldið.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	783	599	410	214	-	-
Inntøkujáttan	5.100	5.100	5.100	4.995	-	-
01. Veðhaldsútlán til IRF						
Útreiðslur	**783**	**599**	**410**	**214**	**-**	**-**
82. Útlán v.m.	783	599	410	214	-	-
Inntøkur	**5.100**	**5.100**	**5.100**	**4.995**	**-**	**-**
86. Afturgjaldan av útlánum v.m.	*5.100*	*5.100*	*5.100*	*4.995*	*-*	*-*

Ráevnisvinna

11.32.1. Fyrisiting

11.32.1.06. El-veiting, umsiting (Rakstrarjáttan)

Umhvørvisstovan umsitur løgtingslóg nr. 59 frá 7. juni 2007 um framleiðslu, flutning og veiting av ravmagni.

Endamálið við lógini er at tryggja, at el-veiting í Føroyum verður løgd til rættis við fyriliti fyri veitingartrygd, samfelagsbúskapi og umhvørvi, og skal fremja virkisfýsni í sambandi við framleiðslu av ravmagni, og nýtslu av varandi orkukeldum.

Ætlanin hjá landsstýrinum at elektrifisera samfelagið er av álvara farin í gongd, serliga við at økja framleiðsluna av el úr varandi orku. Sum eitt framhald av útbyggingini í Húsahaga er farið undir at gera eina kanning av optimeringsmøguleikum í Vestmannaøkinum til tess at gera niðurstøðu um mest skynsomu útbyggingina av økinum.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	7	0	0	0	0	0
Útreiðslur	1.806	2.322	2.800	2.800	2.800	2.800
Inntøkur	1.799	2.322	2.800	2.800	2.800	2.800
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	7	0	0	0	0	0
Útreiðslur	**1.806**	**2.322**	**2.800**	**2.800**	**2.800**	**2.800**
11. Lønir v.m.	1.178	1.371	1.200	1.200	1.200	1.200
14. Keyp av vørum og tænastum	322	797	1.300	1.300	1.300	1.300
15. Keyp av útbúnaði, netto	10	1	100	100	100	100
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	10	152	-	-	-	-
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	286	-	200	200	200	200
Inntøkur	**1.799**	**2.322**	**2.800**	**2.800**	**2.800**	**2.800**
25. Eftirlits- og umsjónaravgjøld	*1.799*	*2.322*	*2.800*	*2.800*	*2.800*	*2.800*

Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Í lønarflokki 37 ella hægri	-	-	-	-	-	-
Onnur	2,0	2,0	2,0	2,0	2,0	2,0
Fulltíðarstørv	2,0	2,0	2,0	2,0	2,0	2,0
Lønarpartur (mió. kr.)	1,2	1,4	1,2	1,2	1,2	1,2

11.32.1.10. Ferð á grøna orku (Rakstrarjáttan)

Ein miðvís ætlan fyri útbygging, umlegging, framleiðslu og nýtslu av varandi orkukeldum er raðfest. Málið er, at í minsta lagi helvtin av øllum sethúsum og bygningum skulu í ár 2025 ár hitast við grønari orku. Ætlanin er, at í 2030 skal øll elorka á landi koma frá varandi orku. Fyri at gagnnýta elorkuna í yvirskoti og geva rúm fyri størri útbyggingum skal eggjast til grøna orkunýtslu hjá húsarhaldum, í flutningi og í vinnu. Harumframt verða átøk innan náttúru- og umhvørvisøkið raðfest.

Í 2017 var upphæddin ætlað til serlig tiltøk og verkætlanir innan umhvørvi og orku, harav 500 tús. kr. vóru ætlaðar til at keypa orkudepilin á Kambsdali, ið stovnar undir Mentamálaráðnum fara at reka og nýta.

Serligu átøkini, ið arbeitt hevur verið við, snúgva seg m.a. um at kanna møguleikar fyri, hvar vindmyllur kunnu staðsetast, at kanna um til ber at gagnnýta heitt vatn í Kollafirði. Harumframt hevur verið arbeitt við royndarverkætlanum við sólsellum og við biogassverkætlan, umframt at kunningarátøk vóru framd.

Eingin játtan er til endamálið í 2018.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	-	1.648	2.000	-	-	-
Útreiðslur	-	1.648	2.000	-	-	-
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	-	1.648	2.000	-	-	-
Útreiðslur	**-**	**1.648**	**2.000**	**-**	**-**	**-**
11. Lønir v.m.	-	130	1.200	-	-	-
14. Keyp av vørum og tænastum	-	387	300	-	-	-
15. Keyp av útbúnaði, netto	-	919	-	-	-	-
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	-	211	-	-	-	-
32. Útvegan av løgu o.ø.	-	-	500	-	-	-

Landbúnaður

11.33.2. Landbúnaðarstudningur

11.33.2.05. Træplanting (Stuðulsjáttan)

Játtanin var til at stuðla verkætlanum, ið høvdu til endamáls at planta trø og annan viðarvøkstur. Eingin játtan er longur til virksemið.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	304	-	-	-	-	-
01. Stuðul						
Útreiðslur	**304**	**-**	**-**	**-**	**-**	**-**
54. Stuðul til annað virksemi	304	-	-	-	-	-

Handil og vinna annars

11.37.1. Ymsar útreiðslur

11.37.1.10. El-nevndin (Rakstrarjáttan)

El-nevndin er sett sambært løgtingslóg nr. 134 frá 10. juni 1993 um sterkstreymsútbúnað. El-nevndin skal tryggja, at fyrisitingin hevur neyðugt innlit á økinum, sum í lóggávuni er skipað við nógvum neyvum tøkniligum ásetingum, m.a. í sterkstreymsreglugerðini, og at veita fyrisitingini sakkøna hjálp, umframt at nevndin skal hava yvirskipaða eftirlitið við sterkstreymsútbúnaði og skipa fyri, at el-lutir o.a. verða góðkendir.

Fyrisitingarútreiðslurnar verða fíggjaðar við gjøldum. Inntøkurnar frá gjøldum eru á § 20 Inntøkur, høvuðskonta 20.52.3.10. Aðrar inntøkur.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	181	176	186	186	186	186
Útreiðslur	181	176	186	186	186	186
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	181	176	186	186	186	186
Útreiðslur	**181**	**176**	**186**	**186**	**186**	**186**
11. Lønir v.m.	124	125	148	148	148	148
14. Keyp av vørum og tænastum	41	51	26	26	26	26
15. Keyp av útbúnaði, netto	15	-	12	12	12	12

11.37.2. Ymiskur studningur

11.37.2.19. Stuðul til útoyggjamenning (Stuðulsjáttan)

Játtanin er ætlað til at stuðla tiltøkum í útoyggjum, sum eru mennandi fyri útoyggjarnar. Stuðul verður veittur sambært "Reglugerð fyri stuðul til útoyggjamenning".

Umsóknir skulu innihalda upplýsingar um endamál og lýsing av verkætlanini, kostnaðarmeting og fíggjarætlan.

Stuðulin verður útgoldin so hvørt sambært rokning, fyribils verkætlanarroknskapi, ella endaligum roknskapi. Roknskapur verður latin Heilsu- og innlendismálaráðnum, saman við frágreiðing um úrslitið av verkætlanini, tá ið verkætlanin er liðug, ella í seinasta lagi 20. februar eftir lokið fíggjarár.

Játtanin er hækkað við 90 tús. kr. í 2018.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	705	703	710	800	800	800
Inntøkujáttan	71	-	-	-	-	-
01. Stuðul						
Útreiðslur	**705**	**703**	**710**	**800**	**800**	**800**
54. Stuðul til annað virksemi	705	703	710	800	800	800
Inntøkur	**71**	**-**	**-**	**-**	**-**	**-**
64. Aðrar flytingarinntøkur	*71*	-	-	-	-	-

11.37.2.20. Sandoyarætlan (Stuðulsjáttan)

Ein vakstrarætlan varð gjørd fyri Sandoynna, sum vísti á møguleikar fyri at skapa fólkavøkstur. Ætlanin varð framd í samstarvi millum kommunur, feløg og vinnu á oynni.

Landsins luttøka í verkætlanini varð liðug í 2016.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	400	400	-	-	-	-
01. Stuðul						
Útreiðslur	**400**	**400**	**-**	**-**	**-**	**-**
54. Stuðul til annað virksemi	400	400	-	-	-	-

11.37.4. Ognarskrásetingar

11.37.4.02. Umhvørvisstovan (Rakstrarjáttan)

Ábyrgdarøki

Umhvørvisstovan fyrisitur matrikul, tinglýsing, fólkayvirlit og landsadressuskrá. Stovnurin fremur umhvørviseftirlit og umhvørvisvernd og somuleiðis gransking á umhvørvisøkinum. Stovnurin umsitur el-veitingarlógina um framleiðslu, flutning og veiting av ravmagni. Stovnurin ger kort og samskipar ymiskar skrásetingar. Stovnurin umsitur eisini viðarlundir og onnur náttúruøki. Harafturat er partur av vápnalógini lagdur til stovnin at umsita. Umhvørvisstovan er skrivstova hjá Býarskipanarnevndini og Skógfriðingarnevndini.

Stovnurin veitir kunning, tænastur og vegleiðing á økinum, sum stovnurin varðar av.

Uppgávur

Matrikulin er yvirlit yvir allar fastar ognir (eigindóm) í Føroyum. Matrikulin verður umsitin og viðlíkahildin av Umhvørvisstovuni. Tinglýsingin umsitur tingbókina, sum er ein skrá yvir, hvør eigur, og hvørji rættindi eru til fasta ogn. Tinglýsingin fevnir eisini um leysafæ (persónbók) og veðhald í akførum (bilbók). Landsfólkayvirlitið er føroyska persónsdátuskráin. Hon verður umsitin av Umhvørvisstovuni, men aðrir myndugleikar (kommunur, prestar, jarðarmøður og skattamyndugleikar) eru við til at halda skránna viðlíka. Stovnurin umsitur eisini fikspunktnet og geodætiska grundarlagið í samstarvi við "Styrelsen for DataForsyning og Effektivisering".

Fyrisitingin á umhvørvisøkinum skal tryggja verju av náttúru og umhvørvi, varðveita livikor hjá fólki, rekreativ øki, vistskipanir og eitt fjøltáttað plantu- og djóralív. Hetta verður gjørt við at fyribyrgja og avmarka dálking og skaðiliga ávirkan á náttúruna. Harumframt ger stovnurin ymisk umhvørvishagtøl, sum ásett er í altjóða sáttmálum. Granskingardeildin fær vitan til vega um dálkingarstøðuna í føroysku náttúruni. Arbeiðið fevnir um at granska útbreiðsluna av umhvørvisdálkandi evnum og árinini av teimum í grindahvali, fiski og fugli.

Fyrisitingin av elveitingarlógini hevur til endamáls at tryggja, at elveiting í Føroyum verður løgd til rættis við fyriliti fyri veitingartrygd, samfelagsbúskapi og umhvørvi. Henda fyrisiting skal somuleiðis fremja effektivitet í sambandi við framleiðslu av ravmagni og nýtslu av varandi orkukeldum. Innan viðarvøkstur og frílendi umsitur stovnurin almenn náttúrulendi. Stovnurin rekur Gróðurstøðina í Hoydølum, sum millum annað hevur um hendi plantualing og plantusølu. Umhvørvisstovan umsitur partar av vápnalógini. Stovnurin hevur til uppgávu at skráseta lóglig vápn í Føroyum, eins og Umhvørvisstovan útskrivar og umsitur vápnaprógv.

Talgildu Føroyar
Umhvørvisstovan hevur avgerandi leiklut í verkætlanini "Talgildu Føroyar". Stovnurin umsitur dátuskráirnar: Fólkayvirlit, tinglýsing, matrikul, adressur, staðarnøvn og ymisk kort. Ein virkisskrá skal nú mennast og legst sostatt afturat. Hetta eru alt grundardátur, sum aðrir almennir myndugleikar og kommunur, vinnan og einstaki borgarin hava stóran tørv á. Ein grundleggjandi fortreyt fyri talgildu tilgongdini er, at hollar grundardátur verða tøkar og ókeypis hjá øllum samfelagnum at gagnnýta. Menningin av grundardátuskráunum fer at fáa stóra ávirkan á stovnin og framhaldandi raksturin av honum, samstundis sum inntøkurnar av dátusølu falla burtur. Verkætlanin "Talgildu Føroyar" samskipar og rindar menningina av dátuskráunum, men Umhvørvisstovan skal taka við víðkaða rakstrinum av teimum, so hvørt tær eru klárar. Hetta skal játtanin til stovnin bera, og tí verður neyðugt við tillagingum í játtanini komandi árini.

41. Inntøkufíggjað virksemi
Partur av virkseminum á Skógrøktini er grundaður á inntøkur frá røkt av viðarlundum og frá sølu av føroyskum, og føroyskt tillagagum, plantutilfari, sum verður alt og framleitt á Gróðurstøðini í Hoydølum. Vakstrar- og veðurlíkindi gera at úrtøkan og íløgutørvurin sveiggjar frá ári til árs. Hetta verður bókað sum inntøkufíggjað virksemi. Eisini arbeiðið eftir útskiftingarlógini (L147/39) verður roknað sum inntøkufíggjað virksemi. Hetta eru serstøk átøk, skipað sum sjálvstøðugar verkætlanir, ið kunnu røkka yvir fleiri ár. Landskassin ber helvtina av útreiðslunum og eigararnir hina helvtina.

45. Stuðulsfíggjað virksemi
Virksemi á granskingarøkinum er í stóran mun skipað í verkætlanir, sum heilt ella lutvíst eru fíggjaðar uttanífrá.

Lógargrundarlag
Lógargrundarlagið undir virksemi stovnsins er:

- Ll. nr. 64 frá 11. desember 1962 um matrikulering og sundurbýti o.a.
- Ll. nr. 55 frá 16. august 1962 um tinglýsing, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 164 frá 22. desember 2005
- L. for Færøerne nr. 147 af 27. mars 1939 om udskiftning, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 110 frá 29. juni 1955

- Ll. nr. 11 frá 3. apríl 1970 um eigaraíbúðir
- Ll. nr. 41 frá mai 2007 um fólkayvirlit, sum broytt við løgtingslóg nr. 36. frá 6 mai 2011
- Ll. frá 26. mars 2002 um fólkanøvn, sum broytt við løgtingslóg nr. 33 frá 30. apríl 2007
- Ll. nr. 17 frá 6. mars 2002 um adressur
- Ll. nr. 134 frá 29. oktober í 1988 um umhvørvisvernd, sum broytt við løgtingslóg nr. 125 frá 22. desember 2008
- Ll. nr. 59 frá 17. mai 2005 um verju av havumhvørvinum, sum broytt við løgtingslóg nr. 58 frá 26. mai 2011
- Ll. nr. 73 frá 10. mai 1994 um íløt til øl, mineralvatn, og lidnar leskidrykkir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 47 frá 15. mai 2007
- Ll. nr. 59 frá 7. juni 2007 um framleiðslu, flutning og veiting av ravmagni
- Ll. nr. 53 frá 27. november 1952 um viðarlundir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 110 frá 29. juni 1995
- Ll. nr. 76 frá 17. mai 1994 um tinglýsingargjøld
- Ll. nr. 8 frá 28. februar 2006 um tinglýsingaravgjald
- K. nr. 14 frá 11. februar 2009 um gjøld eftir matrikullógini
- K. nr. 161 frá 19. desember 2011 um royndarskipan um gjøld fyri upplýsingar úr landsfólkayvirlitsskránni
- K. nr. 102 frá 22. oktober 2012 um gjøld hjá Umhvørvisstovuni fyri umsiting og eftilit sambært lóggávuni á umhvørvisøkinum
- K. nr. 53 frá 3. mai 1994 um umhvørvisreglur, sum seinast broytt við kunngerð nr. 111 frá 7. september 2009
- K. nr. 147 frá 19. oktober 1995 um burturkast, sum broytt við kunngerð nr. 90 frá 28. september 2007
- K. nr. 111 frá 7. september 2009 um spillivatn
- K. nr. 84 frá 2. juli 2010 um bunkring, flutning av olju o.a., sum broytt við kunngerð nr. 3 frá 14. januar 2013
- K. nr. 118 frá 16. desember 2010 um ozonoyðandi evni
- K. nr. 72 frá 29. mai 2012 um taðing
- K. nr. 74 frá 28. juni 2016 um skráseting av skotvápnum, sum broytt við kunngerð nr. 92 frá 7. september 2016
- K. nr. 93 frá 7. september 2016 um vápnaprógv

Játtanin í 2018 er hækkað við góðum 2,6 mió. kr., harav ein partur skal nýtast í sambandi við nýggja lóg til at fyrisita og verja náttúrumargfeldið. Endamálið er at tryggja tað lívfrøðiliga, landslagsliga og jarðfrøðiliga margfeldið í náttúruni. Lógin skipar fyrisitingina av náttúruverndini við fakligari kønari fyrisiting. Hin parturin skal nýtast í sambandi við, at nýggj kunngerð um at fyribyrgja og týna rottu er sett í gildi. Eisini skulu fremjast miðvís átøk at upplýsa um, fyribyrgja og týna rottu, og at verja rottufríar oyggjar móti rottu. Harumframt skal ein partur av játtanini nýtast til umsiting av verandi náttúrufriðingarlóg, til nýggj lóg verður sett í gildi.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	17.091	19.420	20.389	22.953	22.953	22.953
Útreiðslur	26.319	29.926	28.999	31.563	31.563	31.563
Inntøkur	9.228	10.506	8.610	8.610	8.610	8.610
21. Umhvørvisstovan						
Nettoútreiðsla	17.091	19.401	20.389	22.953	22.953	22.953
Útreiðslur	**22.439**	**25.862**	**25.999**	**28.563**	**28.563**	**28.563**
11. Lønir v.m.	16.962	18.856	20.299	22.463	22.463	22.463
14. Keyp av vørum og tænastum	4.327	5.312	4.000	4.400	4.400	4.400
15. Keyp av útbúnaði, netto	726	1.106	1.130	1.130	1.130	1.130
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	410	731	562	562	562	562
17. Avskrivingar o.a.	-	-150	-	-	-	-
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	-	-	8	8	8	8
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	14	7	-	-	-	-
Inntøkur	**5.348**	**6.461**	**5.610**	**5.610**	**5.610**	**5.610**
21. Søla av vøru og tænastum	*4.921*	*5.920*	*5.100*	*5.100*	*5.100*	*5.100*
25. Eftirlits- og umsjónaravgjøld	*102*	*60*	*500*	*500*	*500*	*500*
29. Ymsar rakstrarinntøkur	-	*0*	-	-	-	-
62. Kravd gjøld, bøtur o.a.	-	*345*	-	-	-	-
63. Vanligar flytingarinntøkur	-	-	*10*	*10*	*10*	*10*
76. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	*324*	*136*	-	-	-	-
41. Inntøkufíggjað virksemi						
Nettoútreiðsla	0	18	0	0	0	0
Útreiðslur	**3.881**	**4.064**	**2.200**	**2.200**	**2.200**	**2.200**
11. Lønir v.m.	1.778	2.350	1.100	1.100	1.100	1.100
14. Keyp av vørum og tænastum	1.683	1.394	1.100	1.100	1.100	1.100
15. Keyp av útbúnaði, netto	40	81	-	-	-	-
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	358	237	-	-	-	-
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	0	1	-	-	-	-
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	23	-	-	-	-	-
Inntøkur	**3.881**	**4.045**	**2.200**	**2.200**	**2.200**	**2.200**
21. Søla av vøru og tænastum	*3.020*	*2.751*	*2.200*	*2.200*	*2.200*	*2.200*
25. Eftirlits- og umsjónaravgjøld	-	*-1*	-	-	-	-
29. Ymsar rakstrarinntøkur	-	*46*	-	-	-	-
63. Vanligar flytingarinntøkur	*354*	*75*	-	-	-	-
65. Flytingarinntøkur úr útlandinum	*342*	*1.104*	-	-	-	-
76. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	*165*	*70*	-	-	-	-
45. Stuðulsfíggjað virksemi						
Nettoútreiðsla	-	-	0	0	0	0
Útreiðslur	**-**	**-**	**800**	**800**	**800**	**800**
11. Lønir v.m.	-	-	500	500	500	500
14. Keyp av vørum og tænastum	-	-	300	300	300	300
Inntøkur	**-**	**-**	**800**	**800**	**800**	**800**
21. Søla av vøru og tænastum	-	-	*800*	*800*	*800*	*800*

Virksemisyvirlit: 21 Umhvørvisstovan

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
A: Høvuðsendamál (1.000 kr.)	**22.439**	**25.862**	**25.999**	**28.563**	**28.563**	**28.563**
Stjórn og felagsumsiting	5.214	5.357	5.299	5.263	5.263	5.263
Matrikulumsiting	3.553	5.105	5.100	5.100	5.100	5.100
Viðarvøkstur og frílendi	1.880	1.549	1.600	1.600	1.600	1.600
Umhvørvisfyrisiting	2.801	2.932	3.000	2.900	2.900	2.900
Kort og skráir	3.246	3.262	3.300	3.200	3.200	3.200
Tinglýsing og landsfólkayvirlit	3.994	4.398	4.400	4.400	4.400	4.400
Umhvørviskanningar og gransking	1.751	1.472	1.500	1.600	1.600	1.600
Orka og orkuráðgeving	-	1.787	1.800	1.800	1.800	1.800
Náttúrufyrisiting	-	-	-	2.700	2.700	2.700

Starvsfólkayvirlit: 21 Umhvørvisstovan

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Í lønarflokki 37 ella hægri	1,0	1,0	1,0	1,0	1,0	1,0
Onnur	37,5	39,8	42,0	45,5	45,5	45,5
Fulltíðarstørv	38,5	40,8	43,0	46,5	46,5	46,5
Lønarpartur (mió. kr.)	17,0	18,9	20,3	22,5	22,5	22,5

§ 12 Almannamál

Felagsútreiðslur

12.11.1. Fyrisiting

12.11.1.22. Javnstøðunevndin (Rakstrarjáttan)

Løgtingslóg nr. 52 frá 3. mai 1994 um javnstøðu millum kvinnur og menn kom í gildi í 1994. Sambært § 10 í lógini skal ein javnstøðunevnd veljast, sum hevur 5 limir. Javnstøðunevndin skal m.a. hava eftirlit við, at javnstøðulógin verður hildin, vera ráðgevi hjá myndugleikum, stovnum, feløgum og einstaklingum í javnstøðuspurningum og gera tilmæli í javnstøðumálum.

Javnstøðunevndin verður vald beint eftir løgtingsval fyri valskeiðið, Løgtingið situr.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	284	419	419	419	419	419
Útreiðslur	284	419	419	419	419	419
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	284	419	419	419	419	419
Útreiðslur	**284**	**419**	**419**	**419**	**419**	**419**
11. Lønir v.m.	177	261	354	354	354	354
14. Keyp av vørum og tænastum	106	157	65	65	65	65

12.11.1.26. Almannamálaráðið (Rakstrarjáttan)

Landsstýriskvinnan í almannamálum umsitur almannamál, bústaðarmál og javnstøðumál. Ráðið, sum umsitur økið, er Almannamálaráðið.

Uppgávan hjá Almannamálaráðnum er:

- at ráðgeva landsstýriskvinnuni
- at tilevna lógaruppskot, kunngerðir og aðrar reglur
- at veita stovnum og øðrum undir ráðnum ráð og vegleiðing

Játtanin til høvuðskontuna er við kravi um tillagaðan rakstur í 2018 lækkað við sløkum 600 tús. kr.

Átekning

Landsstýriskvinnuni verður heimilað at gera innanhýsis flytingar millum hesa høvuðskontuna og høvuðskontu 11.11.1.24. Heilsu- og innlendismálaráðið.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	13.582	12.299	12.924	12.365	12.365	12.365
Útreiðslur	13.622	12.341	12.924	12.365	12.365	12.365
Inntøkur	40	42	-	-	-	-
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	11.855	10.337	10.559	10.080	10.080	10.080
Útreiðslur	**11.895**	**10.379**	**10.559**	**10.080**	**10.080**	**10.080**
11. Lønir v.m.	8.578	7.487	8.370	7.644	7.644	7.644
14. Keyp av vørum og tænastum	2.386	1.939	2.010	1.620	1.620	1.620
15. Keyp av útbúnaði, netto	510	286	101	99	99	99
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	54	58	78	77	77	77
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	21	-	-	-	-	-
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	346	610	-	640	640	640
Inntøkur	**40**	**42**	**-**	**-**	**-**	**-**
21. Søla av vøru og tænastum	*40*	*4*	-	-	-	-
76. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	-	*38*	-	-	-	-
21. Ráð og nevndir						
Nettoútreiðsla	62	90	198	118	118	118
Útreiðslur	**62**	**90**	**198**	**118**	**118**	**118**
11. Lønir v.m.	42	47	198	118	118	118
14. Keyp av vørum og tænastum	16	44	-	-	-	-
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	4	-	-	-	-	-
25. SSP-samstarv						
Nettoútreiðsla	400	395	400	400	400	400
Útreiðslur	**400**	**395**	**400**	**400**	**400**	**400**
54. Stuðul til annað virksemi	400	395	400	400	400	400
26. Leigunevndin						
Nettoútreiðsla	217	198	242	242	242	242
Útreiðslur	**217**	**198**	**242**	**242**	**242**	**242**
11. Lønir v.m.	19	12	242	242	242	242
14. Keyp av vørum og tænastum	18	1	-	-	-	-
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	180	186	-	-	-	-
27. Verkætlanir Almannamálaráðið						
Nettoútreiðsla	1.048	1.278	1.525	1.525	1.525	1.525
Útreiðslur	**1.048**	**1.278**	**1.525**	**1.525**	**1.525**	**1.525**
11. Lønir v.m.	549	603	618	618	618	618
14. Keyp av vørum og tænastum	321	450	907	907	907	907
15. Keyp av útbúnaði, netto	9	-	-	-	-	-
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	1	-	-	-	-	-
54. Stuðul til annað virksemi	167	187	-	-	-	-
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	-	38	-	-	-	-

21. Ráð og nevndir

Ráðið fyri brekað

Ráðið fyri brekað gevur landsstýrinum og øðrum myndugleikum ráð í málum, sum viðvíkja fólki sum bera brek. Landsstýriskvinnan í almannamálum setur ráðið. Í ráðnum eru tilsamans 7 limir: eitt umboð fyri Almannamálaráðið, eitt umboð fyri Løgmansskrivstovuna, tvey umboð fyri Kommunufelagið og tvey umboð fyri MBF, harav

annað av hesum er formaðurin í MBF, sum er føddur ráðslimur. Hesir 6 ráðslimirnir gera so tilmæli at velja formann, ið verður 7. limurin í ráðnum.

Markamótsnevndin
Sambært §5, stk. 5 í ll. nr. 19 frá 7. apríl 2014 um heimatænastu, eldrarøkt v.m. er ásett, at ein trímannanevnd verður sett til at taka avgerðir um handfaring av markamótum til aðra lóggávu. Kommunurnar velja ein lim, landsstýrismaðurin velur ein lim og læknafelagið velur ein lim.

25. SSP-samstarv
SSP er eitt samstarv millum skúlan, sosialar myndugleikar og løgregluna.

26. Leigunevndin
Leigunevndin skal taka avgerð í ávísum trætumálum millum leigara og útleigara. Í leigunevndini eru 3 limir og 3 varalimir. Nevndarlimirnir skulu hava kunnleika um leiguvirksemi, byggifrøði, búskaparfrøði og viðurskifti brúkaranna. Formaðurin í leigunevndini skal vera løgfrøðingur. Almannamálaráðið og Uttanríkis- og vinnumálaráðið hava gjørt umsitingarsáttmála við Brúkaraumboðið, har ið Brúkaraumboðið virkar sum umsiting fyri leigunevndina.

27. Verkætlanir
Játtanin skal nýtast til Heildarætlanina um harðskap í parløgum og nærsambondum og til Heildarætlanina um kynsligan ágang. Arbeiðið at seta í verk átøkini í báðum ætlanum hongur neyvt saman og verður framt undir einum.

Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Í lønarflokki 37 ella hægri	3,0	2,0	3,0	3,0	3,0	3,0
Onnur	12,2	12,1	10,5	10,5	10,5	10,5
Fulltíðarstørv	15,2	14,1	13,5	13,5	13,5	13,5
Lønarpartur (mió. kr.)	8,6	7,5	8,4	7,6	7,6	7,6

12.11.1.48. Kvinnuluttøka í politikki (Rakstrarjáttan)

Løgtingið samtykti tann 20. november 2007, at arbeiðið hjá Demokratia skuldi halda áfram. Endamálið við Demokratia er at virka fyri, at leikluturin hjá kvinnum í føroyskum politikki økist.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	187	315	314	314	314	314
Útreiðslur	187	315	314	314	314	314
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	187	315	314	314	314	314
Útreiðslur	**187**	**315**	**314**	**314**	**314**	**314**
11. Lønir v.m.	104	115	263	263	263	263
14. Keyp av vørum og tænastum	83	200	51	51	51	51

Almannamál

12.21.1. Fyrisiting

12.21.1.02. Almannaverkið (Rakstrarjáttan)

Almannaverkið veitir sosiala ráðgeving og leiðbeining til einstaklingar. Harumframt veitir Almannaverkið tænastur til borgarar við serligum tørvi, sum búgva heima og á stovnum.

Almannaverkið umsitur:

- Lóg um almenna forsorg
- Lóg um almannapensjónir o.a.
- Lóg um arbeiðsfremjandi tiltøk
- Lóg um viðbót til ávísar pensjónistar
- Lóg um barnagjald til einsamallar uppihaldarar o.o.
- Lóg um stuðul til uppihaldspening
- Lóg um dagpening av sjúku v.m.
- Lóg um ásetan og javning av almannaveitingum
- Lóg um familjuískoyti

Somuleiðis umsitur Almannaverkið ávísar ásetingar í lóg um barnavernd.

Harumframt umsitur Almannaverkið "Millumlandasáttmálan frá 12. juni 2012 við Finnland, Ísland, Noreg og Svøríki um almannatrygd", sum fekk virknað í Føroyum tann 1. mai 2015. Sáttmálin fevnir um pensjónir, dagpening v.m. Høvuðssetningurin í sáttmálanum er, at norðurlendskir ríkisborgarar verða javnsettir við ríkisborgarar í viðkomandi landi í mun til lóggávuna í landinum. Eisini norðurlendski millumlandasáttmálin um almannastuðul og almannatænastur frá 14. juni 1994 er settur í gildi í Føroyum, og hevur sum høvuðssetning at javnseta allar norðurlendskar borgarar á forsorgarøkinum.

Bygnaður hjá Almannaverkinum
Almannaverkið er skipað við eini Fyrisiting, HR- og stjóraskrivstovu, Viðskiftadepli og tveimum Trivnaðardeplum. Játtanin til virksemið hjá Trivnaðardeplunum er at finna undir høvuðskontu 12.21.6.09. Trivnaðartænastur. Innanhýsis flytingar eru frá høvuðskontu 12.21.6.09. Trivnaðartænastur, undirkonta 20. Vanligt virksemi.

Fyrisitingin fevnir um fíggjardeild, fakdeild og KT-deild.

Viðskiftadepilin er býttur upp í deildirnar:

Avgerðarskrivstovan
Avgerðarskrivstovan skal góðskutryggja nógvar av avgerðunum, sum Viðskiftadepilin tekur. Allar avgerðir, sum verða tiknar viðvíkjandi fyritíðarpensjón, arbeiðsbúgving, stórum hjálpartólum og visitering til Trivnaðardepilin verða sendar til Avgerðarskrivstovuna, sum skal tryggja, at málsviðgerðin er í samsvari við galdandi lóggávu og livir upp til sosialfakligar og fyrisitingarligar meginreglur.

Borgaratænastan
Við støði í tvørfakligari hugsan, ráðgevur Borgaratænastan borgarum um allar peningaligar

veitingar og tænastur hjá Almannaverkinum, soleiðis at borgarar kunnu fáa kunning um teirra møguleikar, rættindi og skyldur á einum staði. Borgaratænastan avgreiðir umsóknir um stuðul vegna arbeiðsloysi og sjúku, stakútreiðslur, barnaískoyti umframt aðrar veitingar. Borgaratænastan veitir ráðgeving til pensjónistar og einkjur/einkjumenn, umframt at Borgaratænastan vísir borgarum víðari til aðrar viðkomandi deildir. Borgaratænastan er sambindingarliður fyri føroyingar, sum fara til onnur norðurlond at arbeiða.

Børn og ung
Á deildini fyri Børn og ung verður dentur lagdur á at stuðla foreldrum, ið hava børn, ið bera brek, so familjan fær møguleika fyri eina so vanliga tilveru sum møguligt, hóast brekið/sjúkuna hjá barninum. Á deildini verða eisini avgreiddar umsóknir um endurgjald fyri neyðugar meirútreiðslur vegna brekið hjá barninum, endurgjald fyri mista inntøku til tann, sum uppiheldur barni við breki heima, og umsóknir um persónligan stuðul og pláss á vardum bústaði. Ráðgevarnir á deildini hava samskipandi leiklutin fyri átakinum "Tann góða tilgongdin".

Hjálpartól og endurvenjing
Á deildini fyri Hjálpartól og endurvenjing, verður dentur lagdur á at menna og stuðla borgaranum til størri sjálvbjargni og sjálvsavgerðarrætt. Har verða eisini avgreiddar umsóknir um hjálpartól, avlamisbilar og bústaðarbroytingar.

Menning
Á deildini fyri Menning verður dentur lagdur á at menna og stuðla borgaranum til størri sjálvbjargni og sjálvsavgerðarrætt. Har verða eisini avgreiddar umsóknir um arbeiðsbúgving, tillagað starv, fyritíðarpensjón og upptøku á vardan bústað og umsóknir um persónligan stuðul.

Útgjald
Á deildini fyri Útgjald verða flest allar veitingar útgoldnar. Harumframt avgreiðir deildin umsóknir um sjúkradagpening.

Framskrivingar og broytingar
Í 2015 varð farið undir ein nýggjan samstarvsleist "Tann góða tilgongdin" fyri familjur at børnum við autismu. Í 2016 vórðu 600 tús. kr. settar av til endamálið. Tað hevur síðani víst seg, at uppgávan at samskipa tænasturnar, sum ymiskir myndugleikar veita, er meira tíðar- og orkukrevjandi enn upprunaliga mett og harumframt hevur tilgongdin av familjum verið størri enn væntað. Tá farið varð undir verkætlanina varð mett, at áleið 70 familjur fóru at gerast partur av skipanini. Í dag eru 120 familjur at børnum við autismu knýttar at skipanini og royndirnar vísa, at skipanin ger stóran mun fyri familjurnar og børnini. Játtanin er hækkað við 400 tús. kr. í 2018 fyri at tryggja, at hesin samstarvsleistur kann halda áfram, uttan at viðgerðartíðin av umsóknum til aðrar tænastur og veitingar til børn, sum bera brek verður ávirkað av tí.

Játtanin er við kravi um tillagaðan rakstur lækkað við góðum 700 tús. kr. í 2018.

21. Hjálpartólamiðstøðin
Fyri at tryggja betri samanhang í fyribyrgjandi tænastuni er virksemið hjá Hjálpartólamiðstøðini skipað á deildini fyri hjálpartól og endurvenjing.

24. Fakliga nevndin fyri børn við serligum tørvi

Fakliga nevndin fyri børn við serligum tørvi hevur sínar fundir á Almannaverkinum, sum hevur ábyrgd av umsitingarliga partinum av arbeiðinum. Nevndin er mannað við 3 serfrøðingum og er sett sambært forsorgarlógini § 32d. Nevndin skal taka støðu í málum, har ivamál eru, um barn er fevnt av § 5 í dagstovnalógini, ella um Stuðulsfólkaskipanin fyri børn skal veita barni tilboð.

40. Inntøkufíggjað virksemi

Fyri at fáa ein skynsamari rakstur av hjálpartólum, ið verða veitt sum útlán, fyri at tryggja endurnýtslu av hjálpartólum og fyri at forða fyri, at vit fáa fleiri hjálpartólagoymslur, varð ein leiguskipan sett á stovn í 2010. Myndugleikar, sum annars hava ábyrgd av at veita hjálpartól, kunnu leiga hesi fyri eitt leigugjald. Skipanin fevnir eisini um søla av hjálpartólum til stovnar hjá landinum og kommununum.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	48.124	52.717	52.624	52.285	52.285	52.285
Útreiðslur	57.595	64.597	62.861	63.822	63.822	63.822
Inntøkur	9.471	11.880	10.237	11.537	11.537	11.537
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	41.467	46.084	45.444	45.105	45.105	45.105
Útreiðslur	**49.272**	**56.474**	**55.074**	**56.035**	**56.035**	**56.035**
11. Lønir v.m.	37.572	41.703	43.153	44.303	44.303	44.303
14. Keyp av vørum og tænastum	6.669	7.776	7.452	7.646	7.646	7.646
15. Keyp av útbúnaði, netto	824	2.037	1.247	1.247	1.247	1.247
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	3.545	4.129	3.222	2.839	2.839	2.839
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	5	0	-	-	-	-
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	656	828	-	-	-	-
Inntøkur	**7.804**	**10.390**	**9.630**	**10.930**	**10.930**	**10.930**
21. Søla av vøru og tænastum	*0*	*32*	-	-	-	-
76. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	*7.554*	*10.358*	*9.630*	*10.930*	*10.930*	*10.930*
77. Flyting frá kommunum	*250*	-	-	-	-	-
21. Hjálpartólamiðstøðin						
Nettoútreiðsla	6.982	7.084	7.165	7.165	7.165	7.165
Útreiðslur	**7.539**	**7.384**	**7.165**	**7.165**	**7.165**	**7.165**
11. Lønir v.m.	4.916	4.186	4.237	4.237	4.237	4.237
14. Keyp av vørum og tænastum	1.214	1.266	1.550	1.550	1.550	1.550
15. Keyp av útbúnaði, netto	402	137	143	143	143	143
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	848	928	669	669	669	669
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	8	7	-	-	-	-
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	150	860	566	566	566	566
Inntøkur	**556**	**300**	**-**	**-**	**-**	**-**
76. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	*556*	*300*	-	-	-	-
24. Fakliga nevndin fyri børn við serligum tørvi						
Nettoútreiðsla	-	7	15	15	15	15
Útreiðslur	**-**	**7**	**15**	**15**	**15**	**15**
11. Lønir v.m.	-	7	15	15	15	15
14. Keyp av vørum og tænastum	-	0	-	-	-	-

40. Inntøkufíggjað virksemi, Hjálpartólamiðstøðin

Nettoútreiðsla	-326	-458	0	0	0	0
Útreiðslur	**785**	**732**	**607**	**607**	**607**	**607**
11. Lønir v.m.	102	105	107	107	107	107
14. Keyp av vørum og tænastum	56	77	50	50	50	50
15. Keyp av útbúnaði, netto	314	229	400	400	400	400
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	14	22	50	50	50	50
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	300	300	-	-	-	-
Inntøkur	**1.111**	**1.190**	**607**	**607**	**607**	**607**
21. Søla av vøru og tænastum	*1.111*	*1.190*	*607*	*607*	*607*	*607*

Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Í lønarflokki 37 ella hægri	4,3	3,0	3,0	3,0	3,0	3,0
Onnur	80,7	88,0	89,0	91,0	91,0	91,0
Fulltíðarstørv	85,0	91,0	92,0	94,0	94,0	94,0
Lønarpartur (mió. kr.)	37,6	41,7	43,2	44,3	44,3	44,3

Starvsfólkayvirlit: 21 Hjálpartólamiðstøðin

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Í lønarflokki 37 ella hægri	0,7	-	-	-	-	-
Onnur	11,5	9,4	9,4	9,4	9,4	9,4
Fulltíðarstørv	12,2	9,4	9,4	9,4	9,4	9,4
Lønarpartur (mió. kr.)	4,9	4,2	4,2	4,2	4,2	4,2

12.21.1.06. KT-heildarskipan til Almannastovuna (Rakstrarjáttan)

Løgtingslóg nr. 44 frá 15. mai 2014 um liðugtgerð av fyrra parti av nýggjari KT-heildarskipan til Almannaverkið fór úr gildi 31. desember 2015.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	1.500	-	-	-	-	-
Útreiðslur	1.500	-	-	-	-	-
20. KT-heildarskipan til Almannastovuna						
Nettoútreiðsla	1.500	-	-	-	-	-
Útreiðslur	**1.500**	**-**	**-**	**-**	**-**	**-**
15. Keyp av útbúnaði, netto	1.100	-	-	-	-	-
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	400	-	-	-	-	-

12.21.1.08. Dugni - skúlin (Rakstrarjáttan)

Dugni-skúlin við Áir er fyri vaksin, sum av likamligum, sálarligum ella sosialum orsøkum hava skerdan arbeiðsførleika. Skúlin hevur kostdeild og veitir undirvísing.

Virksemið er skipað við heimild í § 30, stk. 3 í forsorgarlógini.

Í 2017 varð eykajáttan á 200 tús. kr. fingin til vega til virksemið hjá skúlanum, og er játtanin framskrivað samsvarandi.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	3.414	3.571	3.532	3.732	3.732	3.732
Útreiðslur	3.592	3.764	3.685	3.885	3.885	3.885
Inntøkur	178	193	153	153	153	153
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	3.414	3.571	3.532	3.732	3.732	3.732
Útreiðslur	**3.592**	**3.764**	**3.685**	**3.885**	**3.885**	**3.885**
11. Lønir v.m.	3.034	3.250	3.244	3.444	3.444	3.444
14. Keyp av vørum og tænastum	488	446	366	366	366	366
15. Keyp av útbúnaði, netto	48	49	20	20	20	20
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	21	18	55	55	55	55
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	-	1	-	-	-	-
Inntøkur	**178**	**193**	**153**	**153**	**153**	**153**
21. Søla av vøru og tænastum	*178*	*193*	*153*	*153*	*153*	*153*

Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Í lønarflokki 37 ella hægri	-	-	-	-	-	-
Onnur	7,4	7,4	7,4	6,8	6,8	6,8
Fulltíðarstørv	7,4	7,4	7,4	6,8	6,8	6,8
Lønarpartur (mió. kr.)	3,0	3,2	3,2	3,4	3,4	3,4

12.21.1.09. Dugni - skúlin (Løgujáttan)

Farið verður undir triðja og síðsta byggistig av Dugnaskúlanum, sum fevnir um at betra um búeindina, undirvísingarhølini, ventilatiónsskipanina, samstundis sum atkomuviðurskiftini verða betraði og verða brunaviðurskiftini endaliga dagførd, so skúlin lýkur øll neyðug krøv. Samlaði kostnaðurin er mettur at vera 4. mió. kr.

Játtaðar eru 2 mió. kr. í 2018 og hildið verður fram við arbeiðinum í 2019.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	-	-	-	2.000	2.000	-
10. Dugni - skúlin						
Útreiðslur	**-**	**-**	**-**	**2.000**	**2.000**	**-**
31. Bygging og løguframleiðsla	-	-	-	2.000	2.000	-

12.21.1.10. Teknmálstulkatænastan (Stuðulsjáttan)

Stuðulin verður latin til Teknmálstulkatænastuna. Teknmálstulkatænastan veitir tulk, tá ið samskift verður millum hoyrandi, tunghoyrd og deyv. Árligi stuðulin á 1.310 tús. kr. verður latin til teknmálstulkar, skrivitulk og til skrivstovuhjálp. Stuðulin verður útgoldin

frammanundan mánaðarliga sum ávegisgjald. Ársroknskapur fyri árið frammanundan skal vera latin Almannamálaráðnum innan 1. apríl.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	1.310	1.310	1.310	1.310	1.310	1.310
01. Stuðul						
Útreiðslur	**1.310**	**1.310**	**1.310**	**1.310**	**1.310**	**1.310**
54. Stuðul til annað virksemi	1.310	1.310	1.310	1.310	1.310	1.310

12.21.1.12. Endurmenning (Rakstrarjáttan)

Endurmenningin í Almannaverkinum er skipað sum eitt tvørfakligt samstarv, har dentur verður lagdur á at menna og stuðla borgarum til størri sjálvbjargni og sjálvsavgerðarrætt. Endurmenningin leggur seg eftir at samansjóða tænastur til borgarar, sum hava ein samansettan tørv á ymiskum tænastum. Talan kann vera um tænastur frá Almannaverkinum, heilsuverkinum, skúlaverkinum og øðrum. Hetta ger, at borgarin fær eina betri hjálp, til sjálvstøðugari lív.

Endurvenjing
Endurvenjingin er skipað sambært § 29 í forsorgarlógini. Almannaverkið kann veita borgarum í aldrinum 18-66 ár endurvenjing fyri at venja aftur ein ella fleiri mistar førleikar. Endamálið við endurvenjingini er, at borgarin kann fáa ella fasthalda tilknýtið til arbeiðsmarknaðin ella fyri, at borgarin kann klára seg uttan hjálp ella við minni hjálp frá Almannaverkinum.

Almannaverkið arbeiðir mið- og stigvíst við at skipa eina landsfevnandi endurvenjingartænastu. Í løtuni eru tvær eindir, ein í Tórshavn og ein í Runavík, har borgarar fáa eitt ávíst tal av endurvenjingartímum í eitt frammanundan avtalað tíðarskeið.

Tað eru eisini borgarar, sum ikki hava møguleikan til at fara á eindirnar í Tórshavn og Runavík at fáa viðgerð og tí verður endurvenjingin veitt í nærumhvørvinum og í heiminum. Almannaverkið veitir tískil í ávísum førum endurvenjing heima hjá borgaranum og verða avtalur eisini í ein ávísan mun gjørdar við kommunur og privatar veitarar um nýtslu av hølum og tólum og/ella keyp av endurvenjingartænastu.

Bíðilisti er til endurvenjing hjá Almannaverkinum. Talan er m.a. um borgarar, sum hava fingið serkøna endurvenjing, á sjúkrahúsum í Føroyum ella á venjingarstøðum í Danmark, og sum hava framhaldandi tørv á endurvenjing frá Almannaverkinum. Tað er sera umráðandi fyri hesar borgarar, at venjingin heldur áfram, beinanvegin teir eru útskrivaðir.

Nógvir borgarar, sum hava seinheilaskaða og fáa endurvenjing, hava stóran tørv á talu- og lesivenjing, men fáa ikki hesa frá Almannaverkinum í dag. Fyri borgaran merkir hetta, at ein so grundleggjandi førleiki sum at kunna samskifta ikki verður vandur nøktandi.

Játtanin er hækkað við 1,3 mió. kr. í 2018 fyri at Almannaverkið kann seta 2 terapeutar, sum kunnu veita fleiri borgarum endurvenjing og fyri at taluvenjing kann gerast partur av endurvenjingini.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	4.559	5.338	5.468	6.768	6.768	6.768
Útreiðslur	4.559	5.338	5.468	6.768	6.768	6.768
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	4.559	5.338	5.468	6.768	6.768	6.768
Útreiðslur	**4.559**	**5.338**	**5.468**	**6.768**	**6.768**	**6.768**
11. Lønir v.m.	2.901	4.065	4.536	5.836	5.836	5.836
14. Keyp av vørum og tænastum	390	527	352	352	352	352
15. Keyp av útbúnaði, netto	473	26	150	150	150	150
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	346	484	400	400	400	400
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	13	14	-	-	-	-
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	436	204	-	-	-	-
72. Flytingar frá landi til kommunur	-	18	30	30	30	30

Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Í lønarflokki 37 ella hægri	-	-	-	-	-	-
Onnur	8,0	10,0	10,0	13,0	13,0	13,0
Fulltíðarstørv	8,0	10,0	10,0	13,0	13,0	13,0
Lønarpartur (mió. kr.)	2,9	4,1	4,5	5,8	5,8	5,8

12.21.1.19. Ráðgevingin fyri føroyingar í Danmark (Stuðulsjáttan)

Stuðulin verður latin til Sjálvsognarstovnin "Ráðgevingin fyri føroyingar í Danmark". Sjálvsognarstovnurin hevur heimstað í Danmark. Endamálið við Ráðgevingini fyri føroyingar í Danmark er m.a.:

- at veita føroyingum í Danmark hjálp og vegleiðing í sosialum, persónligum og lestrarligum spurningum
- at upplýsa um nevndu øki mótvegis einstaklingum, myndugleikum og stovnum í Danmark og Føroyum
- at virka sum millumlið millum føroyingar í Danmark og myndugleikar og stovnar í Danmark og í Føroyum á nevndu økjum

Árligi stuðulin verður latin til lønir og vanligar skrivstovuútreiðslur. Stuðulin verður útgoldin frammanundan mánaðarliga sum ávegisgjald. Ársroknskapur fyri árið frammanundan skal vera latin Almannamálaráðnum innan 1. apríl. Sambært reglugerð skulu hagtøl latast Almannamálaráðnum fyri stuðulsárið.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	1.248	1.248	1.248	1.248	1.248	1.248
01. Stuðul						
Útreiðslur	**1.248**	**1.248**	**1.248**	**1.248**	**1.248**	**1.248**
51. Tilskot til útlandið o.a.	1.248	728	1.248	1.248	1.248	1.248
54. Stuðul til annað virksemi	-	520	-	-	-	-

12.21.1.22. Stuðul til feløg (Stuðulsjáttan)

Stuðul verður latin til ymisk feløg.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	4.340	5.040	5.690	5.840	5.840	5.840
01. Kreppumiðstøð						
Útreiðslur	**1.290**	**1.290**	**1.290**	**1.290**	**1.290**	**1.290**
54. Stuðul til annað virksemi	1.290	1.290	1.290	1.290	1.290	1.290
02. Reyði Krossur						
Útreiðslur	**50**	**150**	**200**	**250**	**250**	**250**
54. Stuðul til annað virksemi	50	150	200	250	250	250
06. KRIS						
Útreiðslur	**500**	**1.000**	**1.200**	**1.200**	**1.200**	**1.200**
54. Stuðul til annað virksemi	500	1.000	1.200	1.200	1.200	1.200
08. Sorgbólkurin Berin						
Útreiðslur	**300**	**400**	**800**	**900**	**900**	**900**
54. Stuðul til annað virksemi	300	400	800	900	900	900
10. Fountainhúsið						
Útreiðslur	**2.000**	**2.000**	**2.000**	**2.000**	**2.000**	**2.000**
54. Stuðul til annað virksemi	2.000	2.000	2.000	2.000	2.000	2.000
11. Føroysk teldutala						
Útreiðslur	**200**	**200**	**200**	**200**	**200**	**200**
54. Stuðul til annað virksemi	200	200	200	200	200	200

01. Kreppumiðstøð

Stuðulin verður latin Kreppumiðstøðini, sum hevur til endamáls at veita kvinnum, ið hava verið fyri harðskapi, innivist og veita ráðgeving og vegleiðing. Á Kreppumiðstøðini eru tvey ársverk, skipað í trý størv. Stuðulin verður útgoldin frammanundan mánaðarliga. Ársroknskapur fyri árið frammanundan skal vera latin Almannamálaráðnum innan 1. apríl. Sambært reglugerð skal Kreppumiðstøðin lata Almannamálaráðnum hagtøl fyri stuðulsárið.

Harumframt umsitur Kreppumiðstøðini átøk sambært heildarætlanini Harðskapur í parløgum og nærsambondum. Talan er um hesi átøk:

- Tilboð um sálarfrøðiliga hjálp til teirra, ið eru rakt av harðskapi
- Veiting til keyp av mati og neyðsynjarvørum
- Veiting til tulkingarskipan til kvinnur

02. Reyði Krossur Føroya

Stuðulin verður latin Reyða Krossi, sum er heimsfevnandi hjálparfelagsskapur, sum m.a. hevur til endamáls at veita hjálp uttan mun til tjóðskap, ættarslag, átrúnað, sannføring, stætt ella politiskan hugburð. Stuðulin verður játtaður til virksemið hjá felagsskapinum. Stuðulin verður útgoldin einaferð um árið. Ársroknskapur fyri árið frammanundan skal vera latin Almannamálaráðnum innan 1. apríl.

Stuðulin er hækkaður við 50 tús. kr. í 2018.

06. KRIS
Stuðulin verður játtaður til virksemi hjá KRIS, ið virkar fyri at hjálpa vaksnum insestoffrum og til heildarverkætlanina hjá KRIS. Stuðulin verður útgoldin hvønn ársfjórðing. Ársroknskapur fyri árið frammanundan skal vera latin Almannamálaráðnum innan 1. apríl. Sambært reglugerð skal KRIS lata Almannamálaráðnum hagtøl fyri stuðulsárið.

08. Sorgarbólkurin Berin
Stuðulin verður latin til Sorgarbólkin Beran, sum hevur til endamáls at geva børnum og ungum, ið hava mist foreldur og/ella systkin við deyða, eitt stað, har tey kunnu hittast og práta við javnlík. Sorgarbólkar eru eisini skipaðir fyri foreldur, sum hava mist børn. Stuðulin verður útgoldin hvønn ársfjórðing. Ársroknskapur fyri árið frammanundan skal vera latin Almannamálaráðnum innan 1. apríl. Sambært reglugerð skal Berin lata Almannamálaráðnum hagtøl fyri stuðulsárið.

Stuðulin er hækkaður við 100 tús. kr. í 2018.

10. Fountainhúsið
Stuðulin verður latin Fountainhúsinum, ið veitir arbeiðsrættað tilboð til persónar við sálarsjúku ella við sálarligum trupulleikum, sambært meginreglunum galdandi fyri Fountain hús. Stuðulin verður útgoldin frammanundan mánaðarliga. Ársroknskapur fyri árið frammanundan skal vera latin Almannamálaráðnum innan 1. apríl. Sambært reglugerðini skulu hagtøl latast Almannamálaráðnum fyri stuðulsárið.

11. Føroysk teldutala
Stuðulin verður latin Grunninum Føroysk Teldutala. Teldutalan er eitt týðandi amboð fyri sjónveik, blind og lesiveik, sum í gerandisdegnum stimbrar undir virkisfýsni og sjálvbjargni. Stuðulin fer til at rinda árliga gjaldið til teldutaluskipanina. Stuðulin verður útgoldin einaferð um árið. Ársroknskapurin fyri árið frammanundan skal vera latin Almannamálaráðnum fyri 1. apríl.

12.21.1.23. Stuðul til fyriskipanir fyri heimleys (Stuðulsjáttan)

Við heimild í §32 e í forsorgarlógini, er heimilað landsstýrinum at skipa ella góðkenna serlig bútilboð til persónar við víttfevndum sosialum trupulleikum, sum ikki eru førir fyri at útvega sær ella fasthalda ein varandi bústað.

Almannaverkið og sjálvbodnir felagsskapir samstarva um skipan av serligum bútilboðum. Almannaverkið avgreiðir umsóknirnar. Formligu krøvini eru at finna í kunngerð. Játtan um stuðul verður givin við grundarlagi í umsóknini og skal nýtast í stuðulsárinum. Stuðul verður goldin frammanundan mánaðarliga ella hvønn ársfjórðing eftir avtalu millum partarnar. Stuðul til serlig bútilboð kann ongantíð fara upp um kostnaðin av at reka hesi, tá ið gjøld fyri húsaleigu og onnur føst gjøld frá búfólkunum eru drigin frá.

Játtanin er hækkað við 2 mió. kr. í 2018 í sambandi við ætlanina at skipa eitt serligt bútilboð í Klaksvík.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	3.800	3.950	3.950	5.950	5.950	5.950
01. Stuðul til fyriskipanir fyri heimleys						
Útreiðslur	**3.800**	**3.950**	**3.950**	**5.950**	**5.950**	**5.950**
54. Stuðul til annað virksemi	3.800	3.950	3.950	5.950	5.950	5.950

12.21.3. Barnastuðul

12.21.3.01. Barnavernd (Lógarbundin játtan)

Barnaverndarútreiðslur verða goldnar við heimild í Ll. nr. 18 frá 8. mars 2005 um barnavernd, við seinni broytingum.

Kommunurnar hava ábyrgdina av barnaverndarøkinum, og bera útreiðslurnar, ið standast av barnaverndarlógini. Tó ber landið útreiðslurnar av stovnsetan og rakstri av Høvuðsbarnaverndarnevndini, samdøgursstovnum og dagstovnum hjá landinum, og fyri familjuviðgerð á samdøgursstovnum. Eisini ber landið útreiðslurnar, tá børn verða sett á stovn, sum landsstýriskvinnan hevur góðkent sambært § 33, stk. 4, ella tá ið børn verða sett á stovn uttanlands í sambandi við, at nøktandi tilboð ikki kann veitast í Føroyum.

Harumframt eru inngjøld fyri uppalingarískoyti tikin við. Er tað eftir lógini um rættarstøðu barnanna álagt einum persóni at rinda barnagjald v.m. til eitt barn, ið verður sett heiman, fær tað almenna rættin til barnagjaldið frá gjaldskylduga. Tað almenna er at skilja sum tann myndugleiki, ið uppiheldur barninum, meðan tað er sett heiman. Er barnið sett til fosturs, er tað tann kommunala barnaverndartænastan, ið heldur útreiðslurnar og hevur rætt til gjaldið. Verður barnið sett á stovn hjá landinum, er tað landið, ið heldur útreiðslurnar og hevur rætt til gjaldið.

Sambært kunngerð nr. 4 frá 30. januar 2007 um brúkaragjøld fyri børn á stovni hjá landinum, sum broytt við kunngerð nr. 110 frá 9. november 2012, skulu kommunurnar rinda ein part av útreiðslunum vegna stovnsuppihald. Brúkaragjaldið er ájavnt samsýningini, sum kommunur rinda fosturforeldrum, sum hava óvanliga trupul børn til fosturs.

Játtanin til barnavernd fevnir um útreiðslur til onnur stovnsuppihald enn tey, sum liggja undir høvuðskontu 12.21.6.09. Trivnaðartænastur.

05. Advokatumboðan
Um eitt barn verður sett heiman og foreldramyndugleikin ella barnið, ið hevur fylt 15 ár, ikki hevur givið samtykki, hava foreldrini og barnið rætt til at verða umboðað ókeypis av advokati. Í málum har samtykki er fingið, kann Høvuðsbarnaverndarnevndin gera av, um foreldur og børn kunnu fáa ókeypis umboðan. Útreiðslurnar til advokatin ber landið.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	1.695	1.794	2.555	2.655	2.655	2.655
Inntøkujáttan	525	560	820	820	820	820
04. Barnavernd						
Útreiðslur	**1.354**	**1.463**	**2.155**	**2.155**	**2.155**	**2.155**
52. Tilskot til einstaklingar	1.354	1.463	2.155	2.155	2.155	2.155
Inntøkur	**525**	**560**	**820**	**820**	**820**	**820**
63. Vanligar flytingarinntøkur	*-*	*-*	*100*	*100*	*100*	*100*
77. Flyting frá kommunum	*525*	*560*	*720*	*720*	*720*	*720*
05. Advokatumboðan						
Útreiðslur	**341**	**331**	**400**	**500**	**500**	**500**
52. Tilskot til einstaklingar	341	331	400	500	500	500

Virksemisyvirlit: 04 Barnavernd

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
A: Høvuðsendamál (1.000 kr.)						
Barnavernd	1.354	1.463	2.155	2.155	2.155	2.155
B: Virksemi (tal)						
Tal av børnum	2	2	2	3	3	3
C: Eindarkostnaður (1.000 kr.)						
Barnavernd	677	732	1.078	718	718	718

12.21.3.02. Stuðul til Barnaverndarstovuna (Stuðulsjáttan)

Stuðulin á 500 tús. kr. verður latin til virksemið hjá Barnahúsinum í sambandi við, at avtala er gjørd millum Almannamálaráðið, Heilsumálaráðið, Kommunufelagið og Føroya Landfúta um at skipa Barnahús í Føroyum. Sambært avtaluni er Barnahúsið ætlað børnum og ungdómum í aldrinum 0-18 ár, og skal vera karmur um eitt skipað tvørfakligt samstarv millum barnaverndartænastur, løgreglu og heilsumyndugleikar í sambandi við mál um kynsligan ágang ella annan harðskap.

Barnaverndarstova Føroya, ið er stovnur undir Kommunufelagnum, umsitur og rekur Barnahúsið.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	500	500	500	500	500	500
02. Barnahús						
Útreiðslur	**500**	**500**	**500**	**500**	**500**	**500**
54. Stuðul til annað virksemi	500	500	500	500	500	500

12.21.3.03. Einkjubarnastyrkur (Lógarbundin játtan)

Barnagjald verður veitt við heimild í Ll. nr. 71 frá 20. mai 1996 um barnagjald til einsamallar uppihaldarar v.fl., við seinni broytingum.

Rætt til gjald hava børn, sum hava mist annað av foreldrunum, faðir- og móðurleys børn og børn fødd uttanfyri hjúnalag, tá faðirskapurin ikki er staðfestur. Harumframt kann Almannaverkið veita stuðul til útreiðslur í sambandi við barnsins dóp, ferming, sjúku og jarðarferð ella av øðrum serstøkum orsøkum.

Veitingar sambært hesi lóg verða á hvørjum ári javnaðar sambært Ll. nr. 107 frá 22. desember 1999 um áseting og javning av almannaveitingum, við seinni broytingum.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	1.857	1.716	1.714	1.714	1.714	1.714
01. Einkjubarnastyrkur						
Útreiðslur	**1.857**	**1.716**	**1.714**	**1.714**	**1.714**	**1.714**
52. Tilskot til einstaklingar	1.857	1.716	1.714	1.714	1.714	1.714

Virksemisyvirlit: 01 Einkjubarnastyrkur

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
A: Høvuðsendamál (1.000 kr.)						
Barnagjald	1.857	1.716	1.714	1.714	1.714	1.714
B: Virksemi (tal) av børnum						
Tal av móttakarum	157	122	126	128	128	128
C: Eindarkostnaður (kr.)						
Barnagjald	11.828	14.066	13.603	13.391	13.391	13.391

12.21.3.04. Barnapeningur veittur í forskoti (Lógarbundin játtan)

Barnapeningur verður veittur í forskoti við heimild í Ll. nr. 71 frá 20. mai 1996 um barnagjald til einsamallar uppihaldarar v.m. við seinni broytingum.

Rindar gjaldskyldugi ikki barnagjald (alimentatión), ið er ásett eftir lóggávuni um rættarstøðu barnanna, rættstundis (gjalddagin), kann tað almenna í forskoti rinda vanliga barnagjaldið til tann, sum hevur rætt til gjaldið. Barnagjald kann verða útgoldið til barnið fyllir 18 ár.

Umframt barnagjaldið, sum vanliga verður rindað hálvárliga í ávísum førum tó mánaðarliga, kunnu eisini serlig gjøld eftir nevndu lógum omanfyri verða útgoldin í forskoti, t.d. uppihaldspeningur til mammuna í sambandi við barnsburð og dóps- og fermingargjøld. Almannaverkið krevur umvegis TAKS peningin inn aftur frá gjaldskylduga.

Veitingar sambært hesi lóg verða á hvørjum ári javnaðar sambært Ll. nr. 107 frá 22. desember 1999 um áseting og javning av almannaveitingum, við seinni broytingum.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	566	711	1.038	800	800	800
01. Forskotsrindan						
Útreiðslur	**11.781**	**11.217**	**12.208**	**11.500**	**11.500**	**11.500**
52. Tilskot til einstaklingar	11.781	11.217	12.208	11.500	11.500	11.500
02. Innkrevjing av forskotsrindan av barnapeningi						
Útreiðslur	**-11.214**	**-10.506**	**-11.170**	**-10.700**	**-10.700**	**-10.700**
52. Tilskot til einstaklingar	-11.214	-10.506	-11.170	-10.700	-10.700	-10.700

Virksemisyvirlit: 01 Forskotsrindan

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
A: Høvuðsendamál (1.000 kr.)						
Barnapeningur veittur í forskoti	11.781	11.217	12.208	11.500	11.500	11.500
B: Virksemi (tal)						
Tal av móttakarum	678	664	700	675	675	675
Tal av børnum	974	938	1.000	975	975	975
C: Eindarkostnaður (kr.)						
Barnapeningur veittur í forskoti pr. móttakara	17.376	16.893	17.440	17.037	17.037	17.037
Barnapeningur veittur í forskoti pr. barn	12.095	11.958	12.208	11.795	11.795	11.795

12.21.3.05. Stuðul til uppihaldspening (Lógarbundin játtan)

Stuðulin verður veittur sambært Ll. nr. 90 frá 6. juni 1997 um stuðul til uppihaldspening, við seinni broytingum. Rætt til stuðul eftir hesi lóg hava persónar, ið eru undir fullari skattskyldu í Føroyum, sum av tí almenna eru álagdir at gjalda uppihaldspening til hjúnafelaga, sum teir eru skildir ella sundurlisnir frá, og til børn yngri enn 18 ár, sum ikki búgva hjá uppihaldsskylduga. Stuðulin verður bert veittur eftir umsókn.

Sambært løgtingslóg nr. 136 frá 28. desember 2010 um broyting í løgtingslóg um stuðul til uppihaldspening verður stuðul bert veittur fyri 40 % av goldnu upphæddina, sum fer upp um vanliga árliga gjaldið fyri eitt barn.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	2.395	2.417	2.423	2.423	2.423	2.423
01. Stuðul til uppihaldspening						
Útreiðslur	**2.395**	**2.417**	**2.423**	**2.423**	**2.423**	**2.423**
52. Tilskot til einstaklingar	2.395	2.417	2.423	2.423	2.423	2.423

Virksemisyvirlit: 01 Stuðul til uppihaldspening

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
A: Høvuðsendamál (1.000 kr.)						
Stuðul til uppihaldspening	2.395	2.417	2.423	2.423	2.423	2.423
B: Virksemi (tal)						
Stuðul til uppihaldspening	236	242	245	245	245	245
C: Eindarkostnaður (kr.)						
Stuðul til uppihaldspening	10.148	9.988	9.890	9.890	9.890	9.890

12.21.3.06. Barnaískoyti (Lógarbundin játtan)

Barnaískoyti verður veitt við heimild í Ll. nr. 71 frá 20. mai 1996 um barnagjald til einsamallar uppihaldarar v.m., við seinni broytingum. Barnaískoyti til einsamallar uppihaldarar verður veitt eftir umsókn. Ískoytið verður útgoldið hvønn ársfjórðing og varð í 2015 ásett at vera 10.000 kr. um árið.

Veitingar sambært hesi lóg verða á hvørjum ári javnaðar sambært løgtingslóg nr. 107 frá 22. desember 1999 um áseting og javning av almannaveitingum, við seinni broytingum.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	11.358	11.563	11.597	11.597	11.597	11.597
01. Barnaískoyti						
Útreiðslur	**11.358**	**11.563**	**11.597**	**11.597**	**11.597**	**11.597**
52. Tilskot til einstaklingar	11.358	11.563	11.597	11.597	11.597	11.597

Virksemisyvirlit: 01 Barnaískoyti

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
A: Høvuðsendamál (1.000 kr.)						
Barnaískoyti	11.358	11.563	11.597	11.597	11.597	11.597
B: Virksemi (tal)						
Tal av móttakarum	843	858	860	860	860	860
C: Eindarkostnaður (kr.)						
Barnaískoyti	13.473	13.477	13.485	13.485	13.485	13.485

12.21.3.09. Familjuískoyti (Lógarbundin játtan)

Familjuískoyti verður veitt við heimild í ll. nr. 160 frá 24. desember 2015 um familjuískoyti, og verður veitt til barnafamiljur, ið hava lágar inntøkur og trong fíggjarlig kor. Barnafamiljur við inntøku lægri enn 200.000 kr., fáa fulla upphædd, meðan ískoytið lækkar stigvíst so hvørt, sum inntøkan hækkar. Familjuískoytið til støk við einum barni er 18.000 kr. um árið, og hjá pørum við einum barni er familjuískoytið 22.000 kr. um árið. Fyri hvørt barnið aftrat tí fyrsta hækkar veitingin við 5.000 kr.

Sambært Ll. nr. 167 frá 20. desember 2017 hækkar markið fyri mótrokning hjá pørum, sum móttaka familjuískoyti, úr 200.000 kr. upp í 280.000 kr. Játtanin í 2018 er lækkað vegna minni virksemi enn væntað, men hækkar við 1,0 mió. kr. vegna lógarbroytingina.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	-	4.027	7.750	6.000	6.000	6.000
01. Familjuískoyti						
Útreiðslur	**-**	**4.027**	**7.750**	**6.000**	**6.000**	**6.000**
52. Tilskot til einstaklingar	-	4.027	7.750	6.000	6.000	6.000

Virksemisyvirlit: 01 Familjuískoyti

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
A: Høvuðsendamál (1.000 kr.)						
Familjuískoyti	-	4.027	7.750	6.000	6.000	6.000
B: Virksemi (tal)						
Tal av móttakarum, barnafamiljur	-	322	430	420	420	420
C: Eindarkostnaður (kr.)						
Familjuískoyti	-	12.506	18.023	14.286	14.286	14.286

12.21.3.13. Ættleiðingarstuðul (Lógarbundin játtan)

Lógargrundarlagið undir ættleiðingarstuðlinum er Ll. nr. 51 frá 3. mai 1994 um ættleiðingarstuðul, við seinni broytingum. Stuðulin er 100 tús. kr. í sambandi við ættleiðingina.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	200	600	500	300	300	300
01. Ættleiðingarstuðul						
Útreiðslur	**200**	**600**	**500**	**300**	**300**	**300**
52. Tilskot til einstaklingar	200	600	500	300	300	300

Virksemisyvirlit: 01 Ættleiðingarstuðul

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
A: Høvuðsendamál (1.000 kr.)						
Ættleiðingarstuðul	200	600	500	300	300	300
B: Virksemi (tal) av børnum						
Ættleiðingarstuðul	2	6	5	3	3	3
C: Eindarkostnaður (1.000 kr.)						
Ættleiðingarstuðul	100	100	100	100	100	100

12.21.3.16. Felagið Barnabati (Stuðulsjáttan)

Stuðulin á 450 tús. kr. verður latin til Felagið Barnabati, sum rekur skrivstovu, hvørs endamál er at fremja tiltøk, ið tæna børnum og ungdómum. Barnabati virkar sambært viðtøkum felagsins sambært ST-sáttmálanum um barnarættindi og virkar fyri at bøta um trivnaðin hjá børnum og ungum. Stuðulin verður útgoldin einaferð um árið. Ársroknskapur

fyri árið frammanundan skal vera latin Almannamálaráðnum innan 1. apríl. Sambært reglugerð skal Barnabati lata Almannamálaráðnum hagtøl fyri stuðulsárið.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	850	350	450	450	450	450
01. Stuðul						
Útreiðslur	**850**	**350**	**450**	**450**	**450**	**450**
54. Stuðul til annað virksemi	850	350	450	450	450	450

12.21.4. Sjúkradagpeningur

12.21.4.01. Dagpeningaskipanin (Lógarbundin játtan)

Dagpeningur verður veittur við heimild í løgtingslóg nr. 74 frá 8. mai í 2001 um dagpening vegna sjúku v.m., við seinni broytingum.

Dagpeningur verður veittur:

- løntakarum, sum ikki hava rætt til fulla ella partvísa løn í sambandi við sjúku o.a.sambært lóg, trygging ella sáttmála
- útróðrarmonnum, sum rógva út við egnum ella annan mans fari
- sjálvstøðugt vinnurekandi, sum ikki hava ella bara hava lítla leysa arbeiðsmegi aftur at sær
- sjálvstøðugt vinnurekandi, sum hava teknað sjálvbodna trygging
- vegna fráveru fyri føðing av heilsuvanda fyri móður ella barn
- fólki, hvørs børn ella hjúnafelagi gerast álvarliga sjúk

Rætturin til dagpening er sum høvuðsregla treytaður av føstum bústaði og fullari skattskyldu í Føroyum. Tann, ið seinastu 13 vikurnar undan sjúkrafráveruni hevur verið í løntum arbeiði í minst 120 tímar tilsamans, hevur rætt til dagpening vegna sjúku.

Dagpeningur verður veittur frá 1. fráverudegi og verður sum høvuðsregla roknaður eftir miðalinntøkuni tær síðstu 5 vikurnar, áðrenn viðkomandi gjørdist óarbeiðsførur. Tó kunnu bæði eitt styttri og eitt longri meira umboðandi tíðarskeið verða nýtt sum inntøkugrundarlag. Útreiðslurnar fyri 1. og 2. fráverudag verða endurrindaðar av arbeiðsgevaranum.

Dagpeningaveitingin er væntaða mista inntøkan, tó í mesta lagi 80 % av lønini sambært sáttmála millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag.

Tey, sum hava teknað sjálvbodna trygging, hava rætt til dagpening 4 vikur eftir, at umsóknin um upptøku í sjálvbodnu tryggingini er latin inn, og tryggingargjaldið er goldið. Sjálvboðin tryggjað fáa dagpening frá 1. fráverudegi og við fullari dagpeningaupphædd.

Dagpeningur til løntakarar og sjálvboðin tryggjað, kann í mesta lagi verða veittur í 40 vikur í einum 12 mánaða skeiði.

Í sambandi við fráveru fyri føðing, orsakað av heilsuvanda fyri móður ella barn, verður dagpeningur veittur í mesta lagi 32 vikur í viðgongutíðini. Barsilsskipanin rindar tær seinastu 8 vikurnar.

Løgtingslóg um sjúkratrygd til fiskimenn er við løgtingslóg nr. 117 frá 24. november 2016 sett úr gildi. Fiskimenn eru frá 1. januar 2017 fevndir av dagpeningalógini frá 1. fráverudegi.

Við ll. nr. 54 frá 4. mai 2017 er tíðarskeiðið, sum fyritíðarpensjónistar hava rætt til at fáa dagpening vegna sjúku, longt úr 20 upp í 40 vikur í einum 12 mánaða skeiði. Við ll. nr. 86 frá 29. mai 2017 er talið av teimum, ið kunnu tekna trygging sambært dagpeningalógini hækkað, samstundis sum at gjaldið verður lækkað nakað. Broytingarnar tilsamans hava við sær, at nettojáttanin í 2018 er hækkað við góðum 700 tús. kr.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	64.286	63.769	68.081	68.855	68.855	68.855
Inntøkujáttan	7.677	8.887	9.460	9.529	9.529	9.529
01. Løntakarar						
Útreiðslur	**62.277**	**61.734**	**65.452**	**66.196**	**66.196**	**66.196**
52. Tilskot til einstaklingar	62.277	61.734	65.452	66.196	66.196	66.196
Inntøkur	**3.396**	**4.374**	**4.200**	**4.200**	**4.200**	**4.200**
63. Vanligar flytingarinntøkur	*3.396*	*4.374*	*4.200*	*4.200*	*4.200*	*4.200*
02. Sjálvstøðug og húsarhaldsfólk						
Útreiðslur	**1.177**	**1.325**	**1.699**	**1.715**	**1.715**	**1.715**
52. Tilskot til einstaklingar	1.177	1.325	1.699	1.715	1.715	1.715
Inntøkur	**510**	**568**	**660**	**660**	**660**	**660**
63. Vanligar flytingarinntøkur	*510*	*568*	*660*	*660*	*660*	*660*
04. Gjald fyri læknaváttanir						
Útreiðslur	**833**	**710**	**930**	**944**	**944**	**944**
52. Tilskot til einstaklingar	833	710	930	944	944	944
09. Arbeiðsgevarans partur, dagpengar						
Inntøkur	**3.771**	**3.945**	**4.600**	**4.669**	**4.669**	**4.669**
61. Skattir og avgjøld	*-29*	*-150*	-	-	-	-
63. Vanligar flytingarinntøkur	*3.800*	*4.095*	*4.600*	*4.669*	*4.669*	*4.669*

Virksemisyvirlit

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
A: Høvuðsendamál (1.000 kr.)	**64.286**	**63.769**	**68.081**	**68.855**	**68.855**	**68.855**
1. Løntakarar, sjúkradagpeningur	62.277	61.734	65.452	66.196	66.196	66.196
2. Sjálvstøðug vinnurekandi og húsarhaldsfólk	1.177	1.325	1.699	1.715	1.715	1.715
3. Gjald til læknaváttanir	833	710	930	944	944	944
B: Virksemi (tal)	**2.353**	**2.357**	**2.722**	**2.540**	**2.540**	**2.540**
1. Løntakarar, sjúkradagpeningur	2.312	2.309	2.660	2.476	2.476	2.476
2. Sjálvstøðug vinnurekandi og húsarhaldsfólk	41	48	62	64	64	64
C: Eindarkostnaður (kr.)						
1. Løntakarar, sjúkradagpeningur	26.936	26.736	24.606	26.735	26.735	26.735
2. Sjálvstøðug vinnurekandi og húsarhaldsfólk	28.707	27.604	27.403	26.797	26.797	26.797

12.21.5. Stuðul til eldri og teirra, ið bera brek

12.21.5.01. Stuðul til feløg teirra, ið bera brek (Stuðulsjáttan)

Stuðul verður latin til feløg teirra, ið bera brek.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	3.432	3.532	3.732	3.732	3.732	3.732
01. Deyvafelagið						
Útreiðslur	**932**	**932**	**932**	**932**	**932**	**932**
54. Stuðul til annað virksemi	932	932	932	932	932	932
03. Meginfelag teirra, ið bera brek í Føroyum (MBF)						
Útreiðslur	**1.500**	**1.600**	**1.600**	**1.600**	**1.600**	**1.600**
54. Stuðul til annað virksemi	1.500	1.600	1.600	1.600	1.600	1.600
05. Hjálpargrunnur fyri óarbeiðsførar fiskimenn						
Útreiðslur	**100**	**100**	**100**	**100**	**100**	**100**
54. Stuðul til annað virksemi	100	100	100	100	100	100
07. Javni						
Útreiðslur	**500**	**500**	**500**	**500**	**500**	**500**
54. Stuðul til annað virksemi	500	500	500	500	500	500
08. Sinnisbati						
Útreiðslur	**200**	**200**	**400**	**400**	**400**	**400**
54. Stuðul til annað virksemi	200	200	400	400	400	400
09. Føroya blindafelag						
Útreiðslur	**200**	**200**	**200**	**200**	**200**	**200**
54. Stuðul til annað virksemi	200	200	200	200	200	200

01. Deyvafelagið

Deyvafelag Føroya er áhugafelag fyri deyv og er eitt av feløgunum í MBF. Stuðulin á 932 tús. kr. verður latin Deyvafelagnum, sum hevur til endamáls at savna deyv í Føroyum og at varpa ljós á og virka fyri, at deyv í Føroyum hava somu rættindir, sum hoyrandi hava. Deyvafelagið skipar fyri tiltøkum og skeiðum fyri deyv, og hevur sett deyvaráðgeva í starv, ið veitir persónliga ráðgeving og vegleiðing til deyv, hoyriveik og CI-brúkarar. Deyvafelagið fór undir sítt virksemi í Deyvahúsinum í 1983. Stuðulin verður veittur til rentur og avdráttir til Deyvahúsið og til skrivstovurakstur. Stuðulin verður útgoldin frammanundan mánaðarliga. Ársroknskapur fyri árið frammanundan skal vera latin Almannamálaráðnum innan 1. apríl. Sambært reglugerð skal Deyvafelagið lata Almannamálaráðnum hagtøl fyri stuðulsárið.

03. Meginfelag teirra, ið bera brek í Føroyum (MBF).

Meginfelag teirra, ið bera brek í Føroyum, MBF, er meginfelag fyri 24 feløg, ið umboða brekað og sjúk. Meginfelagið arbeiðir fyri at bøta um viðurskiftini hjá brekaðum. Stuðulin er til skrivstovuhald hjá MBF og sum stuðul til limafeløgini. Stuðulin verður útgoldin frammanundan mánaðarliga. Ársroknskapur fyri árið frammanundan skal vera latin Almannamálaráðnum innan 1. apríl. Sambært reglugerð skal MBF lata Almannamálaráðnum hagtøl fyri stuðulsárið.

05. Hjálpargrunnur fyri óarbeiðsførar fiskimenn
Hjálpargrunnurin fyri óarbeiðsførar fiskimenn er grunnur hjá Føroya Fiskimannafelag. Stuðulin á 100 tús. kr. verður latin hjálpargrunninum sum hevur til endamáls at veita sjómonnum, ið eru vorðnir óarbeiðsførir av sjúku ella skaða á sjónum, ein stuðul. Stuðulin verður útgoldin einaferð um árið. Ársroknskapur fyri árið frammanundan skal vera latin Almannamálaráðnum innan 1. apríl.

07. Javni
Felagið Javni er landsfelag menningartarnaðum at bata og er eitt av feløgunum í MBF. Stuðulin á 500 tús. kr. verður latin til Javna, sum hevur til endamáls at virka fyri javnrættindum til øll við menningartarni í føroyska samfelagnum. Stuðulin verður útgoldin hvønn ársfjórðing. Ársroknskapur fyri árið frammanundan skal vera latin Almannamálaráðnum innan 1. apríl. Sambært reglugerð skal Javni lata Almannamálaráðnum hagtøl fyri stuðulsárið.

08. Sinnisbati
Sinnisbati er ein sjálvboðin áhugafelagsskapur hjá teimum, ið hava sálarsjúku og avvarðandi teirra og er eitt av feløgunum í MBF. Stuðulin á 400 tús. kr. verður latin til Sinnisbata, ið hevur til endamáls at bøta um korini hjá teimum sálarsjúku og virkar fyri tolsemi og betri fatan av menniskjum, sum eru sálarsjúk. Sinnisbati veitir upplýsingar um sálarsjúku og viðgerðarmøguleikar, stuðlar samstarvi millum avvarðandi at sálarsjúkum, stovnar, læknar og onnur umframt at felagsskapurin skipar fyri fyribyrgjandi tiltøkum, gransking og øðrum, ið virka sálarheilsufremjandi. Stuðulin verður útgoldin einaferð um árið. Ársroknskapur fyri árið frammanundan skal vera latin Almannamálaráðnum innan 1. apríl. Sambært reglugerð skal Sinnisbati lata Almannamálaráðnum hagtøl fyri stuðulsárið.

09. Føroya blindafelag
Føroya Blindafelag er sjálvstøðugt limafelag hjá fólki, sum hava sjón undir 10% og er eitt av feløgunum í MBF. Stuðulin á 200 tús. kr. verður latin Blindafelagnum, ið hevur til endamáls at røkja áhugamálini hjá blindum og sjónveikum, at styrkja javnrættindini og atkomu hjá blindum og sjónveikum í samfelagnum. Stuðulin verður útgoldin einaferð um árið. Ársroknskapur fyri árið frammanundan skal vera latin Almannamálaráðnum innan 1. apríl.

12.21.5.04. Stuðul til feløg hjá eldri (Stuðulsjáttan)

Landsfelag Pensjónista
Stuðulin verður latin til skrivstovuhald og annað virksemi hjá Landsfelag Pensjónista, t.d. blaðið Sólsetur og norðurlendskt samstarv. Landsfelagið hevur eisini til uppgávu at ráðgeva landsstýriskvinnuni í øllum málum, ið viðvíkja eldri. Árligi stuðulin verður útgoldin hvønn ársfjórðing. Ársroknskapur fyri árið frammanundan skal vera latin Almannamálaráðnum innan 1. apríl.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	350	450	450	450	450	450
02. Landsfelag pensjónista						
Útreiðslur	**350**	**450**	**450**	**450**	**450**	**450**
54. Stuðul til annað virksemi	350	450	450	450	450	450

12.21.6. Eldri og serforsorg

12.21.6.02. Bústovnar o.a. (Løgujáttan)

Í tráð við bústaðarætlanina fyri Suðurstreymoy fyri árini 2017-2022, har avsettar eru 200 mió. kr. til bygging og útvegan av bústovnum, verður í 2018 hildið áfram við dagføringum av verandi bygningum, samstundis sum farið verður undir at byggja nýggjar stovnar.

Heimið til eldri fólk við sálarsjúku verður liðugt í 2018.

Løgtingslóg um dagføring av Eirargarði er samtykt, Ll. nr. 79 frá 29. mai 2017. Harumframt eru tríggjar verklagslógir lagdar fyri Løgtingið á heysti 2017. Talan er um bygging av vardum bústøðum í Tórshavn til fólk við menningartarni, nýtt barnaheim í Tórshavn og búheim og umlættingarheim í Tórshavn til børn og ung við autismu.

Í 2021 verður farið undir fyrireikingar av nýggjum heimi til fólk við seinheilaskaða.

Átekning

Landsstýriskvinnuni verður heimilað at flyta óbrúkta játtan til seinni fíggjarár.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	21.871	20.176	12.000	29.000	40.000	35.000
10. Bústovnar o.a.						
Útreiðslur	**21.871**	**20.176**	**12.000**	**29.000**	**40.000**	**35.000**
11. Lønir v.m.	648	-	-	-	-	-
14. Keyp av vørum og tænastum	775	5	-	-	-	-
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	-1.423	-1.482	-1.500	-1.500	-1.500	-1.500
31. Bygging og løguframleiðsla	21.871	20.368	12.000	29.000	40.000	35.000
32. Útvegan av løgu o.ø.	-	-192	-	-	-	-
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	-	1.477	1.500	1.500	1.500	1.500

Virksemisyvirlit: 10 Bústovnar o.a.

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
A: Høvuðsendamál (netto) (1.000 kr.)	**21.871**	**20.176**	**12.000**	**29.000**	**40.000**	**35.000**
Sambýlið á Bóndaheygi 14, dagføring	-	3.263	-	-	-	-
Økisdepil til sinnisveik í Vági	43	69	-	-	-	-
Sambýli til sálarsjúk í Tórshavn	-57	74	-	-	-	-
Stovnur í Eysturoynni til børn við fjølbreki	755	130	-	-	-	-
Eirargarður 14 og 16, umvæling	-	2.141	-	-	-	-
Børn og ung	-	-	-	6.000	13.000	9.500
Virknis- og umlættingardepill í Sandoynni	3.342	9.854	-	-	-	-
Vardir bústaðir í Norðoyggjum og Eysturoynni	17.542	1.600	-	-	-	-
Vardur bústaður í Klaksvík, einstøk eind	31	-	-	-	-	-
Umbygging og ábøtur	-	-	2.800	1.200	1.000	1.000
Sambýlið í Eysturoy, broyting	-	1.937	-	-	-	-
Fyrireiking av verkætlanum	215	1.108	-	3.500	-	-
Sambýli til menningartarnaði	-	-	-	5.000	11.000	9.000
Eirargarður 14 og 16	-	-	-	8.000	5.500	6.000
Stovnur til eldri fólk við sálarsjúku	-	-	9.200	300	-	-
Børn og ung við autismu	-	-	-	5.000	9.500	9.500

12.21.6.04. Eldrarøkt (Rakstrarjáttan)

Við løgtingslóg nr. 19 frá 7. apríl 2014 um heimatænastu, eldrarøkt v.m. og løgtingslóg nr. 20 frá 7. apríl 2014 um kommunalt samstarv um heimatænastu, eldrarøkt v.m. er økið latið til kommunurnar at umsita frá 1. januar 2015 at rokna.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	2.948	-	-	-	-	-
Útreiðslur	3.578	-	-	-	-	-
Inntøkur	630	-	-	-	-	-
28. Eldrarøkt						
Nettoútreiðsla	2.948	-	-	-	-	-
Útreiðslur	**3.578**	**-**	**-**	**-**	**-**	**-**
11. Lønir v.m.	174	-	-	-	-	-
14. Keyp av vørum og tænastum	441	-	-	-	-	-
15. Keyp av útbúnaði, netto	5	-	-	-	-	-
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	218	-	-	-	-	-
17. Avskrivingar o.a.	6	-	-	-	-	-
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	649	-	-	-	-	-
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	2.084	-	-	-	-	-
Inntøkur	**630**	**-**	**-**	**-**	**-**	**-**
21. Søla av vøru og tænastum	*1*	-	-	-	-	-
65. Flytingarinntøkur úr útlandinum	*605*	-	-	-	-	-
77. Flyting frá kommunum	*24*	-	-	-	-	-

Virksemisyvirlit: 28 Eldrarøkt

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
A: Høvuðsendamál (1.000 kr.)	**3.578**	**-**	**-**	**-**	**-**	**-**
Røktarheim	-	-	-	-	-	-
Eldrarøkt í Sandoynni	-	-	-	-	-	-
Eldrasambýli	-	-	-	-	-	-
Felagsútreiðslur	3.578	-	-	-	-	-
Heimasjúkrarøkt	-	-	-	-	-	-
Heimahjálp	-	-	-	-	-	-
B: Virksemi (tal)						
Røktarheim	-	-	-	-	-	-
Eldrasambýli, tal av plássum	-	-	-	-	-	-
Heimahjálp, tal av brúkarum	-	-	-	-	-	-
C: Eindarkostnaður (kr.)						
Røktarheim og Eldrarøkt í Sandoynni	-	-	-	-	-	-
Eldrasambýli og Eldrarøkt í Sandoynni	-	-	-	-	-	-
Heimahjálp og Eldrarøkt í Sandoynni	-	-	-	-	-	-

Starvsfólkayvirlit: 28 Eldrarøkt

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Í lønarflokki 37 ella hægri	-	-	-	-	-	-
Onnur	0,4	-	-	-	-	-
Fulltíðarstørv	0,4	-	-	-	-	-
Lønarpartur (mió. kr.)	0,2	-	-	-	-	-

12.21.6.09. Trivnaðartænastur (Rakstrarjáttan)

20. Vanligt virksemi
Borgarar, sum hava tørv á persónligum stuðli fyri at megna gerandisdagin, fáa henda stuðul frá Trivnaðartænastuni. Virksemið er partvíst skipað við heimild í forsorgarlógini og partvíst við heimild í barnaverndarlógini. Virksemið fevnir um dag- og virknistilboð, bútilboð, umlættingartilboð, stuðuls- og viðgerðartilboð.

Dag- og virknistilboð
Dag- og virknistilboð eru ætlað fólki við serligum tørvi. Talan er m.a. um verkstaðir/verkhús, sum veita dagtilboð til viðskiftafólk, sum hava bústaðartilboð frá Trivnaðardeplinum og til fólk, sum antin búgva hjá avvarðandi ella í sjálvstøðugum íbúðum.

Bústaðartilboð
Bústaðartilboð verða rikin sum ávikavist búfelagsskapir, sambýlir og røktarbústaðir. Bústaðartilboðini verða veitt fólki við likamligum breki, fólki við menningartarni og fólki við sálarsjúku, ið hava tørv á umsorgan, hjálp og stuðli til gerandis virksemið ella hava tørv á røkt. Bústaðartilboð sambært § 32 í forsorgarlógini eru meira varandi bústaðir í mun til bútilboð sambært § 27 í forsorgarlógini, sum hava eitt mennandi endamál.

Umlættingartilboð
Umlætting verður veitt til fólk við menningartarni, við autismu og fólki við fjølbreki, sum búgva hjá avvarðandi ella búgva sjálvstøðugt og hava tørv á umlætting í eina tíð.

Stuðulstilboð
Tilboðini eru skipað bæði í toymum og sum stuðul til einstaklingar. Stuðulin verður veittur fólki við likamligum, sálarligum ella sosialum avbjóðingum, sum búgva hjá avvarðandi ella búgva sjálvstøðugt.

Viðgerðartilboð
Viðgerðartilboð verður veitt børnum og ungum, ið hava serligan tørv á umsorgan og viðgerð vegna sosialar-, atferðar-, ella tillagingartrupulleikar.

Kommunurnar rinda brúkaragjøld fyri stovnspláss á stovnum, ið eru settir á stovn við heimild í barnaverndarlógini.

Bygnaður
Bygnaðarliga er Trivnaðardepilin skipaður í eindir, sum eru býttar upp eftir breki, landafrøði og virksemi. Stuðlar og stovnar verða skipaðir undir somu leiðslu. Niðanfyri verður greitt frá virkseminum í einstøku eindunum.

Eind 1 Fólk við autismu í Norðoyggjum
Virksemið er partvíst skipað sum bútilboð á sambýlum. Búfólkini eru børn, ung og vaksin við autismu. Búfólkini fara í skúla ella til arbeiðis í dagtímunum á einum verkstaði ella virknistilboði. Í frítíðini eru búfólkini knýtt at ymiskum frítíðaraktivitetum, eitt nú kvøldskúla, frítíðarklubba, svimjing, gongutúrum og øðrum.

Umframt bútilboð er eisini umlætting, frítíðartilboð til børn og ung og stuðulstilboð til børn, ung og vaksin, skipað undir hesari eindini.

Eind 2 Fólk við menningartarni og fjølbreki o.tíl. í Eysturoy og Norðoyggjum
Virksemið er partvíst skipað sum bútilboð á sambýlum og í búfelagsskapi. Búfólkini eru børn og vaksin við menningartarni og fjølbreki, og vaksin við likamligum breki. Gerandisdagar fáa búfólkini virknistænastu á verkstaði ella hjá fyritøkum í økinum. Í frítíðini eru búfólkini knýtt at ymiskum frítíðaraktivitetum, eitt nú kvøldskúla, tónleiki, o.a.

Umframt bútilboð er eisini samdøgurs- og dagumlætting og stuðulstilboð til børn og vaksin skipað í eindini.

Eind 3 Fólk við autismu í Suðurstreymoy
Virksemið er partvíst skipað sum bútilboð á sambýlum. Búfólkini eru fólk við autismu/asberger. Gerandisdagar fáa flestu búfólkini virknistænastu á verkstaði og frá fyritøkum. Í frítíðini eru búfólkini knýtt at ymiskum aktivitetum.

Umframt bútilboð er eisini samdøgurs- og døgnumlætting skipað í eindini. Partur av virkseminum í hesari eindini er skipað sum frítíðartilboð til børn og ung við autismu. Somuleiðis eru onnur frítíðartoymi skipað í Tórshavn. Mentortoymi er skipað til serflokkar í Studendaskúlanum í Hoydølum, har ung fólk eru knýtt at. Mentortoymið virkar í tættum samstarvi við læraratoymið hjá serflokkunum í Hoydølum. Harumframt verður eisini stuðul veittur til børn og vaksin í hesari eindini.

Eind 4 Fólk við sálarsjúku í Suðurstreymoy og virksemi í Vágum
Virksemið er partvíst skipað sum bútilboð á sambýlum og sum bú- og viðgerðartilboð. Virksemið í Suðurstreymi fevnir um ung og vaksin við psykiatriskari diagnosu ella fólk við autismu, meðan virksemið í Vágum fevnir um alt virksemi, sum Trivnaðardepilin veitur í Vágum. Nøkur av búfólkunum fáa virknistænastu gerandisdagar á vardum verkstaði.

Umframt bútilboð og bú- og viðgerðartilboð fevnir virksemið eisini um frítíðarskúla og stuðulstilboð.

Eind 5 Fólk við menningartarni o.tíl. í Suðurstreymoy
Virksemið er skipað sum bútilboð á sambýlum og búfelagsskapum. Búfólkini eru ung og vaksin fólk við menningartarni. Flestu búfólkini fáa virknistænastu gerandisdagar á vardum verkstaði og frá fyritøkum. Í frítíðini eru búfólkini knýtt at ymiskum frítíðartilboðum, eitt nú kvøldskúla, svimjing, tónleiki, venjing o.ø.

Harumframt verður skipað fyri frítíðartilboði aftaná skúlatíð og frítíðarklubba um kvøldið til tey ungu.

Eind 6 Fólk við menningartarni í Suðurstreymoy
Virksemið er skipað í bútilboðum á sambýlum. Meginparturin av búfólkunum eru eldri fólk við menningartarni. Flestu búfólkini hava virknistilboð gerandisdagar á vardum verkstaði, dagtilhaldi og hjá fyritøkum.

Í frítíðini eru búfólkini knýtt at ymiskum frítíðaraktivitetum. Eitt nú verður skipað fyri túrum, útferðum, legum o.ø.

Harumframt verður skipað fyri stuðulstilboði til vaksin í hesari eindini.

Eind 7 Fólk við fjølbreki o.tíl. í Suðurstreymoy og Sandoy
Virksemið er skipað sum bútilboð á sambýli har vaksin fólk við menningartarni og/ella fjølbreki búgva.

Flestu búfólkini hava virknistilboð gerandisdagar á vardum verkstaði og onkur hevur vart starv. Í frítíðini verður skipað fyri ymiskum frítíðarvirksemi, so sum legum, busstúrum, stevnum o.ø.

Harumframt eru skipað toymir til børn undir skúlaaldur fyrrapart og til børn í skúlaaldri aftaná skúlatíð. Náttarvaktartoymi er skipað til børn, sum búgva heima, og harumframt verður veittur stuðul til børn og vaksin.

Eind 8 Vaksin við sálarsjúku og seinheilaskaða
Virksemið er skipað í bútilboðum, har vaksin fólk við sálarsjúku og seinheilaskaða búgva. Einstøk búfólk fáa virknistilboð á vardum verkstaði gerandisdagar. Í frítíðini eru búfólkini knýtt at ymiskum frítíðartilboðum, so sum kvøldskúla, máling o.ø.

Harumframt er skipað fyri dagtilboði fyri seinheilaskadd, veristaði og kaffihúsi.

Eind 9 Verkstøð og verkhús
Virksemið er skipað sum virknistænasta á vardum verkstøðum, verkhúsum og veristøðum kring landið.

Harumframt er skipað fyri frítíðarklubbum. Eisini er skipað dagtilhald fyri eldri borgarar við menningartarni.

Eind 10 Barnavernd
Virksemið er skipað sum bú- og viðgerðarstovnar til børn og ung í aldrinum 0-18 ár, í serligum førum til 21 ár. Tað er Høvuðsbarnaverndartænastan, sum innskrivar børn og ung á stovnin.

Harumframt verður skipað fyri tilboðum til familjur, sum verða ávístar av barnaverndartænastum kring landið. Pláss er fyri tveimum familjum ísenn, sum hava egna íbúð.

Eind 11 Suðuroy
Virksemið er skipað í bútilboðum, har vaksin fólk við sálarsjúku og menningartarni búgva.

Nøkur av búfólkunum fáa gerandisdagar virknistilboð á vardum verkstaði, umframt annað dagligt virksemi á sjálvum stovninum. Verkstaðið er eisini eitt virknistilboð til heimabúgvandi.

Harumframt verður skipað fyri frítíðartilboði fyri børn og ung við menningartarni, í aldrinum 0-18 ár, aftaná skúlatíð. Eisini verður stuðul veittur til heimabúgvandi børn, ung og vaksin við sálarsjúku, menningartarni og seinheilaskaða. Virksemið fevnir eisini um umlætting til heimabúgvandi fólk við sálarsjúku.

Eind 12 Fólk við menningartarni og likamligum breki
Virksemið er skipað í bútilboðum, búfelagsskapum og harumframt verður skipað fyri stuðulstilboði til vaksin.

Sjálvsognarstovnar
Virksemið hjá sjálvsognarstovnunum undir Trivnaðartænastuni er skipað sum umlætting hjá Dáanum í Klaksvík og í Frítíðarheiminum í Skrivaragøtu í Tórshavn. Harumframt er talan um stovnarnar Sólteig, Eysturstræti og Tórshavnar Privata Vistarheim, ið veita bútilboð til fólk við sálarligum avbjóðingum.

Framskrivingar og broytingar
Í 2017 er eykajáttan fingin til vega til fyriskipanir til borgarar við seinheilaskaða og øktan tørv á stuðulstilboðum. Játtanin er framskrivað við góðum 4,8 mió. kr. í 2018 til fult virksemi.

Játtanin til eind 10 barnavernd er hækkað við 2,4 mió. kr. í 2018, orsaka av støðugt vaksandi trýsti á stovnin. Eind 10 veitir bú- og viðgerðartilboð til børn og ung, sum eru sett heiman sambært barnaverndarlógini.

Í sambandi við avgerðina hjá markamótsnevndini um, at tað er Almannaverkið, sum skal veita tilboð til borgarar undir 67 við alkoholdemens, er játtanin hækkað við sløkum 2,7 mió. kr. í 2018.

Játtanin er hækkað við 400 tús. kr. í 2018 til fyribils stovnin fyri børn og ung við autismu, sum nýliga er stovnsettur. Stovnurin hevur útreiðslur, sum hædd ikki varð tikin fyri, tá ið játtan varð sett av til stovnin.

Fluttar eru 500 tús. kr. frá høvuðskontu 7.23.2.02. Sernám, orsaka av, at uppgávan at veita børnum, sum skulu ganga á skúlanum á Trøðni og sum hava tørv á bústaðartilboði, meðan tey ganga í skúla, nú er flutt til Almannaverkið.

21. Virksemi uttanlands
Sambært skjali A L. nr. 717 frá 18. november 1987 um heildarveiting til føroyska almannaøkið rindar landskassin útreiðslur fyri føroyingar á stovni í Danmark og ferðaútreiðslur fyri føroyingar á stovni í Danmark og fyri tey, sum varða av teimum.

Sambært § 27 í forsorgarlógini kann tilboð veitast persónum á bú- og viðgerðarstovni ella stovnslíknandi fyriskipan uttanlands, um einki nøktandi tilboð kann veitast í Føroyum.

Átekning

Landsstýriskvinnuni verður heimilað at gera innanhýsis flytingar millum undirkontu 20. Vanligt virksemi og høvuðskontu 12.21.1.02. Almannaverkið.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	242.261	275.621	299.463	310.282	310.282	310.282
Útreiðslur	270.142	294.430	312.423	326.742	326.742	326.742
Inntøkur	27.881	18.809	12.960	16.460	16.460	16.460
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	239.429	263.237	281.832	292.651	292.651	292.651
Útreiðslur	**255.614**	**282.046**	**294.792**	**309.111**	**309.111**	**309.111**
11. Lønir v.m.	211.966	233.479	260.599	271.654	271.654	271.654
14. Keyp av vørum og tænastum	21.930	21.404	15.361	16.325	16.325	16.325
15. Keyp av útbúnaði, netto	3.610	5.015	2.063	2.063	2.063	2.063
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	7.801	8.319	6.447	7.447	7.447	7.447
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	1.665	1.466	1.258	1.258	1.258	1.258
54. Stuðul til annað virksemi	524	-	-	-	-	-
57. Rentuútreiðslur o.a.	3	1	-	-	-	-
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	4.779	9.442	9.064	10.364	10.364	10.364
72. Flytingar frá landi til kommunur	3.335	2.922	-	-	-	-
Inntøkur	**16.184**	**18.809**	**12.960**	**16.460**	**16.460**	**16.460**
21. Søla av vøru og tænastum	*8.426*	*9.932*	*6.803*	*10.303*	*10.303*	*10.303*
29. Ymsar rakstrarinntøkur	*720*	*817*	*433*	*433*	*433*	*433*
63. Vanligar flytingarinntøkur	-	*7*	-	-	-	-
76. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	-	*16*	-	-	-	-
77. Flyting frá kommunum	*7.039*	*8.037*	*5.724*	*5.724*	*5.724*	*5.724*
21. Virksemi uttanlands						
Nettoútreiðsla	2.832	12.384	17.631	17.631	17.631	17.631
Útreiðslur	**14.528**	**12.384**	**17.631**	**17.631**	**17.631**	**17.631**
14. Keyp av vørum og tænastum	1.869	1.638	4.250	5.250	5.250	5.250
51. Tilskot til útlandið o.a.	12.653	10.732	13.331	12.331	12.331	12.331
52. Tilskot til einstaklingar	7	13	50	50	50	50
Inntøkur	**11.696**	**-**	**-**	**-**	**-**	**-**
65. Flytingarinntøkur úr útlandinum	*11.696*	-	-	-	-	-

Virksemisyvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
1.: Lønarútreiðslur (1.000 kr.)	**211.966**	**233.479**	**260.599**	**271.654**	**271.654**	**271.654**
1. Fólk við autismu í Eysturoy og Norðoyggjum	20.364	-	-	-	-	-
1. Fólk við autismu í Norðoyggjum	-	18.312	18.629	17.500	17.500	17.500
2. Fólk við menningartarni og fjølbr. í Eyst. og Norð.	19.591	17.892	19.158	21.490	21.490	21.490
3. Fólk við autismu í Suðurstreymoy	12.377	13.107	15.195	16.250	16.250	16.250
4. Fólk við sálarsjúku í Suðurstr. og virksemi í Vágum	19.715	24.303	26.029	24.585	24.585	24.585
5. Fólk við menningartarni o.tíl. í Suðurstreymoy	12.422	13.062	14.151	14.950	14.950	14.950
6. Fólk við menningartarni í Suðurstreymoy	16.860	16.029	16.319	16.070	16.070	16.070
7. Fólk við fjølbreki o.tíl. í Suðurstreymoy og Sandoy	19.693	20.752	20.783	23.200	23.200	23.200
8. Vaksin við sálarsjúku og seinheilaskaða	22.305	26.762	33.529	35.668	35.668	35.668
9. Verkstøð og verkhús	17.774	18.212	20.972	20.450	20.450	20.450
10. Barnavernd	20.457	23.931	23.947	28.030	28.030	28.030
11. Suðuroy	9.332	11.875	13.611	14.100	14.100	14.100
12. Fólk við menningartarni og líkamligum breki	572	15.249	15.638	15.790	15.790	15.790
Sjálvsognarstovnar	13.531	14.314	15.965	15.535	15.535	15.535
Felags	6.973	4.065	6.673	8.036	8.036	8.036
Tíðaravmarking	-	-4.386	-	-	-	-

Virksemisyvirlit

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
20: Høvuðsvirksemi í Trivnaðardeplinum (tal)						
Tal av fastbúgvandi	194	218	223	229	229	229
Tal av stovnsplássi fyri børn og ung	20	23	25	25	25	25
Tal av vaksnum sum fáa stuðul	179	200	200	210	210	210
Tal av børnum, sum fáa stuðul og/ella onnur tilboð	108	90	90	90	90	90
Tal av umlættingum	30	45	50	55	55	55
Verkstaðpláss	161	166	168	170	170	170

Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Í lønarflokki 37 ella hægri	1,9	2,0	2,0	2,0	2,0	2,0
Onnur	560,6	617,4	649,5	676,5	676,5	676,5
Fulltíðarstørv	562,5	619,4	651,5	678,5	678,5	678,5
Lønarpartur (mió. kr.)	212,0	233,5	260,6	271,7	271,7	271,7

Virksemisyvirlit: 21 Virksemi uttanlands

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
A: Høvuðsendamál (1.000 kr.)	**14.529**	**12.383**	**17.631**	**17.631**	**17.631**	**17.631**
Føroyingar á stovni í Danmark	12.653	10.732	13.331	12.331	12.331	12.331
Ferðaútreiðslur til klientar og avvarðandi	7	13	50	50	50	50
Fyriskipanir uttanlands	1.869	1.638	4.250	5.250	5.250	5.250
B: Virksemi (tal)						
Føroyingar á stovni í Danmark	14	11	11	9	9	9
Ferðaútreiðslur til klientar og avvarðandi	2	2	3	3	3	3
Fyriskipanir uttanlands	2	3	4	4	4	4
C: Eindarkostnaður (1.000 kr.)						
Føroyingar á stovni í Danmark	904	976	1.212	1.370	1.370	1.370
Ferðaútreiðslur til klientar og avvarðandi	4	7	17	17	17	17
Fyriskipanir uttanlands	935	546	1.063	1.313	1.313	1.313

12.21.6.10. Ansingarsamsýning (Lógarbundin játtan)

Við løgtingslóg nr. 19 frá 7. apríl 2014 um heimatænastu, eldrarøkt v.m. og løgtingslóg nr. 20 frá 7. apríl 2014 um kommunalt samstarv um heimatænastu, eldrarøkt v.m. er økið latið til kommunurnar at umsita frá 1. januar 2015 at rokna.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	-253	-	-	-	-	-
01. Samsýning						
Útreiðslur	**-253**	**-**	**-**	**-**	**-**	**-**
52. Tilskot til einstaklingar	-253	-	-	-	-	-

12.21.6.13. Vardar íbúðir, rakstrarstudningur (Stuðulsjáttan)

Sambært løgtingslóg nr. 111 frá 3. oktober 1988 um vardar íbúðir, eru hesar ætlaðar til at hýsa avlamisfólki, eldri fólki og fólki annars, sum búgva í vardum bústøðum. Endamálið er at tryggja hesum eitt gott og hóskandi tilhald.

Studningurin verður latin til stovnar, sum einans hava til endamáls at byggja (stovnseta) og reka vardar íbúðir. Stovnurin skal vera sjálveigandi stovnur og hava viðtøkur, sum eru góðkendar av landsstýrinum.

Sjálvsognarstovnurin í Tórshavn er avtikin og verður tí ongin stuðul latin.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Inntøkujáttan	800	-	-	-	-	-
01. Stuðul						
Inntøkur	**800**	**-**	**-**	**-**	**-**	**-**
64. Aðrar flytingarinntøkur	*800*	-	-	-	-	-

12.21.6.14. Lán til ellis- og røktarheim (Stuðulsjáttan)

01. Lán til ellis- og røktarheim í Vági
Við løgtingslóg nr. 118 frá 20. desember 2006 um lán til bygging av ellis- og røktarheimi í Vági, við seinni broytingum, varð landsstýrinum heimilað at veita kommununum í Suðuroynni rentufrítt lán úr landskassanum til kommunupartin av útreiðslunum til bygging av ellis- og røktarheiminum í Vági.

Heimið varð liðugt bygt á vári 2011.

Lánið verður afturgoldið landskassanum yvir eitt 13 ára skeið í tíðarskeiðnum 2012-2025.

02. Lán til ellis- og røktarheim í Vágum
Við løgtingslóg nr. 61 frá 15. mai 2014 um studningslán og rentufrítt lán til umvæling av ellis- og røktarheiminum á Sýnini, varð landsstýrinum heimilað at veita lán til Sørvágs kommunu og Vága kommunu til umvæling av ellis- og røktarheiminum á Sýnini í Miðvági.

Helvtin av lánsupphæddini til hvørja kommunu varð veitt sum studningslán og helvtin sum rentufrítt lán.

Lánið verður afturgoldið landskassanum yvir eitt 13 ára skeið í tíðarskeiðnum 2015-2028.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	6.000	6.250	-	-	-	-
Inntøkujáttan	3.878	3.878	3.868	3.868	3.868	3.868
01. Lán til ellis- og røktarheim í Vági						
Inntøkur	**2.666**	**2.666**	**2.666**	**2.666**	**2.666**	**2.666**
86. Afturgjaldan av útlánum v.m.	*2.666*	*2.666*	*2.666*	*2.666*	*2.666*	*2.666*

02. Lán til ellis- og røktarheim í Vágum

Útreiðslur	**6.000**	**6.250**	**-**	**-**	**-**	**-**
82. Útlán v.m.	6.000	6.250	-	-	-	-
Inntøkur	**1.212**	**1.212**	**1.202**	**1.202**	**1.202**	**1.202**
86. Afturgjaldan av útlánum v.m.	*1.212*	*1.212*	*1.202*	*1.202*	*1.202*	*1.202*

12.21.6.17. Serflutningsskipan landsins (Stuðulsjáttan)

Endamálið við Serflutningsskipan landsins er at veita flutningsmøguleika til fólk, ið bera brek og eru so tarnað, at tey ikki kunnu nýta almenn flutningstól ella í avmarkaða tíð vegna sjúku ella skaða, hava henda tørv. Skipanin fevnir ikki um sjúkraflutning.

Ein stýrisbólkur, sum landsstýriskvinnan í almannamálum setur eftir tilmæli frá pørtunum, hevur mótvegis landsstýriskvinnuni ábyrgdina av, at skipanin virkar eftir ætlan. Í stýrisbólkinum situr umboð fyri brúkaran (Meginfelag teirra brekaðu í Føroyum), fyri Kommunufelagið, umframt umboð fyri Almannamálaráðið.

Skipanin verður fíggjað ávikavist av landskassanum, avvarðandi kommunu og av brúkarunum. Brúkarin rindar eitt brúkaragjald fyri hvønn túrin, meðan restkostnaðurin verður býttur javnt millum land og luttakandi kommunur. Landskassaparturin verður útgoldin sambært góðkendari fíggjarætlan tvær ferðir um árið. Kommunurnar senda fyri hvørja serflutningsskipan sær ein grannskoðaðan ársroknskap fyri árið frammanundan til Almannamálaráðið innan 15. mars.

Skipanin virkar í Tórshavnar kommunu, Klaksvíkar kommunu og í Eysturoynni.

Játtanin er hækkað við 70 tús. kr. í 2018.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	1.106	1.111	1.137	1.207	1.207	1.207
01. Stuðul						
Útreiðslur	**1.106**	**1.111**	**1.137**	**1.207**	**1.207**	**1.207**
72. Flytingar frá landi til kommunur	1.106	1.111	1.137	1.207	1.207	1.207

12.21.6.18. Studningslán til eldrabústaðir (Stuðulsjáttan)

Sambært løgtingslóg nr. 61 frá 15. mai 2014 um studningslán og rentufrítt lán til umvæling av ellis- og røktarheiminum á Sýnini varð landsstýrismanninum heimilað at veita lán til Sørvágs kommunu og Vága kommunu, ið samanlagt var í mesta lagi 31,5 mió. kr. Lánið varð veitt til umvæling av ellis- og røktarheiminum á Sýnini í Miðvági.

Helvtin av lánsupphæddini til hvørja kommunu varð veitt sum studningslán og helvtin sum rentufrítt lán.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	6.000	6.250	-	-	-	-
01. Studningslán til eldrabústaðir						
Útreiðslur	**6.000**	**6.250**	**-**	**-**	**-**	**-**
82. Útlán v.m.	6.000	6.250	-	-	-	-

12.21.6.19. Dugni - endurbúgving (Rakstrarjáttan)

Sambært viðtøkunum hjá sjálvsognarstovninum Dugna er endamál felagsins at vera arbeiðstarnaðum til hjálpar við m.a. at royna arbeiðsevnini, menna arbeiðsmøguleikarnar og at skipa fyri endurbúgving. Sjálvsognarstovnurin hevur verkstøð í Tórshavn og á Kambsdali, sum standa fyri framleiðslu, eins og stovnurin hevur nakrar sølubúðir í somu økjum.

Virksemið er skipað við heimild í § 30, stk. 3 í forsorgarlógini.

Játtanin verður latin til vanliga virksemi hjá Dugna, meðan egið virksemi verður fíggjað við søluinntøkum og møguligum øðrum inntøkum.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	6.125	6.244	6.325	6.325	6.325	6.325
Útreiðslur	6.125	6.244	6.325	6.325	6.325	6.325
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	6.125	6.244	6.325	6.325	6.325	6.325
Útreiðslur	**6.125**	**6.244**	**6.325**	**6.325**	**6.325**	**6.325**
11. Lønir v.m.	4.752	4.866	4.994	4.994	4.994	4.994
14. Keyp av vørum og tænastum	641	705	556	556	556	556
15. Keyp av útbúnaði, netto	69	10	90	90	90	90
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	413	413	438	438	438	438
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	-	0	247	247	247	247
55. Íløgustuðul o.a.	250	250	-	-	-	-

Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Í lønarflokki 37 ella hægri	-	-	-	-	-	-
Onnur	11,5	11,2	11,2	11,2	11,2	11,2
Fulltíðarstørv	11,5	11,2	11,2	11,2	11,2	11,2
Lønarpartur (mió. kr.)	4,8	4,9	5,0	5,0	5,0	5,0

12.21.6.20. Sjóndepilin (Rakstrarjáttan)

Sjóndepilin er skipaður sum sjálvsognarstovnur. So at siga alt virksemið hjá stovninum er fíggjað úr landskassanum. Á Sjóndeplinum verður skipað fyri virksemi fyri blind og sjónveik við frálæru í ymiskum lærugreinum og vegleiðing í hjálpartólum. Tænastan er fyri

alt landið. Vart verkstað fyri sjónveik, lættari seinment, er skipað sum sjálvstøðug eind í virkishúsi undir Sjóndeplinum.

Virksemið er skipað við heimild í § 30, stk. 3 í forsorgarlógini.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	6.200	6.495	6.439	6.439	6.439	6.439
Útreiðslur	6.803	7.092	6.652	6.652	6.652	6.652
Inntøkur	603	597	213	213	213	213
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	6.200	6.495	6.439	6.439	6.439	6.439
Útreiðslur	**6.803**	**7.092**	**6.652**	**6.652**	**6.652**	**6.652**
11. Lønir v.m.	3.423	3.454	4.053	4.053	4.053	4.053
14. Keyp av vørum og tænastum	1.748	1.688	1.018	1.018	1.018	1.018
15. Keyp av útbúnaði, netto	112	176	100	100	100	100
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	439	700	397	397	397	397
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	68	60	71	71	71	71
55. Íløgustuðul o.a.	1.013	1.013	1.013	1.013	1.013	1.013
Inntøkur	**603**	**597**	**213**	**213**	**213**	**213**
21. Søla av vøru og tænastum	*586*	*463*	*213*	*213*	*213*	*213*
29. Ymsar rakstrarinntøkur	*7*	-	-	-	-	-
63. Vanligar flytingarinntøkur	*10*	*134*	-	-	-	-

Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Í lønarflokki 37 ella hægri	-	-	-	-	-	-
Onnur	10,3	10,3	10,3	10,3	10,3	10,3
Fulltíðarstørv	10,3	10,3	10,3	10,3	10,3	10,3
Lønarpartur (mió. kr.)	3,4	3,5	4,1	4,1	4,1	4,1

12.21.7. Sosialar skipanir

12.21.7.01. Vanlig forsorg (Lógarbundin játtan)

Vanlig forsorg verður veitt við heimild í Lbkg. nr. 100 frá 2. mars 1988 um almenna forsorg í Føroyum, við seinni broytingum.

Forsorgarlógin er grundarlagið undir sosialari hjálp í Føroyum. Tá allir aðrir møguleikar eru troyttir, virkar forsorgarlógin sum eitt trygdarnet fyri persónar, ið hava tørv á almennari hjálp.

Fyribils hjálp eftir § 9:
Endamálið við veiting av fyribils fíggjarligari hjálp eftir § 9 er at forða fyri, at lívskorini hjá persóni og familju hansara versna munandi orsakað av eini almannahending, t.d. sjúku og hjúnaskilnaði. Støddin á veitingini er tengd at forsyrgjaraskyldu, aldri og bústaðarviðurskiftunum. Veitingin kann í mesta lagi vera 90 prosent av hægstu veiting sbrt. lóg um dagpening vegna sjúku, frítíðarløn ikki íroknað.

Fyribils hjálp eftir § 9 vegna arbeiðsloysi:
Forsorg/ískoyti vegna arbeiðsloysi kann veitast arbeiðsleysum, sum í eitt skifti ikki eru før fyri at vinna sær og sínum til uppihalds. Støddin á veitingini er tengd at forsyrgjaraskyldu, aldri og bústaðarviðurskiftunum. Veitingin kann í mesta lagi vera 90 prosent av hægstu veiting sbrt. lóg um dagpening vegna sjúku, frítíðarløn ikki íroknað.

Varandi hjálp eftir § 13:
Um tað ikki tykist vera møguligt at gerast fíggjarliga sjálvbjargin á nakran hátt, og viðkomandi ikki hevur rætt til fyritíðarpensjón, kann varandi hjálp veitast í serligum førum. Veitingin er svarandi til 60 prosent av hægstu veiting sbrt. lóg um dagpening vegna sjúku, frítíðarløn ikki íroknað.

Hjálp til stakútreiðslur eftir § 15:
Treytin fyri veiting eftir § 15 - undantikið hjálp til sjúkraútreiðslur - er hin sama sum eftir § 9, at okkurt hevur borist á (sjúka e.a.), so at fólk ikki klára seg fíggjarliga. Stuðulin kann verða veittur til rímiligar stakútreiðslur.

Fíggjarligur stuðul til familjur við børnum við skerdum førleika sambært § 17:
Familjur, ið heima uppihalda einum barni undir 18 ár við víðfevndum og longrivarandi skerdum førleika, kunnu frá tí almenna fáa endurgoldnar neyðugar meirútreiðslur, harundir útreiðslur til serligar viðgerðir og fyri mista arbeiðsinntøku. Endurgjaldið er treytað av, at staðfest verður, at meirútreiðslurnar eru avleiðing av skerda førleikanum, og at hjálpin ikki kann veitast av serforsorgini.

Stuðul til hjálparráð o.a. eftir § 18b, § 18d og § 18e:
Stuðul verður veittur til hjálparráð, bil og innrættan av bústaði til persónar við varandi virkistarni eftir ávikavist § 18b, § 18d og § 18e.

Almannaverkið umsitur stuðulin sbrt. §§ 18b, 18d og 18e.

Stuðul til hjálparráð verður veittur til persónar við virkistarni orsakað av likamligum ella sálarligum breki ella varandi sjúku. Hjálparráð fevna um bein- og armprotesur, serligar skógvar, hárkollar, korsett, serkost, koyristólar, lyftir v.m. Hjálparráðið skal vera neyðugt fyri at vera í arbeiði, munandi bøta um varandi avleiðingar av sjúkuni/brekinum, ella munandi lætta um gerandisdagin í heiminum.

Trygdarfyriskipanir eftir § 16:
Almannaverkið hevur skyldu til at veita bútilboð til persónar, ið sambært rættarúrskurði skulu sinniskannast, sambært rættarúrskurði ella dómi skulu setast í vardan bústað ella vera undir eftirliti ella sum treyt fyri ákæruafturtøku ella royndarleyslating verða settir í vardan bústað.

Hoyritól eftir §18b:
Við hjálparráð er eisini at skilja hoyritól. Stuðul til hoyritól verður veittur sambært § 18b í forsorgarlógini. Landssjúkrahúsið umsitur hoyritólsskipanina.

Serligur stuðul eftir §15a:
Persónar, sum heilt ella partvíst eru í fyriskipan hjá tí almenna eftir §§ 27 og 32 í forsorgarlógini ella eftir aðrari lóggávu, og persónar, sum eru varðhaldsfongslaðir ella settir í varðhaldslíknandi fyriskipan, sita dóm ella eru undir øðrum frælsisskerjandi fyriskipanum

sambært dómi, kunnu fáa stuðul eftir § 15a í forsorgarlógini. Stuðulin fevnir í høvuðsheitum um egingjøld fyri stovnspláss og lummapening.

Í mun til fíggjarlógaruppskotið er játtanin til fyribils hjálp eftir § 9 vegna arbeiðsloysi lækkað við 1 mió. kr.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	105.143	107.852	111.128	114.932	115.613	116.311
Inntøkujáttan	344	103	382	382	382	382
01. Fyribils hjálp § 9						
Útreiðslur	**33.418**	**31.073**	**32.553**	**32.453**	**32.453**	**32.453**
52. Tilskot til einstaklingar	33.418	31.073	32.553	32.453	32.453	32.453
Inntøkur	**344**	**103**	**382**	**382**	**382**	**382**
63. Vanligar flytingarinntøkur	*0*	-	-	-	-	-
77. Flyting frá kommunum	*344*	*103*	*382*	*382*	*382*	*382*
02. Varandi veiting § 13						
Útreiðslur	**713**	**617**	**810**	**310**	**310**	**310**
52. Tilskot til einstaklingar	713	617	810	310	310	310
03. Stakútreiðslur § 15						
Útreiðslur	**1.890**	**1.791**	**1.851**	**1.851**	**1.851**	**1.851**
52. Tilskot til einstaklingar	1.890	1.791	1.851	1.851	1.851	1.851
04. Meirútreiðslur brekað barn § 17						
Útreiðslur	**12.773**	**13.086**	**13.475**	**14.779**	**14.779**	**14.779**
52. Tilskot til einstaklingar	12.773	13.086	13.475	14.779	14.779	14.779
06. Hjálparamboð v.m. § 18						
Útreiðslur	**21.782**	**25.589**	**22.941**	**27.241**	**27.922**	**28.620**
52. Tilskot til einstaklingar	21.782	25.589	22.941	27.241	27.922	28.620
07. Arbeiðsloysisforsorg § 9,2						
Útreiðslur	**28.197**	**28.412**	**28.993**	**24.993**	**24.993**	**24.993**
52. Tilskot til einstaklingar	28.197	28.412	28.993	24.993	24.993	24.993
08. Trygdarskipanir § 16						
Útreiðslur	**2.957**	**4.049**	**5.705**	**8.305**	**8.305**	**8.305**
52. Tilskot til einstaklingar	2.957	4.049	5.705	8.305	8.305	8.305
09. Hoyritól						
Útreiðslur	**3.413**	**3.135**	**4.400**	**3.400**	**3.400**	**3.400**
52. Tilskot til einstaklingar	3.413	3.135	4.400	3.400	3.400	3.400
10. Serligur stuðul § 15 a						
Útreiðslur	**-**	**101**	**400**	**1.600**	**1.600**	**1.600**
52. Tilskot til einstaklingar	-	101	400	1.600	1.600	1.600

Virksemisyvirlit

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018** **F**	2019 Æ	2020 Æ
A: Høvuðsendamál (1.000 kr.)	**105.143**	**107.852**	**111.128**	**114.932**	**115.613**	**116.311**
1. Fyribils hjálp § 9	33.418	31.073	32.553	32.453	32.453	32.453
2. Varandi veiting § 13	713	617	810	310	310	310
3. Stakútreiðslur § 15	1.890	1.791	1.851	1.851	1.851	1.851
4. Meirútreiðslur vegna brekað barn § 17	12.773	13.086	13.475	14.779	14.779	14.779
6. Hjálparamboð, v.m. § 18	21.782	25.589	22.941	27.241	27.922	28.620
7. Arbeiðsloysisforsorg § 9,2	28.197	28.412	28.993	24.993	24.993	24.993
8. Trygdarfyriskipanir § 16	2.957	4.049	5.705	8.305	8.305	8.305
9. Hoyritól	3.413	3.135	4.400	3.400	3.400	3.400
10. Serligur stuðul § 15 a	-	101	400	1.600	1.600	1.600
B: Virksemi (tal)	**2.275**	**2.173**	**2.494**	**2.099**	**2.099**	**2.099**
1. Fyribils hjálp § 9	591	535	598	580	580	580
2. Varandi veiting § 13	7	6	9	3	3	3
3. Stakútreiðslur § 15	211	198	211	200	200	200
4. Meirútreiðslur vegna brekað barn § 17	-	-	-	-	-	-
6. Hjálparamboð, v.m. § 18	-	-	-	-	-	-
7. Arbeiðsloysisforsorg § 9,2	509	513	509	370	370	370
8. Trygdarfyriskipanir § 16	5	6	6	6	6	6
9. Tal av hoyritólum	952	906	1.127	906	906	906
10. Serligur stuðul § 15 a	-	9	34	34	34	34
C: Eindarkostnaður (1.000 kr.)						
1. Fyribils hjálp § 9	57	58	54	56	56	56
2. Varandi veiting § 13	102	103	90	103	103	103
3. Stakútreiðslur § 15	9	9	9	9	9	9
4. Meirútreiðslur vegna brekað barn § 17	-	-	-	-	-	-
6. Hjálparamboð, v.m. § 18	-	-	-	-	-	-
7. Arbeiðsloysisforsorg § 9,2	55	55	57	68	68	68
8. Trygdarfyriskipanir § 16	591	675	951	1.384	1.384	1.384
9. Hoyritól	4	3	4	4	4	4
10. Serligur stuðul § 15 a	-	11	12	47	47	47

12.21.7.02. Arbeiðsfremjandi tiltøk (Lógarbundin játtan)

Stuðul til arbeiðsfremjandi tiltøk verður veittur við heimild í Ll. nr. 63 frá 15. mai 2012 um arbeiðsfremjandi tiltøk, við seinni broytingum. Lógin fevnir um tiltøk, ið stuðla undir eitt virkið arbeiðslív hjá persónum, sum hava ella kunnu fáa trupulleikar við at varðveita tilknýtið til arbeiðsmarknaðin. Við lógini kann stuðul verða veittur til virknisvenjing, arbeiðsbúgving, stuðul til íverksetan av egnari fyritøku, tillagað starv, avtalaða løn og leiðbeinaraskipan.

Játtanin fevnir eisini um vard størv. Heimildin at seta á stovn vard størv, varð strikað við Ll. nr. 64 frá 15. mai 2012 um almenna forsorg, men lógin ásetti eisini, at verandi vard størv halda áfram.

Uppihaldsveitingar sambært hesi lóg eru tengdar at forsyrgjaraskyldu, aldri og bústaðarviðurskiftum. Veitingin kann í mesta lagi vera svarandi til hægstu veiting sambært lóg um dagpening vegna sjúku, frítíðarløn ikki íroknað.

Játtanin til undirkontu 03. Tillagað starv hækkar í 2018 vegna økt virksemi, herundir við 1,7 mió. kr. vísandi til Ll. nr. 103 frá 13. juli 2017.

Í mun til fíggjarlógaruppskotið er játtanin í 2018 til undirkontu 02. Arbeiðsbúgving lækkað við 1,5 mió. kr.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	65.255	68.050	68.686	77.510	84.793	87.370
02. Arbeiðsbúgving						
Útreiðslur	**37.460**	**36.382**	**38.274**	**34.462**	**34.883**	**33.837**
52. Tilskot til einstaklingar	37.460	36.382	38.274	34.462	34.883	33.837
03. Tillagað starv						
Útreiðslur	**11.069**	**16.959**	**16.012**	**29.656**	**37.456**	**41.951**
52. Tilskot til einstaklingar	11.069	16.959	16.012	29.656	37.456	41.951
04. Vart starv						
Útreiðslur	**16.726**	**14.709**	**14.400**	**13.392**	**12.454**	**11.582**
52. Tilskot til einstaklingar	16.726	14.709	14.400	13.392	12.454	11.582

Virksemisyvirlit

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
A: Høvuðsendamál (1.000 kr.)	**65.255**	**68.050**	**68.686**	**77.510**	**84.793**	**87.370**
2. Arbeiðsbúgving	37.460	36.382	38.274	34.462	34.883	33.837
3. Tillagað starv	11.069	-	16.012	29.656	37.456	41.951
4. Vart starv	16.726	14.709	14.400	13.392	12.454	11.582
B: Virksemi (tal)	**732**	**800**	**777**	**766**	**808**	**812**
2. Arbeiðsbúgving	495	564	547	500	515	505
3. Tillagað starv	115	135	127	170	204	224
4. Vart starv	122	101	103	96	89	83
C: Eindarkostnaður (kr.)						
2. Arbeiðsbúgving	75.677	64.507	69.971	68.924	67.734	67.004
3. Tillagað starv	96.252	125.622	126.079	174.447	183.608	187.281
4. Vart starv	137.098	145.634	139.806	139.500	139.933	139.542

12.21.8. Sosialar pensjónir

12.21.8.01. Fólkapensjón (Lógarbundin játtan)

Fólkapensjón verður veitt við heimild í Ll. nr. 48 frá 10. mai 1999 um almannapensjónir o.a., við seinni broytingum. Persónar, sum eru fyltir 67 ár, hava rætt til fólkapensjón. Hevur pensjónisturin uppihaldsskyldu ella gjaldskyldu mótvegis børnum undir 18 ár, verður ein barnaviðbót veitt.

Viðbøtur til fólkapensjónistar sambært hesi lóg verða á hvørjum ári javnaðar sambært Ll. nr. 107 frá 22. desember 1999 um áseting og javning av almannaveitingum, við seinni broytingum.

Sambært Ll. um áseting og javning av almannaveitingum verður ein viðbót veitt teimum fólkapensjónistum, sum fáa minni útgoldið í fólkapensjón, orsakað av, at teir ikki hava rætt til fult útgjald úr samhaldsfasta aftaná broytingina í fólkapensjónsveitingini í 2016.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	508.163	487.702	496.852	511.983	524.890	537.554
10. Fólkapensjón						
Útreiðslur	**508.163**	**487.702**	**496.852**	**511.983**	**524.890**	**537.554**
52. Tilskot til einstaklingar	508.163	487.702	496.852	511.983	524.890	537.554

Virksemisyvirlit: 10 Fólkapensjón

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
A: Høvuðsendamál (1.000 kr.)	**508.163**	**487.702**	**496.852**	**511.983**	**524.890**	**537.554**
Fólkapensjón	508.163	487.702	496.852	511.983	524.890	537.554
B: Virksemi (tal)						
Fólkapensjón	8.022	8.058	8.250	8.570	8.758	8.968
C: Eindarkostnaður (kr.)						
Fólkapensjón	63.346	60.524	60.224	59.741	59.933	59.941

12.21.8.05. Fyritíðarpensjón (Lógarbundin játtan)

Fyritíðarpensjón verður veitt við heimild í Ll. nr. 48 frá 10. mai 1999 um almannapensjónir o.a., við seinni broytingum.

Tað eru trý ymisk fyritíðarpensjónsstig: Hægsta, miðal og lægsta fyritíðarpensjón. Fyritíðarpensjónin verður veitt vegna niðursett arbeiðsføri ella einkjustøðu. Hægsta og miðal fyritíðarpensjón eru samansettar av grundupphædd, viðbót og avlamisviðbót, meðan lægsta fyritíðarpensjón er samansett av grundupphædd, viðbót og eini eyka viðbót. Støddin av viðbótini er treytað av pensjónsstiginum. Avlamisviðbót er óheft av aðrari inntøku.

Persónar millum 18 - 67 ár kunnu fáa fyritíðarpensjón, um arbeiðsførið varandi er niðursett orsakað av sjúku, avlamni ella øðrum serligum orsøkum. Um hægsta, miðal ella lægsta fyritíðarpensjón verður veitt er treytað av aldri, hvussu nógv arbeiðsførið er niðursett og orsøkini til niðursetta arbeiðsførið.

Grundupphædd og viðbøtur verða á hvørjum ári javnaðar sambært Ll. nr. 107 frá 22. desember 1999 um áseting og javning av almannaveitingum, við seinni broytingum.

Sambært Ll. nr. 171 frá 20. desember 2017 um áseting og javning av almannaveitingum verður grundupphæddin av fyritíðarpensjón frá 1. januar 2018 skattafrí, samstundis sum viðbøturnar verða tillagaðar. Viðbótin til hægstu fyritíðarpensjón lækkar, meðan viðbótin til miðal- og lægstu fyritíðarpensjón hækkar.

Mett verður, at útreiðslurnar til viðbót til hægstu fyritíðarpensjón lækka við 8,3 mió. kr., útreiðslurnar til viðbót til miðal fyritíðarpensjón hækka við 4,6 mió. kr. og útreiðslurnar til viðbót til lægstu fyritíðarpensjón hækka við 2,4 mió. kr.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	257.034	261.141	263.880	261.368	263.149	265.444
01. Hægsta fyritíðarpensjón						
Útreiðslur	**149.772**	**160.504**	**164.454**	**165.060**	**168.528**	**172.064**
52. Tilskot til einstaklingar	149.772	160.504	164.454	165.060	168.528	172.064
02. Miðal fyritíðarpensjón						
Útreiðslur	**70.139**	**66.277**	**64.403**	**63.594**	**62.414**	**61.546**
52. Tilskot til einstaklingar	70.139	66.277	64.403	63.594	62.414	61.546
03. Lægsta fyritíðarpensjón						
Útreiðslur	**32.027**	**29.482**	**29.485**	**27.376**	**26.869**	**26.496**
52. Tilskot til einstaklingar	32.027	29.482	29.485	27.376	26.869	26.496
04. Avlamisveiting						
Útreiðslur	**4.008**	**3.926**	**4.173**	**3.973**	**3.973**	**3.973**
52. Tilskot til einstaklingar	4.008	3.926	4.173	3.973	3.973	3.973
05. Læknaváttanir						
Útreiðslur	**1.089**	**952**	**1.365**	**1.365**	**1.365**	**1.365**
52. Tilskot til einstaklingar	1.089	952	1.365	1.365	1.365	1.365

Virksemisyvirlit

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
A: Høvuðsendamál (1.000 kr.)	**257.034**	**261.141**	**263.880**	**261.368**	**263.149**	**265.444**
1.Hægsta fyritíðarpensjón	149.772	160.504	164.454	165.060	168.528	172.064
2. Miðal fyritíðarpensjón	70.139	66.277	64.403	63.594	62.414	61.546
3. Lægsta fyritíðarpensjón	32.027	29.482	29.485	27.376	26.869	26.496
4. Avlamisveiting	4.008	3.926	4.173	3.973	3.973	3.973
5. Læknaváttanir	1.089	952	1.365	1.365	1.365	1.365
B: Virksemi (tal)	**2.091**	**2.064**	**2.024**	**2.059**	**2.063**	**2.070**
1. Hægsta fyritíðarpensjón	931	986	967	1.029	1.050	1.071
2. Miðal fyritíðarpensjón	711	651	633	620	608	599
3. Lægsta fyritíðarpensjón	330	309	300	290	285	280
4. Avlamisveiting	119	118	124	120	120	120
C: Eindarkostnaður (kr.)						
1. Hægsta fyritíðarpensjón	160.872	162.783	170.066	160.408	160.503	160.657
2. Miðal fyritíðarpensjón	98.648	101.808	101.742	102.571	102.655	102.748
3. Lægsta fyritíðarpensjón	**97.052**	**95.411**	**98.283**	**94.400**	**94.277**	**94.629**
4. Avlamisveiting	33.681	33.271	33.653	33.108	33.108	33.108

12.21.8.13. Viðbót til ávísar pensjónistar (Lógarbundin játtan)

Viðbót til ávísar pensjónistar verður veitt sambært løgtingslóg nr. 35 frá 16. apríl 1997 um viðbót til ávísar pensjónistar, við seinni broytingum. Fólkapensjónistar og fyritíðarpensjónistar hava rætt til viðbótina til ávísar pensjónistar, tó ikki fyritíðarpensjónistar, ið búgva á stovni, ið er góðkendur sambært lóg um almenna forsorg. Hjún, har bæði eru pensjónistar, fáa eina viðbót í felag. Viðbótin verður útgoldin við einari helvt til hvønn.

Treytin fyri at fáa viðbótina er, at stakur pensjónistur ikki hevur hægri ársinntøku umframt pensjónina enn 60 tús. kr., og at giftur pensjónistur saman við hjúnafelaga ikki hevur hægri ársinntøku umframt pensjónina enn 80 tús. kr.

Veitingar sambært hesi lóg verða á hvørjum ári javnaðar sambært Ll. nr. 107 frá 22. desember 1999 um áseting og javning av almannaveitingum, við seinni broytingum.

Útreiðslurnar til viðbót til ávísar pensjónistar verða mettar til áleið 32 mió. kr. í 2018.

Sambært løgtingsmáli nr. 21/2017: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um viðbót til ávísar pensjónistar v.fl. verður treytin fyri at fáa viðbót broytt frá 1. januar 2018 at rokna, soleiðis at móttakarar, sum hava nettoinntøkur hægri enn 2 tús. kr. árliga, ið verða skattaðar sambært kapitalvinningskattalógini, ikki longur hava rætt til hesa viðbót. Fyri hjún verður viðbótin latin í felag, sbr. § 1 í lógini, og eru treytirnar og inntøkuásetingarnar at meta sum treytir, sum hjún skulu lúka í felag. Mett verður, at útreiðslurnar lækka við áleið 4 mió. kr. Játtanin í 2018 er lækkað samsvarandi.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	30.674	30.758	26.287	28.006	28.614	29.234
01. Viðbót						
Útreiðslur	**30.674**	**30.758**	**26.287**	**28.006**	**28.614**	**29.234**
52. Tilskot til einstaklingar	30.674	30.758	26.287	28.006	28.614	29.234

Virksemisyvirlit: 01 Viðbót

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
A: Høvuðsendamál (1.000 kr.)						
Viðbót	30.674	30.758	26.287	28.006	28.614	29.234
B: Virksemi (tal)						
Viðbót	8.560	8.059	8.802	8.300	8.300	8.300
C: Eindarkostnaður (kr.)						
Viðbót	3.583	3.817	2.986	3.374	3.447	3.522

Fram til 2016 er viðbót til ávísar pensjónistar útgoldin 3 ferðir árliga. Útgjaldið er broytt til eina mánaðarliga veiting frá 2017 at rokna.

Fiskivinna

12.34.4. Studningur til vinnur

12.34.4.04. Sjúkratrygd (Lógarbundin játtan)

Løgtingslóg um sjúkratrygd til fiskimenn er við løgtingslóg nr. 117 frá 24. november 2016 sett úr gildi. Fiskimenn eru frá 1. januar 2017 fevndir av dagpeningalógini frá 1. fráverudegi.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	4.275	3.491	350	-	-	-
01. Sjúkratrygd						
Útreiðslur	**4.275**	**3.491**	**350**	**-**	**-**	**-**
52. Tilskot til einstaklingar	4.275	3.491	350	-	-	-

Virksemisyvirlit: 01 Sjúkratrygd

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
A: Høvuðsendamál (1.000 kr.)						
Sjúkratrygd	4.275	3.491	350	-	-	-
B: Virksemi (tal)						
Sjúkratrygd	280	185	25	-	-	-
C: Eindarkostnaður (kr.)						
Sjúkratrygd	15.268	18.870	14.000	-	-	-

§ 13 Uttanríkis- og vinnumál

Felagsútreiðslur

13.11.1. Fyrisiting

13.11.1.20. Keyp av bygningi (Løgujáttan)

Sum liður í at samla miðfyristingina hevur landið keypt bygningin hjá BankNordik í Gongini.

Játtanin í 2016 varð nýtt til ráðgeving, tilfar v.m. til innrættan av hølunum til skrivstovur.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	21.300	3.000	-	-	-	-
11. Bygningur til miðfyrisitingina						
Útreiðslur	**21.300**	**3.000**	**-**	**-**	**-**	**-**
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	-	-135	-	-	-	-
31. Bygging og løguframleiðsla	-	3.000	-	-	-	-
32. Útvegan av løgu o.ø.	21.300	-	-	-	-	-
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	-	135	-	-	-	-

13.11.1.59. Uttanríkis- og vinnumálaráðið (Rakstrarjáttan)

Uttanrikis- og vinnumálaráðið er stjórnardeild landsstýrisins á ávísum málsøkjum. Uppgávur ráðsins mótvegis landsstýrismanninum í uttanríkis- og vinnumálum í hesum sambandi eru m.a. at:

- Ráðgeva
- Málsviðgera
- Fyrireika lógaruppskot, kunngerðir og reglugerðir
- Samskipa
- Fremja stovnseftirlit

Uttanríkis- og vinnumálaráðið arbeiðir harumframt áhaldandi við at:

- Gera ætlanir fyri øki, sum hava týdning fyri menning, vøkstur og virðisskapan innan verandi og nýggjar vinnur kring alt landið
- Gera ætlanir fyri, hvussu kapitalur og arbeiðsmegi verða tilskundað at flyta frá minni produktivum vinnum til meira produktivar vinnur

Starvsøkið fevnir eisini um um millumtjóðasamstarv, handilsmál, altjóða rætt, trygdar- og verjumál, alment diplomati og tjóðarbranding, menningarsamstarv o.a.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið rindar fyri hølisútreiðslur og skrivstovuhald hjá NORA (Norrønt Atlantssamstarv), ið heldur til á Bryggjubakka.

21. Marknaðarføring
Endamálið við játtanini er tvídeilt. Ein partur fer til at marknaðarføra Føroyar sum íløguland,

endamálið við hesum er at fáa vitanartungar útlendskar vinnur at staðseta seg í Føroyum, og á henda hátt skapa arbeiðspláss og vøkstur. Arbeiðið verður skipað við í mestan mun at venda sær beinleiðis til íløgubólkar, fyritøkur og ávísar sektorar, umframt at røkja sambond ið kunnu føra til m.a. fígging av granskingarverkætlanum, ið kunnu hava týdning fyri menning av føroyskari vinnu. Arbeiðið verður gjørt í samstarvi við Vinnuframa, sum avgreiðir fyrispurningar, dagførir og samskipar kunning á heimasíðuni invest.fo.

Ein partur av játtanini fer til at styrkja altjóða kappingarførið og umdømið hjá Føroyum og føroyskum fyritøkum. Hetta kann vera við átøkum innan alment diplomati (public diplomacy), arbeiðið við at bøta um marknaðaratgongd fyri føroyskar vørur, vinnuferðir o.l. umframt virksemið hjá Útflutningsráðnum.

Tiltøkini at røkka hesum endamáli eru strategiskt grundað, samskipað og málrættað.

Landsstýrið gongur á odda at gera og seta í verk hóskandi strategi saman við vinnuni og Útflutningsráðnum, soleiðis at tiltøkini gagna land og vinnu á besta hátt.

24. Maritimur tænastudepil

Eitt innanhýsis fólk arbeiðir við at samskipað og saman við vinnuni skipa fyri miðvísari marknaðarføring av maritimum tænastum, sum føroyskar fyritøkur og stovnar hava at bjóða.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	10.823	20.194	19.996	19.604	19.604	19.604
Útreiðslur	10.909	20.296	19.996	19.604	19.604	19.604
Inntøkur	86	102	-	-	-	-
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	10.468	19.359	18.886	18.494	18.494	18.494
Útreiðslur	**10.555**	**19.461**	**18.886**	**18.494**	**18.494**	**18.494**
11. Lønir v.m.	7.800	13.252	15.595	15.303	15.303	15.303
14. Keyp av vørum og tænastum	2.276	5.129	2.799	2.699	2.699	2.699
15. Keyp av útbúnaði, netto	410	716	150	150	150	150
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	2	136	-	-	-	-
17. Avskrivingar o.a.	2	-	-	-	-	-
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	-	1	82	82	82	82
57. Rentuútreiðslur o.a.	0	0	-	-	-	-
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	64	227	260	260	260	260
Inntøkur	**86**	**102**	**-**	**-**	**-**	**-**
21. Søla av vøru og tænastum	*86*	*1*	-	-	-	-
61. Skattir og avgjøld	-	*0*	-	-	-	-
65. Flytingarinntøkur úr útlandinum	-	*85*	-	-	-	-
76. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	-	*16*	-	-	-	-
21. Marknaðarføring						
Nettoútreiðsla	366	495	610	610	610	610
Útreiðslur	**366**	**495**	**610**	**610**	**610**	**610**
11. Lønir v.m.	-	6	-	-	-	-
14. Keyp av vørum og tænastum	216	340	610	610	610	610
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	150	150	-	-	-	-

24. Maritimur tænastudepil						
Nettoútreiðsla	-	340	500	500	500	500
Útreiðslur	**-**	**340**	**500**	**500**	**500**	**500**
11. Lønir v.m.	-	-	400	400	400	400
14. Keyp av vørum og tænastum	-	340	100	100	100	100
45. Verkætlanir						
Nettoútreiðsla	-12	-	-	-	-	-
Útreiðslur	**-12**	**-**	**-**	**-**	**-**	**-**
17. Avskrivingar o.a.	-12	-	-	-	-	-

Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018** **F**	2019 Æ	2020 Æ
Í lønarflokki 37 ella hægri	2,0	3,0	4,0	5,0	5,0	5,0
Onnur	13,0	21,0	21,0	20,0	20,0	20,0
Fulltíðarstørv	15,0	24,0	25,0	25,0	25,0	25,0
Lønarpartur (mió. kr.)	7,8	13,3	15,6	15,3	15,3	15,3

Uttanríkismál

13.13.1. Sendistovur

13.13.1.01. Sendistovur (Rakstrarjáttan)

21. Sendistova Føroya til Evropasamveldið
Serstøk mál hjá sendistovuni í Brússel fevna m.a. um:

- at umboða Føroyar mótvegis Evropasamveldinum,
- í samstarvi við uttanríkistænastuna og avvarðandi stjórnarráð/stovn at varða av sáttmálum Føroya við ES, t.e. sáttmálar um handils-, heilsufrøðilig-, fiskivinnumál eins og granskingarmál,
- at fylgja við ES málum, ið kunnu hava týdning og avleiðingar fyri Føroyar,
- at røkja atlimaskap Føroya í matvørufelagsskapi Sameindu Tjóða (FAO),
- at arbeiða fyri at gera Føroyar sjónligari á evropeiska meginlandinum, og
- at veita tænastur til vinnufyritøkur.

Sendistovan flutti í oktober 2007 í egin høli, sum eru á leið 350 fermetrar til støddar, harav ein partur verður útleigaður. Sendistovan hevur umstøður at hýsa fundum vegna stjórnarráð ella vinnufeløg, ið hava áhugamál at røkja í Brússel.

22. Sendistova Føroya til Danmarkar
Serstøk mál hjá sendistovuni í Keypmannahavn fevna m.a. um:

- mál og málsøki, sum skulu yvirtakast,
- mál, har støða Føroya skal boðast donskum myndugleikum, t.d. uttanríkismál,
- mál, har donsk stjórnarráð ráðføra seg við sendistovuna,
- regluligar fundir millum føroyskar og danskar myndugleikar,
- samskifti við aðrar sendistovur í Keypmannahavn serstakliga fyri at fremja búskaparligu áhugamál Føroya
- at veita hølisumstøður og aðrar tænastur til føroyskar myndugleikar og vinnulív, og
- at virka fyri at Føroyar verða sjónligari í Danmark.

Sendistovan húsast á Norðurbryggjuni og ræður yvir fleiri skrivstovum, ið verða endurleigaðar eini altjóða skrivstovu o.ø. Føroysk stjórnarráð, stovnar og fyritøkur nýta skrivstovu- og fundarhølini.

Ein týdningarmikil partur av virkseminum er at røkja sambond við fremmandar sendistovur í Keypmannahavn, tí tær hava eisini Føroyar sum teirra arbeiðsøki.

Sendistovan veitir tænastur til føroyskar og útlendskar fyritøkur í handilsligum viðurskiftum, ið stuðla føroyskari útflutningsvinnu og samhandli.

Sendistovan røkir harumframt uppgávur í sambandi við føroyska umhvørvið í Keypmannahavn, haruppií Føroyahúsið og føroysku deildina á Vestara kirkjugarði.

23. Sendistova Føroya til Bretlands og Írlands
Serstøk mál hjá sendistovuni í London eru m.a.:

- at umboða Føroyar mótvegis Bretlandi og Írlandi,
- at røkja atlimaskap Føroya í IMO og luttøku Føroya og sambond við millumtjóðafelagsskapir í Bretlandi annars, eitt nú NEAFC, NASCO og IWC,
- at virka fyri góðum sínámillum viðurskiftum millum Føroyar og ávikavist Bretland og Írland, eitt nú innan kolvetnisøkið,
- at útbyggja førleikan at veita føroyskum vinnulívi betri hjálp og umstøður á bretska og írska marknaðinum,
- at veita tænastur til vinnufyritøkur, og
- at gera Føroyar sjónligari í Bretlandi og Írlandi.

Sendistova Føroya til London hevur síðan hon var stovnað í 2002 hildið til í hølunum hjá donsku sendistovuni.

24. Sendistova Føroya til Íslands
Serstøk mál hjá sendistovuni í Reykjavík fevna m.a. um:

- at umboða Føroyar mótvegis Íslandi og at røkja føroysk áhugamál í Íslandi,
- í samstarvi við uttanríkistænastuna at varða av áhugamálum Føroya sambært Hoyvíkssáttmálanum, m.a. at beina burtur forðingar fyri vinnuligum virksemi landanna millum,
- at menna mentanarsamstarv millum Føroyar og Ísland,
- at greiða fyrispurningar frá einstaklingum, vinnu og stovnum,
- at veita tænastur til vinnufyritøkur, og
- at virka fyri at gera Føroyar sjónligari í Íslandi

Sendistovan í Reykjavík lat upp í egnum hølum í september 2007. Sendistovan flutti í 2013 í nýggj høli, sum og liggja væl í sendistovuumhvørvi í Reykjavik. Harumframt hevur sendistovan eisini atgongd til ein sal, sum er 150 fermetrar, ið er væl hóskandi til størri tiltøk, so sum móttøkur og vinnuátøk.

25. Sendistova Føroya til Russlands
Serstøk mál hjá sendistovuni fara m.a. at vera:

- at umboða Føroyar mótvegis Russlandi, umframt hinum londunum í Eurasisku tollsamgonguni: Kasakstan, Hvítarusslandi, umframt Ukraina,
- at røkja føroysk áhugamál í nevndu tollsamgongulondunum og Ukraina og støðugt virka fyri, at tilgongdin fram ímóti betri og meira fjøltáttaðari marknaðaratgongd og fríhandilsavtalu, kann verða hildin á rættari kós,
- at virka fyri at bøta um marknaðaratgongdina annars hjá føroyskum útflytarum - bæði í Russlandi og í hinum londunum, ið eru nevnd omanfyri,
- at veita tænastur til føroyskar vinnufyritøkur, og
- at virka fyri at gera Føroyar sjónligari í Russlandi

Sendistovan í Moskva lat upp í 2015. Sendistovan húsast í hølunum hjá donsku sendistovuni í Moskva.

26. Nýtt sendistovuvirksemi

Áhugin fyri at flyta út alilaks og fisk til londini í fjareystri er vaksandi. Útflutningurin til Kina er fleirfaldaður seinnu árini, men áhugi tykist eisini vera fyri marknaðum í londum sum Suður Korea og Japan. Skal góða gongdin halda fram, mugu føroyskir útflytarar hava somu treytir á marknaðinum sum teirra kappingarneytar. Hetta krevur miðvíst arbeiði mótvegis nevndu londum, og kann sum frálíður eisini krevja støðuga føroyska umboðan í fjareystri.

Játtaðar eru 1,0 mió. kr. í 2018 til endamálið.

30. Marknaðarføra Føroyar

Skipað verður fyri átøkum, saman við vinnuni, til tess at marknaðarføra føroyskt vinnulív í útlandinum.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	15.509	15.434	15.526	16.876	16.876	16.876
Útreiðslur	16.694	16.861	17.396	18.571	18.571	18.571
Inntøkur	1.185	1.427	1.870	1.695	1.695	1.695
21. Sendistova Føroya til Evropasamveldið						
Nettoútreiðsla	2.896	2.851	2.635	2.635	2.635	2.635
Útreiðslur	**2.919**	**2.920**	**2.900**	**2.900**	**2.900**	**2.900**
11. Lønir v.m.	1.112	1.250	1.259	1.259	1.259	1.259
14. Keyp av vørum og tænastum	438	454	401	401	401	401
15. Keyp av útbúnaði, netto	4	36	25	25	25	25
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	1.055	915	865	865	865	865
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	310	265	350	350	350	350
Inntøkur	**23**	**69**	**265**	**265**	**265**	**265**
21. Søla av vøru og tænastum	*23*	*69*	*265*	*265*	*265*	*265*
22. Sendistova Føroya til Danmarkar						
Nettoútreiðsla	3.717	3.354	3.534	3.684	3.684	3.684
Útreiðslur	**4.846**	**4.678**	**5.026**	**5.026**	**5.026**	**5.026**
11. Lønir v.m.	1.496	1.587	1.759	1.759	1.759	1.759
14. Keyp av vørum og tænastum	437	603	568	568	568	568
15. Keyp av útbúnaði, netto	54	65	23	23	23	23
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	2.652	2.273	2.526	2.526	2.526	2.526
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	208	150	150	150	150	150
Inntøkur	**1.129**	**1.325**	**1.492**	**1.342**	**1.342**	**1.342**
21. Søla av vøru og tænastum	*1.129*	*1.089*	*1.492*	*1.342*	*1.342*	*1.342*
64. Aðrar flytingarinntøkur	-	*236*	-	-	-	-
23. Sendistova Føroya til Bretlands og Írlands						
Nettoútreiðsla	2.915	3.194	2.875	3.000	3.000	3.000
Útreiðslur	**2.915**	**3.194**	**2.900**	**3.000**	**3.000**	**3.000**
11. Lønir v.m.	938	1.084	1.268	1.268	1.268	1.268
14. Keyp av vørum og tænastum	1.453	1.918	382	382	382	382
15. Keyp av útbúnaði, netto	156	10	-	-	-	-
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	43	-	1.050	1.050	1.050	1.050
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	326	183	200	300	300	300
57. Rentuútreiðslur o.a.	0	-	-	-	-	-
Inntøkur	**-**	**-**	**25**	**-**	**-**	**-**
21. Søla av vøru og tænastum	-	-	*25*	-	-	-

24. Sendistova Føroya til Íslands

Nettoútreiðsla	2.653	2.564	2.770	2.820	2.820	2.820
Útreiðslur	**2.682**	**2.591**	**2.833**	**2.883**	**2.883**	**2.883**
11. Lønir v.m.	1.141	1.331	1.300	1.300	1.300	1.300
14. Keyp av vørum og tænastum	670	460	506	506	506	506
15. Keyp av útbúnaði, netto	73	28	25	25	25	25
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	522	632	650	650	650	650
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	277	140	352	402	402	402
Inntøkur	**29**	**27**	**63**	**63**	**63**	**63**
21. Søla av vøru og tænastum	*-*	*2*	*63*	*63*	*63*	*63*
63. Vanligar flytingarinntøkur	*20*	*25*	*-*	*-*	*-*	*-*
65. Flytingarinntøkur úr útlandinum	*9*	*-*	*-*	*-*	*-*	*-*

25. Sendistova Føroya til Russlands

Nettoútreiðsla	3.090	2.587	2.712	2.737	2.737	2.737
Útreiðslur	**3.093**	**2.594**	**2.737**	**2.762**	**2.762**	**2.762**
11. Lønir v.m.	1.195	1.000	1.167	1.167	1.167	1.167
14. Keyp av vørum og tænastum	1.451	1.434	395	395	395	395
15. Keyp av útbúnaði, netto	208	-14	25	25	25	25
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	-	-	900	900	900	900
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	240	174	250	275	275	275
Inntøkur	**3**	**7**	**25**	**25**	**25**	**25**
21. Søla av vøru og tænastum	*3*	*7*	*25*	*25*	*25*	*25*

26. Nýtt sendistovuvirksemi

Nettoútreiðsla	-	-	-	1.000	1.000	1.000
Útreiðslur	**-**	**-**	**-**	**1.000**	**1.000**	**1.000**
11. Lønir v.m.	-	-	-	200	200	200
14. Keyp av vørum og tænastum	-	-	-	450	450	450
15. Keyp av útbúnaði, netto	-	-	-	50	50	50
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	-	-	-	200	200	200
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	-	-	-	100	100	100

30. Marknaðarføra Føroyar

Nettoútreiðsla	238	885	1.000	1.000	1.000	1.000
Útreiðslur	**238**	**885**	**1.000**	**1.000**	**1.000**	**1.000**
11. Lønir v.m.	10	4	-	-	-	-
14. Keyp av vørum og tænastum	228	881	1.000	1.000	1.000	1.000

Starvsfólkayvirlit: 21 Sendistova Føroya til Evropasamveldið

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018** **F**	2019 Æ	2020 Æ
Í lønarflokki 37 ella hægri	1,0	1,0	1,0	1,0	1,0	1,0
Onnur	1,0	1,0	1,0	1,0	1,0	1,0
Fulltíðarstørv	2,0	2,0	2,0	2,0	2,0	2,0
Lønarpartur (mió. kr.)	1,1	1,3	1,3	1,3	1,3	1,3

Starvsfólkayvirlit: 22 Sendistova Føroya til Danmarkar

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Í lønarflokki 37 ella hægri	1,0	1,0	1,0	1,0	1,0	1,0
Onnur	1,8	1,8	1,8	1,8	1,8	1,8
Fulltíðarstørv	2,8	2,8	2,8	2,8	2,8	2,8
Lønarpartur (mió. kr.)	1,5	1,6	1,8	1,8	1,8	1,8

Starvsfólkayvirlit: 23 Sendistova Føroya til Bretlands og Írlands

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Í lønarflokki 37 ella hægri	1,0	1,0	1,0	1,0	1,0	1,0
Onnur	1,0	1,0	1,0	1,0	1,0	1,0
Fulltíðarstørv	2,0	2,0	2,0	2,0	2,0	2,0
Lønarpartur (mió. kr.)	0,9	1,1	1,3	1,3	1,3	1,3

Starvsfólkayvirlit: 24 Sendistova Føroya til Íslands

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Í lønarflokki 37 ella hægri	1,0	1,0	1,0	1,0	1,0	1,0
Onnur	1,0	1,0	1,0	1,0	1,0	1,0
Fulltíðarstørv	2,0	2,0	2,0	2,0	2,0	2,0
Lønarpartur (mió. kr.)	1,1	1,3	1,3	1,3	1,3	1,3

Starvsfólkayvirlit: 25 Sendistova Føroya til Russlands

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Í lønarflokki 37 ella hægri	1,0	1,0	1,0	1,0	1,0	1,0
Onnur	1,0	1,0	1,0	1,0	1,0	1,0
Fulltíðarstørv	2,0	2,0	2,0	2,0	2,0	2,0
Lønarpartur (mió. kr.)	1,2	1,0	1,2	1,2	1,2	1,2

13.13.2. Millumtjóða samstarv

13.13.2.04. Millumtjóða samstarv (Stuðulsjáttan)

01. NPA (The Northern Periphery and the Arctic)

NPP er ein ES grunnur, sum stuðlar verkætlanum í útjaðaraøkjum. Um 260 mió. kr. eru tøkar hjá limalondunum Finnlandi, Írlandi, Svøríki, og Stóra Bretlandi (Norðurírlandi og Skotlandi), meðan góðar 75 mió. kr. verða latnar til verkætlanir í Føroyum, Grønlandi, Íslandi og Norra.

Í farna NPP verkætlanartíðarskeiðinum hava Føroyar rindað tilsamans 7.550 tús. kr. Nýggja verkætlanarskeiðið 2014-2020 eitur Northern Periphery and Arctic. Føroyska íkastið er nú minkað nakað til 850 tús. kr. um árið, ella tilsamans 5.950 tús. kr. fyri skeiðið.

Meginreglan í farna verkætlanartíðarskeiði var, at NPP fíggjaði 50 % til verkætlanarluttøku. Javnvágin eftir samstarvið í farna skeiði er, at Føroyar hava fingið 1.343 tús. kr. meira í sín

part, enn landið hevur rindað. Býtislykilin fyri NPA er 35 % í eginfígging og 65 % frá NPA. Nýggja verkætlanartíðarskeiðið leggur størri dent á arktiska økið, íroknað Føroyar, umframt at privat vinnuvirksemi fær høvi at taka lut í stuðuls- og samstarvsskipanini. Nýskapan, íverksetan og vøkstur eru raðfest øki í virkisætlanini hjá NPA.

Verkætlanir, sum hava møguleika fyri at fáa stuðul frá NPA, skulu í høvuðsheitum snúgva seg um at menna útjaðaraøki í Norðurevropa búskaparliga, sosialt og umhvørvisliga. Talan er um nýskapandi vørur og tænastur. Fyri tíðarskeiðið 2014-2020 broytir skipanin navn til Northern Periphery and the Arctic (NPA).

02. IMO
Endamálið við játtanini er at geva Føroyum atlimaskap í altjóða sjóvinnufelagsskapinum IMO. Atlimaskapur í IMO gevur Føroyum sjávstøðuga umboðan og talurætt í IMO ráðnum og í viðkomandi fakligu undirnevndum. Gjaldið er roknað eftir einum føstum ST frymli. Móttakarin er skrivstovan hjá IMO í London.

03. NORA
Tá ið viðtøkurnar fyri NORA vórðu gjørdar, varð ásett, at fígging hjá luttakandi londum í stóran mun skuldi verða partur av samlaðu fíggingini av virkseminum.

Í eini dagføring av fíggingini hevur síðan 2007 verið semja um, at lutfallið av fíggingini hjá luttakandi londunum verður sett soleiðis, at Føroyar og Grønland skulu gjalda 250 tús. kr. um árið, Ísland skal gjalda 500 tús. kr. um árið, og at Noreg skal gjalda 700 tús. kr. um árið.

Afturat hesum fíggjar Nordisk Ministerråd (NMR) 6,39 mió. kr. til virksemið hjá NORA.

04. Altjóða veiðifelagsskapir
ICES
Endamálið við játtanini er at fíggja árliga gjaldið fyri Føroyar til ICES í Altjóða havgranskingarráðnum. Gjaldið, sum Føroyar rinda fyri formliga luttøku í ICES, byggir á eina avtalu frá 1988, ið viðurkennir sjálvræði hjá ávikavist Føroyum (v/ Havstovuni) og Grønlandi, tá talan er um gransking og umsiting av havinum og havsins tilfeingi. Við hesum fáa Føroyar (og Grønland) eina serstaka eygleiðarastøðu í ráðgevandi nevndini hjá ICES og gjalda tilsamans eina upphædd, ið svarar til ein part av gjaldslyklinum hjá ICES. Av hesum parti er avtalað millum Føroyar og Grønland, at Føroyar rinda 80 % og Grønland rindar 20 %.

Móttakarin er ICES skrivstovan í Keypmannahavn. Gjaldið verður goldið við grundarlagi í einum árligum kravi frá ICES.

NEAFC
Endamálið við játtanini er at fíggja árliga gjald Føroya til NEAFC (Nevndin fyri samstarv um fiskiskap í altjóða sjógvi í landnyrðingspartinum av Atlantshavinum). Gjaldið hjá Føroyum er partur av felags NEAFC limagjaldinum hjá Føroyum og Grønlandi (Denmark in respect of the Faroe Islands and Greenland). Limagjøldini í NEAFC taka støði í fíggjarætlanini fyri NEAFC fyri komandi árið og verða roknað eftir einum gjaldsfrymli, ið er ásettur í NEAFC sáttmálanum grein 17.4, og sum partvís byggir á samlaða fiskiskapin hjá einstøku limalondunum fyri tveimum árum síðan. Árliga fíggjarætlanin fyri NEAFC verður formliga samtykt á ársfundinum í november á hvørjum ári.

Viðmerkjast skal, at NEAFC sáttmálin gevur limalondum møguleika á hvørjum ári at áseta, sambært grein 17.4 c), at limalond, ið hava eitt fólkatal undir 300.000 íbúgvar, ikki skulu gjalda meira enn 5 % av samlaðu fíggjarætlanini. Semja er á hvørjum ári um at brúka hesa áseting til fyrimuns fyri Føroyar og Grønland. Hetta hevur við sær, at gjaldið hjá Føroyum er munandi minni, enn hvat tað annars hevði verið, um tað varð ásett sambært frymlinum í grein 17.4 b) & c). Býtið millum Føroyar og Grønland fyri samlaða limagjaldið verður roknað eftir frymli í grein 17.4 a) og b). Í 2018 er gjaldið mett at verða 770 tús. kr.

Móttakarin av árliga gjaldinum er NEAFC skrivstovan í London, og gjaldið verður vanliga avgreitt fyri 1. apríl fyri sama árið.

NAFO
Endamálið við játtanini er at fíggja árliga gjald Føroya til NAFO (Nevndin fyri samstarv um fiskiskap í altjóðasjógvi í útnyrðingspartinum av Atlantshavinum). Gjaldið hjá Føroyum er partur av felags NAFO limagjaldinum hjá Føroyum og Grønlandi (Denmark in respect of the Faroe Islands and Greenland). Limagjøldini í NAFO taka støði í fíggjarætlanini fyri NAFO fyri komandi árið og verða roknað eftir einum gjaldsfrymli, ið er ásettur í NAFO sáttmálanum grein 16.3, og sum partvís byggir á samlaða fiskiskapin hjá einstøku limalondunum fyri tveimum árum síðan. Árliga fíggjarætlanin fyri NAFO verður formliga samtykt á ársfundinum í september á hvørjum ári.

Býtið millum Føroyar og Grønland fyri samlaða limagjaldið verður roknað eftir frymli í grein 16.3 í NAFO sáttmálanum. Parturin hjá Grønlandi í sínámillum býtinum er munandi størri vegna tess, at Grønland rindar allan tann partin, sum er álagdur strandarlondunum í NAFO sambært grein 16.3.

Móttakarin av árliga gjaldinum er NAFO skrivstovan í Dartmouth, Kanada, og gjaldið verður vanliga avgreitt fyri 1. apríl sama árið.

NAMMCO
Endamálið við játtanini er at fíggja árliga gjald Føroya til NAMMCO (Nevndin fyri samstarv um vernd, umsiting og gransking av havsúgdjórum í Norður Atlantshavinum). Føroyar hava sjálvstøðugan limaskap í NAMMCO. Limagjaldið byggir á eitt gjaldsbýti millum verandi fýra limalond: Føroyar, Grønland, Ísland og Noreg, sum varð avtalað í 1992, tá ið NAMMCO varð sett á stovn. Sambært tí rinda Føroyar og Grønland 12,5 % í part, Ísland 25 % og Noreg 50 %. Árliga gjaldið verður ásett við støði í árligu fíggjarætlanini fyri NAMMCO, ið verður samtykt á NAMMCO ársfundinum á hvørjum ári.

Móttakarin av árliga gjaldinum er NAMMCO skrivstovan í Tromsø, og gjaldið verður vanliga avgreitt innan 1. apríl fyri sama árið.

NASCO
Endamálið við játtanini er at fíggja árliga gjald Føroya til NASCO (Felagsskapurin fyri umsiting og vernd av villum laksi í Norðuratlantshavi). Gjaldið hjá Føroyum er partur av felags NASCO limagjaldinum hjá Føroyum og Grønlandi (Denmark in respect of the Faroe Islands and Greenland). Limagjøldini í NASCO taka støði í fíggjarætlanini fyri NASCO fyri komandi árið og verða roknað eftir ein gjaldsfrymli, ið er ásettur í grein 16 í NASCO sáttmálanum.

Árliga fíggjarætlanin fyri NASCO verður formliga samtykt á ársfundinum.

Móttakarin av árliga gjaldinum er NASCO skrivstovan í Edinburgh, og gjaldið verður vanliga avgreitt innan 1. apríl sama árið.

SPRFMO
Føroyar (Kingdom of Denmark in respect of the Faroe Islands) gjørdust í juli 2010 fyrsti formligi sáttmalaparturin av nýggja sáttmálanum fyri samstarv um fiskiveiði í altjóða sjógvi í Suðurkyrrahavinum. Við at taka lut í SPRFMO eru Føroyar við at tryggja sær rættindi at fiska í sáttmálaøkinum í Suðurkyrrahavinum. Formliga varð felagsskapurin settur á stovn í 2012, tá 8 lond høvdu staðfest sáttmálan. Í dag eru 13 limir í felagsskapinum.

Í 2012 varð ein leistur fyri luttøkugjald samtyktur, sum partvíst tekur støði í einum grundgjaldi, sum er eins fyri øll limalondini, og partvíst tekur støði í, hvussu væl landið er fyri (ein sokallaður vælferðarkomponentur) og luttøku í fiskiskapinum. Limagjaldið verður goldið fyri fíggjarár, sum er frá 1. juli til 30. juni.

Limagjaldið verður ásett í NZD. Limagjaldið kann eisini broytast, um fleiri lond staðfesta sáttmálan, tí hetta ávirkar serliga grundgjaldið, soleiðis at minni verður at gjalda í part. Í so fall verður føroyska íkasti lækkað.

Móttakarin av árliga gjaldinum er SPRFMO skrivstovan í Wellington í Nýsælandi, og gjaldið verður vanliga avgreitt innan 1. apríl sama árið.

05. FAO og UNESCO
FAO
Endamálið við játtanini er at rinda gjaldið fyri atlimaskap Føroya í FAO - Matvøru- og landbúnaðarstovninum hjá ST. Atlimaskapur í FAO gevur Føroyum sjálvstøðuga umboðan og talurætt í FAO ráðnum og viðkomandi fakligu undirnevndum. Gjaldið er roknað eftir einum føstum ST frymli.

Móttakarin er umsitingin hjá FAO í Rom. Gjaldskravið verður sent fyrst í árinum fyri sama árið.

UNESCO
Endamálið við játtanini er at rinda gjaldið fyri atlimaskap Føroya í UNESCO - ST felagsskapinum fyri samstarv um útbúgving, vísindi og mentan. Atlimaskapur í UNESCO gevur Føroyum sjálvstøðuga umboðan og talurætt í UNESCO ráðnum og viðkomandi fakligu undirnevndum. Gjaldið er roknað eftir einum føstum ST frymli.

Móttakarin er umsitingin hjá UNESCO í París. Gjaldskravið kemur fyrst í árinum fyri sama árið.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	2.935	3.067	3.250	3.250	3.250	3.250
01. The Northern Periphery						
Útreiðslur	**852**	**849**	**870**	**870**	**870**	**870**
51. Tilskot til útlandið o.a.	852	849	870	870	870	870

02. IMO						
Útreiðslur	**71**	**43**	**50**	**50**	**50**	**50**
51. Tilskot til útlandið o.a.	71	43	50	50	50	50
03. NORA						
Útreiðslur	**250**	**250**	**250**	**250**	**250**	**250**
51. Tilskot til útlandið o.a.	250	250	250	250	250	250
04. Altjóða veiðifelagsskapir						
Útreiðslur	**1.634**	**1.782**	**1.950**	**1.950**	**1.950**	**1.950**
51. Tilskot til útlandið o.a.	1.634	1.782	1.950	1.950	1.950	1.950
05. FAO og UNESCO						
Útreiðslur	**129**	**142**	**130**	**130**	**130**	**130**
51. Tilskot til útlandið o.a.	129	142	130	130	130	130

13.13.3. Menningarsamstarv og neyðhjálp

13.13.3.02. Neyðhjálp (Stuðulsjáttan)

Endamálið við játtanini er at veita neyðhjálp, m.a. til krígsherjað øki og tá vanlukkur brádliga raka úti í heimi. Neyðhjálp kann verða latin sum peningaligur stuðul og sum virkin luttøka í neyðhjálpararbeiði. Partur av latna stuðlinum kann verða nýttur til útbúgving av delegatum. Hjálpin verður vanliga latin frammanundan gjøgnum hjálparfelagsskapir, sum t.d. Reyða Kross og altjóða stjórnarfelagsskapir, sum t.d. Heimsmatvørufelagsskapin undir Sameindu Tjóðum, World Food Programme. Játtanin verður eisini nýtt at svara áheitanum frá altjóða myndugleikum um t.d. at lata pening til at basa hungursneyð.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið fær atgongd til upplýsingar um, hvussu peningurin er nýttur gjøgnum ársfrágreiðingar og roknskapir hjá felagsskapunum.

Játtanin er í 2018 flutt til høvuðskontu 13.13.3.03. Neyðhjálp og menningarsamstarv (Stuðulsjáttan).

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	1.250	1.000	4.000	-	-	-
01. Neyðhjálp						
Útreiðslur	**1.250**	**1.000**	**4.000**	**-**	**-**	**-**
51. Tilskot til útlandið o.a.	1.250	1.000	4.000	-	-	-

13.13.3.03. Neyðhjálp og menningarsamstarv (Stuðulsjáttan)

0.1. Neyðhjálp. Endamálið við játtanini er at veita neyðhjálp, m.a. til krígsherjað øki og tá vanlukkur brádliga raka úti í heimi. Neyðhjálp kann verða latin sum peningaligur stuðul og sum virkin luttøka í neyðhjálpararbeiði. Partur av latna stuðlinum kann verða nýttur til útbúgving av delegatum. Hjálpin verður vanliga latin frammanundan gjøgnum hjálparfelagsskapir, sum t.d. Reyða Kross og altjóða stjórnarfelagsskapir, sum t.d. Heimsmatvørufelagsskapin undir Sameindu Tjóðum, World Food Programme. Játtanin verður eisini nýtt at svara áheitanum frá altjóða myndugleikum um t.d. at lata pening til at basa hungursneyð.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið fær atgongd til upplýsingar um, hvussu peningurin er nýttur gjøgnum ársfrágreiðingar og roknskapir hjá felagsskapunum.

Játtanin verður í 2018 raðfest við 2,5 mió. kr., úr 4 mió. kr. upp í 6,5 mió. kr.

0.2. Menningarsamstarv. Endamálið við játtanini er at útinna løgtingslóg nr. 44 frá 14. mai 2007 um altjóða menningarsamstarv, hvørs endamál er at minka um búskaparliga ójavnan í heiminum við millum annað at vera við í sjálvberandi menningarsamstarvi.

Samstarvað verður við sjálvbodnar hjálparfelagsskapir, bæði her heima og uttanlands, og við altjóða stjórnarfelagsskapir, sum t.d. Heimsmatvørufelagsskapin undir Sameindu Tjóðum, World Food Programme. Harumframt verður játtanin nýtt til at gagnnýta føroyska vitan og at fáa føroyingar at starva sum altjóða ráðgevar. Hetta verður framt millum annað gjøgnum Reyða Kross og sjálvhjálparfelagsskapin Mercy Corps.

Stuðul verður bert latin eftir umsókn. Nærri ásetingar um viðgerð av umsókn og treytir eru í kunngerð nr. 72 frá 25. juni 2008 um altjóða menningarsamstarv. Stuðulin verður vanliga útgoldin framman undan. Uttanríkis- og vinnumálaráðið ger skrivliga avtalu við stuðulsmóttakararnar hvør sær um frágreiðingar og roknskap. Harumframt ger Uttanríkis- og vinnumálaráðið stakroyndir av verkætlanum, ið ráðið hevur stuðlað.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	-	-	-	9.000	9.000	9.000
01. Neyðhjálp						
Útreiðslur	**-**	**-**	**-**	**6.500**	**6.500**	**6.500**
51. Tilskot til útlandið o.a.	-	-	-	6.500	6.500	6.500
02. Menningarsamstarv						
Útreiðslur	**-**	**-**	**-**	**2.500**	**2.500**	**2.500**
51. Tilskot til útlandið o.a.	-	-	-	2.500	2.500	2.500

13.13.3.04. Menningarsamstarv (Stuðulsjáttan)

Endamálið við játtanini er at útinna løgtingslóg nr. 44 frá 14. mai 2007 um altjóða menningarsamstarv, hvørs endamál er at minka um búskaparliga ójavnan í heiminum við millum annað at vera við í sjálvberandi menningarsamstarvi.

Samstarvað verður við sjálvbodnar hjálparfelagsskapir, bæði her heima og uttanlands, og við altjóða stjórnarfelagsskapir, sum t.d. Heimsmatvørufelagsskapin undir Sameindu Tjóðum, World Food Programme. Harumframt verður játtanin nýtt til at gagnnýta føroyska vitan og at fáa føroyingar at starva sum altjóða ráðgevar. Hetta verður framt millum annað gjøgnum Reyða Kross og sjálvhjálparfelagsskapin Mercy Corps.

Stuðul verður bert latin eftir umsókn. Nærri ásetingar um viðgerð av umsókn og treytir eru í kunngerð nr. 72 frá 25. juni 2008 um altjóða menningarsamstarv. Stuðulin verður vanliga útgoldin framman undan. Uttanríkis- og vinnumálaráðið ger skrivliga avtalu við stuðulsmóttakararnar hvør sær um frágreiðingar og roknskap. Harumframt ger Uttanríkis- og vinnumálaráðið stakroyndir av verkætlanum, ið ráðið hevur stuðlað.

Játtanin er í 2018 flutt til høvuðskontu 13.13.3.03. Neyðhjálp og menningarsamstarv (Stuðulsjáttan).

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	1.560	2.500	2.500	-	-	-
01. Menningarsamstarv						
Útreiðslur	**1.560**	**2.500**	**2.500**	**-**	**-**	**-**
51. Tilskot til útlandið o.a.	1.560	2.500	2.500	-	-	-

Ráevnisvinna

13.32.1. Fyrisiting

13.32.1.03. Jarðfeingi (Rakstrarjáttan)

Endamálið við Jarðfeingi er at fyrisita, granska, ráðgeva og breiða út kunnleika um kolvetni og jarðfrøðilig náttúruvirði.

Kolvetnismál
Stovnurin fyrisitur lóggávuna innan leiting eftir og framleiðslu av kolvetnum. Jarðfeingi granskar í jarðfrøði og náttúrufrøði á landi, á havbotninum og í undirgrundini. Stovnurin samskipar alt arbeiði, ið hevur beinleiðis við málsøkið at gera.

Stovnurin umsitur kolvetnismál sambært løgtingslóg nr. 31 frá 16. mars 1998 um kolvetnisvirksemi og løgtingslógirnar um útbjóðingarumførini 1-4. Fýra útbjóðingarumfør eru hildin, eitt í ár 2000, eitt í 2004/2005 og triðja útbjóðingarumfar var í 2008 og nýggjasta í 2017/2018.

Níggju leitibrunnar eru boraðir í tíðarskeiðinum 2001-2014. Farið er undir verkætlan har størri dentur enn higartil verður lagdur á at marknaðarføra føroyska landgrunnin til oljuleiting. Serlig játtan er til hetta endamál, høvuðskonta 13.32.1.05. Marknaðarføring av landgrunninum til kolvetnisleiting. Eisini er nýtt útbjóðingarumfar latið upp sum liður í marknaðarføringini av føroyska landgrunninum til oljuleiting, umfarið letur aftur 17. februar 2018.

Jarðfrøði
Jarðfeingi kortleggur, savnar og varðveitir jarðfrøðiligt tilfar, umframt at granska, ráðgeva og kunna um jarðfrøðilig evni og viðurskifti, og virkar fyri, at lóggáva og umsiting innan jarðfrøðilig náttúruvirði verður grundað á framkomna og dagførda jarðfrøðiliga vitan. Stovnurin virkar sum jarðfrøðiligt dátusavn, har kanningarúrslit frá øllum jarðfrøðiligum kanningum og oljuleitingum á Føroyaøkinum, frágreiðingar og annað verður varðveitt.

Stovnurin ráðgevur m.a. Landsverki og øðrum í sambandi við tunnilsverkætlanir, samstarvar við Fróðskaparsetur Føroya og aðrar stovnar um undirvísing, og við Føroya Náttúrugripasavn um jarðfrøðiligar framsýningar. Jarðfeingi hevur nógv samstarv við føroyskar og útlendskar granskingarstovnar.

40. Granskingarverkætlanir
Jarðfeingi luttekur í granskingarverkætlanum, ið partvíst verða fíggjaðar uttanhýsis. Granskingarsamstarv er við ymiskar útlendskar stovnar og vinnulív, og hevur higartil verið viðvíkjandi geofakligum evnum.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	10.574	8.658	8.674	8.467	8.467	8.467
Útreiðslur	14.688	14.703	11.674	13.767	13.767	13.767
Inntøkur	4.114	6.045	3.000	5.300	5.300	5.300
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	10.598	8.632	8.674	8.467	8.467	8.467
Útreiðslur	**13.201**	**11.958**	**10.274**	**10.667**	**10.667**	**10.667**
11. Lønir v.m.	9.968	8.208	8.880	8.823	8.823	8.823
14. Keyp av vørum og tænastum	1.709	1.900	239	639	639	639
15. Keyp av útbúnaði, netto	169	446	155	205	205	205
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	1.320	1.329	1.000	1.000	1.000	1.000
17. Avskrivingar o.a.	-	43	-	-	-	-
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	4	0	-	-	-	-
54. Stuðul til annað virksemi	25	25	-	-	-	-
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	7	7	-	-	-	-
Inntøkur	**2.604**	**3.325**	**1.600**	**2.200**	**2.200**	**2.200**
21. Søla av vøru og tænastum	*2.092*	*1.326*	*500*	*400*	*400*	*400*
25. Eftirlits- og umsjónaravgjøld	*1*	*10*	*400*	-	-	-
29. Ymsar rakstrarinntøkur	*4*	-	-	-	-	-
63. Vanligar flytingarinntøkur	*263*	*1.989*	*700*	*1.800*	*1.800*	*1.800*
65. Flytingarinntøkur úr útlandinum	*-55*	-	-	-	-	-
76. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	*299*	-	-	-	-	-
40. Granskingarverkætlanir						
Nettoútreiðsla	-24	26	0	0	0	0
Útreiðslur	**1.486**	**2.745**	**1.400**	**3.100**	**3.100**	**3.100**
11. Lønir v.m.	699	1.273	1.000	1.000	1.000	1.000
14. Keyp av vørum og tænastum	781	1.476	200	2.100	2.100	2.100
15. Keyp av útbúnaði, netto	-	2	-	-	-	-
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	6	-	200	-	-	-
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	-	-6	-	-	-	-
Inntøkur	**1.510**	**2.719**	**1.400**	**3.100**	**3.100**	**3.100**
21. Søla av vøru og tænastum	-	*0*	-	-	-	-
63. Vanligar flytingarinntøkur	*91*	*-1.831*	*1.400*	*135*	*135*	*135*
65. Flytingarinntøkur úr útlandinum	*1.419*	*4.551*	-	*2.965*	*2.965*	*2.965*

Virksemisyvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
A: Høvuðsendamál (1.000 kr.)	**13.201**	**11.958**	**10.274**	**10.667**	**10.667**	**10.667**
1. Leiðsla, skrivstova og felagsútreiðslur	3.600	3.600	3.600	3.593	3.593	3.593
2. Kolvetni	2.489	3.758	4.034	4.034	4.034	4.034
3. El-orka	2.500	-	-	-	-	-
4. Jarðfrøði	4.612	4.600	2.640	3.040	3.040	3.040

Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Í lønarflokki 37 ella hægri	2,0	2,0	2,0	2,0	2,0	7,0
Onnur	21,0	13,5	14,0	14,0	14,0	14,0
Fulltíðarstørv	23,0	15,5	16,0	16,0	16,0	21,0
Lønarpartur (mió. kr.)	10,0	8,2	8,9	8,8	8,8	8,8

13.32.1.04. Gjald fyri seismisk forkanningarloyvi (Stuðulsjáttan)

Gjøldini fyri forkanningarloyvi (seismikkloyvi) eru heimilað í løgtingslóg nr. 31 frá 16. mars 1998 um kolvetnisvirksemi. Eitt gjald er ásett feløgum uppá 75 tús. kr. fyri loyvi at gera seismiskar kanningar, umframt eitt ómaksgjald til Jarðfeingi á 10 tús. kr. á høvuðskontu 13.32.1.03. Jarðfeingi.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Inntøkujáttan	-	75	75	75	75	75
01. Gjald fyri seismisk forkanningarloyvi						
Inntøkur	**-**	**75**	**75**	**75**	**75**	**75**
21. Søla av vøru og tænastum	-	*75*	*75*	*75*	*75*	*75*

13.32.1.05. Marknaðarføring av landgrunninum til kolvetnisleiting (Rakstrarjáttan)

Farið er undir miðvísa marknaðarføring av føroyska landgrunninum til tess at fáa økt leitivirksemið. Hóast leitað hevur verið eftir olju í nógv ár er framvegis nógv eftir at kanna.

Avtalað er við oljuvinnufelagið, at grunnurin til førleikamenning, sum oljufeløgini hava goldið til ísv. leitiloyvi, fíggjar marknaðarføringina av føroyska landgrunninum.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	500	0	0	0	0	0
Útreiðslur	759	1.055	950	950	950	950
Inntøkur	259	1.055	950	950	950	950
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	500	0	0	0	0	0
Útreiðslur	**759**	**1.055**	**950**	**950**	**950**	**950**
11. Lønir v.m.	492	489	500	500	500	500
14. Keyp av vørum og tænastum	267	549	450	450	450	450
15. Keyp av útbúnaði, netto	-	13	-	-	-	-
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	-	4	-	-	-	-
Inntøkur	**259**	**1.055**	**950**	**950**	**950**	**950**
64. Aðrar flytingarinntøkur	-	-	*950*	-	-	-
65. Flytingarinntøkur úr útlandinum	*259*	*1.055*	-	*950*	*950*	*950*

Landbúnaður

13.33.1. Djóralæknatænastur

13.33.1.04. Djóralæknatænastur (Rakstrarjáttan)

Endamálið við játtanini er at veita samsýning til privat starvandi djóralæknar, soleiðis at djóraeigarar kunnu fáa djóralæknahjálp frá privat starvandi djóralæknum.

Tænastan er síðan 2012 einans skipað við telefonvaktarhaldi. Djóraeigarar kunnu tí fáa fatur á privatstarvandi djóralækna alt samdøgrið allar dagar í árinum.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	579	577	650	650	650	650
Útreiðslur	579	577	650	650	650	650
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	579	577	650	650	650	650
Útreiðslur	**579**	**577**	**650**	**650**	**650**	**650**
14. Keyp av vørum og tænastum	579	577	650	650	650	650

Sjóvinna

13.35.1. Ymsar útreiðslur

13.35.1.08. Sjóvinnustýrið (Rakstrarjáttan)

Sjóvinnustýrið
Undir Sjóvinnustýrinum eru skipaskráseting, FAS og Skipaeftirlit.

Skipaskráseting
Høvuðsuppgávan hjá Skipaskrásetingini er at umsita løgtingslóg nr. 9 frá 5. mars 1970 um skráseting av skipum, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 63 frá 15. mai 2014, sum er sermál, og at veita Landsstýri, Løgtingi og borgarum stuðul og ráðgeving í sjóvinnumálum.

Skipaskrásetingin umsitur løgtingslógina um skipaskráseting. Umsitingarligu uppgávurnar eru at skráseta nýggj skip og skip flutt úr øðrum skrásetingum, pantirættindi o.a. og at hava neyvt eftirlit við, um eigarar/feløg lúka øll skrásetingarkrøv. Skrásetingin skal eisini umsita reglurnar um leiguskráseting (bareboat-skráseting).

Allar skrásetingar verða gjørdar á www.teyggjan.fo, soleiðis at neyðugar upplýsingar verða skrásettar í einari skipan og á einum staði.

FAS-skipanin
Gjørdar eru broytingar í FAS-skipanini við tí endamáli at gera hana til eina kappingarføra hágóðskuskipaskrá.

Hetta er gjørt við, at:

- gera broytingar í ymsum lógum, sum hava við virksemið á økinum at gera,
- skipa fyrisitingina á økinum, soleiðis at viðskiftafólk í sínum samskifti við myndugleikarnar bert hava eitt stað at venda sær til, og at
- skipanin verður miðvíst marknaðarførd

21. Skipaeftirlitið
Sjóvinnustýrið arbeiðir støðugt við at betra um arbeiðsumhvørvið umborð á skipum, trygd á sjónum og at vera við til at verja havumhvørvið.

Sjóvinnustýrið umsitur og hevur ábyrgd av føroyska regluverkinum, sum ásetur krøv til skip og bátar, skrásett í føroysku skipa- og far skránni. Føroyska regluverkið fevnir um altjóða krøv til skip og bátar umframt serlig føroysk krøv. Stovnurin leggur áherðslu á, at fylgja við í broytingunum í altjóða krøvum og at innføra hesi og serligu føroysku krøvini í føroyska lóggávu. Løgtingslógir, kunngerðir og fráboðanir frá Sjóvinnustýrinum verða kunngjørdar á www.kunngerdaportalur.fo og á regluportalinum, sum Sjóvinnustýrið umsitur, sí www.fma.fo.

Høvuðsuppgávurnar hjá Sjóvinnustýrinum eru:

- At veita landsstýrimanninum ráðgeving
- Gera og hjálpa til við lógarfyrireiking og lógarsmíð: Lóg um trygd á sjónum og kunngerðir

- Áseta reglur við heimild í løgtingslóg um trygd á sjónum
- Umsita samskiftið við IMO og aðrar avvarðandi altjóða felagsskapir og stovnar, hvussu viðurskifti Føroya við IMO verða skipað
- Umsita og útinna lóggávuna, sum nevnd er omanfyri, undir hesum skriva út skipssertifikat, og samstarva við vinnuna í hesum sambandi
- Eftirlit við bygging og umbygging av skipum
- Sýna skip, undir hesum kanna vanlukkur á sjónum o.a.
- Eftirlit undir MARPOL og føroysku umhvørviskunngerðunum sbrt. § 10, stk. 3 í kunngerð nr. 124 frá 25. november 2005 um avhendan av olju og oljudálkaðum sjógvi ella vatni, og sbrt. § 11, stk. 3 í kunngerð nr. 122 frá 25. novmber 2005 um avhendan av burturkasti
- Hava eftirlit við klassafeløgum, sum hava myndugleikagóðkenning at sýna og útgeva sertifikat myndugleikanna vegna
- Viðgera umsóknir um sjóvinnubrøv og manninarskjøl

Avtala er gjørd við donsku havaríkommisiónina, um at hjálpa til við at kanna vanlukkur á sjónum.

Sjóvinnustýrið hevur, sbrt. løgtingslóg um starvsviðurskifti hjá sjófólki, skyldu til at halda útreiðslur ísv. heimferð hjá sjófólki m.a. tá sjófólk, sum er við barn, og av heilsuligum ávum krevur at sleppa av í útlondum ella tá sjófólk, har hjúnafelagið ella barn er deytt ella illa sjúkt, krevur at sleppa heim v.m.

Hølisviðurskifti

Í 2018 verður farið undir at skipa hølisviðurskiftini hjá Sjóvinnustýrinum í fastar karmar. Fyrireikað verður at bjóða út og byggja ein umsitingarbygning til stovnin í Vágum.

Í 2018 eru 5 mió. kr. settar av til endamálið á høvuðskontu 13.35.1.09. Sjóvinnustýrið, bygningur.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	8.518	8.753	9.066	8.759	8.759	8.759
Útreiðslur	15.239	15.301	14.108	13.801	13.801	13.801
Inntøkur	6.721	6.548	5.042	5.042	5.042	5.042
20. Skipaskrásetingin						
Nettoútreiðsla	160	271	326	326	326	326
Útreiðslur	**3.274**	**3.030**	**2.428**	**2.428**	**2.428**	**2.428**
11. Lønir v.m.	1.722	1.826	1.800	1.800	1.800	1.800
14. Keyp av vørum og tænastum	1.194	1.009	420	420	420	420
15. Keyp av útbúnaði, netto	241	24	42	42	42	42
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	118	171	166	166	166	166
17. Avskrivingar o.a.	-	1	-	-	-	-
57. Rentuútreiðslur o.a.	0	-	-	-	-	-
Inntøkur	**3.114**	**2.759**	**2.102**	**2.102**	**2.102**	**2.102**
21. Søla av vøru og tænastum	*187*	*191*	*120*	*120*	*120*	*120*
25. Eftirlits- og umsjónaravgjøld	*2.427*	*1.428*	*1.482*	*1.482*	*1.482*	*1.482*
67. Rentuinntøkur og vinningsbýti	*-*	*18*	*-*	*-*	*-*	*-*
76. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	*500*	*1.122*	*500*	*500*	*500*	*500*

21. Skipaeftirlitið

Nettoútreiðsla	8.358	8.483	8.740	8.433	8.433	8.433
Útreiðslur	**11.965**	**12.271**	**11.680**	**11.373**	**11.373**	**11.373**
11. Lønir v.m.	6.855	7.509	8.158	7.951	7.951	7.951
14. Keyp av vørum og tænastum	2.378	2.886	2.032	1.932	1.932	1.932
15. Keyp av útbúnaði, netto	1.630	391	184	184	184	184
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	505	394	806	806	806	806
17. Avskrivingar o.a.	96	-31	-	-	-	-
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	1	0	-	-	-	-
57. Rentuútreiðslur o.a.	0	0	-	-	-	-
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	500	1.122	500	500	500	500
Inntøkur	**3.607**	**3.789**	**2.940**	**2.940**	**2.940**	**2.940**
21. Søla av vøru og tænastum	*210*	*113*	*110*	*110*	*110*	*110*
25. Eftirlits- og umsjónaravgjøld	*3.397*	*3.675*	*2.830*	*2.830*	*2.830*	*2.830*
61. Skattir og avgjøld	-	*0*	-	-	-	-

Virksemisyvirlit: 20. Skipaskrásetingin og 21. Skipaeftirlitið

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
A: Høvuðsendamál (1.000 kr.)	**15.239**	**15.301**	**14.108**	**13.801**	**13.801**	**13.801**
Leiðsla	1.100	1.100	1.100	1.100	1.100	1.100
Umsiting	2.650	2.650	2.900	2.733	2.733	2.733
Manningarviðurskifti	2.995	3.100	2.635	2.600	2.600	2.600
Skráseting	1.344	1.400	1.200	1.200	1.200	1.200
Løgfrøði	1.700	1.750	1.795	1.795	1.795	1.795
Eftirlit	4.264	4.300	3.645	3.540	3.540	3.540
QA Dygdarmenning	1.186	1.001	833	833	833	833

Starvsfólkayvirlit: 20 Skipaskrásetingin

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Í lønarflokki 37 ella hægri	1,0	1,0	1,0	1,0	1,0	1,0
Onnur	1,6	1,6	1,6	1,6	1,6	1,6
Fulltíðarstørv	2,6	2,6	2,6	2,6	2,6	2,6
Lønarpartur (mió. kr.)	1,7	1,8	1,8	1,8	1,8	1,8

Starvsfólkayvirlit: 21 Skipaeftirlitið

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Í lønarflokki 37 ella hægri	-	-	-	-	-	-
Onnur	15,5	15,5	15,5	15,5	15,5	15,5
Fulltíðarstørv	15,5	15,5	15,5	15,5	15,5	15,5
Lønarpartur (mió. kr.)	6,9	7,5	8,2	8,0	8,0	8,0

13.35.1.09. Sjóvinnustýrið, bygningur (Løgujáttan)

Farið verður undir at skipa hølisviðurskiftini hjá sjóvinnustýrinum í fastar karmar. Sjóvinnustýrið hevur síðan á sumri 2016 húsast í fyribilshølum eftir at stovnurin mátti flyta bráfeingis úr leiguhølunum í Miðvági.

Eingi hóskandi høli eru til stovnin í Vágoynni og fari verður tí undir at byggja ein umsitingarbygning til stovnin í Vágoynni.

Í 2018 verður bjóðað út og farið undir byggingina. Nýggi bygningurin verður eftir ætlan innflytingarklárur á heysti 2019.

Landsverk hevur mett kostnaðin av einum slíkum bygningi at vera áleið 13,7 mió. kr. Innbúgv er ikki íroknað.

Játtaðar eru 5 mió. kr. til endamálið í 2018.

Átekning

Landsstýrismanninum verður heimilað at flyta óbrúkta játtan til seinni fíggjarár.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	-	-	-	5.000	8.700	-
10. Sjóvinnustýrið, bygningur						
Útreiðslur	**-**	**-**	**-**	**5.000**	**8.700**	**-**
31. Bygging og løguframleiðsla	-	-	-	5.000	8.700	-

13.35.1.11. Havnaeftirlit við fremmandum skipum (Paris MoU) (Rakstrarjáttan)

Paris MoU er ein felagsskapur, har 27 av sjóvinnufyrisitingunum í Europa, Russlandi og Kanada eru limir. Endamálið við felagsskapinum er at fremja eftirlit umborð á útlendskum skipum, sum koma í eina Paris MoU havn. Eftirlitið skal staðfesta, um skipini lúka altjóða krøv sambært m.a. SOLAS, MARPOL, STCW og MLC sáttmálunum. Við øðrum orðum verður kannað, um teknisku viðurskiftini á skipinum eru í lagi, at reglur um vernd av umhvørvinum verða hildnar, at manningin hevur kravdu førleikarnar, at hóskandi livi- og arbeiðsumstøður eru umborð, og at kravd sertifikat eru í gildi og eru umborð.

Meginreglan hjá felagsskapinum er, at høvuðsábyrgdin fyri, at krøvini sambært altjóða sáttmálanum verða yvirhildin, er hjá reiðarínum. Ábyrgdin at tryggja, at hesi viðurskifti eru í lagi, er hjá flaggmyndugleikanum.

Til tess at røkja uppgávuna verður mett at tvey ársverk skulu setast at røkja eftirlitsuppgávuna umframt neyðug førleikamenning av hesum starvsfólkum. Ein partur av játtanini skal nýtast til at menna ein føroyskan pall fyri "SafeSeaNet", sum er ein skipaferðslu- og upplýsingarskipan, sum inniheldur neyðugu upplýsingarnar um skipaferðslu, farm, tilburðir o.a. sum er avgerðandi fyri at kunna virka í Paris MoU. Árliga limagjaldi til Paris MoU er áleið 350 tús. kr.

Í 2018 verður farið undir tilgondina at gerast partur av Paris Mou.

Økið er í 2018 raðfest við 2,0 mió. kr.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	-	-	-	2.000	2.000	2.000
Útreiðslur	-	-	-	2.000	2.000	2.000
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	-	-	-	2.000	2.000	2.000
Útreiðslur	**-**	**-**	**-**	**2.000**	**2.000**	**2.000**
11. Lønir v.m.	-	-	-	1.200	1.200	1.200
14. Keyp av vørum og tænastum	-	-	-	450	450	450
51. Tilskot til útlandið o.a.	-	-	-	350	350	350

Aling

13.36.1. Ymsar útreiðslur

13.36.1.04. Havbúnaðarroyndir (Stuðulsjáttan)

Játtanin verður nýtt til at veita stuðul til gransking, menning og ráðgeving innan aling av vatnlivandi djórum og plantum. Arbeiðið fatar um at betra vitanarstøðið og framleiðsluna innan alivinnuna saman við Uttanríkis- og vinnumálaráðnum.

Løgtingslóg nr. 73 frá 25. mai 2009 um at hækka partapeningin í P/F Fiskaaling heimilar landsstýrismanninum at veita stuðul til nevndu endamál av árligu játtanini á fíggjarlógini.

Raðfestu økini eru:

- **Vatnlivandi djór og plantur v.m.:** Endamálið er at betra um verandi aling og fjøltátta alingina við nýggjum vatnlivandi djórum og plantum. Arbeiðið kann umfata gýting, kleking, startfóðring, aling av yngli og royndir við framleiðslu. Herundir kemur eisini onnur menning og gransking, ið tørvur er á í einari burðardyggari og matvørutryggari alivinnu.
- **Aliøkir:** Endamálið er at menna aliútgerð, ið kann nýtast á aliøkjum við nógvum streymi og stórari aldu. Møguleikar verða harvið at minka um trýstið á verandi økir, samstundis sum nýggj aliøki kunnu økja um framleiðsluna av alifiski í framtíðini.

Stavnhaldið hjá P/F Fiskaaling er við gransking at økja vitanarstøði og framleiðslu innan alivinnu. Stórur dentur verður lagdur á altjóða granskingarsamstarv við granskingarstovnar og vinnulív og á gransking, sum er viðkomandi fyri menning av føroyskari alivinnu. Tað eru í løtuni 11 granskarar tilknýttir P/F Fiskaaling og 1 PhD-lesandi fyri at menna hesi øki:

- Aling av fiski og øðrum sjódjórasløgum
- Aling á harðbalnum økjum/streymasjógvi
- Fóður, vatn og framleiðsluhættir
- Ílegugransking og biotøkni
- Matvørugóðsku úr aldum fiski
- Sjúkufyribyrging, fiskaheilsu og aliumhvørvi

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	9.500	9.500	9.500	9.700	9.700	9.700
01. Royndir						
Útreiðslur	**9.500**	**9.500**	**9.500**	**9.700**	**9.700**	**9.700**
53. Stuðul til vinnu	9.500	9.500	9.500	9.700	9.700	9.700

13.36.1.07. Fiskasjúkutænastur (Rakstrarjáttan)

21. Basan av fiskasjúkum
Føroysk alivinna hevur verið sera illa plágað av ILA, og eru tiltøk framd, sum kunnu tálma

ella basa sjúkuni, soleiðis at vinnan verður ment. Síðsta aliumfarið í hesum sambandi var í 2012. Verkætlanin hevði sera stóran týdning fyri føroyska alivinnu.

Royndarverkætlanin um ILA-koppseting fer yvir til at vera ein yvirvøkuskipan fyri fleiri fiskasjúkur. Kunngerð verður gjørd í hesum sambandi.

Ætlanin er, at frameftir verður viðlíkahald og menning av aliskipanini fíggjað av alifeløgunum, soleiðis at skipanin eisini kann nýtast til yvirvøku av øðrum hóttandi sjúkum í alivinnuni. Hetta krevur tó broyting í gjaldskunngerðini. Aliskipanin er ein elektronisk innrapporteringsskipan sambært rakstrarkunngerðini, ið ger, at Heilsufrøðiliga starvsstovan mánaðarliga fær øll neyðug rakstrartøl beinleiðis frá alarum. Skipanin er ein av hornasteinunum í stýringini av eftirlitsarbeiðinum innan alivinnuna.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	-	-	0	0	0	0
Útreiðslur	-	-	300	300	300	300
Inntøkur	-	-	300	300	300	300
21. Basan av fiskasjúkum						
Nettoútreiðsla	-	-	0	0	0	0
Útreiðslur	**-**	**-**	**300**	**300**	**300**	**300**
14. Keyp av vørum og tænastum	-	-	300	300	300	300
Inntøkur	**-**	**-**	**300**	**300**	**300**	**300**
25. Eftirlits- og umsjónaravgjøld	*-*	*-*	*300*	*300*	*300*	*300*

Handil og vinna annars

13.37.1. Ymsar útreiðslur

13.37.1.07. Sáttmálaeftirlit (Rakstrarjáttan)

Eftir kunngerð nr. 61 frá 23. mai 2002 um at umsita lóg um studning til skipasmiðjur, sum hevur heimild í løgtingslóg nr. 73 frá 20. mai 1996 um studning til skipasmiðjur, sum broytt við løgtingslóg nr. 49 frá 26. mars 2002, er ásett, at føroyskar skipa- og bátasmiðjur og onnur, kunnu søkja Vinnuframa um endurgjald til skipasmíð.

Játtanin er gjald til Vinnuframa fyri at umsita játtan til endurgjald til skipasmíð.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	50	50	50	50	50	50
Útreiðslur	50	50	50	50	50	50
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	50	50	50	50	50	50
Útreiðslur	**50**	**50**	**50**	**50**	**50**	**50**
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	50	50	50	50	50	50

13.37.1.08. Loyvisnevndin (Rakstrarjáttan)

Loyvisnevndin umsitur skeinkiloyvi til rúsdrekka o.a. Játtanin er til at fíggja umsitingina av málsøkinum.

Inntøkurnar frá loyvisgjøldum eru á § 20 Inntøkur, høvuðskonta 20.52.3.10. Aðrar inntøkur.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	186	186	186	186	186	186
Útreiðslur	186	186	186	186	186	186
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	186	186	186	186	186	186
Útreiðslur	**186**	**186**	**186**	**186**	**186**	**186**
11. Lønir v.m.	94	87	175	175	175	175
14. Keyp av vørum og tænastum	92	99	11	11	11	11

13.37.1.15. Brúkaraumboð (Rakstrarjáttan)

Løgtingslóg nr. 19 frá 8. mai 2008 um marknaðarføring kom í gildi 1. januar 2009. Endamálið er at tryggja góðan marknaðarføringssið við atliti til brúkaran, vinnurekandi og samfelagið. Brúkaraumboðið umsitur lógina.

Virksemið hjá Brúkaraumboðnum er at hava eftirlit við, privatum vinnuvirksemi og almennum virksemi, umframt vinnuvirksemi hjá áhugafeløgum og felagsskapum, í tann mun

vørur og tænastur verða bodnar út á marknaðinum, og at fremja góðan marknaðarføringssið til frama fyri brúkaran.

Eftirlitið er býtt í tveir partar. Tann fyrsti parturin eru innkomnar klagur ella mál, sum Brúkaraumboðið av sínum eintingum kann taka upp. Tað er ein sera týðandi partur, tí tað eru klagurnar, sum geva eina greiða mynd av, hvussu stendur til við góðum marknaðarføringssiði í Føroyum.

Tann næsti parturin er upplýsandi. Brúkaraumboðið skal royna at ávirka vinnurekandi og stovnar við at gera og almannakunngera leiðreglur um marknaðarføring á økjum, sum hava stóran týdning, serliga fyri brúkaran.

Brúkaraumboðið kann gera forhandarmeting um ætlað marknaðarføringstiltøk kunnu metast at verða lóglig ella ikki. Tað vil siga, at Brúkaraumboðið kann fáa tilfar og lýsingar sendandi fyri at fyribyrgja, at nakað kemur skeivt fyri, tá ið marknaðarføringstiltøk verða sett í verk.

Í marknaðarføringslógini er ein áseting um eina samráðingarmeginreglu. Tí fer Brúkaraumboðið altíð samráðingarvegin fyri at loysa mál, áðrenn onnur tiltøk sum t.d. áleggingar, forboð og rættarmál verða sett í verk.

Almannamálaráðið og Brúkaraumboðið hava gjørt umsitingarsáttmála, sum Uttanríkis- og vinnumálaráðið hevur góðkent, um at Brúkaraumboðið virkar sum umsiting fyri Leigunevndina, www.leigunevndin.fo.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	990	926	1.100	1.100	1.100	1.100
Útreiðslur	1.234	1.112	1.230	1.230	1.230	1.230
Inntøkur	243	186	130	130	130	130
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	990	926	1.100	1.100	1.100	1.100
Útreiðslur	**1.234**	**1.112**	**1.230**	**1.230**	**1.230**	**1.230**
11. Lønir v.m.	781	838	840	960	960	960
14. Keyp av vørum og tænastum	342	197	200	80	80	80
15. Keyp av útbúnaði, netto	31	-	40	40	40	40
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	79	77	150	150	150	150
Inntøkur	**243**	**186**	**130**	**130**	**130**	**130**
21. Søla av vøru og tænastum	*63*	-	-	-	-	-
76. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	*180*	*186*	*130*	*130*	*130*	*130*

Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Í lønarflokki 37 ella hægri	1,0	1,0	1,0	1,0	1,0	1,0
Onnur	0,5	0,5	0,5	0,5	0,5	0,5
Fulltíðarstørv	1,5	1,5	1,5	1,5	1,5	1,5
Lønarpartur (mió. kr.)	0,8	0,8	0,8	1,0	1,0	1,0

13.37.1.20. Vinnustovnurin (Rakstrarjáttan)

20. Skráseting Føroya
Felagsskrásetingin umsitur parta- og smápartafelagslógina, lógina um vinnurekandi grunnar, ársroknskaparlógina, grannskoðaralógina, § 7, stk. 2-4 í lóg um aling av fiski, lóg um vatn í Sumbiarbergholinum, og skrásetir m.a. nýggj feløg. Felagsskrásetingin hevur eftirlit við, at feløgini lúka øll krøv, sum verða sett til teirra felagshátt, herundir eisini viðvíkjandi lóg um hvítvask. Umsitingarkostnaðurin hjá Skrásetingini verður í høvuðsheitum fíggjaður við gjøldum og frá inntøkum fyri upplýsingar, sum viðskiftafólk biðja um.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið skal støðugt saman við skrásetingini skapa karmar og dagføra lógargrundarlagið innan málsøkið.

Skráseting Føroya umsitur eisini:

- Lov om foreningsregisteret
- Lov om visse erhversdrivende virksomheder
- Lóg um keyp og sølu av fastogn o.a.
- Lóg um vinnu

21. Kappingareftirlitið
Kappingareftirlitið umsitur løgtingslóg nr. 35 frá 3. mai 2007 um kapping. Lógin kom í gildi 1. januar 2008.

Lógin hevur sum endamál at fremja fulldygga samfelagsliga tilfeingisnýtslu til frama fyri fyritøkur og brúkarar. Hetta verður gjørt við at tryggja virkna kapping og soleiðis styrkja virkisførið í framleiðslu og handli við vørum og tænastum o.ø. við mest møguligum gjøgnumskygni viðvíkjandi kappingarviðurskiftum og við tiltøkum ímóti avmarking í vinnufrælsinum og øðrum skaðiligum árinum av kappingaravmarkingum.

Kappingarráðið hevur eftirlit við lógini og reglum ásettar sambært lógini. Til ráðið er knýtt skrivstova, Kappingareftirlitið, sum vegna Kappingarráðið hevur um hendi dagligu umsitingina av kappingarlógini.

Kappingarráðið hevur sum høvuðsuppgávu at hava eftirlit við, at forboðini í kappingarlógini ikki verða brotin. Hesi eru forboð ímóti kappingaravlagandi avtalum og forboð ímóti misnýtslu av marknaðarráðandi støðu. Afturat hesum hevur Kappingarráðið eftirlit við, at samanleggingar, sum kunnu hindra virknari kapping, ikki verða framdar. Kappingarráðið hevur eisini heimild til at venda sær beinleiðis til myndugleikar og vísa á reguleringar, sum eru skaðiligar fyri kappingina og koma við uppskoti um øðrvísi regulering

23. Royndarverkætlan við orkusparing í landsins bygningum						
Nettoútreiðsla	-	-	0	0	0	0
Útreiðslur	**-**	**-**	**3.060**	**3.060**	**3.060**	**3.060**
14. Keyp av vørum og tænastum	-	-	3.060	3.060	3.060	3.060
Inntøkur	**-**	**-**	**3.060**	**3.060**	**3.060**	**3.060**
76. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	*-*	*-*	*3.060*	*3.060*	*3.060*	*3.060*
30. Landsvegahald						
Nettoútreiðsla	44.057	46.394	41.950	41.670	41.670	41.670
Útreiðslur	**46.789**	**48.536**	**44.950**	**44.670**	**44.670**	**44.670**
11. Lønir v.m.	17.243	16.498	18.550	18.450	18.450	18.450
14. Keyp av vørum og tænastum	19.606	19.633	22.150	22.000	22.0 00	22.000
15. Keyp av útbúnaði, netto	878	3.023	20	20	20	20
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	5.141	4.726	4.230	4.200	4.200	4.200
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	-14	-	-	-	-	-
32. Útvegan av løgu o.ø.	450	1.291	-	-	-	-
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	3.485	3.366	-	-	-	-
Inntøkur	**2.732**	**2.142**	**3.000**	**3.000**	**3.000**	**3.000**
21. Søla av vøru og tænastum	*1.773*	*1.530*	*1.750*	*1.750*	*1.750*	*1.750*
42. Søla av løgu o.ø.	*220*	*30*	*-*	*-*	*-*	*-*
76. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	*740*	*581*	*1.250*	*1.250*	*1.250*	*1.250*

35. Havnir

Nettoútreiðsla	4.960	5.167	5.145	5.145	5.145	5.145
Útreiðslur	**5.276**	**5.387**	**6.270**	**6.270**	**6.270**	**6.270**
11. Lønir v.m.	2.629	2.921	3.420	3.420	3.420	3.420
14. Keyp av vørum og tænastum	1.838	1.339	1.840	1.840	1.840	1.840
15. Keyp av útbúnaði, netto	73	94	350	350	350	350
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	331	609	660	660	660	660
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	405	425	-	-	-	-
Inntøkur	**316**	**220**	**1.125**	**1.125**	**1.125**	**1.125**
21. Søla av vøru og tænastum	*268*	*220*	*500*	*500*	*500*	*500*
76. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	*47*	*-*	*625*	*625*	*625*	*625*

38. Flogferðsla

Nettoútreiðsla	903	1.182	1.155	1.155	1.155	1.155
Útreiðslur	**1.430**	**1.765**	**1.930**	**1.930**	**1.930**	**1.930**
11. Lønir v.m.	931	1.218	1.340	1.340	1.340	1.340
14. Keyp av vørum og tænastum	311	375	500	500	500	500
15. Keyp av útbúnaði, netto	55	22	20	20	20	20
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	56	66	70	70	70	70
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	4	7	-	-	-	-
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	74	77	-	-	-	-
Inntøkur	**527**	**583**	**775**	**775**	**775**	**775**
21. Søla av vøru og tænastum	*445*	*583*	*400*	*400*	*400*	*400*
76. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	*83*	*-*	*375*	*375*	*375*	*375*

40. Inntøkufíggjað virksemi

Nettoútreiðsla	158	340	0	0	0	0
Útreiðslur	**65.814**	**80.937**	**72.000**	**72.000**	**72.000**	**72.000**
11. Lønir v.m.	21.215	22.479	20.600	20.600	20.600	20.600
14. Keyp av vørum og tænastum	34.756	46.888	34.400	34.400	34.400	34.400
15. Keyp av útbúnaði, netto	5.845	-342	8.000	8.000	8.000	8.000
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	2.183	9.933	9.000	9.000	9.000	9.000
17. Avskrivingar o.a.	-52	-	-	-	-	-
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	0	34	-	-	-	-
57. Rentuútreiðslur o.a.	0	0	-	-	-	-
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	1.867	1.946	-	-	-	-
Inntøkur	**65.656**	**80.597**	**72.000**	**72.000**	**72.000**	**72.000**
21. Søla av vøru og tænastum	*64.814*	*80.097*	*72.000*	*72.000*	*72.000*	*72.000*
76. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	*842*	*500*	*-*	*-*	*-*	*-*

Undirkonta 20. Landsverksskrivstovan. Av hesi játtan fara útreiðslur til høvuðsleiðslu, skrivstovu, bókhald og aðrar innanhýsis tænastur.

Undirkonta 22. Byggi- og bygningsumsiting landsins. Endamálið við játtanini er at umsita landsins bygningar, bæði byggi- og víðlíkahaldsuppgávur. Við at savna umsitingina hjá Landsverki, verða allar uppgávur loystar á einum staði, sum hava við byggimál landsins at gera. Við at savna vitanina til málsøkið hjá Landsverki er umsitingin munadyggari, betri skipað við langtíðarætlanum, og við møguleikum fyri at optimera nýtsluna. Atlit verður m.a. tikið til umhvørvi, dygd, byggilist og at varðveita landsins bygningar í góðum standi.

Landsverk fyrisitur byggikunngerðina (BK17) frá 1. januar 2017. Uppgávan er at vegleiða kommunum og byggivinnuni sum heild, um ásetingarnar í byggikunngerðini.

Høvuðsuppgávurnar eru millum annað:

- Ný- og umbygging av bygningum landsins
- Viðlíkahald
- Leigumál og keyp
- Studningsmál
- Byggiráðgeving
- Landsplanlegging
- Verkætlanarleiðsla

Størsti parturin av útreiðslunum hjá byggi- og bygningsumsitingini verður fíggjaður av ymsu løguverkætlanunum við innanhýsis flytingum.

Undirkonta 23. Royndarverkætlan við orkusparing í landsins bygningum. Farið er undir "Orkutøk", sum er ein verkætlan, um orkusparing í landsins bygningum, fyri at minka um orkunýtsluna, og samstundis betra landsins bygningar, og minka landsins útreiðslur, sum frálíður. Arbeiðið verður gjørt í tøttum samstarvi við stovnar og føroyska vinnu.

Undirkonta 30. Landsvegahald. Sambært løgtingslóg nr. 51 frá 25. juli 1972 um landsvegir, ger og heldur landið landsvegirnar.

Tey verkevni, sum koma undir haldið, eru býtt soleiðis: Vanligt hald er alt arbeiði at reka og røkja landsvegir, undir hesum eisini tunlar og brýr, og vanligt asfalteringsviðlíkahald. Seta upp skelti og strípa vegir, eftirlit við bygging fram við landsvegi og íbindingum, umframt ferðsluteljingar og aðrar skrásetingar. Vetrarhaldið tekur sær av fráboðanum um koyrilíkindini, kavarudding og ástroying fyri hálku. Asfaltering er asfaltering í sambandi við at halda landsvegir. Harumframt arbeiðir Deildin fyri Infrakervið við langtíðarætlanum innan flutningskervið. Játtanin kann eisini nýtast til at seta upp skelti í sambandi við ferðavinnu og ferðslu annars í Føroyum.

Landsvegirnir eru 477 kilometrar samanlagt, av hesum eru 32 kilometrar tunlar. Vágatunnilin og Norðoyartunnilin eru ikki íroknaðir.

Undirkonta 35. Havnir. Játtanin er ætlað til:

- At halda ferjulegurnar/samferðsluhavnirnar, ið landið eigur á Gomlurætt, á Krambatanga, og á Syðradali (Kalsoy), og ferjulemmarnar á teim kommunalu ferjulegunum o.a.
- At halda anodur sambært løgtingslóg nr. 24 frá 9. mai 1968.
- At gera lendisskipanir á firðum og sundum og at útvega neyðuga vitan í hesum sambandi, t.d. veðurmátingar og aldu- og streymmátingar.
- At gera sjóuppmátingar í sambandi við at dagføra dýpdarkort og sjókort.
- At tryggja, at sum mest fæst burtur úr havnaíløgunum kring oyggjarnar, og at umsita studningsjáttanir til kommunal havnaarbeiði.
- At hava eftirlit o.t. við kommunalum vitum, siglingarljósum og avmerkingum.
- At ráðleggja um lendisskipanir í sambandi við aling á sjónum.
- At veita kommununum tænastur í sambandi við at reka og at halda havnir og lendingar.
- At hava eftirlit við og góðkenna ISPS havnir (trygdargóðkenning).

Játtanin kann eisini verða nýtt til onnur endamál innan havnaøkið, í tann mun tørvur er á tí.

Undirkonta 38. Flogferðsla. Játtanin verður nýtt til at reka tyrlupallarnar kring oyggjarnar. Játtanin kann eisini nýtast til at kanna flogvallarviðurskifti í Føroyum.

Undirkonta 40. Inntøkufíggjað virksemi. Raksturin av inntøkufíggjaðum virksemi skal hvíla í sær sjálvum. Landsverk knúsar skerv og ger asfalt og hevur sostatt skyldu at tæna bæði privatum og almennum fyritøkum á besta hátt. Landsverk ger arbeiði fyri og veitir ráðgeving til aðrar landsstovnar, kommunur, feløg og einstaklingar.

Alt vøru- og tænastuvirksemi, t.d. á skerv- og asfaltverkum, sum Landsverk fremur fyri onnur og til sín sjálvs, verður skrásett undir inntøkufíggjaðum virksemi.

Amboð/smiðjur fevnir um alt arbeiðið viðvíkjandi at reka og røkja amboð, sum Landsverk hevur um hendi, umframt at keypa nýggj amboð. Skerv- og asfaltverk fevnir um alt arbeiðið at reka og røkja hesi verk, og útreiðslur at keypa asfalt og at framleiða hetta.

17.38.1.07. Nýggir landsvegir (Løgujáttan)

Játtanin verður brúkt til at útbyggja og bøta um vegakervið kring landið við tí endamáli at fáa eina so munadygga og trygga ferðslu sum gjørligt. Sum meginregla verða øll arbeiði boðin út. Útreiðslujáttanin til landsvegagerð er 34,6 mió. kr. í 2018, og verður játtanin nýtt til 14 endamál.

Dagføring av brúm og tunlum
Landsverk hevur í nógv ár boðað frá, at játtanin til viðlíkahald er alt ov lág. Játtanin er minkað, sjálvt um kostnaðarstøðið er hækkað, nýggir landsvegir eru gjørdir, og størri dygdarkrøv og trygdarkrøv verða sett. Hetta hevur gingið út yvir viðlíkahaldið av føroyska vegakervinum, herímillum tunlar og brýr.

Samlaða eftirsleipið á undirstøðukervi landsins verður mett til at verða umleið 375 mió. kr. Hetta er samlaði tørvurin á játtan til viðlíkahald og dagføring av vegum, tunlum, brúm og annað.

Í 2018 eru 3,0 mió. kr. játtaðar til endamálið. Sostatt er neyðugt við munandi hægri játtan næstu árini til viðlíkahald og dagføring av brúm og tunlum.

Innkoyringarvegur til Tórshavn
Endamálið við innkoyringarvegnum er at leiða ferðsluna uttan um Havnina og inn til býin við íbindingarvegum.

Nógv ferðsla er til og frá Tórshavn, og fer ferðslan at vaksa enn meira tá Eystoyartunnilin verður tikin í nýtslu í 2020. Verandi innkoyring til býin er ikki hóskandi til ferðsluna í dag. Ein partur av innkoyringarvegnum er bygdur, tí játtan hevur verið til endamálið í fleiri umførum. Talan er um vegateinin frá Klingruni yvir til Sundsvegin.

Higartil eru umleið 37,0 mió. kr. nýttar. Játtanin til innkoyringarvegin er 6,5 mió. kr. í 2018.

Trygdartiltøk, størri ábøtur og umvælingar
Játtanin verður nýtt til at bøta um verandi samferðslukervi, soleiðis at trygdin verður betri á

landsvegunum. Talan kann verða um ábøtur á brýr, tunlar, vegir, íbindingar, busslummar og tílíkt. Í 2018 eru 4,6 mió. kr. játtaðar til endamálið.

Vegagerð í Kalsoy, vegir og tunlar
Arbeiðið fevnir um ábøtur og liðugtgerð av øllum vegakervinum á oynni, herímillum eisini tunlar, sum ongantíð eru gjørdir lidnir. Endamálið er at dagføra samferðslukervið á Kalsoynni. Í 2018 eru 1,0 mió. kr. játtaðar til endamálið.

Hvalbiartunnil
Hvalbiartunnilin verður raðfestur. Arbeitt verður við at prosjektera verkætlanina, og verður farið undir at fáa lendi til vega til vegagerðina, og at fyrireika sjálva byggingina av vegum og tunlinum í 2018. Farið verður eftir ætlan undir at bora tunnilin í 2019.

Tað eru játtaðar 3,0 mió. kr. til verkætlanina í 2018.

Søla av jørð til kommunur
Endamálið við játtanini er at hava heimild til at selja lendi til kommunur.

Tjørnuvíkarvegurin, tryggjan
Ymisk tiltøk eru gjørd til tess at tryggja Tjørnuvíkarvegin. Eitt nú er trygdarhegn sett upp á einum strekki, og vegurin er bøttur í støðum. Tað eru játtaðar 1,0 mió. kr. til Tjørnuvíkarvegin í 2018.

Selatraðarvegurin
Vegurin til Selatraðar er ein smalur einbreytaður vegur, har undirlendi er vánaligt í støðum. Tað hevur ongantíð verið játtað til eina samlaða dagføring av vegnum, og hevur Landsverk tí valt at dagføra og umvæla ringastu strekkini, tá játtan hevur verið til endamálið. Tað eru játtaðar 1,5 mió. kr. til at bøta um Selatraðarvegin í 2018.

Farleið til Dals, tryggja verandi veg
Ein stórur partur av Dalsvegnum liggur í brattlendi, har trupulleikar eru av skriðulopum og at grót kemur á vegin. Tað er eisini máað undan vegnum í støðum. Fyri at tryggja vegin, er ætlanin at flyta ein part av vegnum longur inn, og at ein veit verður grivin í ovara borði at verja móti gróti.

Prosjekt er gjørt til at bøta um umleið 500 metrar av vegnum, har vegurin er í ringasta standi. Hetta verður mett til at kosta umleið 5 til 6 mió. kr. Í 2017 vóru 1,0 mió. kr. játtaðar til Dalsvegin, sum varð brúkt til at tryggja ein part av vegnum móti gróti, og at fyrireika at breiðka strekkið, har vegurin er í ringasta standi.

Tað eru játtaðar 1,0 mió. kr. til farleiðina til Dals í 2018. Sí eisini játtanina til "Tunnilslið" niðanfyri.

Ferðsluætlan Vágar
Tað er umráðandi at skúlabørn úr Sandavági og Miðvági, kunnu koma trygt til og frá skúlanum á Giljanesi. Tað eru játtaðar 1,0 mió. kr. í 2018 til at betra ferðsluviðurskiftini á staðnum.

Tunnilslið
Eitt tunnilslið verður skipað, sum eftir ætlan skal bora tunlar til smærru bygdirnar, so sum til

Fámjin, til Dals, Tjørnuvíkar og til Gjáar, so langt sum játtanin røkkur á hvørjum ári. Ásannast má at tað ikki hevur borið til at fingið játtanir til vega til smærru farleiðirnar, og besta loysn er mangan at tunnil verður gjørdur. Tað eru játtaðar 7,0 mió. kr. til endamálið í 2018.

Suðuroyartunnil, forkanningar
Eftir ætlan verður farið undir Suðuroyartunnilin, tá Sandoyartunnilin er liðugur. Víst verður á eina loysn, har tunnilin fer av Sandi yvir Skúvoy til Sandvíkar. Jarðfeingi hevur gjørt eitt tilmæli til Landsverk um, hvørjar jarðfrøðiligar kanningar eiga at verða gjørdar fyri at hava eitt haldgott grundarlag fyri at fara undir verkætlanina. Tað eru játtaðar 500 tús. kr. til jarðfrøðiligar kanningar í 2018.

Runavík, Fjøruvegurin
Eysturoyartunnilin verður eftir ætlan liðugur í 2020, og merkir tað økta ferðslu eystaru megin við Skálafjørðin. Fyri at betra ferðsluviðurskiftini er ein møguleiki at gera veg frá tunnilsmunnanum í Rókini, framvið fjøruni og havnalagnum í Runavík, til Bakkavegin á Glyvrum. Tað eru játtaðar 2,5 mió. kr. í 2018 til verkætlanina, og verður upphæddin brúkt til at prosjektera vegin.

Oyndarfjarðarvegurin
Vegurin til Oyndarfjarðar er ótíðarhóskandi. Ein partur av vegnum liggur høgt og vegurin er brættur, meðan aðrastaðni er vegurin slættur og í láglendi, men sera smalur. Tað eru játtaðar 1,0 mió. kr. í 2018 til at tryggja vegin.

Froðbiarvegurin
Froðbiarvegurin er landsvegur frá gamla grótbrotinum og eystureftir. Vegurin er smalur og ótíðarhóskandi. Eitt strekki var breiðkað í sambandi við at kaðalarbeiði var gjørt í 2017, og er ætlanin at gera arbeiði liðugt í ár. Tað eru játtaðar 1,0 mió. kr. í 2018 til at breiðka vegin.

Átekning

Landsstýrismanninum verður heimilað at flyta óbrúkta játtan til seinni fíggjarár.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	95.409	64.662	11.100	34.600	48.100	71.600
Inntøkujáttan	-	-75	100	100	100	100
10. Nýgerð av landsvegum						
Útreiðslur	**95.409**	**64.662**	**11.100**	**34.600**	**48.100**	**71.600**
11. Lønir v.m.	1.382	83	-	-	-	-
14. Keyp av vørum og tænastum	823	612	-	-	-	-
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	-2.205	-2.636	-2.800	-2.800	-2.800	-2.800
31. Bygging og løguframleiðsla	95.041	64.632	11.100	34.600	48.100	71.600
32. Útvegan av løgu o.ø.	319	30	-	-	-	-
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	48	1.941	2.800	2.800	2.800	2.800
Inntøkur	**-**	**-75**	**100**	**100**	**100**	**100**
21. Søla av vøru og tænastum	-	*-75*	-	-	-	-
42. Søla av løgu o.ø.	-	-	*100*	*100*	*100*	*100*

Virksemisyvirlit: 10 Nýgerð av landsvegum

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
A: Høvuðsendamál (netto) (1.000 kr.)	**95.409**	**64.737**	**11.000**	**34.500**	**48.000**	**71.500**
1. Øravík- Hov	-	-	-	-	-	-
2. Dagføring av brúm og tunlum	3.440	3.093	3.000	3.000	5.000	5.000
3. Vegurin omanfyri Skálafjørð	-	9	-	-	-	5.000
4. Innkoyringarvegur til Tórshavn, íbinding	3.387	572	-	6.500	-	-
5. Funningsfjarðavegurin	-	-	-	-	-	-
6. Trygdartiltøk, størri ábøtur og umvælingar	5.477	6.299	5.100	4.600	6.100	6.100
7. Rituvíkarvegurin	-	-	-	-	-	-
8. Vegagerð í Kalsoy, vegir og tunlar	1.977	1.914	2.000	1.000	2.000	-
9. Vegagerð í Leirvík	456	-	-	-	-	-
10. Hvalbiartunnilin	-	1.307	-	3.000	18.000	33.000
11. Søla av jørð til kommunur	-	-	-100	-100	-100	-100
12. Farleið til Viðareiðis	72.789	43.826	-	-	-	-
13. Íbinding í Hósvík	-	-	-	-	-	-
14. Vegurin til Akrar	-	-	-	-	-	-
15. Norðoyri	-	-	-	-	-	-
17. Í Oyrunum, Toftir	-	-	-	-	-	-
18. Undir Valaknúkum-Undir Gøtueiði, breiðkan	902	1.254	-	-	-	-
19. Søldafjørður, umkoyringarvegur	-	-	-	-	-	-
20. Ferðsluætlan, Vágar	4.085	1.726	-	1.000	-	-
21. Íbinding við Sjógv í Kollafirði	-	-	-	-	-	-
22. Farleiðs til Dals, tryggja verandi veg	139	-	1.000	1.000	-	7.500
23. Signabøur, Oyrareingir	38	-	-	-	-	-
24. Veðurstød í Fámjin	-	-	-	-	-	-
25. Vegurin til Múla	239	760	-	-	-	-
26. Ábøtur á høvuðsveg í Hvalba	248	-	-	-	-	-
27. Omankoyring, Kvívík	2.126	1.140	-	-	-	-
28. Skúlaleið millum Stykkið og Kvívík	-	2.824	-	-	-	-
29. Tjørnuvíkarvegurin, tryggjan	48	-	-	1.000	2.000	2.000
30. Inni í Firði, Kollafjørður	-	-	-	-	1.000	1.000
31. Farleið til Vestmanna	58	13	-	-	5.000	5.000
32. Tunnilslið	-	-	-	7.000	7.000	7.000
33. Selatraðarvegurin	-	-	-	1.500	2.000	-
34. Suðuroyartunnil, forkanningar	-	-	-	500	-	-
35. Runavík, Fjøruvegurin	-	-	-	2.500	-	-
36. Froðbiarvegurin	-	-	-	1.000	-	-
37. Oyndarfjarðarvegurin	-	-	-	1.000	-	-

17.38.1.14. Havnir (Løgujáttan)

Smáábøtur

Tað er stórur tørvur á at gera ábøtur á landsins samferðsluhavnir og ferjulegur. Tað eru játtaðar 2,2 mió. kr. til endamálið í 2018.

Samferðsluhavnin á Syðradali

Tað eru játtaðar 500 tús. kr. til at tryggja atløguviðurskiftini í samferðsluhavnini á Syðradali á Kalsoynni.

Mykines

Tað eru játtaðar 500 tús. kr. til trygdartiltøk á lendingini í Mykinesi.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	4.353	15.157	3.100	3.200	2.200	2.200
10. Nýgerð av havnum						
Útreiðslur	**4.353**	**15.157**	**3.100**	**3.200**	**2.200**	**2.200**
11. Lønir v.m.	156	4	-	-	-	-
14. Keyp av vørum og tænastum	10	-	-	-	-	-
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	-166	-236	-180	-180	-180	-180
31. Bygging og løguframleiðsla	4.353	12.755	3.100	3.200	2.200	2.200
32. Útvegan av løgu o.ø.	-	26	-	-	-	-
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	-	232	180	180	180	180
72. Flytingar frá landi til kommunur	-	2.376	-	-	-	-

Virksemisyvirlit: 10 Nýgerð av havnum

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
A: Høvuðsendamál (1.000 kr.)	**4.354**	**15.157**	**3.100**	**3.200**	**2.200**	**2.200**
1. Skopun, innsiglingin	2.209	-	-	-	-	-
2. Samferðsluhavnin í Suðuroy	810	9.971	-	-	-	-
3. Havn í Svínoy, og viðlíkahald	36	2.376	900	-	-	-
4. Smáábøtur	0	2.159	2.200	2.200	2.200	2.200
5. Havnagerð í Hvannasundi	1.299	651	-	-	-	-
6. Samferðsluhavnin á Syðradali	-	-	-	500	-	-
7. Mykines, lendingin	-	-	-	500	-	-

17.38.1.18. Stuðul til infrakervið á útoyggjum (Stuðulsjáttan)

Málsøkið verður fyrisitið við heimild í lógtingslóg nr. 137 frá 13. desember 2005, og kunngerð nr. 10 frá 7. mars 2006, um at veita stuðul til íløgur í infrakervið á útoyggj. Endamálið við lógini er at skapa fyritreytir fyri at betra um trivnaðin og vinnuligu møguleikarnar á útoyggjum.

Landsstýrismaðurin kann eftir umsókn veita kommunum stuðul til íløgur í infrakervið til byggi- og løguarbeiði viðvíkjandi samferðslu, og byggi- og løguarbeiði til vinnulig, mentanarlig, ítróttarlig og onnur endamál. Útoyggjar, sum koma undir hesa skipan, eru Fugloy, Svínoy, Kalsoy, Mykines, Hestur, Koltur, Skúvoy og Stóra Dímun.

Stuðulin skal verða innanfyri karmarnar í § 50 í Kommunustýrislógini, har tað m.a. er ásett, at kommunur einans kunnu taka lut í vinnuligum virksemi, um so er, at tað tænir einum almannagagnligum endamáli.

Tilsagnir um stuðul kunnu verða veittar av árligu játtanini í tveimum fylgjandi fíggjarárum. Landsverk umsitur játtanina. Í teimum førum, tá kommunur standa fyri arbeiðinum, verður stuðulin goldin eftir skjalprógvaðum útreiðslum, tá arbeiðið er sýnað og góðkent.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	366	567	700	700	700	700
01. Stuðul						
Útreiðslur	**366**	**567**	**700**	**700**	**700**	**700**
54. Stuðul til annað virksemi	146	-	-	-	-	-
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	-	300	-	-	-	-
72. Flytingar frá landi til kommunur	220	267	700	700	700	700

17.38.2. Samferðsla

17.38.2.01. Strandfaraskip landsins (Rakstrarjáttan)

Strandfaraskip Landsins verða rikin sambært reglugerð frá 30. juli 2015. Høvuðsuppgávan hjá Strandfaraskipum landsins er at lúka landsins tørv á innanlands fólka- og farmaflutningi. Sum landsfyritøka skal Strandferðslan í so stóran mun sum gjørligt rekast á handilsligum støði. Virksemið á Oyggjaleiðum er harumframt skipað eftir løgtingslóg nr. 82 frá 15. mai 2001 um fólka- og farmaflutning.

Rakstrarjáttan stovnsins verður 149,3 mió. kr. í 2018. Rakstrarútreiðslurnar verða mettar til 215,9 mió. kr., og inntøkurnar verða mettar til 66,6 mió. kr. Játtanin er ásett við støði í millum annað hesum fortreytum:

- Dokkingar av øllum ferjum, undantikið Smyrli, størri viðlíkahald og tólbúnaður, sum áður varð játtað undir løgum, varð flutt til rakstur í 2016. Í 2018 umleið 9 mió kr.
  Siglt verður allar dagar í árinum, tó við skerdari ferðaætlan ávísar dagar
- Oljuprísurin er prístryggjaður til árslok 2018
- Herd lógarkrøv sambært MLC hava við sær økta hvílitíð, økt manningartal, og minni tøka arbeiðstíð
- SSL hava ongan eykabát til sítt virksemi, og leigar bátar tá skip eru í dokk, í ólagi ella annað
- Á Oyggjaleiðum hækkar ferðfólkatalið og tessvegn inntøkur stovnsins.

Strandferðslan er sáttmálabundin á fleiri økjum, millum annað busssáttmálum hjá Bygdaleiðum, avtalum um havnargjøld, og lønarsáttmálum. Bæði inntøkur og útreiðslur eru tengdar at gongdini í búskapinum. Inntøkurnar eru í stóran mun tengdar at virkseminum á stóru oyggjunum.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	133.226	148.930	147.541	149.288	149.288	149.288
Útreiðslur	197.582	217.070	209.541	215.944	215.944	215.944
Inntøkur	64.356	68.140	62.000	66.656	66.656	66.656
20. Landsfyritøka						
Nettoútreiðsla	133.226	148.930	147.541	149.288	149.288	149.288
Útreiðslur	**197.582**	**217.070**	**209.541**	**215.944**	**215.944**	**215.944**
11. Lønir v.m.	73.395	79.444	78.820	79.380	79.380	79.380
14. Keyp av vørum og tænastum	104.676	107.983	105.800	105.600	105.600	105.600
15. Keyp av útbúnaði, netto	2.009	1.580	621	630	630	630
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	16.792	27.158	23.800	29.700	29.700	29.700
17. Avskrivingar o.a.	1	-21	-	-	-	-
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	438	660	500	370	370	370
52. Tilskot til einstaklingar	267	290	-	294	294	294
57. Rentuútreiðslur o.a.	0	-41	-	-	-	-
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	4	18	-	-30	-30	-30
Inntøkur	**64.356**	**68.140**	**62.000**	**66.656**	**66.656**	**66.656**
21. Søla av vøru og tænastum	*63.819*	*67.502*	*62.000*	*66.100*	*66.100*	*66.100*
67. Rentuinntøkur og vinningsbýti	*2*	-	-	-	-	-
76. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	*535*	*639*	-	*556*	*556*	*556*

Virksemisyvirlit: 20. Landsfyritøka

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
A: Aðrar inntøkur (1.000 kr.)	**19.117**	**19.832**	**17.959**	**17.904**	**17.904**	**17.904**
Bygdaleiðir	17.401	18.194	16.774	16.440	16.440	16.440
Farstøðir og avgreiðslur	1.716	1.638	1.185	1.464	1.464	1.464
B: Aðrar útreiðslur (1.000 kr.)	**69.562**	**70.679**	**70.859**	**70.990**	**70.990**	**70.990**
Bygdaleiðir	45.445	45.922	46.189	45.557	45.557	45.557
Farstøðir og avgreiðslur	12.065	12.497	12.913	13.541	13.541	13.541
Fyrisiting	12.052	12.260	11.757	11.892	11.892	11.892

Virksemisyvirlit: 20. Landsfyritøka

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
A: Inntøkur Oyggjaleiðir (1.000 kr.)	**44.702**	**47.670**	**44.041**	**48.202**	**48.202**	**48.202**
Suðuroy	30.581	32.157	28.661	31.755	31.755	31.755
Sandoy	8.859	9.878	10.040	10.418	10.418	10.418
Nólsoy	2.136	2.227	1.970	2.506	2.506	2.506
Kallsoy	2.164	2.043	1.915	2.415	2.415	2.415
Fugloy	545	502	620	621	621	621
Skúvoy	154	176	140	300	300	300
Mykines	263	687	695	187	187	187
B: Útreiðslur Oyggjaleiðir (1.000 kr.)	**128.020**	**146.391**	**138.682**	**144.954**	**144.954**	**144.954**
Suðuroy	76.007	86.161	80.100	82.594	82.594	82.594
Sandoy	19.918	23.668	23.742	23.000	23.000	23.000
Nólsoy	11.513	14.754	12.255	12.933	12.933	12.933
Kallsoy	6.845	7.083	7.822	8.550	8.550	8.550
Fugloy	5.333	5.508	5.125	5.276	5.276	5.276
Skúvoy	2.702	3.222	3.164	4.222	4.222	4.222
Mykines	1.223	1.037	1.758	1.792	1.792	1.792
Sjódeild, fyrisiting	4.479	4.958	4.716	6.587	6.587	6.587

Starvsfólkayvirlit: 20 Landsfyritøka

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Í lønarflokki 37 ella hægri	1,0	1,0	1,0	1,0	1,0	1,0
Onnur	144,0	147,0	147,0	147,0	147,0	147,0
Fulltíðarstørv	145,0	148,0	148,0	148,0	148,0	148,0
Lønarpartur (mió. kr.)	73,4	79,4	78,8	79,4	79,4	79,4

17.38.2.02. Strandfaraskip landsins (Løgujáttan)

Ein partur av langtíðarløguætlanini hjá landinum er at endurnýggja skipaflotan hjá Strandfaraskipum landsins.

Ritan varð umbygd í 2010 og sett til at røkja Svínoyarleiðina og Fugloyarleiðina, og Másin varð seldur. Ternan varð sama ár sett til at røkja Nólsoyarleiðina, eftir at neyðugar tillagingar vóru gjørdar. Nýtt skip varð keypt til Skúvoyarleiðina í 2013, og fór nýggi Sildberin at sigla í 2014.

Hóast hesar betringar er neyðugt at endurnýggja flotan, tí flestu av smærru skipunum eru gomul.

Sum støðan er nú, leigar Strandfaraskip landsins privatar ferðafólkabátar. Tað er kostnaðarmikið, og eru leigubátarnir upptiknir í øðrum rakstri stóran part av árinum. Tessvegna er trupult at leggja dokkingar og rakstur til rættis. Strandfaraskip landsins hava tí sera stóran tørv á einum tíðarhóskandi avloysaraskipi ella eykaskipi, soleiðis at stovnurin kann røkja sína flutningsskyldu til fulnar, bæði viðvíkjandi dokkingum, tá ið okkurt av skipunum gerst í ólagi, ella okkurt annað hendir. Um Strandferðslan hevði egið eykaskip hevði tað havt við sær rakstrarsparingar og størri fleksibilitet.

Verklagslógin um at byggja nýggja Nólsoyarferju fór úr gildi 31. desember 2015.

Tað eru játtaðar 3,5 mió. kr. í 2018 til at lúka tey krøv sum klassin setur til Smyril, til tess at skipið kann sigla.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	10.748	2.463	22.500	3.500	21.500	-
01. Sandoyarskip						
Útreiðslur	**2.012**	**726**	**-**	**-**	**-**	**-**
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	-	211	-	-	-	-
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	-	-211	-	-	-	-
31. Bygging og løguframleiðsla	2.012	726	-	-	-	-
03. Suðuroyarskip						
Útreiðslur	**3.383**	**531**	**22.500**	**3.500**	**21.500**	**-**
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	-	-	14.500	-	10.000	-
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	-	-	2.000	-	-	-
31. Bygging og løguframleiðsla	3.383	11	6.000	3.500	11.500	-
32. Útvegan av løgu o.ø.	-	520	-	-	-	-
05. Ternan						
Útreiðslur	**1.149**	**-**	**-**	**-**	**-**	**-**
31. Bygging og løguframleiðsla	1.149	-	-	-	-	-
16. Nólsoyarskip						
Útreiðslur	**843**	**-**	**-**	**-**	**-**	**-**
31. Bygging og løguframleiðsla	843	-	-	-	-	-
21. Umvælingar av smærru skipunum						
Útreiðslur	**1.905**	**-**	**-**	**-**	**-**	**-**
31. Bygging og løguframleiðsla	1.905	-	-	-	-	-
22. Sam						
Útreiðslur	**-**	**1.206**	**-**	**-**	**-**	**-**
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	-	440	-	-	-	-
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	-	-440	-	-	-	-
31. Bygging og løguframleiðsla	-	1.206	-	-	-	-
23. Størri tólbúnaður						
Útreiðslur	**1.456**	**-**	**-**	**-**	**-**	**-**
15. Keyp av útbúnaði, netto	1.456	-	-	-	-	-

17.38.2.04. Tyrlutænastan (Rakstrarjáttan)

Nýggjur høvuðssáttmáli er gjørdur millum Føroya Landsstýri og Atlantsflog, fyri tíðarskeiðið 1. januar 2016 til og við 31. desember 2025, um flúgving millum oyggjarnar við tyrlu. Endamálið er at hava gott ferðasamband, serliga til útoyggjar.

Samlaði kostnaðurin er 44,4 mió. kr. árliga. Parturin hjá Samferðslumálaráðnum er 14,3 mió. kr.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	10.100	14.300	14.300	14.300	14.300	14.300
Útreiðslur	10.100	14.300	14.300	14.300	14.300	14.300
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	10.100	14.300	14.300	14.300	14.300	14.300
Útreiðslur	**10.100**	**14.300**	**14.300**	**14.300**	**14.300**	**14.300**
14. Keyp av vørum og tænastum	10.100	14.300	14.300	14.300	14.300	14.300

17.38.2.09. Vága floghavn (Løgujáttan)

Í sambandi við útbygging av flogvøllinum var neyðugt lendi og tilfar ognartikið. Partafelagið hevur rindað fyri og eigur ognina. Málið um endurgjald til eigararnar er sostatt endaliga avgreitt.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	-	-	11.000	-	-	-
Inntøkujáttan	-	-	11.000	-	-	-
10. Vága floghavn						
Útreiðslur	**-**	**-**	**11.000**	**-**	**-**	**-**
32. Útvegan av løgu o.ø.	-	-	11.000	-	-	-
Inntøkur	**-**	**-**	**11.000**	**-**	**-**	**-**
42. Søla av løgu o.ø.	-	-	*11.000*	-	-	-

17.38.2.13. Flogferðsla (Løgujáttan)

Eingin játtan er til tyrlupallar í 2018.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	-	405	-	-	-	-
Inntøkujáttan	-	300	-	-	-	-
10. Útbygging av tyrlupallum						
Útreiðslur	**-**	**405**	**-**	**-**	**-**	**-**
14. Keyp av vørum og tænastum	-	22	-	-	-	-
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	-	278	-	-	-	-
31. Bygging og løguframleiðsla	-	93	-	-	-	-
32. Útvegan av løgu o.ø.	-	11	-	-	-	-
Inntøkur	**-**	**300**	**-**	**-**	**-**	**-**
76. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	-	*300*	-	-	-	-

17.38.2.21. Stuðul til útoyggjar (Stuðulsjáttan)

Sambært løgtingslóg nr. 86 frá 14. desember 1998 um útjavningarstuðul til útjaðaraøki, er heimilað at javna ein part av meirkostnaðinum av at flyta olju og annan farm til fastbúgvandi í útjaðaraøkjum í Føroyum.

Útjaðaraøki eru eftir hesi lóg at skilja sum Fugloy, Svínoy, Kalsoy, Mykines, Nólsoy, Hestur, Koltur, Skúvoy og Stóra Dímun.

Flestu vørur, sum stuðul annars verður veittur til, er til flutning av landbúnaðarvørum, umframt smápakkum.

Stuðulin verður fyrisitin eftir reglugerð frá 7. februar 2006, fyri útjavningarstuðul til útjavningarøki. Flutningsfeløgini Strandfaraskip landsins, Posta og Atlantsflog umsita skipanina, og hava tey higartil fingið ávikavist 550 tús. kr., 100 tús. kr. og 350 tús. kr. í stuðli til endamálið.

Samferðslumálaráðið skal eftir lokið fíggjarár hava útgreinaðan roknskap við grannskoðaraváttan.

Játtanin er hækkað við 300 tús. kr. í 2018.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	985	1.186	1.000	1.300	1.300	1.300
01. Stuðul						
Útreiðslur	**985**	**1.186**	**1.000**	**1.300**	**1.300**	**1.300**
54. Stuðul til annað virksemi	450	547	1.000	1.300	1.300	1.300
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	535	639	-	-	-	-

17.38.2.25. P/F Eystur- og Sandoyartunlar (Stuðulsjáttan)

Almenna partafelagið Eystur- og Sandoyartunlar var stovnað í 2014. Felagið skal byggja og reka Eysturoyartunnilin og Sandoyartunnilin, sum er ein samlað verkætlan. Endamálið er at binda føroyska samfelagið enn meira saman. Tað styttir um dagligu farleiðina hjá sera nógvum borgarum, betrar vinnumøguleikarnar, og stimbrar búskaparvøkstur í Føroyum.

Fyrst verður Eysturoyartunnilin gjørdur, og síðan Sandoyartunnilin.

Eysturoyartunnilin er tilsamans 11 kilometrar, harumframt kemur vegagerð. Farið varð undir at bora í januar 2017, og gongur arbeiðið væl. Sjálv byggitíðin er 3 - 4 ár, og verður tunnilin liðugur í 2020. Tunnilin fer at stytta farleiðina millum Tórshavn og Runavík/Strendur úr 55 kilometrum niður til 17 kilometrar.

Fyrireikingarnar í sambandi við Sandoyartunnilin halda fram, og tá borað er ígjøgnum í Eysturoyartunlinum, verður farið undir at bora Sandoyartunnilin. Tó í seinasta lagi í 2018.

Eftir langtíðarløguætlanini setur landið 400 mió. kr. í felagið fram til 2024. Tað eru játtaðar 35,0 mió. kr. í 2018.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	5.000	25.000	35.000	35.000	35.000	50.000
01. P/F Eystur- og Sandoyartunlar						
Útreiðslur	**5.000**	**25.000**	**35.000**	**35.000**	**35.000**	**50.000**
81. Keyp av virðisbrøvum	5.000	25.000	35.000	35.000	35.000	50.000

17.38.4. Ferðslutrygd

17.38.4.01. Akstovan (Rakstrarjáttan)

Akstovan umsitur akfarseftirlit, skrásetir og umskrásetir akfør, útvegar koyrikort og krevur inn vegskatt og avgjøld á motorakførum. Virksemið hjá Akstovuni verður fíggjað við tænastugjøldum, sum eru ásett í løgtingslóg nr. 14 frá 2. mars 1988 um ferðslu, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 94 frá 6. juni 2017.

Uppgávurnar hjá Akstovuni, sambært ferðslulógini og kunngerðum, eru hesar:

- akfarseftirlit, undir hesum regluligt sýn, umsýn og skrásetingarsýn
- umsita klippilista fyri akfør, sum ikki hava møtt til sýn og umsýn
- kanning av skaddum akførum við álvarsamar ferðsluvanlukkur
- veita øðrum myndugleikum atstøðu við viðgerð av ferðslumálum
- skráseting av nýggjum akførum og umskráseting av brúktum akførum
- umsita klippilista fyri akfør sum skylda trygging
- stíla fyri ástøðiligum og verkligum koyriroyndum
- útvega fólki koyrikort
- stíla fyri eftiransandi koyriroyndum
- viðgera heilsumál og fremja vegleiðandi heilsuligar koyriroyndir í sambandi við koyrikortmál
- fyrireikandi lógararbeiði í sambandi við broyting í ferðslulóg og kunngerðum

Uppgávurnar hjá Akstovuni sambært løgtingslóg um vektgjald, eru hesar:

- senda hálvárlig krøv og áminning til allar eigarar av gjaldsskyldugum akførum
- krevja inn vegskattaeftirstøður og senda bilar til plátumiss, sum ikki gjalda rættstundis

Uppgávurnar hjá Akstovuni sambært løgtingslóg um avgjøld á motorakførum, eru hesar:

- krevja inn skrásetingargjøld í sambandi við skráseting av motorakførum
- krevja inn burturbeiningargjøld í sambandi við skráseting av motorakførum og skráseta burturbeining av motorakførum
- útgjalda skrásetingargjøld í sambandi við útflutning av motorakførum

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	-329	-1.403	-1.000	-1.000	-1.000	-1.000
Útreiðslur	14.189	14.025	13.790	14.295	14.295	14.295
Inntøkur	14.517	15.428	14.790	15.295	15.295	15.295
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	-329	-1.403	-1.000	-1.000	-1.000	-1.000
Útreiðslur	**14.189**	**14.025**	**13.790**	**14.295**	**14.295**	**14.295**
11. Lønir v.m.	7.523	7.797	8.100	8.200	8.200	8.200
14. Keyp av vørum og tænastum	4.657	4.490	4.325	4.460	4.460	4.460
15. Keyp av útbúnaði, netto	1.150	785	600	770	770	770
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	858	953	765	865	865	865
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	0	-1	-	-	-	-
57. Rentuútreiðslur o.a.	0	0	-	-	-	-
Inntøkur	**14.517**	**15.428**	**14.790**	**15.295**	**15.295**	**15.295**
21. Søla av vøru og tænastum	*181*	*174*	*167*	*172*	*172*	*172*
25. Eftirlits- og umsjónaravgjøld	*61*	*41*	*43*	*43*	*43*	*43*
62. Kravd gjøld, bøtur o.a.	*14.276*	*15.214*	*14.580*	*15.080*	*15.080*	*15.080*

Virksemisyvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
A: Høvuðsendamál (1.000 kr.)	**14.189**	**14.025**	**13.790**	**14.295**	**14.295**	**14.295**
1. Leiðsla og hjálparvirksemi	4.115	3.086	3.172	3.059	3.059	3.059
2. Sýn	4.824	5.750	4.688	5.312	5.312	5.312
3. Koyrikort	1.845	1.543	2.620	2.253	2.253	2.253
4. Akfarsskráseting	3.405	3.646	3.310	3.671	3.671	3.671
5. Endurnýggjan av útgerð til sýn av akførum	-	-	-	-	-	-
B: Virksemi (tal)						
2. Framdar sýningar	11.113	12.406	12.100	12.900	12.900	12.900
3. Útvegað koyrikort	3.430	3.404	3.500	3.700	3.700	3.700
4.1. Skrásett akfør í árinum	2.759	2.926	2.900	2.950	2.950	2.950
4.2. Umskrásett akfør í árinum	7.730	8.082	8.000	8.200	8.200	8.200
C: Eindarkostnaður (kr.)						
2. Útreiðslur fyri hvørt sýn	612	584	503	523	523	523
3. Útreiðslur fyri hvørt koyrikort	753	620	975	774	774	774
4. Útreiðslur fyri hvørja skráseting/umskrás.	458	425	394	420	420	420
D: Tørvur (tal)						
2. Tørvur á framdum sýnum	14.482	15.358	15.700	16.125	16.125	16.125
E: Tørvsfulnaður (í %)						
2. Sýn	77	81	77	80	80	80

Starvsfólkayvirlit: 20 Vanligt virksemi

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Í lønarflokki 37 ella hægri	1,0	1,0	1,0	1,0	1,0	1,0
Onnur	17,0	18,0	18,0	18,0	18,0	18,0
Fulltíðarstørv	18,0	19,0	19,0	19,0	19,0	19,0
Lønarpartur (mió. kr.)	7,5	7,8	8,1	8,2	8,2	8,2

17.38.4.02. Akstovan (Løgujáttan)

Tað vóru játtaðar 800 tús. kr. í 2015 til tess at skapa møguleika fyri at fremja akfarssýn í Vágum. Játtanin var nýtt til at keypa útbúnað og innrætta hóskandi høli til endamálið.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	530	-	-	-	-	-
10. Akstovan						
Útreiðslur	**530**	**-**	**-**	**-**	**-**	**-**
14. Keyp av vørum og tænastum	5	-	-	-	-	-
15. Keyp av útbúnaði, netto	510	-	-	-	-	-
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	15	-	-	-	-	-
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	-530	-	-	-	-	-
31. Bygging og løguframleiðsla	530	-	-	-	-	-

17.38.4.04. Ráðið fyri ferðslutrygd (Stuðulsjáttan)

Ráðið fyri ferðslutrygd (RFF) skal:

- Betra ferðsluvanarnar við upplýsing og fjølbroyttum fyritaksemi
- Stuðla ferðsluundirvísingini við ráðgeving og stuðli
- Útvega tíðarhóskandi og viðkomandi undirvísingarmiðlar í ferðslulæru
- Skipa fyri skeiðsvirksemi og trygdarfremjandi verkætlanum
- Geva sakliga upplýsing um øll viðurskifti, sum eru til ampa fyri ferðslutrygdina
- Samstarva við myndugleikar, stovnar og einstaklingar um ferðslutrygdarspurningar
- Fáa støðugar og viðkomandi upplýsingar um ferðsluóhapp og vanlukkur, skaðaorsøkir o.a. at nýta í ferðslutrygdararbeiðinum
- Fáa regluligt fjølmiðlainnivist um ferðslutrygdarboðskap ráðsins

Játtanin er hækkað við 200 tús. kr. í 2018.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	1.000	1.000	1.000	1.200	1.200	1.200
01. Stuðul						
Útreiðslur	**1.000**	**1.000**	**1.000**	**1.200**	**1.200**	**1.200**
54. Stuðul til annað virksemi	1.000	1.000	1.000	1.200	1.200	1.200

Virksemisyvirlit: 01 Stuðul

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
A: Útreiðslur (1.000 kr.)	**2.100**	**2.100**	**2.100**	**2.300**	**2.300**	**2.300**
Skrivstovuhald	1.200	1.200	1.200	1.200	1.200	1.200
Tiltøk: Skeið, undirvísing, lýsingar o.a.	900	900	900	1.100	1.100	1.100
B: Inntøkur (1.000 kr.)	**2.100**	**2.100**	**2.100**	**2.300**	**2.300**	**2.300**
Landskassastuðul	1.000	1.000	1.000	1.200	1.200	1.200
Tryggingarfeløg	900	900	900	900	900	900
Limagjald, og aðrar møguligar inntøkur	200	200	200	200	200	200

Arbeiðsmarknaður

17.39.1. Ymsar útreiðslur

17.39.1.01. Semingsmannaskipanin (Rakstrarjáttan)

Endamálið við játtanini er at fíggja semingsmannaskipanina. Stovnurin er skipaður sambært løgtingslóg nr. 39 frá 13. mai 2013 um semingsstovn. Sambært nýggju lógini umfatar lógin allan arbeiðsmarknaðin í mun til áður galdandi lóg nr. 86 frá 31. mars 1928 um seming í arbeiðsósemjum, sum bert umfataði privata arbeiðsmarknaðin. Lógin ásetur í § 12 at landskassin ber útreiðslurnar av semingsstovninum, meðan partarnir bera sjálvir egnar útreiðslur samsvarandi starvsskipan.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	194	503	500	500	500	500
Útreiðslur	194	503	500	500	500	500
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	194	503	500	500	500	500
Útreiðslur	**194**	**503**	**500**	**500**	**500**	**500**
11. Lønir v.m.	177	421	450	450	450	450
14. Keyp av vørum og tænastum	18	82	50	50	50	50

17.39.1.02. Fastur gerðarrættur (Stuðulsjáttan)

Partarnir á arbeiðsmarknaðinum hava gjørt sáttmála um fastan gerðarrætt, og varð gerðarrætturin skipaður í 2006. Fasti gerðarrætturin skal loysa trætur, ósemjur og ivamál á arbeiðsmarknaðinum, umframt at savna, menna og kunna um føroyskan arbeiðsmarknaðarrætt.

Eftir § 1, stk. 3 í løgtingslóg nr. 21 frá 11. apríl 2006 um mál ið hoyra undir fasta gerðarrættin, ber landskassin tær útreiðslur til skrivstovu, samsýning og aðrar fastar útreiðslur av fasta gerðarrættinum, ið gjøldini til gerðarrættin ikki røkka til.

Játtanin verður flutt fasta gerðarrættinum tá landsstýrismaðurin hevur góðtikið fíggjarætlanina fyri játtanarárið, og móttikið grannskoðaðan roknskap fyri árið frammanundan.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	700	700	700	700	700	700
01. Fastur gerðarrættur						
Útreiðslur	**700**	**700**	**700**	**700**	**700**	**700**
54. Stuðul til annað virksemi	700	700	700	700	700	700

17.39.1.07. Arbeiðs- og brunaeftirlitið (Rakstrarjáttan)

Arbeiðs- og brunaeftirlitið er arbeiðs- og brunaeftirlitsmyndugleiki landsins. Høvuðsuppgávurnar hjá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum er støðugt at betra arbeiðsumhvørvi á øllum føroyskum arbeiðsplássum, umframt at virka fyri brunatrygd.

Lógargrundarlagið fyri virksemi stovnsins er:

1. Løgtingslóg um arbeiðsumhvørvi við tilhoyrandi kunngerðum
2. Løgtingslóg um kavaravinnu við tilhoyrandi kunngerðum
3. Løgtingslóg um spreingievni við tilhoyrandi kunngerðum
4. Løgtingslóg um tiltøk at minka um royking við tilhoyrandi kunngerð
5. Lóg um løggildar vektir og nøgdarmátarar við tilhoyrandi kunngerðum
6. Løgtingslóg um tilbúgving við tilhoyrandi kunngerðum
7. Løgtingslóg um fýrverk

Arbeiðs- og brunaeftirlitið fremur eftirlitsvitjanir, brunasýn, góðkennir virkir og virksemi og leiðbeinir stovnum, pørtunum á arbeiðsmarknaðinum, feløgum og persónum. Arbeiðs- og brunaeftirlitið skrásetur og granskar vanlukkutilburðir og ráðgevur landsstýrismanninum viðvíkjandi arbeiðsumhvørvismálum, brunatrygd og annað.

Økta virksemið í samfelagnum, serliga innan byggivinnu og framleiðslu, merkir, at arbeiðsbyrðan hjá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum er økt munandi. Arbeitt verður framhaldandi við at betra sálarliga arbeiðsumhvørvi, fyribyrgja arbeiðsvanlukkur, fremja reglulig brunasýn, og at dagføra rættarreglur.

Brunatrygd er sera týdingarmikið. Landið hevur í fleiri ár ikki framt regluligt brunasýn, og er alneyðugt at raðfesta málsøkið. Í 2018 verða reglulig brunasýn sett í verk, og er játtanin til stovnin hækkað við 350 tús. kr.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	5.496	5.524	6.239	6.589	6.589	6.589
Útreiðslur	6.706	6.474	7.330	7.680	7.680	7.680
Inntøkur	1.211	950	1.091	1.091	1.091	1.091
20. Arbeiðseftirlitið						
Nettoútreiðsla	3.517	4.117	4.119	4.139	4.139	4.139
Útreiðslur	**4.727**	**5.066**	**5.210**	**5.230**	**5.230**	**5.230**
11. Lønir v.m.	3.544	4.080	4.310	4.400	4.400	4.400
14. Keyp av vørum og tænastum	665	561	560	605	605	605
15. Keyp av útbúnaði, netto	120	176	100	125	125	125
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	399	244	240	100	100	100
17. Avskrivingar o.a.	-1	5	-	-	-	-
57. Rentuútreiðslur o.a.	0	0	-	-	-	-
Inntøkur	**1.211**	**950**	**1.091**	**1.091**	**1.091**	**1.091**
21. Søla av vøru og tænastum	*15*	*8*	-	-	-	-
25. Eftirlits- og umsjónaravgjøld	*1.196*	*942*	*1.091*	*1.091*	*1.091*	*1.091*

21. Brunaeftirlitið

Nettoútreiðsla	1.979	1.407	2.120	2.450	2.450	2.450
Útreiðslur	**1.979**	**1.407**	**2.120**	**2.450**	**2.450**	**2.450**
11. Lønir v.m.	1.634	1.145	1.896	2.200	2.200	2.200
14. Keyp av vørum og tænastum	282	261	164	190	190	190
15. Keyp av útbúnaði, netto	64	-	60	60	60	60
16. Leiga, viðlíkahald og skattur	-	2	-	-	-	-

Virksemisyvirlit: 20 Arbeiðseftirlitið

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
A: Rakstrarinntøkur (1.000 kr.)	**1.211**	**950**	**1.091**	**1.091**	**1.091**	**1.091**
Lyftir og elevatorar	224	265	261	261	261	261
Løggilding av serkønum	76	86	50	50	50	50
Ummæli av innrætting	15	3	10	10	10	10
Eftirlit við trýstskipanum	23	26	10	10	10	10
Mát og vekt	570	400	550	550	550	550
Vinnukaving	0	0	30	30	30	30
Vinnubrøv, nýggj	303	170	180	180	180	180

Starvsfólkayvirlit: 20 Arbeiðseftirlitið

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Í lønarflokki 37 ella hægri	-	-	-	1,0	1,0	1,0
Onnur	7,0	8,0	8,0	7,0	7,0	7,0
Fulltíðarstørv	7,0	8,0	8,0	8,0	8,0	8,0
Lønarpartur (mió. kr.)	3,5	4,1	4,3	4,4	4,4	4,4

Starvsfólkayvirlit: 21 Brunaeftirlitið

	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Í lønarflokki 37 ella hægri	-	-	-	-	-	-
Onnur	3,0	2,0	3,0	4,0	4,0	4,0
Fulltíðarstørv	3,0	2,0	3,0	4,0	4,0	4,0
Lønarpartur (mió. kr.)	1,6	1,1	1,9	2,2	2,2	2,2

17.39.4. Arbeiðsmarknaðartænastur

17.39.4.01. Barsilsskipan (Lógarbundin játtan)

Eftir løgtingslóg nr. 48 frá 3. apríl 2001 um barsilsskipan, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 166 frá 20. desembur 2017, fevnir barsilsskipanin um allan arbeiðsmarknaðin, og verður barsilspeningur veittur í sambandi við viðgongu, barnsburð og ættleiðing. Barsilspeningurin endurrindar løn hjá løntakaranum annaðhvørt til løntakaran ella til arbeiðsgevaran, tó við einum útgjaldshámarki upp á 25 tús. kr. Avtala er gjørd við TAKS um at virka sum umsiting hjá barsilsskipanini.

Lógin miðar eftir:

- at allir løntakarar mest møguliga fáa endurgjald fyri lønarmiss í sambandi við barnsburð
- at skipanin fevnir um bæði kvinnur og menn, ið eru løntakarar og sjálvstøðug vinnurekandi
- at fremja javnstøðu, og gera grundarlagið betri fyri javnsettum møguleikum hjá kvinnum og monnum til arbeiði
- at tryggja barninum samveru bæði við móðir og faðir
- at umstøðurnar hjá hinum einstaka á arbeiðsmarknaðinum í sambandi við barnsburð og ættleiðing eru so eins sum gjørligt.

Mamman hevur rætt til útgjald í 14 vikur eftir barnsburð. Pápin hevur rætt til útgjald í 4 vikur. Foreldrini hava harumframt rætt til útgjald í 28 vikur, sum tey kunnu býta sínámillum eftir egnum tykki.

Stakir uppihaldarar kunnu fáa barsilsfarloyvi hjá hinum foreldrinum lagt afturat sínum barsilsfarloyvi.

Harumframt eru ymiskar serskipanir fyri foreldur sum fáa:

- tvey børn ella fleiri
- børn fødd áðrenn 32. viku í viðgonguni
- ættleitt børn

1. januar 2018 varð barsilslógin broytt, soleiðis at rætturin hjá foreldrum til barsilspening eftir barnsburð varð longdur úr 44 til 46 vikur. Rætturin hjá ættleiðingarforeldrum til barsilspening eftir móttøku av barninum varð longdur úr 48 til 50 vikur. Harumframt hevur lógarbroytingin við sær, at eftirløn verður løgd oman á øll útgjøld úr barsilsskipanini eftir 1. mars 2018. Síðan 2015 hevur lógarkravda eftirlønargjaldið verið drigið frá barsilspeninginum við útgjald.

Lønmóttakarar og arbeiðsgevarar gjalda 0,71 % av móttiknu og rindaðu lønunum. Hesar inntøkur verða fluttar í Barsilsgrunnin. Barsilsgrunnurin fíggjar barsilsskipanina.

Barsilsskipanin kostaði 111,7 mió. kr. í 2016. Útreiðslurnar í 2017 verða mettar til 123 mió. kr. Mett verður, at barsilsskipanin fer at kosta 133 mió. kr. í 2018.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	95.758	111.699	114.000	133.000	135.000	137.000
Inntøkujáttan	95.758	111.699	114.000	133.000	135.000	137.000
01. Barsilsskipan						
Útreiðslur	**95.758**	**111.699**	**114.000**	**133.000**	**135.000**	**137.000**
52. Tilskot til einstaklingar	95.758	111.699	114.000	133.000	135.000	137.000
Inntøkur	**95.758**	**111.699**	**114.000**	**133.000**	**135.000**	**137.000**
76. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	*95.758*	*111.699*	*114.000*	*133.000*	*135.000*	*137.000*

17.39.4.04. Umsiting av barsilsskipan (Rakstrarjáttan)

Sambært avtalu við Samferðslumálaráðið, umsitur TAKS barsilsskipanina. Umsitingarkostnaðurin umfatar eisini kostnað av kærunevnd og umsiting av kærunevnd.

Lønmóttakarar og arbeiðsgevarar gjalda 0,71 % av móttiknu og rindaðu lønunum sum inntøkujáttan á § 20 Inntøkur, sum verður flutt í Barsilsgrunn. Barsilsgrunnurin endurrindar TAKS umsitingina av barsilsskipanini.

Roknað verður við, at fyrisitingin av barsilsskipanini fer at kosta 2,4 mió. kr. í 2018.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Nettoútreiðslujáttan	0	0	0	0	0	0
Útreiðslur	2.505	2.147	2.000	2.400	2.400	2.400
Inntøkur	2.505	2.147	2.000	2.400	2.400	2.400
20. Vanligt virksemi						
Nettoútreiðsla	0	0	0	0	0	0
Útreiðslur	**2.505**	**2.147**	**2.000**	**2.400**	**2.400**	**2.400**
11. Lønir v.m.	50	50	50	50	50	50
15. Keyp av útbúnaði, netto	-	126	-	-	-	-
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	2.455	1.971	1.950	2.350	2.350	2.350
Inntøkur	**2.505**	**2.147**	**2.000**	**2.400**	**2.400**	**2.400**
76. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	*2.505*	*2.147*	*2.000*	*2.400*	*2.400*	*2.400*

§ 20 Inntøkur

Rentur

20.50.1. Rentur av skuld

20.50.1.01. Rentur at gjalda (Ógreinað játtan)

Frá 1. apríl 2013 vórðu landsins gjaldføris- og skuldaviðurskifti fyrisitin av Føroya Gjaldstovu eftir ásetingum frá Gjaldstovuráðnum. Sambært Ll. nr. 116 frá 24. november 2016 um Landsbanka Føroya og Føroya váðaráð verða hesar uppgávur frá 1. januar 2017 fyrisitnar av Landsbanka Føroya.

Langfreistaða skuldin hjá landskassanum var áleið 5,1 mia. kr. við ársenda 2016. Skuldin er samansett av lánsbrævaskuld á áleið 4,6 mia. kr. og skuld til danska statin á 0,5 mia. kr. Skuldin til danska statin er rentu- og avdráttarfrí, og fellur bert til gjaldingar um olja verður funnin í føroysku undirgrundini áðrenn 10. juni 2018.

Farið er frá meginregluni fyri rentuútreiðslur, har kursbroytingar vórðu javnaðar yvir restlánitíðina á einstaka brævaláninum. Eftir tilmæli frá Fígging landsins er frá fíggjarárinum 2016 nýggj meginregla nýtt fyri rentuútreiðslur og rentuinntøkur. Fyri rentuútreiðslurnar verður effektiva rentan brúkt. Skuldin hjá landskassanum hevur í løtuni fimm lánsbrævarøðir og er tað tí ikki nógv hóvasták at rokna tí effektivu rentuna fyri hvørt lánið sær. Effektiva rentan kann staðfestast objektivt og lættir tað munandi um at meta um rentuútreiðsluna. Ein meting skal tó gerast fyri rentuna á komandi lánum, ið vera tikin, men har kunnu forward renturnar á fíggjarmarknaðunum verða brúktar, sum eina ábending.

Ætlanin er, at hesar metingar av rentuútreiðslum og rentuinntøkum eru grundarlag bæði fyri játtan og roknskapi. Møgulig frávik í mun til játtan, vegna órealiseraðar kursbroytingar, verða frameftir skrásett sum óvanligar inntøkur ella útreiðslur undir RLÚ 2 og ávirka sostatt ikki RLÚ 1.

Nýggja meginreglan hevði við sær, at marknaðarvirðið av lánsbrævaskuldini pr. 1. januar 2016 hækkaði við 84 mió. kr.

Eftir nýggi meginregluni vóru rentuútreiðslurnar 54,0 mió. kr. í 2016. Rentuútreiðslurnar verða 20,0 mió. kr. í 2017. Roknað verður við rentuútreiðslum á 18,0 mió. kr. í 2018.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	105.640	63.008	20.000	18.000	17.000	29.000
Inntøkujáttan	-	9.008	-	-	-	-
01. Rentur av skuld						
Útreiðslur	**105.640**	**63.008**	**20.000**	**18.000**	**17.000**	**29.000**
57. Rentuútreiðslur o.a.	105.640	63.008	20.000	18.000	17.000	29.000
Inntøkur	**-**	**9.008**	**-**	**-**	**-**	**-**
76. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	-	*9.008*	-	-	-	-

20.50.2. Rentuinntøkur o.t.

20.50.2.01. Rentuinntøkur av innistandandi (Ógreinað játtan)

01. Rentur av innistandandi
Frá 1. apríl 2013 vórðu landsins gjaldføris- og skuldaviðurskifti fyrisitin av Føroya Gjaldstovu eftir ásetingum frá Gjaldstovuráðnum. Sambært Ll. nr. 116 frá 24. november 2016 um Landsbanka Føroya og Føroya váðaráð verða hesar uppgávur frá 1. januar 2017 fyrisitnar av Landsbanka Føroya.

Gjaldføri landskassans var áleið 2,9 mia. kr. við ársenda 2016. Minstagjaldføri landskassans, sum skal vera 15% av BTÚ, er ásett at vera 2.670 mió. kr. í 2018.

Farið er frá roknskaparmeginreglunum fyri rentuinntøkur, sum ásettu, at lánsbrøv skuldu virðisásetast til dagskurs, og kurstap/vinningur vórðu innroknað, hóast óstaðfest. Sostatt kundu stór sveiggj verða í rentuinntøkunum.

Eftir tilmæli frá Fígging landsins er frá fíggjarárinum 2016 nýggj meginregla nýtt fyri rentuútreiðslur og rentuinntøkur. Fyri rentuinntøkurnar er hetta ikki so einfalt at gera upp sum fyri rentur av skuld, tí tað kunnu vera upp móti 200 ymisk virðisbrøv í íløgurøðini, og samansetingin av hesum verður javnan broytt. Samstarvsfelagarnir Nordea, Nykredit, Danske Capital og SEB hava givið teirra meting av væntaðum avkasti. Peningastovnarnir býta aktivini upp í aktivklassar og geva teirra boð uppá eitt langtíðaravkast fyri hvønn aktivklassa. Henda avkastmeting verður nýtt til íløgurøðina hjá landinum, har útgangsstøðið er minstagjaldføri og ein miðalsalda í hvørjum aktivklassa.

Ætlanin er, at hesar metingar av rentuútreiðslum og rentuinntøkum eru grundarlag bæði fyri játtan og roknskapi. Møgulig frávik í mun til játtan, vegna órealiseraðar kursbroytingar, verða frameftir skrásett sum óvanligar inntøkur ella útreiðslur undir RLÚ 2 og ávirka sostatt ikki RLÚ 1.

Arbeitt verður við at broyta samansetingina av virðisbrøvum í umsitingini av gjaldførinum hjá landinum, soleiðis at rentuinntøkurnar vaksa. Broytingin í samansetingini verður framd eftir nøkrum árum.

Eftir nýggi meginregluni vóru rentuinntøkurnar 26,7 mió. kr. í 2016. Rentuinntøkurnar verða 25,8 mió. kr. í 2017. Roknað verður við rentuinntøkum á 31,9 mió. kr. í 2018.

02. Samsýning til Landsbankan
Landsbanki Føroya, sum varð endurstovnaður 1. januar 2017, fer í størstan mun at verða inntøkufíggjaður við gjaldi svarandi til upp til 4 promillu av minstagjaldføri landsins. Fyri 2017 verður mett, at gjaldið verður slakar 6,2 mió. kr. Fyri 2018 eru 4 promillu av minstagjaldføri landsins mett at verða 10,7 mió. kr., men avsetta upphæddin á 7,9 mió. kr. er ásett í mun til mett virksemi hjá Landsbankanum í 2018.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	-	60.034	7.900	7.900	7.900	7.900
Inntøkujáttan	10.193	86.734	25.800	31.900	33.900	34.900
01. Rentur av innistandandi						
Útreiðslur	**-**	**60.034**	**-**	**-**	**-**	**-**
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	-	60.034	-	-	-	-
Inntøkur	**10.193**	**86.734**	**25.800**	**31.900**	**33.900**	**34.900**
67. Rentuinntøkur og vinningsbýti	*10.193*	*86.734*	*25.800*	*31.900*	*33.900*	*34.900*
02. Samsýning til Landsbankan						
Útreiðslur	**-**	**-**	**7.900**	**7.900**	**7.900**	**7.900**
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	-	-	7.900	7.900	7.900	7.900

20.50.2.04. Aðrar rentur (Ógreinað játtan)

Hesar rentuinntøkurnar stava frá pørtum av útlánum landskassans, t.d. stuðulslánum, serlánum og kurslánum. Torført er at meta um hesar inntøkur.

Inntøkurnar frá øðrum rentum vóru slakar 0,6 mió. kr. í 2016. Mett verður, at inntøkurnar verða slakar 0,4 mió. kr. í 2017. Roknað verður við 1,0 mió. kr. í 2018.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Inntøkujáttan	766	581	1.000	1.000	1.000	1.000
01. Aðrar rentur						
Inntøkur	**766**	**581**	**1.000**	**1.000**	**1.000**	**1.000**
67. Rentuinntøkur og vinningsbýti	*766*	*581*	*1.000*	*1.000*	*1.000*	*1.000*

20.50.2.10. Útgoldið yvirskot frá Danmarks Nationalbank (Ógreinað játtan)

Sambært § 19 í lóg nr. 116 frá 1936 um Danmarks Nationalbank fer yvirskotið hjá bankanum, eftir at møguliga avsett er í tiltaksgrunn ella serstakar trygdargrunnar, til ríkið.

Føroyski landskassin fær part av yvirskotsveiting frá Nationalbankanum til ríkið. Partur landskassans verður roknaður sum lutfallið millum tað føroyska seðlaumfarið og alt seðlaumfarið í ríkinum við ársenda. Av tí, at rakstrarúrslit bankans verður broytt av, at lánsbrøv, gjaldoyra, gull o.a. verða kursjavnað við ársenda, er ringt at meta um upphæddina, sum goldin verður føroyska landskassanum.

Landskassans partur var 5,5 mió. kr. í 2016. Mett verður, at inntøkurnar verða 5,2 mió. kr. í 2017. Roknað verður við 5,0 mió. kr. í 2018.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Inntøkujáttan	10.626	5.482	6.000	5.000	5.000	5.000
01. Yvirskot						
Inntøkur	**10.626**	**5.482**	**6.000**	**5.000**	**5.000**	**5.000**
65. Flytingarinntøkur úr útlandinum	*10.626*	*5.482*	*6.000*	*5.000*	*5.000*	*5.000*

Skattir og avgjøld

20.52.1. Skattainntøkur

20.52.1.01. Vanligur landsskattur (Ógreinað játtan)

Samtíðarskattur verður kravdur sambært løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum, og løgtingslóg nr. 87 frá 1. september 1983 um áseting av skatti við seinni broytingum.

Vanligur inntøkuskattur er:

- landsskattur
- kommunuskattur (herundir atvinnuskattur)

Inntøkugrundarlagið byggir á tey fólk, sum sambært nevndu lógum skulu gjalda skatt í Føroyum.

Roknskaparmeginregla
Persónsskatturin er settur saman av hesum høvuðsupphæddum:

- Fyribilsskattur er tað, sum er inngoldið í fyribilsskatti í skattaárinum (gjaldsmeginregla).
- Endalig uppgerð, sum er munurin millum tað, ið er inngoldið í árinum (fyribilsskattur) og endaligu álíkningina fyri árið.

Vanligur landsskattur 2016
Inntøkurnar av vanligum landsskatti vóru netto 1.347,3 mió. kr. í 2016.

Meting 2017
Fyri 2017 verður mett, at inntøkurnar verða netto 1.407 mió. kr.

Framrokning 2018
Í metingini av 2018 er hædd tikin fyri ymsum broytingum sum ávirka inntøkurnar frá vanligum landsskatti, so sum høga virksemisstigið sum er í landinum við hækkandi løntakaratali og minkandi arbeiðsloysi.

Roknað verður við, at inntøkur landskassans av vanliga landsskattinum verða netto 1.465,4 mió. kr. í 2018, tá er innroknaður skatturin á hægri útgjaldingum til fyritíðarpensjónistar.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Inntøkujáttan	1.393.100	1.347.336	1.380.000	1.465.400	1.490.000	1.515.000
01. Vanligur landsskattur						
Inntøkur	**3.060.800**	**3.112.582**	**3.197.000**	**3.372.400**	**3.430.000**	**3.488.000**
61. Skattir og avgjøld	*3.058.922*	*3.110.185*	*3.197.000*	*3.372.400*	*3.430.000*	*3.488.000*
62. Kravd gjøld, bøtur o.a.	*23*	*64*	-	-	-	-
67. Rentuinntøkur og vinningsbýti	*1.855*	*2.332*	-	-	-	-

02. Gamal skattur fyri 1. apríl 1984						
Inntøkur	**17**	**-**	**-**	**-**	**-**	**-**
61. Skattir og avgjøld	*17*	*-*	*-*	*-*	*-*	*-*
07. Húsaleiguskattur						
Inntøkur	**4.750**	**4.929**	**6.000**	**6.000**	**6.000**	**6.000**
61. Skattir og avgjøld	*4.728*	*4.903*	*6.000*	*6.000*	*6.000*	*6.000*
67. Rentuinntøkur og vinningsbýti	*22*	*26*	*-*	*-*	*-*	*-*
09. Flutt til kommunur						
Inntøkur	**-1.670.34**	**-1.767.96**	**-1.820.00**	**-1.910.00**	**-1.943.00**	**-1.976.00**
61. Skattir og avgjøld	*-1.670.34*	*-1.767.96*	*-1.820.00*	*-1.910.00*	*-1.943.00*	*-1.976.00*
13. Skattur av húsaleigu flutt til kommunur						
Inntøkur	**-2.128**	**-2.207**	**-3.000**	**-3.000**	**-3.000**	**-3.000**
61. Skattir og avgjøld	*-2.128*	*-2.207*	*-3.000*	*-3.000*	*-3.000*	*-3.000*

20.52.1.04. FAS-skipanin (Ógreinað játtan)

Lønarinntøka hjá øllum føroyingum og útlendingum í FAS-skipanini verður sambært § 8, stk. 2 í ásetingarlógini skattað við 35 %. Skatturin frá FAS verður afturborin reiðaravirkjum sum stuðul sambært § 63a í skattalógini við tilhoyrandi kunngerð.

Brutto vóru 247,4 mió. kr. goldnar í skatti frá FAS-skipanini í 2016. Mett verður, at upphæddin verður áleið 237 mió. kr. í 2017. Roknað verður við 245 mió. kr. í 2018.

Av tí, at afturberingin er sama upphædd sum skatturin, er netto eingin beinleiðis skattainntøka frá FAS-skipanini til landskassan, og játtanin verður netto 0 kr.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	248.137	247.010	250.000	245.000	250.000	255.000
Inntøkujáttan	247.223	247.376	250.000	245.000	250.000	255.000
01. FAS-endurgjald						
Útreiðslur	**248.137**	**247.010**	**250.000**	**245.000**	**250.000**	**255.000**
53. Stuðul til vinnu	248.137	247.010	250.000	245.000	250.000	255.000
02. Skattainntøka frá FAS-skipanini						
Inntøkur	**247.223**	**247.376**	**250.000**	**245.000**	**250.000**	**255.000**
61. Skattir og avgjøld	*247.223*	*247.376*	*250.000*	*245.000*	*250.000*	*255.000*

20.52.1.05. Kirkjuskattur (Ógreinað játtan)

Grundarlagið undir kirkjuskattinum er løgtingslóg nr. 61 frá 7. juni 2007 um fíggjarviðurskifti fólkakirkjunnar. Kirkjuskatturin er býttur í tvey: ein landskirkjuskatt, ið hægst kann vera 0,65 % av skattskyldugu inntøkuni, og ein staðbundnan kirkjuskatt, ið hægst kann vera 0,3 % av skattskyldugu inntøkuni.

Landskirkjuskatturin er 0,6 %, meðan staðbundni kirkjuskatturin er milum 0,0 % og 0,3 %, alt eftir kirkjusóknum. Tilsamans er kirkjuskatturin millum 0,6-0,9 % av skattskyldugu inntøkuni, alt eftir støddini á staðbundna kirkjuskattinum.

Í 2016 var kirkjuskatturin 53,0 mió. kr. Kirkjuskatturin verður mettur til góðar 55 mió. kr. í 2017, og roknað verður við 59 mió. kr. í 2018.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Inntøkujáttan	0	0	0	0	0	0
01. Kirkjuskattur						
Inntøkur	**45.296**	**53.030**	**54.000**	**59.000**	**62.000**	**65.000**
61. Skattir og avgjøld	*45.296*	*53.030*	*54.000*	*59.000*	*62.000*	*65.000*
08. Flutt til kirkjur						
Inntøkur	**-45.296**	**-53.030**	**-54.000**	**-59.000**	**-62.000**	**-65.000**
61. Skattir og avgjøld	*-45.296*	*-53.030*	*-54.000*	*-59.000*	*-62.000*	*-65.000*

20.52.1.06. Kolvetnisskattur, persónar (Ógreinað játtan)

Kolvetnisskattur verður kravdur sambært løgtingslóg nr. 26 frá 21. apríl 1999 um at skatta inntøkur av kolvetnisvirksemi (Kolvetnisskattalógin) og løgtingslóg nr. 16 frá 14. februar 2000 um álíkning, innkrevjing, eftirlit o.a. í sambandi við skatting av inntøku av kolvetnisvirksemi (Kolvetnisskattafyrisitingarlógin). Galda nevndu lógir ikki fyri virksemi, verður skatturin kravdur inn eftir øðrum viðkomandi skattalógum.

Í 2016 var kolvetnisskatturin frá persónum 14 tús. kr. Eingir loyvishavarar hava enn bundið seg til at bora nakran brunn í 2017 ella árini eftir tað, og roknað verður tí ikki við nakrari inntøku í 2017 og frameftir.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Inntøkujáttan	3.667	14	-	-	-	-
01. Kolvetnisskattur, persónar						
Inntøkur	**3.667**	**14**	**-**	**-**	**-**	**-**
61. Skattir og avgjøld	*3.667*	*14*	-	-	-	-

20.52.1.07. Felagsskattur (Ógreinað játtan)

Felagsskattur verður kravdur sambært løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum (Skattalógin) og løgtingslóg nr. 87 frá 1. september 1983 um áseting av skatti við seinni broytingum (Ásetingarlógin).

Inntøkugrundarlagið byggir á tey feløg, sum sambært nevndu lógum skulu gjalda skatt í Føroyum. Felagsskatturin, sum fellur til gjaldingar í 2018, er álíknaður á teir roknskapir, har inntøkuárið fellur saman við ella endar í 2017.

Felagsskatturin er 18 % av skattskyldugu inntøkuni, harav fær landið 70 % og kommunurnar 30 %.

Í 2016 var felagsskatturin netto 277,4 mió. kr. Mett verður, at felagsskatturin netto verður 396 mió. kr. í 2017. Roknað verður við 395 mió. kr. netto í 2018.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	349	86	-	-	-	-
Inntøkujáttan	263.084	277.498	275.000	395.000	400.000	405.000
01. Felagsskattur						
Útreiðslur	**349**	**86**	**-**	**-**	**-**	**-**
57. Rentuútreiðslur o.a.	349	86	-	-	-	-
Inntøkur	**376.610**	**396.265**	**393.000**	**564.000**	**571.000**	**578.000**
61. Skattir og avgjøld	*375.861*	*395.817*	*393.000*	*564.000*	*571.000*	*578.000*
67. Rentuinntøkur og vinningsbýti	*749*	*448*	-	-	-	-
09. Flutt til kommunur						
Inntøkur	**-113.526**	**-118.767**	**-118.000**	**-169.000**	**-171.000**	**-173.000**
61. Skattir og avgjøld	*-113.526*	*-118.767*	*-118.000*	*-169.000*	*-171.000*	*-173.000*

20.52.1.08. Kolvetnisskattur, feløg (Ógreinað játtan)

Kolvetnisskatturin til feløg, sum fellur til gjaldingar í 2018, er álíknaður á teir roknskapir, har inntøkuárið fellur saman við ella endar í 2017.

Í 2016 vóru inntøkurnar 2,3 mió. kr. Fyri 2017 og árini frameftir verður ikki roknað við nakrari inntøku, tí enn hevur ongin loyvishavari bundið seg til at bora nakran brunn.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Inntøkujáttan	10.973	2.250	-	-	-	-
01. Kolvetnisskattur, feløg						
Inntøkur	**10.973**	**2.250**	**-**	**-**	**-**	**-**
61. Skattir og avgjøld	*10.973*	*2.250*	-	-	-	-

20.52.1.09. Tilfeingis/loyvisskattur (Ógreinað játtan)

Við løgtingslóg nr. 159 frá 20. desember 2013 fekst heimild at áleggja tilfeingis/loyvisskatt í 2014. Skatturin varð tá hækkaður upp í 7 prosent av skattskyldugu inntøkuni omanfyri 1 mió. kr.

Serstøk skattaskipan kom í gildi fyri alivinnuna frá 2014 (loyvisgjald á alivinnu), og alivinnan rindar tí ikki tilfeingis/loyvisskatt longur.

Tilfeingis/loyvisskattur varð í 2015 rindaður sambært løgtingslóg nr. 117 frá 15. desember 2014 um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt (Skattalógin).

Eingin lógarheimild er fyri tilfeingis/loyvisskatti í 2016, og er ikki ætlanin at nýta henda skattaleistin frameftir, tí tað verður mett óheppið, at føroyskar vinnur rinda ymiskan partafelagsskatt.

Í 2016 vóru inntøkurnar vegna endaliga álíkning 3,5 mió. kr. Ongar inntøkur verða frá tilfeingis/loyvisskatti í 2017 og frameftir.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Inntøkujáttan	19.261	3.499	-	-	-	-
01. Tilfeingis/loyvisskattur						
Inntøkur	**19.261**	**3.499**	**-**	**-**	**-**	**-**
61. Skattir og avgjøld	*19.200*	*2.970*	*-*	*-*	*-*	*-*
67. Rentuinntøkur og vinningsbýti	*60*	*530*	*-*	*-*	*-*	*-*

20.52.1.11. Kapitalvinningsskattur (Ógreinað játtan)

Kapitalvinningsskattur verður kravdur sambært løgtingslóg nr. 164 frá 21. desember 2001 um at skatta kapitalvinning (Kapitalvinningsskattalógin) við seinni broytingum.

Sambært § 14 í hesi lóg verða roknað við í uppgerðina viðvíkjandi skattskyldugu inntøkuni eftir Kapitalvinningsskattalógini:

- søla og avhendan av partabrøvum v.m. eftir § 4 jvm. við § 1, 1),
- innfrían, søla og onnur avhendan av fíggjarkrøvum, leysgevan av skuld v.m. eftir § 6 jvm. § 1, 2 og 3),
- vinningur ella tap við eftirgeving, fyrning v.m. av skuld v.m. eftir § 7, jvm. § 1, 3),
- vinningur ella tap av keyps- og sølurættindum v.m. eftir § 8 jvm. § 1, 4),
- vinningsbýti eftir § 9 jvm. § 1, 5),
- rentuinntøkur eftir § 10 jvm. § 1, 6) og
- rentuútreiðslur eftir § 10, stk. 3.

Fyribilsskattur verður goldin av rentuinntøku og vinningsbýti, og verður hesin um árslok gjørdur upp saman við aðrari kapitalinntøku sambært § 14 í Kapitalvinningsskattalógini. Henda uppgerð kann geva avlops- ella írestandi skatt, treytað av støddini á øðrum kapitalinntøkum.

Vinningsbýti

Feløg og grunnar o.o., sum luta út vinningsbýti til likamligar persónar, skulu halda aftur skatt, sum er 35 %. Tá ið útlutað verður til feløg og grunnar o.o. skal verða hildin aftur skattur, sum er 18 %. Feløg og grunnar o.o., sum eru fult skattskyldug í Føroyum skulu ikki gjalda skatt av vinningsbýtinum. Avgerandi fyri, í hvørjum fíggjarári skattur av vinningsbýti verður tikin við er, nær vinningsbýtið fellur til gjaldingar. Vinningsbýtið, sum fellur til gjaldingar í 2018, verður tikið við í 2018.

Rentuinntøkur

Fyri likamligar persónar og deyðsbúgv undir fullari ella avmarkaðari skattskyldu í Føroyum verða rentuinntøkur roknaðar upp í uppgerðina viðvíkjandi skattskyldugu inntøkuni eftir § 14 í Kapitalvinningsskattalógini. Henda inntøkan verður skattað 35 %. Fyri tilskrivaða rentu í føroyskum peningastovnum er tann regla galdandi, at peningastovnurin, sum tilskrivar rentu á innlánið tvær ferðir um árið, avroknar í rentuskatti 35 % beinleiðis í landskassan.

Fyri feløg og grunnar verða rentuinntøkur skattaðar við 18 %.

Vinningur av virðisbrævasølu
Vinningur við sølu av virðisbrøvum, ið er skattskyldugur eftir Kapitalvinningsskattalógini verður fyri likamligar persónar skattaður við 35 %. Feløg og grunnar o.o. lata skatt upp á 18 %.

Broyting til Kapitalvinningsskattalógina varð samtykt í 2006 sum staðfestir, at frá 1. januar 2007 var skattafrítøkan avtikin fyri virðisbrøv, ið vórðu útvegaði áðrenn Kapitalvinningsskattalógin kom í gildi, tó soleiðis, at tað bert er staðfesti vinningurin eftir 1. januar 2007, ið verður skattaður.

Í 2016 var kapitalvinningsskatturin 210,7 mió. kr. Kapitalvinningsskatturin verður mettur til 290 mió. kr. í 2017. Roknað verður við 260 mió. kr. í 2018.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Inntøkujáttan	259.131	210.714	215.000	260.000	265.000	270.000
01. Kapitalvinningsskattur						
Inntøkur	**259.131**	**210.714**	**215.000**	**260.000**	**265.000**	**270.000**
61. Skattir og avgjøld	*232.887*	*210.278*	*215.000*	*260.000*	*265.000*	*270.000*
62. Kravd gjøld, bøtur o.a.	*278*	-	-	-	-	-
67. Rentuinntøkur og vinningsbýti	*25.966*	*435*	-	-	-	-

20.52.1.13. Avgjald av kapitaleftirlønum (Ógreinað játtan)

Avgjald av kapitaleftirlønum verður kravt sambært løgtingslóg nr. 51 frá 29. desember 1971 um skatt av rentutryggingum v.m. (Rentutryggingarlógin), við seinni broytingum.

Avgjald, sum er 35 %, verður tikið, tá ið kapitaleftirlønir verða útgoldnar við heimild í § 6, b) og c) eftir reglunum í § 7, 1. stk. í sambandi við:

- aldur,
- deyða, og
- úr starvi av óarbeiðsføri

Sambært § 7, 2. stk. verður 55 % avgjald tikið við útgjalding av kapitaleftirlønum. Henda regla verður nýtt í sambandi við útgjald í ótíð, t.d. tá ið persónur fer úr føroysku skattaskipanini (flytur av landinum). Áður vórðu sambært § 10 í løgtingslógini 40 % av inngoldna avgjaldinum latin til kommunurnar. Hendan lógargrein varð strikað frá 2015 at virka, soleiðis at alt avgjaldið fellur til landskassan. Hetta var partur av fíggingarmyndlinum viðvíkjandi eldraøkinum í sambandi við, at kommunurnar yvirtóku eldraøkið frá 1. januar 2015.

Inntøkugrundarlagið fyri avgjald av kapitaleftirlønum er ógvuliga skiftandi m.a. av fólkafráflytingini, og tí er ikki gjørligt at gera neyvar metingar um inntøkurnar.

Í 2016 var avgjaldið av kapitaleftirlønum 57,2 mió. kr. netto. Mett verður, at inntøkurnar verða 43 mió. kr. í 2017. Roknað verður við 40 mió. kr. í 2018.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Inntøkujáttan	44.102	57.178	58.000	40.000	40.000	40.000
01. Avgjald av kapitaleftirlønum						
Inntøkur	**44.102**	**57.178**	**58.000**	**40.000**	**40.000**	**40.000**
61. Skattir og avgjøld	*44.102*	*57.178*	*58.000*	*40.000*	*40.000*	*40.000*

20.52.1.14. Skattur av pensjónsinngjøldum (Ógreinað játtan)

Sambært § 11 a-c í løgtingslóg um skatt av rentutryggingum v.m. er ásett, at pensjónir verða skattaðar við inngjald heldur enn útgjald. Somuleiðis er ásett, at pensjónir ikki verða skattaðar við útgjald. Netto verður sostatt ikki talan um, at skattainntøkur landsins - sæð yvir pensjónsgjaldstíðarskeiðið - hækka, men heldur er talan um, at hesar verða fluttar fram í tíð.

Roknað verður við, at Eftirlønarlógin, sum kom í gildi 1. januar 2014, fer at økja um pensjónsinngjøldini árini frameftir. Í 2016 komu inn 294,4 mió. kr. í skatti av pensjónsinngjøldum. Í 2017 verður skatturin av pensjónsinngjøldum mettur til 321 mió. kr. Roknað verður við 330 mió. kr. í 2018.

Fíggingarmyndilin viðvíkjandi eldraøkinum í sambandi við, at kommunurnar yvirtóku eldraøkið frá 1. januar 2015 hevur við sær, at allur skatturin av pensjónsinngjøldum fellur til kommunurnar frá 2015 og frameftir. Tí eru inntøkurnar netto mettar til 0 kr. frá 2015 og frameftir.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Inntøkujáttan	-288	-1.081	0	0	0	0
01. Skattur av pensjónsinngjøldum						
Inntøkur	**277.106**	**294.440**	**300.000**	**330.000**	**340.000**	**350.000**
61. Skattir og avgjøld	*277.106*	*294.440*	*300.000*	*330.000*	*340.000*	*350.000*
02. Flutt til kommunur (pensjónsskattur)						
Inntøkur	**-277.395**	**-295.522**	**-300.000**	**-330.000**	**-340.000**	**-350.000**
61. Skattir og avgjøld	*-277.395*	*-295.522*	*-300.000*	*-330.000*	*-340.000*	*-350.000*

20.52.1.25. Arvaavgjald (Ógreinað játtan)

Arvagjøld verða kravd sambært fólkatingslóg frá 27. mars 1908, sett í gildi við kongligari fyriskipan nr. 468 frá 8. november 1921, við seinni broytingum.

Áður hevur býtið verið soleiðis, at meginparturin av arvagjaldinum hevur verið goldin landskassanum, og er ein minni partur goldin ríkiskassanum, men við løgtingslóg nr. 124 frá 7. desember 2012 um broyting í løgtingslóg um arvaavgjald, fer frá 2013 og frameftir alt arvaavgjaldið í landskassan.

Inntøkurnar frá arvagjaldi vóru 8,6 mió. kr. í 2016. Mett verður, at inntøkurnar verða 10,4 mió. kr. í 2017. Roknað verður við 10,0 mió. kr. í 2018.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Inntøkujáttan	7.966	8.583	8.000	10.000	10.000	10.000
01. Arvaavgjald						
Inntøkur	**7.966**	**8.583**	**8.000**	**10.000**	**10.000**	**10.000**
61. Skattir og avgjøld	*7.966*	*8.583*	*8.000*	*10.000*	*10.000*	*10.000*

20.52.1.26. Gjald til Vinnusjúkugrunnin (Ógreinað játtan)

1. januar 2010 kom løgtingslóg um trygging móti avleiðingum av arbeiðsskaða (arbeiðsskaðatryggingarlógin) í gildi.

Hendan løgtingslógin er ein dagføring av táverandi vanlukkutryggingarlóg, umframt at nýggja lógin eisini fevnir um vinnusjúkur. Tað er ikki gjørligt at tekna trygging móti vinnusjúkum, og tí er Vinnusjúkugrunnur settur á stovn fyri at tryggja, at peningur er tøkur í hesum sambandi.

Til at fíggja Vinnusjúkugrunnin skulu allir arbeiðsgevarar gjalda 0,1 % av útgoldnum A-inntøkum, eins og sjálvstøðugt vinnurekandi skulu gjalda 0,1 % av skattskyldugu inntøkuni av vinnuvirkinum fyri síðsta inntøkuár.

Goldnar vóru 8,7 mió. kr. til Vinnusjúkugrunnin í 2016. Mett verður, at gjaldið verður 9,2 mió. kr. í 2017. Roknað verður við 9,3 mió. kr. í 2018.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Inntøkujáttan	0	0	0	0	0	0
01. Gjald til Vinnusjúkugrunnin						
Inntøkur	**8.319**	**8.739**	**9.000**	**9.300**	**9.600**	**9.900**
61. Skattir og avgjøld	*8.319*	*8.739*	*9.000*	*9.300*	*9.600*	*9.900*
02. Flyting til Vinnusjúkugrunnin						
Inntøkur	**-8.320**	**-8.739**	**-9.000**	**-9.300**	**-9.600**	**-9.900**
61. Skattir og avgjøld	*-8.320*	*-8.739*	*-9.000*	*-9.300*	*-9.600*	*-9.900*

20.52.1.27. Gjald til Heilsutrygd (Ógreinað játtan)

Lógargrundarlagið undir Heilsutrygd er Ll. nr. 178 frá 22. desember 2009 um almenna heilsutrygd, við seinni broytingum.

Heilsutrygd er almenn heilsutrygdarskipan, ið tann 1. januar 2010 kom fyri gomlu skipanina við 11 sjúkrakassum kring landið. Endamálið við nýskipanini var at tryggja øllum eina samhaldsfasta almenna heilsutrygd, har allir borgarar verða javnsettir viðvíkjandi inngjaldi og tænastum.

Tann 1. januar 2016 broyttist gjaldssamansetingin soleiðis, at øll sum eru fylt 18 ár, skulu gjalda 175 kr. um mánaðin umframt 0,6 % av skattskyldugu inntøku sínari til Heilsutrygd.

Gjaldið til Heilsutrygd var 140,4 mió. kr. í 2016. Roknað verður við 144 mió. kr. í gjaldi til Heilsutrygd í 2017. Í 2018 verður roknað við 148 mió. kr.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Inntøkujáttan	127.529	140.438	143.000	148.000	150.000	152.000
01. Gjald til Heilsutrygd						
Inntøkur	**127.529**	**140.438**	**143.000**	**148.000**	**150.000**	**152.000**
61. Skattir og avgjøld	*127.286*	*140.194*	*143.000*	*148.000*	*150.000*	*152.000*
67. Rentuinntøkur og vinningsbýti	*243*	*244*	-	-	-	-

20.52.1.28. Gjald til barsilsskipan (Ógreinað játtan)

Arbeiðstakarar og arbeiðsgevarar hava frá 1. januar 2016 rindað 0,71 % av A-inntøkuni til at fíggja barsilsskipanina.

Gjaldið, sum verður kravt inn á sama hátt sum ALS-gjaldið, verður kravt inn við heimild í løgtingslóg nr. 48 frá 3. apríl 2001 um barsilsskipan, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 137 frá 16. desember 2015.

Í 2016 vóru 121,0 mió. kr. goldnar til barsilsskipanina. Barsilsgjaldið verður mett til 127,3 mió. kr. í 2017. Roknað verður við 132,5 mió. kr. í 2018.

Goldnu upphæddirnar verða frameftir fluttar í Barsilsgrunn, sum síðani fíggjar virksemið á høvuðskontu 17.39.4.01. Barsilsskipan og á høvuðskontu 17.39.4.04. Umsiting av barsilsskipan.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	100.478	121.010	122.000	132.500	135.000	137.500
Inntøkujáttan	100.478	121.010	122.000	132.500	135.000	137.500
01. Gjald til barsilsskipan						
Inntøkur	**100.478**	**121.010**	**122.000**	**132.500**	**135.000**	**137.500**
61. Skattir og avgjøld	*100.478*	*121.010*	*122.000*	*132.500*	*135.000*	*137.500*
09. Flutt til Barsilsgrunn						
Útreiðslur	**100.478**	**121.010**	**122.000**	**132.500**	**135.000**	**137.500**
71. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	100.478	121.010	122.000	132.500	135.000	137.500

20.52.1.30. Gjald til Búnaðarstovuna (Ógreinað játtan)

Á hesa høvuðskontu kemur inn gjald frá Búnaðargrunninum. Gjaldið er fyri jarðarumsiting, sum verður framd við játtanini á høvuðskontu 5.33.2.03. Búnaðarstovan.

Í 2016 komu góðar 3,5 mió. kr. inn í gjaldi frá Búnaðargrunninum. Mett verður, at upphæddin verður góðar 2,9 mió. kr. í 2017. Roknað verður somuleiðis við góðum 2,9 mió. kr. í 2018.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Inntøkujáttan	2.846	3.540	2.940	2.940	2.940	2.940
01. Gjald til Búnaðarstovuna						
Inntøkur	**2.846**	**3.540**	**2.940**	**2.940**	**2.940**	**2.940**
76. Innanh. flyt. millum almennar stovn.	*2.846*	*3.540*	*2.940*	*2.940*	*2.940*	*2.940*

20.52.2. Avgjøld og tollur

20.52.2.01. Meirvirðisgjald (Ógreinað játtan)

Meirvirðisgjald verður kravt sambært løgtingslóg nr. 136 frá 8. september 1992, við seinni broytingum. Avgjald verður rindað í landskassan í øllum liðum í vinnuligari vøru- og tænastusølu og av innflutningi úr útlondum.

Høvuðsreglan er, at MVG-inntøkurnar verða førdar í tí fíggjarári, tá ið kravið er gjaldkomið. T.e., at eitt krav, sum stavar frá síðsta ársfjórðingi í 2017, fellur til gjaldingar 10. februar í 2018, og verður sostatt tikið við sum inntøka í fíggjarárinum 2018. Fyri vikuavrokningar er avgerandi, nær uppgávan er innlisin í skipanina. Fyri MVG-endurgjald til kommunur er avgerandi, nær upphæddin verður útgoldin.

Í 2016 komu 1.424,2 mió. kr. netto inn í meirvirðisgjaldi. Mett verður, at inntøkurnar verða 1.497 mió. kr. netto í 2017. Hækkingin stavar frá høga virksemisstøðinum í landinum. Roknað verður við 1.565 mió. kr. netto í 2018.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	126.267	156.398	150.000	175.000	180.000	185.000
Inntøkujáttan	1.436.474	1.580.596	1.620.000	1.740.000	1.770.000	1.800.000
01. Meirvirðisgjald						
Inntøkur	**1.436.474**	**1.580.596**	**1.620.000**	**1.740.000**	**1.770.000**	**1.800.000**
61. Skattir og avgjøld	*1.431.297*	*1.576.917*	*1.612.000*	*1.733.000*	*1.763.000*	*1.793.000*
62. Kravd gjøld, bøtur o.a.	*1.223*	*1.218*	*1.000*	*1.500*	*1.500*	*1.500*
67. Rentuinntøkur og vinningsbýti	*3.954*	*2.460*	*7.000*	*5.500*	*5.500*	*5.500*
09. Endurrindan av keyps-MVG til kommunur						
Útreiðslur	**126.267**	**156.398**	**150.000**	**175.000**	**180.000**	**185.000**
75. Keyps-mvg	126.267	156.398	150.000	175.000	180.000	185.000

20.52.2.04. Tollavgjøld (Ógreinað játtan)

Tollavgjøld verða kravd sambært § 2 í løgtingslóg nr. 121 frá 23. desember 1991 um toll við seinni broytingum.

Tollgjald er GATT-tollur, ið er ásettur fyri hvørt vørunummar sær í Toll- og Vøruskránni. Eingin GATT-tollur verður roknaður av innflutningi úr ES- og EFTA-londunum og teimum londum Føroyar hava fríhandilsavtalu við.

Í 2016 vóru tollavgjøldini 44,7 mió. kr. Inntøkurnar verða mettar til 48 mió. kr. í 2017. Roknað verður við 51 mió. kr. í 2018.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Inntøkujáttan	47.745	44.723	42.000	51.000	52.000	53.000
01. Tollavgjøld						
Inntøkur	**47.745**	**44.723**	**42.000**	**51.000**	**52.000**	**53.000**
61. Skattir og avgjøld	*45.505*	*42.375*	*42.000*	*51.000*	*52.000*	*53.000*
62. Kravd gjøld, bøtur o.a.	*525*	*739*	-	-	-	-
67. Rentuinntøkur og vinningsbýti	*1.715*	*1.610*	-	-	-	-

20.52.2.07. Punktgjøld (Ógreinað játtan)

Punktgjøld verða kravd sambært § 1 í løgtingslóg nr. 19 frá 12. mars 2002 um avgjald á framleiðslu og innflutningi við seinni broytingum.

Tann 1. juli 2015 vórðu parfuma og sápuúrdráttir frítikin punktgjaldi. Frá 1. januar 2016 varð punktgjaldið á bensini hækkað við 30 oyrum, úr 2,40 kr. fyri litur upp í 2,70 kr. fyri liturin, eins og punktgjaldið á dieselolju varð hækkað við 25 oyrum, úr 0,50 kr. fyri liturin upp í 0,75 kr. fyri liturin.

Í 2016 vóru punktgjøldini 184,6 mió. kr. Inntøkurnar verða mettar til 193 mió. kr. í 2017. Roknað verður við, at inntøkurnar frá punktgjøldum verða 194 mió. kr. í 2018.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Inntøkujáttan	182.835	184.576	185.000	194.000	196.000	198.000
01. Punktgjøld						
Inntøkur	**182.835**	**184.576**	**185.000**	**194.000**	**196.000**	**198.000**
61. Skattir og avgjøld	*182.835*	*184.576*	*185.000*	*194.000*	*196.000*	*198.000*

20.52.2.10. Lønhæddaravgjald (Ógreinað játtan)

Lønhæddaravgjald verður kravt sambært løgtingslóg nr. 193 frá 10. desember 1993 um lønarhæddaravgjald við seinni broytingum. Avgjald gjalda hesi virki, sum fyri samsýning lata tænastur:

- Læknavirksemi, tannlækna- og annað tannavirksemi, kiropraktik, fysioterapi og onnur verulig heilsurøkt, hava avgjald á 2,5 %.
- Tryggingarvirksemi, hevur avgjald á 10 %.
- Banka-, sparikassa- og fíggjarvirksemi, hava avgjald á 12 %.

Í 2016 komu 36,6 mió. kr. inn í lønhæddaravgjaldi. Inntøkurnar verða mettar til 37 mió. kr. í 2017, og roknað verður somuleiðis við 37 mió. kr. í lønhæddaravgjaldi í 2018.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Inntøkujáttan	33.990	36.582	37.000	37.000	37.000	37.000
01. Lønhæddaravgjald						
Inntøkur	**33.990**	**36.582**	**37.000**	**37.000**	**37.000**	**37.000**
61. Skattir og avgjøld	*33.913*	*36.499*	*37.000*	*37.000*	*37.000*	*37.000*
62. Kravd gjøld, bøtur o.a.	*2*	*4*	-	-	-	-
67. Rentuinntøkur og vinningsbýti	*75*	*79*	-	-	-	-

20.52.2.13. Brennioljugjald (Ógreinað játtan)

Brennioljugjald verður kravt sambært løgtingslóg nr. 179 frá 18. desember 1992 um serligt avgjald á brenniolju við seinni broytingum.

Eitt gjald í landskassan, sum er 0,80 kr. fyri liturin verður í dag lagt á gassoljusøluna. Fyri gassolju latin til skip yvir 20 GT skal einki gjald verða rindað. Sambært kunngerð nr. 23 frá 19. feb. 2003 um endurgjald av serligum oljugjaldi kunnu ávís meirvirðisgjaldskrásett virki fáa góðkenning at fáa endurrindað avgjaldið.

Í 2016 komu netto 68,3 mió. kr. inn í brennioljugjaldi. Nettoinntøkurnar verða mettar til 68 mió. kr. í 2017. Roknað verður við 65 mió. kr. í 2018.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	10.952	10.776	12.000	12.000	12.000	12.000
Inntøkujáttan	79.212	79.082	80.000	77.000	77.000	77.000
01. Brennioljugjald						
Útreiðslur	**10.952**	**10.776**	**12.000**	**12.000**	**12.000**	**12.000**
53. Stuðul til vinnu	10.952	10.776	12.000	12.000	12.000	12.000
Inntøkur	**79.212**	**79.082**	**80.000**	**77.000**	**77.000**	**77.000**
61. Skattir og avgjøld	*79.212*	*79.082*	*80.000*	*77.000*	*77.000*	*77.000*

20.52.2.14. Loyvisgjald á alivinnu (Ógreinað játtan)

Alivinnan rindar loyvisgjald eftir løgtingslóg nr. 64 frá 15. mai 2014 um loyvisgjald á alivinnu, við seinni broytingum.

Frá 1. januar 2016 hevur verið rindað tøkugjald, sum er 4,5 % av marknaðarvirðinum á tøkuni av alifiski. Tøkugjaldið er lægri um marknaðarprísurin fer undir 27 kr. fyri kilo.

Inntøkurnar frá loyvisgjaldi á alivinnu vóru 157,9 mió. kr. í 2016. Mett verður, at inntøkurnar verða 158 mió. kr. í 2017. Roknað verður við 160 mió. kr. í 2018.

Átekning

Landsstýriskvinnuni verður sambært § 2, stk. 3 í Ll. nr. 64 frá 15. mai 2014 um loyvisgjald á alivinnu heimilað at nýta staðfesta mánaðarliga miðalspotprísin í evrum fyri kruvdan laks sambært Fish Pool Index, sum altjóða marknaðarprís til útrokning av avgjaldsgrundarlagnum

fyri tøkugjaldinum. Umroknað verður til danskar krónur við at nýta sentralkursin hjá Danmarks Nationalbank, sum er 746,038 danskar krónur fyri hvørjar 100 evrur.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Inntøkujáttan	23.705	157.907	138.000	160.000	160.000	160.000
01. Tøkugjald á alivinnu						
Inntøkur	**11.597**	**160.881**	**138.000**	**160.000**	**160.000**	**160.000**
61. Skattir og avgjøld	*11.586*	*160.881*	*138.000*	*160.000*	*160.000*	*160.000*
67. Rentuinntøkur og vinningsbýti	*11*	-	-	-	-	-
02. Loyvisskattur á alivinnu						
Inntøkur	**12.108**	**-2.974**	**-**	**-**	**-**	**-**
61. Skattir og avgjøld	*12.098*	*-3.075*	-	-	-	-
67. Rentuinntøkur og vinningsbýti	*10*	*101*	-	-	-	-

20.52.2.15. Avgjald á fiskatilfeingi (Ógreinað játtan)

Sambært løgtingslóg nr. 119 frá 15. desember 2014 um avgjald á veiðu av makreli og norðhavssild í 2015 skuldu øll før rinda 0,5 kr. fyri hvørt kilo í rundari vekt av norðhavssild og 1 kr. fyri hvørt kilo í rundari vekt av makreli. Harafturat var avgjald á 2 kr. fyri hvørt kilo, sum varð landað uttanlands ella varð landað til móttøkuskip undir fremmandum flaggi.

Sambært løgtingslóg nr. 180 frá 29. desember 2015 um serstakar treytir fyri fiskiskapi eftir makreli, norðhavssild og svartkjafti í 2016 skuldu øll før rinda 1 kr. fyri hvørt kilo í rundari vekt av makreli, 0,75 kr. fyri hvørt kilo í rundari vekt av norðhavssild, og 20 oyru fyri hvørt kilo í rundari vekt av svartkjafti. Harafturat var avgjald á 2 kr. fyri hvørt kilo, sum varð landað uttanlands ella varð landað til móttøkuskip undir fremmandum flaggi. Í 2016 var uppboðssøla av einum minni parti av fiskatilfeinginum.

Sambært løgtingslóg nr. 150 frá 23. desember 2016 um serstakar treytir fyri fiskiskapi eftir makreli, norðhavssild og svartkjafti og botnfiski í Barentshavinum í 2017 skuldu øll før rinda 1 kr. fyri hvørt kilo í rundari vekt av makreli, 0,75 kr. fyri hvørt kilo í rundari vekt av norðhavssild, og 20 oyru fyri hvørt kilo í rundari vekt av svartkjafti. Harafturat var avgjald á 2 kr. fyri hvørt kilo, sum varð landað uttanlands ella varð landað til móttøkuskip undir fremmandum flaggi. Í 2017 var uppboðssøla av einum størri parti av fiskatilfeinginum.

Í 2016 komu 213,2 mió. kr. inn í inntøkum frá avgjaldi á og uppboðsølu av fiskatilfeingi. Mett verður, at inntøkurnar frá avgjaldi á og uppboðsølu av fiskatilfeingi verða 296 mió. kr. í 2017. Roknað verður við 292 mió. kr. í 2018.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Inntøkujáttan	109.627	213.242	210.000	292.000	292.000	292.000
01. Avgjald á fiskatilfeingi						
Inntøkur	**109.627**	**153.445**	**150.000**	**157.000**	**157.000**	**157.000**
61. Skattir og avgjøld	*109.627*	*153.445*	*150.000*	*157.000*	*157.000*	*157.000*

02. Uppboðssøla						
Inntøkur	**-**	**59.797**	**60.000**	**135.000**	**135.000**	**135.000**
61. Skattir og avgjøld	*-*	*59.797*	*60.000*	*135.000*	*135.000*	*135.000*

20.52.2.16. Framleiðsluavgjøld (Ógreinað játtan)

Framleiðsluavgjøld verða kravd sambært § 2 í løgtingslóg nr. 19 frá 12. mars 2002 um avgjald á framleiðslu og innflutningi við seinni broytingum.

Størsti parturin av inntøkunum stavar frá framleiðslu av øli og cider.

Í 2016 komu 22,5 mió. kr. inn í framleiðslugjaldi. Inntøkurnar verða mettar til 23,6 mió. kr. í 2017. Roknað verður við 23 mió. kr. í 2018.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Inntøkujáttan	19.939	22.459	25.000	23.000	23.000	23.000
01. Framleiðsluavgjøld						
Inntøkur	**19.939**	**22.459**	**25.000**	**23.000**	**23.000**	**23.000**
61. Skattir og avgjøld	*19.937*	*22.348*	*25.000*	*23.000*	*23.000*	*23.000*
67. Rentuinntøkur og vinningsbýti	*2*	*111*	*-*	*-*	*-*	*-*

20.52.2.19. Skrásetingargjald (Ógreinað játtan)

Skrásetingargjald verður kravt sambært løgtingslóg nr. 33 frá 19. mai 2008 um avgjøld við skráseting av motorakførum við seinni broytingum.

Fyri motorakfør v.m., sum eru skrásetingarskyldug eftir ferðslulógini, verður ásett skrásetingargjald, sum byggir á eitt virðisgjald, og eitt CO_2-avgjald. Gjaldið verður rindað í landskassan, samstundis sum akfarið verður skrásett. Henda høvuðskonta fatar eisini um burturbeiningargjald og umskrásetingargjald.

Í 2016 komu 159,9 mió. kr. inn í skrásetingargjaldi. Inntøkurnar verða mettar til 169 mió. kr. í 2017. Roknað verður við 164 mió. kr. í 2018.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Inntøkujáttan	146.331	159.894	160.000	164.000	166.000	168.000
01. Skrásetingargjald						
Inntøkur	**141.841**	**154.489**	**154.000**	**158.000**	**160.000**	**162.000**
61. Skattir og avgjøld	*141.841*	*154.489*	*154.000*	*158.000*	*160.000*	*162.000*
02. Gjald fyri burturbeining av bili						
Inntøkur	**-7.205**	**-6.840**	**-7.000**	**-7.000**	**-7.000**	**-7.000**
62. Kravd gjøld, bøtur o.a.	*-7.205*	*-6.840*	*-7.000*	*-7.000*	*-7.000*	*-7.000*
03. Inntøkur, burturbeiningargjøld						
Inntøkur	**11.695**	**12.245**	**13.000**	**13.000**	**13.000**	**13.000**
62. Kravd gjøld, bøtur o.a.	*11.695*	*12.245*	*13.000*	*13.000*	*13.000*	*13.000*

20.52.2.22. Vegskattur (Vektgjald) (Ógreinað játtan)

Vegskattur verður kravdur sambært løgtingslóg nr. 38 frá 31. mars 1982 um vektgjald av motorakførum v.m. við seinni broytingum.

Tann 1. januar 2016 hækkaðu vektgjøldini, sum verða løgd á akfør heimahoyrandi her á landi, við 10 %. Samstundis lækkaði vektgjaldið á el drivnum bilum, sum áður rindaðu sama vektgjald sum diesel drivnir bilar, t.e. hægsta vektgjald. Hetta varð gjørt fyri at gera tað fíggjarliga meira áhugavert at hava el drivnar bilar.

Í 2016 var vegskatturin 112,3 mió. kr. Inntøkurnar verða mettar til 118 mió. kr. í 2017. Roknað verður við 119 mió. kr. í inntøkum frá vegskatti í 2018.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Inntøkujáttan	97.087	112.264	113.000	119.000	120.000	121.000
01. Vegskattur						
Inntøkur	**97.087**	**112.264**	**113.000**	**119.000**	**120.000**	**121.000**
61. Skattir og avgjøld	*97.087*	*112.264*	*113.000*	*119.000*	*120.000*	*121.000*

20.52.2.25. Ferðaavgjald (Ógreinað játtan)

Ferðaavgjald verður kravt sambært løgtingslóg nr. 37 frá 26. mai 1988 um ferðagjald, við seinni broytingum. Fyri ferðafólk, ið verða flutt úr Føroyum, skal rindast ferðagjald til landskassan. Gjaldið hevur síðani 1. oktober 2013 verið 65 kr. fyri hvønn ferðandi.

Í 2016 komu 9,4 mió. kr. inn í ferðagjaldi. Inntøkurnar verða mettar til 11,4 mió. kr. í 2017. Roknað verður við 12 mió. kr. í inntøkum frá ferðaavgjaldi í 2018.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Inntøkujáttan	9.573	9.402	10.000	12.000	13.000	14.000
01. Ferðaavgjald						
Inntøkur	**9.573**	**9.402**	**10.000**	**12.000**	**13.000**	**14.000**
61. Skattir og avgjøld	*9.564*	*9.393*	*10.000*	*12.000*	*13.000*	*14.000*
67. Rentuinntøkur og vinningsbýti	*9*	*10*	-	-	-	-

20.52.2.28. Umhvørvisavgjald á smyrjiolju (Ógreinað játtan)

Umhvørvisavgjald á smyrjiolju verður kravt sambært løgtingslóg nr. 75 frá 13. mai 1992, við seinni broytingum. Inntøkugrundarlagið er innflutt og framleidd smyrjiolja sambært vørunr. 2710.19.81-87 í toll- og vøruskránni.

Avgjaldið hevur síðani 1. januar 2016 verið 2,50 kr. fyri liturin, til tess at fíggja kostnaðin av spilloljureinsingini hjá IRF.

Í 2016 komu 2,9 mió. kr. inn í umhvørvisavgjaldi á smyrjiolju. Inntøkurnar verða mettar til 3,3 mió. kr. í 2017. Roknað verður við 3,0 mió. kr. í 2018.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Inntøkujáttan	3.179	2.926	3.750	3.000	3.000	3.000
01. Umhvørvisgjald						
Inntøkur	**3.179**	**2.926**	**3.750**	**3.000**	**3.000**	**3.000**
62. Kravd gjøld, bøtur o.a.	*3.179*	*2.926*	*3.750*	*3.000*	*3.000*	*3.000*

20.52.2.30. Tinglýsingargjald (Ógreinað játtan)

Tinglýsingargjaldið verður kravt upp við heimild í løgtingslóg nr. 76 frá 17. mai 1994 um tinglýsingargjøld v.m., við seinni broytingum og løgtingslóg nr. 8 frá 28. februar 2006 um tinglýsingaravgjald, við seinni broytingum.

Umhvørvisstovan krevur inn tinglýsingaravgjaldið. Tann 1. januar 2016 hækkaði avgjaldið til 1,0 % av tinglýsta virðinum á ognini ella veðupphæddini.

Í 2016 komu 38,6 mió. kr. inn í tinglýsingargjaldi. Inntøkurnar verða mettar til 40,4 mió. kr. í 2017. Roknað verður við 43 mió. kr. í 2018.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Inntøkujáttan	33.139	38.558	40.000	43.000	44.000	45.000
01. Tinglýsingargjald						
Inntøkur	**33.139**	**38.558**	**40.000**	**43.000**	**44.000**	**45.000**
62. Kravd gjøld, bøtur o.a.	*33.139*	*38.558*	*40.000*	*43.000*	*44.000*	*45.000*

20.52.3. Ymsar inntøkur

20.52.3.01. Útluting frá Fíggingargrunninum frá 1992 (Ógreinað játtan)

Fíggingargrunnurin frá 1992 eigur 1/3 av partapeninginum í P/F BankNordik.

Í 2016 fekk landskassin 7 mió. kr. í vinningsbýti. Mett verður, at inntøkurnar verða 100 mió. kr. í 2017. Roknað verður við 15 mió. kr. í 2018.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Inntøkujáttan	5.000	7.000	7.000	15.000	16.000	17.000
01. Útluting						
Inntøkur	**5.000**	**7.000**	**7.000**	**15.000**	**16.000**	**17.000**
67. Rentuinntøkur og vinningsbýti	*5.000*	*7.000*	*7.000*	*15.000*	*16.000*	*17.000*

20.52.3.04. Útluting frá partafeløgum og grunnum (Ógreinað játtan)

01. Útluting frá almennum partafeløgum: Henda undirkonta fevnir um vinningsbýti frá almennum partafeløgunum og partafeløgum, sum landið eigur meirilutan ella ognarlut í.

Inntøkurnar frá vinningsbýti frá almennum partafeløgunum vóru 32,1 mió. kr. í 2016. Mett verður, at inntøkurnar verða 20 mió. kr. í 2017. Roknað verður við 25 mió. kr. í 2018.

02. Útluting frá almennum grunnum: Henda undirkonta fevnir um vinningsbýti frá almennum grunnum. Broytingar í løgtingslógunum um Føroya Realkreditstovn, Húsalánsgrunnin og Búnaðargrunn um at heimila almennu grunnunum at rinda út vinningsbýti, vórðu samtyktar í desember 2012.

Eingin inntøka frá vinningsbýti frá almennu grunnunum var í 2016. Fyri 2017 verða inntøkurnar mettar til 3,2 mió. kr., sum Føroya Realkreditstovnur hevur rindað fyri gamalt ár. Ongar aðrar inntøkur verða í 2017, tí allir grunnarnir høvdu hall í roknskapinum fyri 2016. Roknað verður við 5 mió. kr. í 2018.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Inntøkujáttan	37.792	32.148	30.000	30.000	30.000	30.000
01. Útluting frá almennum partafeløgum						
Inntøkur	**37.051**	**32.148**	**25.000**	**25.000**	**25.000**	**25.000**
67. Rentuinntøkur og vinningsbýti	*37.051*	*32.148*	*25.000*	*25.000*	*25.000*	*25.000*
02. Útluting frá almennum grunnum						
Inntøkur	**742**	**-**	**5.000**	**5.000**	**5.000**	**5.000**
67. Rentuinntøkur og vinningsbýti	*742*	*-*	*5.000*	*5.000*	*5.000*	*5.000*

20.52.3.10. Aðrar inntøkur (Ógreinað játtan)

Torført at meta um inntøkuna á hesi høvuðskontu, tí her verða skrásettar fleiri óvanligar inntøkur, sum til dømis bøtur og annað tílíkt.

Í 2016 vóru aðrar inntøkur netto 4,0 mió. kr. Inntøkurnar verða mettar til 3,2 mió. kr. í 2017. Roknað verður við 2,5 mió. kr. í 2018.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	85	184	-	-	-	-
Inntøkujáttan	7.939	4.193	2.500	2.500	2.500	2.500
02. Skeinkiloyvi, avgjøld						
Inntøkur	**170**	**135**	**150**	**150**	**150**	**150**
25. Eftirlits- og umsjónaravgjøld	*170*	*135*	*150*	*150*	*150*	*150*
04. Navnaprógv						
Inntøkur	**9**	**16**	**20**	**20**	**20**	**20**
62. Kravd gjøld, bøtur o.a.	*9*	*16*	*20*	*20*	*20*	*20*

05. Bøtur						
Inntøkur	**2.844**	**1.198**	**1.000**	**1.000**	**1.000**	**1.000**
62. Kravd gjøld, bøtur o.a.	*2.844*	*1.198*	*1.000*	*1.000*	*1.000*	*1.000*
07. Burturlutingargjøld						
Inntøkur	**793**	**1.285**	**670**	**670**	**670**	**670**
61. Skattir og avgjøld	*793*	*1.285*	*670*	*670*	*670*	*670*
09. Lóggilding av el-innleggjarum, avgjøld						
Inntøkur	**117**	**124**	**120**	**120**	**120**	**120**
25. Eftirlits- og umsjónaravgjøld	*117*	*124*	*120*	*120*	*120*	*120*
11. Víddargjøld oljuvinna						
Útreiðslur	**-**	**140**	**-**	**-**	**-**	**-**
14. Keyp av vørum og tænastum	-	140	-	-	-	-
Inntøkur	**2.137**	**140**	**-**	**-**	**-**	**-**
21. Søla av vøru og tænastum	*2.137*	*-*	*-*	*-*	*-*	*-*
65. Flytingarinntøkur úr útlandinum	*-*	*140*	*-*	*-*	*-*	*-*
60. Óvanligar inntøkur						
Útreiðslur	**85**	**44**	**-**	**-**	**-**	**-**
14. Keyp av vørum og tænastum	-	0	-	-	-	-
17. Avskrivingar o.a.	-29	-	-	-	-	-
19. Ymsar rakstrarútreiðslur	114	44	-	-	-	-
Inntøkur	**1.869**	**1.295**	**540**	**540**	**540**	**540**
29. Ymsar rakstrarinntøkur	*-*	*-*	*540*	*540*	*540*	*540*
63. Vanligar flytingarinntøkur	*-*	*1*	*-*	*-*	*-*	*-*
64. Aðrar flytingarinntøkur	*1.869*	*1.265*	*-*	*-*	*-*	*-*
65. Flytingarinntøkur úr útlandinum	*-*	*30*	*-*	*-*	*-*	*-*

02. Skeinkiloyvi, avgjøld

Gjøld fyri skeinkiloyvi verða kravd sambært kunngerð nr. 60 frá 7. mai 1992 um skeinkingarloyvi, við seinni broytingum. Gjaldið fyri skeinkiloyvi fyri øll rúsdrekkasløg er 10.000 kr. Fyri skeinkiloyvi bara fyri øl og borðvín er gjaldið 5.000 kr.

04. Navnaprógv

Gjøld fyri navnaprógv verða kravd sambært kunngerð nr. 18 frá 21. januar 1993 um gjøld fyri navnaprógv v.m. við seinni broytingum. Fyri navnaprógv verður latið eitt gjald, sum er 1.000 kr. í landskassan.

05. Bøtur

Inntøkugrundarlagið er m.a hesar bøtur:
Parkeringarbøtur, sektir - skattalóg nr. 48 frá 21. juni 1985 (§ 125), og fiskibøtur.

07. Burturlutingargjøld

Gjald sum verður latið sambært løgtingslóg nr. 99 frá 29. desember 1998 um gjald av vinningi við burturluting v.m. Ístaðin fyri inntøkuskatt skal verða latið gjald, sum er 15 %, í landskassan av hvørjum vinningi, sum hevur meira virði enn 3.000 kr.

09. Løggilding av el-innleggjarum, avgjøld

Samb. løgtingslóg nr. 142 frá 10. juni 1993 og kunngerð nr. 111 frá 17. oktober 1994, við seinni broytingum, skal el-innleggjari til tess at fáa og varðveita løggilding sum el-innleggjari gjalda eitt árligt gjald. Vanliga gjaldið er 1.000 kr., sum skal verða goldið frammanundan í seinasta lagi 15. januar í árinum.

11. Víddargjøld

Samb. § 7 í Fylgiskjal B til løgtingslógirnar nr. 5 frá 8. februar 2000 og nr. 27 frá 17. mai 2004 um ávikavist fyrsta og annað útbjóðingarumfar til leiting eftir og framleiðslu av kolvetnum, skal loyvishavari rinda árligt víddargjald. Byrjunargjaldið er 500 kr. pr.

ferkilometur pr. loyvisdag. Eftir 6 árum hækkar gjaldið árliga.

12. Nýtslugjald (royalties, oljufeløg)

Nýtslugjald verður kravt sambært løgtingslóg nr. 26 frá 21. apríl 1999 um at skatta inntøkur av kolvetnisvirksemi (Kolvetnisskattalógin).

60. Aðrar inntøkur

Henda undirkonta verður nýtt til óvanligar inntøkur og útreiðslur, sum ikki kunnu verða flokkaðar aðrastaðni.

20.52.5. Flytingar

20.52.5.01. Endurrindan av keyps-MVG (Ógreinað játtan)

Henda høvuðskonta er til miðsavning av øllum keyps-MVG hjá landinum.

Endurrindanin av keyps-MVG var 202,9 mió. kr. í 2016. Torført er at meta neyvt um hesa játtan, men mett verður, at endurrindanin av keyps-MVG verður 199 mió. kr. í 2017. Roknað verður við 210 mió. kr. í 2018.

Sundurgreinað ætlan

Tús. kr.	2015 R	2016 R	2017 J	**2018 F**	2019 Æ	2020 Æ
Útreiðslujáttan	193.705	202.886	210.000	210.000	210.000	210.000
01. Endurrindan av keyps-MVG						
Útreiðslur	**193.705**	**202.886**	**210.000**	**210.000**	**210.000**	**210.000**
75. Keyps-mvg	193.705	202.886	210.000	210.000	210.000	210.000

20.52.5.04. Endurrindan fyri DIS/FAS inntøkur (Ógreinað játtan)

Í sambandi við, at kommunurnar yvirtóku eldraøkið frá 1. januar 2015 er partur av fíggingarleistinum, at landið flytir kommununum fasta upphædd árliga og at henda upphæddin verður býtt millum kommunurnar, alt eftir hvussu skattagrundarlagið viðvíkjandi DIS/FAS inntøkum og ávísum frádráttum er í einstøku kommununum.

